# LANDSGRANNSKOÐANIN

## Fíggjarárið 2018

Ársfrágreiðing

latin
løgtingsgrannskoðarunum

sambært § 12 í Ll. nr. 25/1999
“um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

SEPTEMBER 2019

# Innihaldsyvirlit


**0. FRAMLØGA 7**

**1. INNGANGUR 9**

**1.1 LANDSROKNSKAPURIN 2018 9**
**1.2 GRANNSKOÐAN AV ROKNSKAPINUM 9**

**2. LØGMANSFYRISITINGIN 13**

**2.1 FØROYA KÆRUSTOVNUR (LG 2017/202-0141) 13**
**2.2 DÁTUEFTIRLITIÐ (LG 2017/202-0142) 14**

**3. FÍGGJARMÁL 17**

**3.1 LANDSROKNSKAPURIN IKKI FULLFÍGGJAÐUR (LG 2014/100-0001) 17**
**3.2 VEÐHALDS- OG EFTIRLØNARSKYLDUR (LG 2018/203-0151) 18**
**3.3 EFTIRLØNIR HJÁ FÓLKASKÚLALÆRARUM (LG 2018/203-0181) 19**
**3.4 GJALDSTOVAN (LG 2016/203-0151) 19**
**3.5 KERVISGRANNSKOÐAN (LG 2018/203-0151) 20**
3.5.1 KERVISGRANNSKOÐAN HJÁ TAKS 20
3.5.2 KERVISGRANNSKOÐAN HJÁ GJALDSTOVUNI 21
3.5.3 KERVISGRANNSKOÐAN HJÁ KT LANDSINS 22
**3.6 HAGSTOVA FØROYA (LG 2015/203-0152) 24**
**3.7 LANDSBANKI FØROYA (LG 2017/203-0151) 24**
**3.8 TALGILDU FØROYAR (LG 2018/203-0111) 26**
**3.9 AVGJALD AV KAPITALEFTIRLØNUM (LG 2017/220-0521) 31**
**3.10 INNHEINTING AV BARNAPENINGI (LG 2017/203-0151) 31**
**3.11 BUNDIN EFTIRLØN AV B-INNTØKUM (LG 2016/220-0521) 32**
**3.12 NEGATIVT MEIRVIRÐISGJALD (LG 2016/220-0522) 33**
**3.13 ENDURGJØLD AV MEIRVIRÐISGJALDI (LG 2018/220-0522) 33**
**3.14 NOTAT UM KEYP AV VØRUM OG TÆNASTUM (LG 2016/405-0008) 37**

**4. FISKIVINNUMÁL 39**

**4.1 FISKIMÁLARÁÐIÐ (LG 2016/205-0111) 39**
**4.2 AFTURLATNAR UPPBOÐSSØLUR (LG 2018/205-0111) 39**
**4.3 FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ (LG 2017/205-0342) 41**
**4.4 FISKIVINNUROYNDIR (LG 2018/205-0343) 42**
**4.5 EFFEKTIVAR VEÐHALDSÚTREIÐSLUR (LG 2017/205-0345) 44**

**5. MENTAMÁL 47**

**5.1 NÁM (LG 2017/207-0231) 47**
**5.2 GLASIR (LG 2017/207-0233) 47**
**5.3 LØNIR Á SERBREYTUNUM (LG 2018/207-0233) 50**
**5.4 TEKNISKI SKÚLI Í KLAKSVÍK, LØGUJÁTTAN (LG 2018/207-0233) 52**
**5.5 FRÍTÍÐARUNDIRVÍSING (LG 2014/207-0235) 54**
**5.6 FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA (LG 2018/207-0236) 54**
**5.7 VINNUHÁSKÚLIN (LG 2018/207-0236) 63**
**5.8 GRANSKINGARRÁÐ FØROYA (LG 2014/207-0236) 66**
**5.9 MÁLRÁÐIÐ (LG 2017/207-0241) 67**
**5.10 TJÓÐPALLUR FØROYA (LG 2015/207-0242) 67**
**5.11 MENTANARGRUNNUR LANDSINS (LG 2015/207-0242) 67**
**5.12 KIRKJUGRUNNURIN OG TILTAKSGRUNNURIN (LG 2018/207-0245) 68**
**5.13 ÍTRÓTTAHØLL Á SANDOYNNI (LG 2018-207-0246) 74**

**6. HEILSU- OG INNLENDISMÁL 75**

**6.1 HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ (LG 2016/211-0111) 75**
**6.2 FÓLKAHEILSURÁÐIÐ (LG 2016/211-0201) 75**
**6.3 HEILSUTRYGD (LG 2015/211-0202) 75**
**6.4 ÍLEGUSAVNIÐ (LG 2018/211-0202) 75**
**6.5 ELVEITING, UMSITING (LG 2017/211-0321) 78**
**6.6 FERÐ Á GRØNA ORKU (LG 2017/211-0321) 79**
**6.7 UMHVØRVISSTOVAN (LG 2017/211-0374) 80**

**7. ALMANNAMÁL 83**

**7.1 ALMANNAMÁLARÁÐIÐ (LG 2016/212-0111) 83**
**7.2 STUÐULSJÁTTANIR, § 12 ALMANNAMÁL (LG 2017/212-0211) 83**
**7.3 ALMANNAVERKIÐ (LG 2017/212-0211) 84**
**7.4 KASSAEFTIRLIT Á ALMANNAVERKINUM (LG 2018/212-0211) 86**
**7.5 BARNAPENINGUR VEITTUR Í FORSKOTI (LG 2015/212-0213) 87**
**7.6 EINKJUBARNASTYRKUR (LG 2014/212-0213) 87**
**7.7 BARNAÍSKOYTI (LG 2015/212-0213) 88**
**7.8 DAGPENINGUR VEGNA SJÚKU V.M. (LG 2014/212-0214) 88**
**7.9 ALMANNAVERKIÐ, TRIVNAÐARTÆNASTUR (LG 2018/212-0216) 88**
7.9.1 TRIVNAÐARTÆNASTUR 88
7.9.2 FELAGSRAKSTUR Í TRIVNAÐARDEPLINUM 93
7.9.3 EIND 1 94
7.9.4 UPPFYLGING AV GRANNSKOÐAN, EIND 4 96
**7.10 VANLIG FORSORG (LG 2014/212-0217) 99**
**7.11 ARBEIÐSFREMJANDI TILTØK (LG 2017/212-0217) 99**
**7.12 FÓLKAPENSJÓN (LG 2018/212-0218) 101**
7.12.1 VIÐBÓT TIL ÁVÍSAR PENSJÓNISTAR 105

**8. UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁL 107**

**8.1 UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ (LG 2016/213-0111) 107**
**8.2 STUÐULSJÁTTANIR, § 13 UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁL 107**

**8.3 JARÐFEINGI (LG 2017/213-0321) 108**
**8.4 DJÓRALÆKNATÆNASTUR (LG 2017/213-0331) 110**
**8.5 SJÓVINNUSTÝRIÐ (LG 2015/206-0351) 111**
**8.6 VINNUSTOVNURIN (LG 2017/213-0371) 111**
**8.7 SKRÁSETING FØROYA (LG 2017/213-0371) 112**
**8.8 RÚSDREKKASØLA LANDSINS (LG 2018/213-0373) 113**
**8.9 HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN (LG 2017/213-0375) 114**

**9. SAMFERÐSLUMÁL 117**

**9.1 LANDSVERK (LG 2018/217-0381) 117**
9.1.1 KEYP OG SØLA AV AMBOÐUM 117
9.1.2 LEIGA AV ASFALTVIRKI 117
9.1.3 ROYNDARVERKÆTLAN VIÐ ORKUSPARING Í LANDSINS BYGNINGUM 119
9.1.4 LØGUJÁTTANIR 124
**9.2 STRANDFARASKIP LANDSINS (LG 2017/217-0382) 124**
**9.3 STUÐUL TIL ÚTOYGGJAR (LG 2018/217-0382) 126**
**9.4 AKSTOVAN (LG 2017/217-0384) 126**
**9.5 ARBEIÐS- OG BRUNAEFTIRLITIÐ (LG 2017/217-0391) 127**
**9.6 FASTI GERÐARRÆTTUR (LG 2018/217-0391) 127**
**9.7 SEMINGSMANNASKIPANIN (LG 2018/217-0391) 128**
**9.8 VANLUKKUTRYGGINGARRÁÐIÐ (LG 2018/217-0391) 128**
**9.9 BARSILSSKIPANIN (LG 2017/217-0394) 129**

**10. FÍGGJARSTØÐA 133**

**10.1 FÍGGJARSTØÐA (LG 2018/300-0000) 133**
10.1.1 KAPITALINNSKOT (LG 2018/300-0102) 133
10.1.2 VIRÐISBRØV 135
10.1.3 ÚTLÁN 137
10.1.4 ÁOGN O.A. 137
10.1.5 TØKUR PENINGUR 139
10.1.6 SKULD 141
10.1.7 ÚTJAVNINGARKONTA (LG 2017/300-0203) 142
**10.2 FYRISITING AV GJALDFØRI OG SKULD (LG 2018/300-0104 OG 0202) 143**
10.2.1 PORTEFØLJUSKIPANIN 143
10.2.2 GJALDFØRIÐ HJÁ LANDINUM 143
10.2.3 LANDSKASSASKULD - BRÆVALÁN 145

**11. LØNIR, GOLDNAR UM FELAGS LØNARSKIPANINA 151**

**11.1 GRANNSKOÐAN AV LØNUM 2018 (LG 2018/511-0001) 151**
**11.2 NIÐURSTØÐA 151**
**11.3 BYGNAÐUR 152**
11.3.1 FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ HEVUR YVIRSKIPAÐA ÁBYRGD OG EFTIRLIT 152
11.3.2 GJALDSTOVAN HEVUR DAGLIGU FYRISITINGINA 152
**11.4 KT TRYGD OG GRUNDDÁTUR 154**
11.4.1 KT TRYGD 154
11.4.2 GRUNDDÁTUR 156

**11.5 STAKROYNDIR** **157**
11.5.1 LÓGIR, VEGLEIÐINGAR, SÁTTMÁLAR O.A. 157
11.5.2 LØNIR, GOLDNAR UM FELAGS LØNARSKIPANINA 157
11.5.3 LØNIR, BÓKAÐAR SUM KEYP AV TÆNASTUVEITINGUM 158

**12. NORÐURLENDSKAR PARALLELGRANNSKOÐANIR** **161**

**12.1 GRANNSKOÐAN AV NORÐURLENDSKUM HÆGRI LÆRUSTOVNUM** **161**
**12.2 GRANNSKOÐAN AV TALGILDING Í NORÐURLONDUM** **165**
12.2.1 GRUNDARLAG UNDIR GRANNSKOÐANINI 165
12.2.2 YVIRSKIPAÐ UM TALGILDING AV SAMFELAGNUM 166
12.2.3 GRANNSKOÐANARSPURNINGAR 167
12.2.4 GRANNSKOÐAN 167
12.2.5 SAMANUMTIKIÐ 168
12.2.6 NIÐURSTØÐA 168
12.2.7 SAMSTARV MILLUM ALMENNAR STOVNAR UM AT GERA LÆTTARI SKIPANIR TIL UMSØKJARAR 169

**13. AÐRAR SERFRÁGREIÐINGAR** **171**

**13.1 LØNARÚTGJALDINGAR TIL LIMIR Í FØROYA PEDAGOGFELAG UNDIR VERKFALLI (LG 2017/405-0011)** **171**
**13.2 SKÚLADEPIL VIÐ MARKNAGIL (LG 2018/405-0012)** **172**

**14. ORÐALISTI** **175**

# 0. Framløga

Sambært § 12, stk. 2, í grannskoðanarlógini skal roknskapargrannskoðanin innan 8 mánaðir[1] eftir fíggjarárslok lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um úrslitið av grannskoðanini. Løgtingsgrannskoðararnir kunnu leingja freistina.

Á fundi 8. august 2019 samdust løgtingsgrannskoðararnir, eftir áheitan frá Landsgrannskoðanini, at leingja freistina ein mánað at lata løgtingsgrannskoðarunum ársfrágreiðingina 2018.

Við hesum letur Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum ársfrágreiðing sína í sambandi við, at løgtingsgrannskoðararnir skulu leggja landsroknskapin 2018 fyri Løgtingið til samtyktar.

Frágreiðingin er løgd fyri teir landsstýrismenn til viðmerkingar, sum hava umsitið málsøkini. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismonnunum um tiltøk og ætlanir, frágreiðingin hevur elvt til, eru tiknar við.

Landsgrannskoðanin roknar grannskoðanina av landsroknskapinum 2018 sum lidna. Kortini kann Landsgrannskoðanin seinni fara at kanna mál og spurningar, sum viðvíkja bæði 2018 og eldri árum. Upplýsingar kunnu koma fram, sum elva til, at tey mál, sum eru umrødd í hesari frágreiðing, verða mett og viðgjørd av nýggjum.

Argir, 24. september 2019

Beinta Dam
landsgrannskoðari

[1] Í 2015 var freistin stytt úr 10 mánaðum í 8 mánaðir.

# 1. Inngangur

## 1.1 Landsroknskapurin 2018

§ 45, stk. 1, í stýrisskipanarlógini ásetir, at landskassaroknskapurin skal verða lagdur fyri Løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok. Sambært § 1, stk. 1, í Ll. nr. 33 frá 23. mars 1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m." skal Landsstýrið, innan mai mánaður er liðin, leggja fyri Løgtingið samlaða landsroknskapin fyri undanfarna fíggjarár.[2]

Tað er eisini ásett í § 11, stk. 1, í grannskoðanarlógini, at landsstýrismaðurin í seinasta lagi fimm mánaðir eftir fíggjarárslok skal lata løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini tann árliga landsroknskapin fyri undanfarna fíggjarár.

***Aðalráð og stovnar skulu leggja fram ein rættan roknskap – gjørdur í Búskaparskipan landsins.***

Neyvari reglur um roknskaparhaldið eru ásettar í K. nr. 22 frá 14. mars 2007 "um roknskaparverk landsins o.t."[3] Aðalráðini og teir stovnar, sum hoyra undir aðalráðini, skulu leggja fram ársroknskap, sum er gjørdur í Búskaparskipan landsins, og sum gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum og av ognum og skuld við fíggjarárslok.

Aðalráðini og stovnar teirra skulu eisini støðugt hava tað innanhýsis eftirlit, ið skal til, fyri at ársroknskapur kann verða gjørdur, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan stórvegis skeivleikar.

***Gjaldstovan setir landsroknskapin upp.***

Sambært § 10 í roknskaparkunngerðini verða roknskaparupplýsingar samsvarandi góðkendum ársroknskapum tiknar við í landsroknskapin, sum Gjaldstovan setir upp.

***Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skal leggja fram samlaðan landsroknskap.***

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skal, áðrenn mai mánaður er liðin, leggja fyri Løgtingið samlaða landsroknskapin.

Landsroknskapurin fyri fíggjarárið 2018 varð latin Løgtinginum 24. mai 2019.

## 1.2 Grannskoðan av roknskapinum

Yvirskipaðu reglurnar um grannskoðan av almennum roknskapum eru ásettar í § 45 í stýrisskipanarlógini. Neyvari reglur eru ásettar í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m."

***Endamálið við grannskoðanini.***

Sambært grannskoðanarlógini er endamálið við grannskoðanini at ansa eftir,

- at allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin,
- at eingin útreiðsla er goldin uttan við heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg,

[2] Í 2015 var tíðarfreistin stytt úr 6 mánaðum í 5 mánaðir.
[3] Broytt við K. nr. 110 frá 14. juli 2017.

- at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði,
- at hóskandi er atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og víkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um, og
- at roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

### Landsgrannskoðanin

*Ábyrgd grannskoðarans.*

Landsgrannskoðanin er stovnur undir Løgtinginum og er óheft í virki sínum. Landsgrannskoðanin skal grannskoða árliga landsroknskapin, t.e. samlaða roknskapin fyri landsumsitingina og allar landsstovnarnar.[4]

Grannskoðanin skal fevna um fíggjarliga grannskoðan, løgfrøðiliga-kritiska grannskoðan og fyrisitingargrannskoðan. Harafturat skal grannskoðanin regluliga kanna, um roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Landsgrannskoðanin ger sjálv av, hvussu grannskoðanin verður útint. Grannskoðanin verður løgd soleiðis til rættis, at øki og stovnar verða grannskoðað við jøvnum millumbili. Landsgrannskoðanin fer út á stovnar og deildir at kanna t.d. roknskapar- og lønarviðurskifti ella at kanna mannagongdir fyri umsiting av lóggávu og játtanum. Aðrar uppgávur eru t.d. játtanareftirlit, gjøgnumgongd av fíggjarstøðu og avstemman.

### Privatir grannskoðarar

Hjá nøkrum landsstovnum og grunnum er tað við lóg, kunngerð ella viðtøkum ásett, at grannskoðanin skal verða útint av løggildum ella skrásettum grannskoðarum. Í øðrum førum verður grannskoðanin útint sambært avtalu ella siðvenju.

Grannskoðararnir lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðingar um úrslitini av grannskoðanunum. Seinnu árini hava løgtingsgrannskoðararnir gjørt ein samandrátt av frágreiðingunum frá privatu grannskoðarunum, sum er latin Løgtinginum saman við uppskoti til samtyktar um góðkenning av landsroknskapinum.

### Frágreiðingar umbidnar av løgtingsgrannskoðarunum

Løgtingsgrannskoðararnir kunnu áleggja Landsgrannskoðanini at gera frágreiðingar um viðurskifti, sum teir vilja hava lýst. Løgtingsgrannskoðararnir kunnu eisini áleggja Landsgrannskoðanini at gera víðkaða fyrisitingargrannskoðan á ávísum økjum ella at gera tvørgangandi fyrisitingargrannskoðan, sum fevnir um fleiri játtanir, stovnar o.a.

Dømi um slíka frágreiðing er frágreiðing “um meirnýtsluna av verkætlanini at byggja Skúladepil við Marknagil”, sum Landsgrannskoðanin lat løgtingsgrannskoðarunum í apríl 2019.

### Viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismonnum

Í § 12, stk. 1, í grannskoðanarlógini er ásett, at landsstýrismaðurin skal hava eina skrivliga fráboðan um úrslitið av grannskoðanini. Vanligt er, at stovnsleiðslan frammanundan fær høvi at gera sínar viðmerkingar til frágreiðingina. Tað er fyri at tryggja, at ongar misskiljingar eru, og at tey skriv, sum verða send landsstýrismanninum, eru so røtt sum gjørligt, og at allir partar fáa høvi at lýsa síni sjónarmið.

*Landsstýrismaðurin skal hava frágreiðingar til viðmerkingar.*

Í § 12, stk. 3, er ásett, at áðrenn frágreiðing um úrslitið av einari grannskoðan verður latin løgtingsgrannskoðarunum, skal hon verða løgd fyri viðkomandi landsstýrismann til viðmerkingar. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismanninum um tiltøk og ætlanir, sum frágreiðingin hevur elvt til, skulu takast við í frágreiðingina til løgtingsgrannskoðararnar.

[4] Tó ikki roknskapirnar hjá teimum, har tað í lóg, kunngerð, viðtøkum, siðvenju e.l. er ásett, at grannskoðanin verður útint av løggildum ella skrásettum grannskoðarum.

Frágreiðingin skal sendast landsstýrismanninum til viðmerkingar til tess at tryggja, at tað tilfar, sum verður latið løgtingsgrannskoðarunum, verður so objektivt rætt sum gjørligt, og at eisini landsstýrismaðurin fær høvi at lýsa síni sjónarmið.

### Stuðul frá Norðurlendska Ráðharraráðnum (LG 2018/409-0005)

Hvørt ár sendir danska ríkisgrannskoðanin eitt yvirlit yvir stovnar og verkætlanir í Føroyum, sum hava fingið stuðul frá Norðurlendska ráðharraráðnum. Talan er um norðurlendskar stovnar í Føroyum, so sum Norðurlandahúsið og Norrønt Atlantssamstarv (NORA). Eisini stuðlar ráðharraráðið fleiri prosjektum í Føroyum, t.d. tænastumannaumbýti.

Landsgrannskoðanin ger ein samandrátt av árligu grannskoðanini av norðurlendsku stovnunum, og hyggur eftir, um roknskapur ella váttan fyriliggur fyri prosjektini. Samandrátturin verður sendur donsku ríkisgrannskoðanini, sum hevur ábyrgd av at grannskoða Norðurlendska Ráðharraráðið og Norðurlandaráðið. Samandrátturin er partur av samlaða roknskapinum hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum og Norðurlandaráðnum.

### Millumlanda samstarv

Landsgrannskoðanin er við í norðurlendskum samstarvi ímillum ríkisgrannskoðanirnar í Danmark, Finnlandi, Íslandi, Norra, Svøríki og Føroyum. Landsgrannskoðanin er eisini við í norðuratlantiskum samstarvi ímillum grannskoðanirnar í Íslandi, Grønlandi og Føroyum.

Sum skrivari hjá løgtingsgrannskoðarunum, er landsgrannskoðarin við á fundum ímillum skrivararnar hjá parlamentarisku grannskoðarunum í Norðurlondum.

Landsgrannskoðanin hevur umboð í grannskoðaranevndini, ið grannskoðar ES-stuðul til Northern Periphery and Arctic Programme.

Landsgrannskoðanin hevur seinasta árið verið við í tveimum norðurlendskum parallelgrannskoðanum. Onnur er um talgilding, har kannað verður, hvussu talgildingin virkar, tá ið ávíst slag av virki verður stovnað. Hin er ein fyrisitingargrannskoðan av universitetum í Norðurlondum, har tað verður kannað, um og hvussu tað ber til at máta effektivitetin. Úrslitini av grannskoðanunum eru tikin við í kap. 12 í hesari frágreiðing.

# 2. Løgmansfyrisitingin

## 2.1 Føroya Kærustovnur (LG 2017/202-0141)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Føroya Kærustovni.

### KT viðurskifti

Kærustovnurin er limur í Landsneti. Í 2013 gjørdi stovnurin tænastusáttmála (SLA) við KT Landsins og brúkar teirra trygdarpolitikk. Stovnurin hevur gjørt dátuflokkingar eftir leistinum hjá KT Landsins.

Kærustovnurin hevði fingið gjørt eina trygdarskoðan, har grannskoðarin hevði eitt høgt raðfest tilmæli um at flyta allar viðkvæmar upplýsingar av fíluservaranum og leggja tær í t.d. journalskipanina, har loggur er á. Sambært stjóranum var tilmælið grundað á, at tað bar ikki til at eftirkanna, hvør hevði latið skjøl í fíluservaranum upp. Stjórin vónaði, at viðkvomu upplýsingarnar fóru at verða fluttar í journalskipanina í 2018.

Kærustovnurin viðger og varðveitir persónsupplýsingar bæði talgilt og fysiskt. Starvsfólkini hava atgongd til allar nevndaravgerðirnar, tó er atgongdin til Psykiatrisku sjúklingakærunevndina og Høvuðsbarnaverndarnevndina avmarkað.

Sambært § 4, stk. 2, í trygdarkunngerðini[5] skal dátuábyrgdarin gera váðameting í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum fyri at fáa greiðu á sannlíkindunum fyri broti á trygdarreglurnar og avleiðingarnar av tí. Landsgrannskoðanin mælti til at fylgja ásetingunum í kunngerðini og at áseta reglur um, hvør hevur atgongd til upplýsingarnar.

Í juni 2019 hevur Løgmansskrivstovan kunnað um, at sambært Kærustovninum eru viðkvomu upplýsingarnar fluttar av fíluservaranum. Kærustovnurin hevur eisini gjørt ásetingar um viðgerð av persónsupplýsingum, og Løgmansskrivstovan hevur fingið avrit.

***Kærustovnurin hevur gjørt ásetingar um viðgerð av persónsupplýsingum.***

### Roknskaparviðurskifti

Løgmansskrivstovan hevur í juni 2019 boðað frá, at nýggj roknskaparreglugerð fyri Kærustovnin varð góðkend 3. januar 2019.

***Roknskaparreglugerðin er nú góðkend.***

Í juni 2019 hevur Løgmansskrivstovan greitt frá, at bæði tilmælini frá Landsgrannskoðanini um roknskaparviðurskifti verða fylgd, t.e. at leggja ferðaskrá við ferðauppgerðum og skjalprógv við øllum keypum til umboðan.

[5] K. nr. 28/2003 “um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum”.

## 2.2 Dátueftirlitið (LG 2017/202-0142)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Dátueftirlitinum.

### KT viðurskifti

Landsgrannskoðanin mælti til at gera mannagongdir, ið tryggja, at váðameting og KT trygdarpolitikkur verða integreraðir partar av innaneftirlitinum. Innaneftirlitið skal tryggja, at stovnurin dagførir mannagongdir og politikkar so hvørt; t.d. tá ið hann tekur nýggjar skipanir í nýtslu, ella tá aðrar broytingar eru, ið ávirka váðamyndina, sum stovnurin virkar í. Dømi um broytingar er skjalaskráin, ið varð tikin í nýtslu í 2013.

Dátueftirlitið er ikki við í Landsneti. Dáturnar liggja í skipanum á Elektron og í læstum skápum á stovninum. Dátueftirlitið hevur tvær heimasíður, ið verða hýstar uttanhýsis.

Eitt grannskoðaravirki gjørdi eina váðameting fyri Dátueftirlitið í 2009. Sama ár gjørdi stovnurin eina trygdarhandbók, sum umrøður elektroniska, fysiska og fyriskipanarliga trygd og KT trygdarpolitikk.

Í 2009 gjørdi Dátueftirlitið skrivliga útveitingar- og trygdaravtalu við P/f Elektron, har m.a. er ásett, at trygdarábyrgdarhavandi hjá báðum pørtum gjøgnumganga avtaluna regluliga og í minsta lagi eina ferð um árið. Sambært § 5 í trygdarkunngerðini kann Dátueftirlitið krevja trygdarskoðan av nýtsluni av upplýsingakervinum.

***Dátueftirlitið heldur, at ISAE 3402 váttan gevur betri vernd, enn vanlig endurskoðan av avtaluni.***

Spurt, um avtalan varð gjøgnumgingin árliga, og um Dátueftirlitið hevði umhugsað eina trygdarskoðan av upplýsingakervinum, svaraði Dátueftirlitið, at stovnurin fær ISAE 3402 váttan frá veitaranum árliga, og at stjórin sá tað sum eina regluliga trygdarskoðan, ið gav betri vernd enn vanlig endurskoðan av avtaluni.

Landsgrannskoðanin ivaðist í, um ISAE 3402 váttan frá veitaranum kundi koma ístaðin fyri gjøgnumgongd av avtaluni millum Elektron og Dátueftirlitið. Sambært Dátueftirlitinum høvdu tey somu skjøl um útveiting av KT, trygdarpolitikki, váðameting o.ø., sum stovnurin hevði í 2009. Stovnurin vísti á, at ongar broytingar ella hendingar høvdu verið, sum áttu at havt elvt til aðra fyriskipan enn hana, Dátueftirlitið hevur.

Landsgrannskoðanin var ikki samd við Dátueftirlitinum, vísandi til at stovnurin hevði fingið nýggja skjalaskrá í 2013, umframt at bøtt var um fysisku trygdina við royk- og eldvarnarum. Stovnurin átti at tikið støðu til váðamyndina av nýggjum tá.

Í juni 2019 hevur Løgmansskrivstovan kunnað um, at váðametingin er gjørd, og at váðagreining og KT trygdarpolitikkur fara at verða integreraðir partar av innaneftirlitinum.

Dátueftirlitið hevði bíðað við at skifta KT útbúnaðin út og at dagføra netið og skipanina, tí eingin tænasta verður veitt til verandi útbúnað eftir 2020, og stovnurin arbeiddi við at endurskoða KT viðurskiftini.

Dátueftirlitið var farið í holt við at nútímansgera trygdarskjøl, váttanir, KT trygdarpolitikk og roknskaparreglugerð.

Dátueftirlitið greiddi í mai 2019 frá, at trygdarskjøl, váttanir og KT trygdarpolitikkur vóru nútímansgjørd og avgreidd, men at enn manglaði at avgreiða eina trygdarskoðan, sum var gjørd, men sum Dátueftirlitið skuldi venda aftur við. Løgmansskrivstovan hevur greitt frá, at tey hava spurt eftir hesum aftur, og bíða eftir svari.

### Lønir

Landsgrannskoðanin mælti til, at stovnsleiðslan skipar fyri hóskandi skráseting av arbeiðstíð fyri at tryggja, at lønarútgjaldingarnar eru rættar.

Sambært stjóranum var skrásetingin hóskandi, tí stovnurin er so lítil, at formlig skráseting av arbeiðstíð er ikki skynsom. Dátueftirlitið skrásetti frítíð og sjúkrafráveru hjá starvsfólkunum eina ferð um árið.

Landsgrannskoðanin vísti á, at lønarútreiðslur vóru størsti parturin av útreiðslunum hjá stovninum, og at tað hevur stóran týdning, at upphæddirnar, stovnurin rindar, eru rættar. Vit mæltu til, at tíðarskrásetingin varð hóskandi skipað, og vístu á, at tað t.d. hevði borið til at knýtt stovnin í tíðarskrásetingarskipanina hjá Løgmansskrivstovuni.

Løgmaður var ikki samdur við Dátueftirlitinum, at óheftni hjá stovninum kundi verða hótt av at brúka tøkniligar skipanir saman við Løgmansskrivstovuni ella øðrum almennum stovnum. Løgmansskrivstovan hevði eisini víst Dátueftirlitinum á, at um stovnurin varð partur av KT Landsins, stóð skipanin Totalview teimum í boði at brúka.

Í juni 2019 hevur Løgmansskrivstovan kunnað um, at Dátueftirlitið bíðar eftir Lønardeildini, sum skal koma við einari almennari útmelding. Dátueftirlitið er farið at skráseta arbeiðstíð manuelt og gjøgnumganga mánaðarliga, tí at starvsfólkini ikki longur hava somu arbeiðstíðir. Løgmansskrivstovan vísir á, at tey áður hava mælt Dátueftirlitinum til at seta seg í samband við Lønardeildina fyri at finna ein skipan, sum Lønardeildin kann góðkenna, men sum ikki er ov tung at umsita fyri ein so lítlan stovn sum Dátueftirlitið.

### Ferðaútreiðslur

Landsgrannskoðanin mælti til, at Dátueftirlitið fylgir vegleiðingini frá Fíggjarmálaráðnum um ferðauppgerðir fyri tænastuferðir uttanlands; eisini mæltu vit til at leggja ferðaskrá, program e.l. við uppgerðunum. Í juni 2019 hevur Løgmansskrivstovan kunnað um, at Dátueftirlitið nú fylgir tilmælinum frá Landsgrannskoðanini um at leggja ferðaskrá við til ferðauppgerðir.

# 3. Fíggjarmál

## 3.1 Landsroknskapurin ikki fullfíggjaður (LG 2014/100-0001)

Í 2013 setti Fíggjarmálaráðið í gildi K. nr. 95/2013 "um at lata inn roknskapar-upplýsingar um alment virksemi til búskaparliga ráðlegging, stýring og eftirlit". Endamálið við kunngerðini var at fáa til vega upplýsingar um alment virksemi, sum ikki er við í fíggjarlógini, men er fevnt av almennu roknskaparlógini.

Landsroknskapurin fevnir um næstan allar landsstovnar og alment virksemi, sum landið varðar av. Somuleiðis er við gjaldføri o.ø. hjá landinum.

Dømi um almennar stovnar og virksemi, sum ikki eru við í landsroknskapinum, eru Føroya Realkreditstovnur og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, sum hava einar 2 mia.kr. í eginogn.

Í svari til løgmann í sambandi við Lm. nr. 37/2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at tað "*framhaldandi og áhaldandi verður arbeitt fram ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Arbeiðið fer sostatt fram í stigum. Bústaðir og Búnaðargrunnurin eru aftur tiknir við í landsroknskapin fyri 2016. Arbeitt verður við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin, har støða eisini verður tikin til tilknýti til landsroknskapin.*"

Grunnarnir eru tiknir við sum notur til landsroknskapin undir partinum "Eksternir grunnar". Ætlanin var, at eginpeningurin í Bústøðum, Búnaðargrunninum, Granskingargrunninum, Mentanargrunninum og Vinnuframa í framtíðini verður tikin við í landsroknskapinum undir "Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t."

Sambært landsstýrismanninum var eftir at fáa greiðu á, hvussu Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Framtaksgrunnurin og Realurin kundu verða tikin við í landsroknskapin.

***Alsamt meira virksemi verður lagt í t.d. partafeløg.***

Seinastu árini er alsamt meira virksemi hjá landinum lagt í virkiseindir, sum eru skildar frá landsfyrisitingini, t.d. í partafeløg. Flestu almennu reglur og fyriskipanir galda ikki almennu partafeløgini. Feløgini eru heldur ikki partur av fíggjarlóg ella roknskapum, sum verða lagdir fyri Løgtingið. Vit kunnu tí siga, at landsroknskapurin í minni mun avspeglar veruliga virksemið, váðar o.a. hjá landinum, umframt at tílíkt virksemi í stóran mun ikki skal fylgja øðrum almennum reglum.

Í 2016 segði Fíggjarmálaráðið seg vera samt við Landsgrannskoðanini um vandan, ið kann standast av, at ov nógv virksemi verður lagt í almenn partafeløg uttan fyri fíggjarlóg, har ikki sama gjøgnumskygni, almenn stýring og almennar reglur eru galdandi.

Í 2018 kunnaði landsstýrismaðurin um, at mánaðarliga innlatingin av roknskapartølum frá Búnaðargrunninum og Húsalánsgrunninum (Bústaðir) var komin í rættlag.

Fíggjarmálaráðið arbeiddi fram ímóti, at eginpeningurin í eksternu grunnunum fór at verða tikin við í landsroknskapin fyri 2017 undir "Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t." Arbeitt varð við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin, har støða eisini verður tikin til tilknýtið til landsroknskapin.

***Arbeitt verður framhaldandi fram ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi.***

Landsstýrismaðurin hevur í 2018 og aftur í 2019 greitt frá, at tað verður framhaldandi arbeitt fram ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Arbeiðið fer fram í stigum. Í 2018 varð miðað ímóti, at í landsroknskapinum fyri 2018 skuldi eginpeningurin í eksternu grunnunum takast við undir "Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t." Í 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at tað verður ikki gjørt kortini.

Í august 2019 hevur landstýrismaðurin kunnað um, at nýggja lógaruppskotið fyri Realin varð sent til hoyringar í apríl 2019. Í uppskotinum er ásett, at Realurin verður skrásettur í landsroknskapinum, men verður ikki tikin við í fíggjarlógini. Tað eydnaðist ikki at fáa uppskotið fyri Løgtingið, áðrenn Løgtingið fór heim í mai.

## 3.2 Veðhalds- og eftirlønarskyldur (LG 2018/203-0151)

### Eftirlønarskyldur landskassans[6]

Gjaldstovan hevur seinastu árini skrásett allar tænastumannaeftirlønarskyldurnar, og fekk fyri nøkrum árum síðani aktuar at meta um, hvat tað hevði kostað, hevði landið keypt seg leyst frá skyldunum. Skyldan hjá landskassanum verður roknað av nýggjum 3. hvørt ár.

Í landsroknskapinum 2015 varð kunnað um, at nettoskylda landskassans var mett til um 3,3 mia.kr.

Tænastumannaeftirlønarskyldurnar vórðu roknaðar aftur fyri roknskapin 2016. Síðani skyldurnar seinast vórðu roknaðar, var talið av tænastumonnum í starvi lækkað. Rentan var lækkað nógv, og livialdurin var hækkaður nógv. Skyldan viðvíkjandi løgtingsmonnum og landsstýrismonnum var hækkað lutfalsliga mest.

***Tænastumanna-eftirlønarskyldurnar eru slakar 5 mia.kr.***

Sambært landsroknskapinum 2018 var samlaða eftirlønarskyldan hjá landskassanum í 2016 slakar 5 mia.kr.

### Veðhaldsskylda vegna tryggingaravtalur hjá Føroya Lívstrygging

Sambært § 3 í Ll. nr. 105/1999 "um umskipan av Føroya Lívstrygging" er landskassa-ábyrgdin framvegis galdandi fyri tær tryggingaravtalur, sum Føroya Lívstrygging hevði, tá ið lógin kom í gildi. Roknskaparreglurnar vórðu broyttar við virknaði fyri roknskapar-árið 2012, so heimild ikki longur er at innrokna landskassaveðhaldið í roknskapin. Avleiðingin av tí var, at eginognin hjá P/f LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag, hvørs skyldur landskassin veðheldur fyri, gjørdist negativ.

Sambært ársfrásøgnini fyri 2018 er eginognin negativ við 1.093 mió.kr. Roknaðu skyldurnar eru umleið 3.076 mió.kr., og íløguognirnar eru 1.957 mió.kr.

***Landsstýrismaðurin hevur heimild at rinda til LÍV, tá ið felagnum tørvar pening at halda tryggingaravtalur.***

Sambært § 3, stk. 2, í Ll. nr. 53/2015 hevur landsstýrismaðurin heimild til at rinda til felagið, tá ið felagnum tørvar pening at halda verandi tryggingaravtalur.

### Veðhaldsskylda vegna P/f Eystur- og Sandoyartunlar

Partafelagið Eystur- og Sandoyartunlar hevur tikið 2,7 mia.kr. í láni[7]. Lánið verður fast rentað við 2,73% fram til 2040, tá ið lánið skal verða goldið aftur. Pr. 31. desember 2018 var tunnilsverkætlanin gjørd upp til 1.240 mió.kr. Av hesum var tilgongdin í 2018 688 mió.kr.

[6] Kelda: s. 242 í Landsroknskapinum 2018.
[7] Kelda: s. 243 í Landsroknskapinum 2018.

Sambært § 5 í Ll. nr. 30/2014 verða 400 mió.kr. settar í partapeningi í felagið tíðarskeiðið fram til 2024. Til og við 2018 eru 115 mió.kr. goldnar felagnum.

Sambært lógini hevur landsstýrismaðurin heimild at hækka partapeningin ella at veita felagnum trygd fyri minstuferðslu í Eysturoyartunlinum og Sandoyartunlinum. Felagið kann tiltransportera hesa játtan og trygd fyri minstuferðslu sum trygd í sambandi við fígging av verkætlanum felagsins. Harafturat kann felagið tiltransportera møguligan rakstrarstuðul uppá í mesta lagi 10 mió.kr. um árið, sum landsstýrismaðurin eftir umsókn kann veita felagnum, tá ið Sandoyartunnilin er tikin í nýtslu.

***Landsstýrismaðurin hevur heimild at hækka partapeningin ella at veita trygd fyri minstuferðslu og at veita rakstrarstuðul til tunlarnar.***

## 3.3 Eftirlønir hjá fólkaskúlalærarum (LG 2018/203-0181)

### Endurrindan frá statinum 2018

Undir hesa skipan koma tænastumenn, sum hava verið settir í føroyska skúla-verkinum, og tey, sum hava verið sett við eftirlønarrætti sum tænastumenn í fólka-skúlanum. Eftirlønirnar verða veittar eftir somu reglum sum hjá teimum, ið fáa tænastumannaeftirløn.

Ll. nr. 32/1971 er galdandi fyri tænastumenn, sum eru eftirløntir eftir 30. juni 1997. Teir, sum eru eftirløntir fyri 30. juni 1997, eru eftirløntir eftir danskari lóg.

Staturin endurrindar 80% av útreiðslunum til tænastumenn v.fl. í fólkaskúlanum, sum eru farnir frá áðrenn 1. januar 1988, herundir eftirsitandi, sum hava rætt til eftirlønina. Harafturat endurrindar staturin 80% av tí parti av eftirlønunum, sum rættur varð vunnin til inntil 31. desember 1987.

Gjaldstovan sendir Moderniseringsstyrelsen krav um endurgjald fyri læraraeftirlønir eina ferð um mánaðin. Eina ferð um árið ger Gjaldstovan upp, hvat staturin skal endur-rinda. Í uppgerðini fyri 2018 eru upphæddirnar hesar:

| Ár | Endurgjaldskrav frá Gjaldstovuni | Endurgjaldskrav smb. eftirlønarlistunum | Munur |
|---|---|---|---|
| 2018 | 29.083.357,73 | 29.083.357,73 | 0 |

Sum part av grannskoðanini kannaði Landsgrannskoðanin nøkur eftirlønarmál. Við støði í lógum, avtalum og grannskoðanarleiðbeining hava vit kannað, um:

- eftirlønarmóttakararnir á teimum báðum yvirlitunum uppfylla ásetingarnar,
- útgoldnu eftirlønarupphæddirnar geva rætt til endurgjald, og
- um endurgjaldskrøvini eru rætt roknað.

Niðurstøðan er, at eftirlønarmóttakararnir høvdu rætt til eftirløn, og at Landsstýrið hevði rætt til endurgjald frá statinum fyri útgoldnu eftirlønarupphæddirnar.

***Endurgjaldið frá statinum fyri útgoldnar eftirlønir er rætt í 2018.***

## 3.4 Gjaldstovan (LG 2016/203-0151)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av roknskapinum hjá Gjaldstovuni og KT Landsins. Roknskaparreglugerðin var góðkend av Fíggjarmála-ráðnum í 2001 og ikki dagførd. Gjaldstovan hevði gjørt uppskot til nýggja roknskapar-reglugerð eftir nýggjum leisti, sum stovnurin sjálvur hevði gjørt, og sum eftir ætlan skuldi gerast til eitt roknskaparrundskriv fyri landsumsitingina.

Í august 2017 boðaði Fíggjarmálaráðið frá, at ráðið fór at gjøgnumganga uppskotið til dagført roknskaparrundskriv og uppskotið til dagførda roknskaparreglugerð saman við Gjaldstovuni, soleiðis at tey kundu verða sett í gildi og góðkend á heysti 2017.

***Roknskaparrundskriv væntandi liðugt í heyst.***

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeiðið hjá Gjaldstovuni og Fíggjarmálaráðnum at gera eitt dagført roknskaparrundskriv er komið so mikið áleiðis, at tað væntandi kann verða lýst tíðliga í heyst (2019).

## 3.5 Kervisgrannskoðan (LG 2018/203-0151)

Kervisgrannskoðari grannskoðar á hvørjum ári skipanir og kervi hjá TAKS, Gjaldstovuni, KT Landsins og ávísum veitarum hjá KT Landsins. Um viðurskifti eru, sum ikki eru nøktandi, gevur kervisgrannskoðarin ítøkilig tilmæli. Tilmælini verða raðfest soleiðis:

- Høg: Týðandi veikleiki, sum eigur at fáast í rættlag sum skjótast,
- Miðal: Týðandi veikleiki, sum eigur at fáast í rættlag innan 6 mánaðir, og
- Lág: Týðandi veikleiki, sum eigur at fáast í rættlag innan 12 mánaðir.

### 3.5.1 Kervisgrannskoðan hjá TAKS

Grundarlagið undir samstarvinum millum TAKS og P/f Elektron hevur í mong ár verið ein sáttmáli frá juni 1999, við seinni rættingum og uppískoytum. Kervisgrannskoðarin hevur áður gjørt vart við, at tørvur var á einum nýggjum sáttmála. Í desember 2017 varð nýggjur sáttmáli um rakstur, menning og viðlíkahald (SLA) gjørdur, sum byggir á ISO 27001 standardin frá 2013, eins og krøvini til trygdarviðurskiftini eru útgreinað á nøktandi hátt.

#### Frágreiðingar um kervisgrannskoðan

Fyri árið 2018 hevur TAKS útflýggjað Landsgrannskoðanini avrit av trimum frágreiðingum. Tær eru:

- Ársfrágreiðing frá kervisgrannskoðan, kervisgrannskoðanararbeiðið fyri TAKS í 2018,
- Frágreiðing 2018, grannskoðan av almennum KT eftirlitsskipanum á Elektron fyri TAKS, og
- ISAE 3402 váttan um almennar KT eftirlitsskipanir hjá P/f Elektron fyri árið 2018 í mun til SLA avtalu við TAKS.

***Við árslok vóru 6 óloyst tilmæli.***

Við árslok 2018 hevði kervisgrannskoðanin tilsamans 6 óloyst tilmæli; av teimum høvdu 2 miðal raðfesting og 4 lága raðfesting. Talvan niðanfyri vísir gongdina í óavgreiddum tilmælum frá kervisgrannskoðanini árini 2014 til 2018:

| Óavgreidd tilmæli við árslok | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Høg raðfesting | 2 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Miðal raðfesting | 2 | 6 | 5 | 6 | 2 |
| Lág raðfesting | 3 | 1 | 1 | 4 | 4 |
| **Tilsamans** | **7** | **7** | **6** | **10** | **6** |
| Av hesum eldri enn eitt ár | 7 | 1 | 6 | 5 | 6 |

***Skjalfestingin av skipanum er framvegis ikki fullfíggjað.***

Niðurstøðan hjá kervisgrannskoðaranum er, at *"tænastusáttmálin sum heild er nøktandi og verður fylgdur á trygdargóðan hátt av Elektron. Ávísir veikleikar av týdningi eru kortini staðfestir. Av týðandi veikleikum kann í fyrsta lagi nevnast, at skjalfestingin av týðandi skipanum hjá TAKS framvegis ikki er fullfíggjað. Tilmæli hava verið opin hesum viðvíkjandi í fleiri ár. Kortini er staðfest, at TAKS og Elektron í felag hava arbeitt við hesum máli tey seinastu árini, og at skipanir eisini í 2018 eru blivnar skjalfestar. Av fýra opnum tilmælum hava vit lækkað raðfestingina fyri trý av tilmælunum í árinum, eftir at vit hava staðfest, at ein týðandi partur av írestandi skjalfestingini er gjørdur. Vit meta tað verða nøktandi, at gongd er í málinum, men at hetta arbeiðið nú eigur at avgreiðast sum skjótast."*

Í oktober 2015 kunnaði landsstýrismaðurin um, at TAKS áhaldandi arbeiddi við at loysa grannskoðanartilmælini. Ein ætlan var gjørd fyri at skjalfesta skipanirnar. Ein triðingur

av arbeiðinum var gjørdur, og væntast skuldi, at tað fór at taka tvey til trý ár afturat at gera arbeiðið liðugt.

Landsstýrismaðurin er nøgdur við, at støðug gongd er í at avgreiða tilmælini.

Í august 2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann fór at fylgja málinum neyvt, og at hann annars var nøgdur við, at støðug gongd var í málinum at avgreiða tilmælini frá kervisgrannskoðaranum. Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at hann framvegis er nøgdur við, at støðug gongd er í málinum at avgreiða tilmælini.

### Grannskoðan av skipanum hjá TAKS

Í mai 2004 gjørdu TAKS, Elektron, grannskoðarin hjá Elektron og innanhýsis kervisgrannskoðarin hjá Elektron avtalu um kervisgrannskoðan av skipanunum hjá TAKS, sum eru hjá Elektron.

Fyribilsskattaskráin grannskoðað í 2018.

Sambært avtaluni skal kervisgrannskoðarin grannskoða eina brúkaraskipan um árið. Í 2018 varð Fyribilsskattaskipanin grannskoðað, og umframt hana eru higartil Skattauppgerðarskráin, Húsaleiguskipanin, eTollur og Innkrevjingarskipanin grannskoðaðar.

Trygdar- og eftirlitsstøðið er sum heild nøktandi, men nakrir veikleikar vóru staðfestir.

Grannskoðanin av Fyribilsskattaskipanini vísti, at trygdar- og eftirlitsstøðið í skipanini sum heild er nøktandi við atliti at teimum skipanareftirlitum, sum vóru fevnd av grannskoðanini, og at skipanin sum heild lýkur krøvini um rættleika, fullfíggjan og stundvísi. Neyðug eftirlit eru í skipanini, og tey eftirlit, sum ikki eru beinleiðis í skipanini, verða framd manuelt av starvsfólkum í TAKS. Kortini varð staðfest, at gjøgnumgongd av tillutaðum brúkararættindum ikki hevði verið framd í longri tíð, og tilmæli varð givið TAKS hesum viðvíkjandi. TAKS hevur ábyrgdina av hesum tilmæli, og er tað ikki við í yvirlitinum yvir tilmælir omanfyri, sum Elektron hevur ábyrgd av. Somuleiðis varð staðfest, at fyribilsskatturin ikki varð roknaður rætt fyri ávísar skattakotur í 2018, orsakað av, at AM-gjaldið hækkaði í árinum. Kervisgrannskoðarin ráddi TAKS til at leggja seg eftir at tryggja, at umsitingin av konfiguratiónsparametrum verður gjørd einfaldari.

Grannskoðarin leggur afturat, at grannskoðanin var avmarkað í vavi, eftir avmarkingum, sum TAKS hevði ásett. Tískil kann hugsast, at onnur viðurskifti ella veikleikar vildu verðið staðfest, um grannskoðanin var meira umfatandi.

## 3.5.2 Kervisgrannskoðan hjá Gjaldstovuni

Kervisgrannskoðarin hevur gjørt avtalu við leiðsluna á Gjaldstovuni um at grannskoða innanhýsis KT viðurskifti og KT stýring hjá Gjaldstovuni í mun til tænastuveitingar til stovnarnar, sum nýta skipanirnar hjá Gjaldstovuni (Búskaparskipan landsins), eins og tað verður gjørt fyri Elektron, sum er høvuðsveitari hjá Gjaldstovuni. Fyri árið 2018 hevur kervisgrannskoðarin gjørt fýra frágreiðingar um KT viðurskiftini hjá Gjaldstovuni:

- Ársfrágreiðing frá kervisgrannskoðanini, Kervisgrannskoðanararbeiði fyri Føroya Gjaldstovu í 2018,
- Frágreiðing 2018, grannskoðan av almennum KT eftirlitsskipanum á Elektron fyri Føroya Gjaldstovu,
- ISAE 3402 váttan um almennar KT eftirlitsskipanir hjá P/f Elektron fyri tíðarskeiðið 1. januar 2018 til 31. desember 2018 í mun til SLA avtalu við Gjaldstovuna, og
- ISAE 3402 váttan um almennar KT eftirlitsskipanir hjá Føroya Gjaldstovu í veitingini av Búskaparskipan Landsins (BSL) fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2018.

Við árslok vóru 4 óavgreidd tilmæli.

Úrslitið av kervisgrannskoðanini var 4 tilmæli; 2 við miðal raðfesting og 2 við lágari raðfesting. 6 tilmæli vórðu lokað í 2018, men eitt nýtt varð givið. 3 av tilmælunum eru eldri enn eitt ár.

Trygdar- og eftirlitsstigið er annars nøktandi.

Niðurstøðan hjá kervisgrannskoðaranum er, at Gjaldstovan framvegis hevur gjølliga og nøktandi stýring av KT umhvørvi sínum á flestu økjum, og at tað støðugt verður arbeitt við at bøta um trygdarviðurskiftini. Sum heild er niðurstøðan, at trygdar- og eftirlitsstigið, ið er sett í verk innan almennu KT eftirlitsskipanirnar hjá Gjaldstovuni, við

atliti at veitingini av Búskaparskipan landsins, er nøktandi, undantikið viðmerktu veikleikar.

*Landsstýrismaðurin er nøgdur við, at støðug gongd er í at avgreiða tilmælini.*

Í juli 2019 hevur landstýrismaðurin kunnað um, at hann er nøgdur við, at støðug gongd er í málinum at avgreiða tilmælini.

### 3.5.3 Kervisgrannskoðan hjá KT Landsins

Kervisgrannskoðarin hjá Elektron hevur í 2018 grannskoðað generellu KT kontrollarnar í sambandi við, at Elektron veitir tænastur til KT Landsins og kundar tess. Kervisgrannskoðarin hevur eisini grannskoðað KT kontrollarnar v.m. í sambandi við KT tænastur, sum Formula veitir KT Landsins. Grannskoðanin er framd sambært SLA avtalum ímillum partarnar.

#### P/f Elektron

Fyri 2018 hevur kervisgrannskoðarin gjørt tvær frágreiðingar um KT viðurskiftini ímillum KT Landsins og Elektron:

- Frágreiðing 2018, grannskoðan av almennum KT eftirlitsskipanum á Elektron fyri KT Landsins, og
- ISAE 3402 váttan um almennar KT eftirlitsskipanir hjá P/f Elektron fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2018 í mun til SLA avtalu við KT Landsins.

*Við árslok vóru 3 óavgreidd tilmæli.*

Úrslitið av grannskoðanini av almennum KT eftirlitsskipanum hjá Elektron er, at tænastusáttmálin sum heild er nøktandi og verður fylgdur á trygdargóðan hátt av Elektron. Í 2018 vóru eitt miðal og tvey lágt raðfest tilmæli lokað. Við árslok vóru trý tilmæli opin, tvey miðal raðfest og eitt lágt raðfest.

*Trygdar- og eftirlitsstigið er annars nøktandi.*

Kervisgrannskoðarin heldur, at tá ið sæð verður burtur frá nevndu manglum og veikleikum, er trygdar- og eftirlitsstigið kring skipanir og dátur, sum KT Landsins nýtir hjá Elektron, trygdargott. Kervisgrannskoðarin heldur eisini, at Elektron hevur hildið krøvini í SLA avtaluni í tíðarskeiðnum burtursæð frá einstøkum viðurskiftum, sum eru fevnd av tilmælunum.

#### P/f Formula

Formula og KT Landsins gjørdu nýggja SLA avtalu galdandi frá 1. september 2016, sum ásetir tænastustøðið fyri veitingina. Kervisgrannskoðarin hevur fyri árið 2018 gjørt tvær frágreiðingar um KT viðurskiftini millum KT Landsins og Formula:

- ISAE 3402 váttan frá óheftum grannskoðara um almennar KT eftirlitsskipanir í tænastuveiting hjá P/f Formula mótvegis KT Landsins fyri árið 2018, og
- Frágreiðing um ISAE 3402 váttan frá óheftum grannskoðara um almennar KT eftirlitsskipanir í tænastuveiting hjá P/f Formula mótvegis KT Landsins fyri árið 2018.

Talvan niðanfyri vísir gongdina í óavgreiddum tilmælum frá kervisgrannskoðanini frá 2014 til 2018:

*Við árslok vóru 10 óavgreidd tilmæli.*

| Óavgreidd tilmæli við árslok | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Høg raðfesting | 3 | 0 | 2 | 2 | 2 |
| Miðal raðfesting | 10 | 7 | 9 | 6 | 5 |
| Lág raðfesting | 6 | 6 | 6 | 1 | 3 |
| **Tilsamans** | **19** | **13** | **17** | **9** | **10** |
| Av hesum eldri enn eitt ár | 19 | 13 | 9 | 5 | 2 |

*Málini í ISO standardinum og SLA avtaluni eru ikki uppfylt á nøktandi hátt.*

Kervisgrannskoðarin sigur m.a., at trygdin er bøtt á fleiri økjum í 2018, og arbeitt hevur verið við at loysa áður givin tilmæli. Trý miðal raðfest og eitt lágt raðfest tilmæli eru lokað í árinum. Kervisgrannskoðarin hevur tó eisini staðfest, at fleiri veikleikar framvegis eru til staðar, sum hava við sær, at málini í ISO standardinum og SLA avtaluni ikki kunnu metast at vera uppfylt á nøktandi hátt. Fimm tilmæli eru framvegis

opin, trý miðal raðfest og tvey høgt raðfest. Harafturat eru fimm nýggj tilmæli givin í árinum; tvey við miðal raðfesting og trý við lágari raðfesting.

Tey høgt raðfestu tilmælini snúgva seg um varðveitslu av og atgongd til trygdaravrit. Í ISAE 3402 váttanini fyri 2018 er KT Landsins gjørt vart við henda serliga eftirlits-veikleika.

Viðurskiftini eru somuleiðis umrødd í ISAE 3402 váttanini fyri KT Landsins, og sostatt eru stovnarnir í Landsneti somuleiðis gjørdir varugir við eftirlitsveikleikan. Sambært upplýsingum frá Formula er talan um fyribilsstøðu, og kervisgrannskoðarin heldur, at Formula eigur at rætta hesi viðurskifti sum skjótast. Tað skal tó viðmerkjast, at Formula hevur kunnað KT Landsins um fyribilsstøðuna, og at Formula ætlar at verkseta eina loysn í fyrsta ársfjórðingi í 2019.

***Kervisgrannskoðarin vísir á serligan eftirlitsveikleika.***

Við undantaki av serliga veikleikanum heldur kervisgrannskoðarin, at almennu KT eftirlitsskipanirnar eru á einum trygdargóðum støði.

***Trygdar- og eftirlits-stigið er annars nøktandi.***

Í juli 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at støðan viðvíkjandi trygdaravritum í umhvørvinum hjá Formula framvegis ikki var loyst. Tað hevði verið trupult at fáa neyðugu útgerðina veitta, men útgerðin stóð at koma til landið 5. august.

Í september 2019 hevur Gjaldstovan kunnað um, at málið nú er avgreitt.

***Málið um serliga eftirlitsveikleikan er nú avgreitt.***

## KT eftirlitsskipanir á KT Landsins

Kervisgrannskoðarin og leiðslan á Gjaldstovuni hava avtalað, at kervisgrannskoðarin skal grannskoða innanhýsis KT viðurskifti og KT stýringar á tænastuveitingunum, sum KT Landsins veitir stovnunum, ið nýta Landsnet. Grannskoðanin skal verða gjørd á sama hátt, sum grannskoðanin av høvuðsveitarunum hjá KT Landsins, Elektron og Formula. Endamálið við tí er m.a. at tryggja, at grundleggjandi og týðandi viðurskifti viðvíkjandi almennum KT eftirliti eru í samsvari við trygdarásetingarnar hjá KT Landsins, umframt at meta um, hvørt nøktandi trygdar- og eftirlitsstig eru sett í verk.

Fyri 2018 hevur kervisgrannskoðarin gjørt tríggjar frágreiðingar um KT viðurskiftini á KT Landsins:

- Ársfrágreiðing frá kervisgrannskoðan, kervisgrannskoðanararbeiðið fyri KT Landsins í 2018,
- Frágreiðing 2018, grannskoðan av almennum KT eftirlitsskipanum hjá KT Landsins, og
- ISAE 3402 váttan um almennar KT eftirlitsskipanir hjá KT Landsins í veitingini av Landsneti fyri árið 2018.

Úrslitið av grannskoðanini er, at fýra manglar og veikleikar eru staðfestir, tveir við miðal raðfesting og tveir við lágari raðfesting. Síðani grannskoðanina fyri 2017 er eitt nýtt tilmæli givið, og fýra eru avgreidd.

***Við árslok vóru 4 óavgreidd tilmæli.***

Niðurstøðan hjá grannskoðaranum er m.a., at KT Landsins framvegis hevur gjølliga og nøktandi stýring av sínum KT umhvørvi á flestu økjum, og at tað støðugt verður arbeitt við at bøta um trygdarviðurskiftini. Grannskoðanin hevur víst, at KT Landsins hevur loyst fleiri av tilmælunum, ið vórðu óavgreidd.

***KT Landsins hevur gjølliga og nøktandi stýring av sínum KT umhvørvi.***

Í frágreiðing sínari vísir kervisgrannskoðarin eisini á serliga eftirlitsveikleikan hjá Formula, ið er nevndur omanfyri. KT Landsins umsitur ikki hesi viðurskifti, men stovnurin hevur ábyrgd av veitingingini hjá Landsneti, og eigur tí at hava neyvt eftirlit við dygdini hjá undirveitarum í týðandi tættum av tænastuveitingunum. KT Landsins eigur tí at tryggja sær, at Formula setir tær betringar í verk, sum fyritøkan hevur lovað at fremja.

***Serligur eftirlits-veikleiki hjá Formula, sum KT Landsins eigur at tryggja sær verður betraður.***

Samanumtikið er niðurstøðan, at trygdar- og eftirlitsstigið, ið er sett í verk innan almennu KT eftirlitsskipanirnar við atliti at veitingini av Landsneti, er trygdargott, tó við undantaki av nevndu veikleikunum.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at KT Landsins, Elektron og Formula arbeiða áhaldandi við at loysa tilmælini hjá kervisgrannskoðaranum. Landsstýrismaðurin er nøgdur við, at støðug gongd er í málinum. Málið viðvíkjandi serliga eftirlitsveikleikanum hjá Formula er framvegis ikki loyst, men gongd er í tí.

***Málið um serliga eftirlitsveikleikan er nú avgreitt.***

Í september 2019 hevur Gjaldstovan kunnað um, at málið nú er avgreitt.

## 3.6 Hagstova Føroya (LG 2015/203-0152)

Landsgrannskoðanin hevur í undanfarnum ársfrágreiðingum víst á roknskaparviðurskifti hjá Hagstovuni, sum ikki hava verið nøktandi. Landsgrannskoðanin mælti til at dagføra roknskaparreglugerðina, sum var frá 2005.

Hagstovan hevði ikki fullfíggjað ognaryvirlit, men bert yvirlit yvir teldur og telefonir. Landsgrannskoðanin hevur fleiri ferðir mælt til, at ognaryvirlit verður gjørt og dagført regluliga.

Fleiri starvsfólk høvdu stórar tímasaldur. Landsgrannskoðanin mælti til, at Hagstovan ásetti reglur um tímasaldur í roknskaparreglugerðini, og at stovnurin skuldi lýsa lønarumsitingina í reglugerðini, herímillum hvussu arbeiðstíð, frítíð, sjúka o.a. vórðu skrásett.

Landsgrannskoðanin mælti eisini til at áseta mannagongdir í roknskaparreglugerðini um at krevja ómaksgjøld og at avskriva skuld.

Í august 2017 vísti landsstýrismaðurin á, at roknskaparkunngerðin partvíst var broytt, við tað at broytingarnar viðvíkjandi lønarútreiðslum, tíðaravmarkingum og tíðarskrásetingum vóru komnar í gildi. Fíggjarmálaráðið skuldi eisini gera rundskriv um arbeiðstíð. Sambært landsstýrismanninum fór Fíggjarmálaráðið at heita á Hagstovuna um at dagføra roknskaparreglugerðina, eisini við teimum dagføringum Landsgrannskoðanin mælti til, so skjótt sum roknskaparrundskrivið var dagført, og rundskriv um arbeiðstíð var gjørt.

Í 2018 kunnaði landsstýrismaðurin um, at nú tøkniliga menningin av ognaryvirlitum í Búskaparskipan landsins var framd, fór Fíggjarmálaráðið at heita á Hagstovuna og hinar stovnarnar undir ráðnum um at dagføra ognaryvirlitini.

Sambært landsstýrismanninum hevði Hagstovan gjørt uppskot til roknskaparreglugerð, og Fíggjarmálaráðið fór í næstum at góðkenna reglugerðina. So skjótt sum roknskaparrundskrivið var dagført, og rundskriv um arbeiðstíð var gjørt, fór ráðið at heita á Hagstovuna um at dagføra reglugerðina, í tann mun broyttar ásetingar eru.

***Roknskaparreglugerðin frá 2005 er ikki dagført/góðkend.***

Í september 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at roknskaparreglugerðin er enn ikki góðkend, men arbeiðið við játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarviðurskiftum verður upprað fest.

## 3.7 Landsbanki Føroya (LG 2017/203-0151)

### Reglur um virksemi

Sambært Ll. nr. 116/2016 “um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð” skal nevndin gera reglur fyri virksemið hjá nevnd og stjóra. Hon skal m.a. gera neyvari ásetingar um

umsiting av landsins gjaldføri, skuld og lántøku, og nevndin skal gera eina íløgustrategi fyri plasering av gjaldføri.

Í § 17 er ásett, at bankin "verður stovnaður við 20 mió.kr. í fæi". Fæið kann nýtast at javna inntøkur og útreiðslur í mun til virksemið, og fæið er uttanhýsis partur av landsroknskapinum.

Nevndin skal gera nærri reglur um, hvat fæið kann brúkast til. Stjórin í Landsbankanum hevur greitt frá, at nærri reglur um stovningarfæið eru ikki gjørdar. Landsgrannskoðanin mælti til at fáa greiðu á, hvat stovningarfæið kann nýtast til, og at gera ásetingar um tað.

***Reglur eru ikki gjørdar um stovnsfæið, sum er 20 mió.kr.***

Í august 2018 greiddi landsstýrismaðurin frá, at tá ið uppskotið til lógina um Landsbankan varð lagt fram, var ein áseting um, at Landsbankin kundi veita kommunum lán. Vórðu lánini veitt, var neyðugt at hava eitt fæ sum "buffara". Ásetingin um heimildina at veita kommununum lán varð tó tikin burtur í samtyktu lógini. So leingi sum endamálið við fænum ikki er greiðari ásett í lógini, verða ásetingar ikki gjørdar, og fæið stendur órørt.

## Roknskaparviðurskifti

Játtanin til raksturin av Landsbankanum er undir høvuðskontu 3.15.1.20. Í 2017 og 2018 vóru roknskapartølini hesi:

*t.kr.*

| Heiti | 2017 Játtan | Rokn-skapur | 2018 Játtan | Rokn-skapur |
|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 6.800 | 3.993 | 6.800 | 4.662 |
| Keyp av vørum og tænastum | 1.900 | 1.809 | 1.720 | 1.689 |
| Keyp av útbúnaði | 200 | 720 | 200 | 247 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 0 | 805 | 0 | 54 |
| Søla av vørum og tænastum | -1.000 | -1.265 | -1.000 | -1.492 |
| Aðrar flytingarinntøkur | -7.900 | 0 | -7.900 | 0 |
| Innanhýsis flytingar millum alm. stovnar (útr.) | 0 | 97 | 180 | -182 |
| Innanhýsis flytingar millum alm. stovnar (innt.) | 0 | -6.159 | 0 | -5.342 |
| **Tilsamans** | **0** | **0** | **0** | **0** |

Í §§ 17-20 í lógini um Landsbankan eru reglur um fíggjarlig viðurskifti hjá bankanum. Landsbankin hevur rakstrarjáttan í fíggjarlógini. Fyri røkt av gjaldføri og skuld landsins fær bankin 4‰ av landsins minstagjaldføri.

***Landsbankin verður fíggjaður av gjaldføri landskassans.***

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur, at *"upphæddin verður flutt av játtanini fyri rentuinntøkur landsins. Við at fastleggja inntøkur stovnins við lóg kemur Landsbankin at vera óheftur. Landsbankin kann eisini krevja gjøld frá teimum almennu eindunum, ið nýta hann til ognar- og skuldarumsiting og til ráðgeving"*.

Stjórin kunnaði um, at bankin hevur inntøkur sambært avtalu við AMEG um umsiting av ogn hjá grunninum umframt alla fyrisiting. Gjaldið er ásett út frá arbeiðsbyrðu, og at tað ikki skal vera kappingaravlagandi. Eisini hevur Landsbankin "innlán" frá m.ø. Framtak og Vinnusjúkugrunninum. Tey gjøldini fevna um samskifti við almennu eindirnar, bókingar og rokning av rentu.

Í § 18, stk. 3, er ásett, at bankin kann hava inntøkufíggjað virksemi. Stjórin í Landsbankanum metir, at umsiting av AMEG, Búskapargrunninum og innlánum hjá øðrum almennum eindum, sum ikki hoyra beinleiðis til landskassan, er inntøkufíggjað virksemi. Uppgávan at umsita ogn og skuld hjá landskassanum og at vera greiningarstovnur kemur undir vanligt virksemi. Stjórin vísir á viðmerkingarnar til lógaruppskotið, um at bankin kann krevja gjøld frá teimum almennu eindunum, ið nýta hann til ognar- og skuldarumsiting og til ráðgeving.

***Landsbankin hevur inntøkufíggjað virksemi.***

Inntøkufíggjaða virksemið er ikki skilt frá vanliga virkseminum hjá Landsbankanum.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at í dagførdu fíggjarlógini fyri 2019 er inntøkufíggjað virksemi hjá Landsbankanum útgreinað á serskildari undirkontu.

Minstagjaldføri landsins í 2018 varð ásett til 2.670 mió.kr.; 4‰ av upphæddini svara til 10,7 mió.kr. Inntøkurnar fyri røkt av gjaldføri og skuld landsins vóru 5,3 mió.kr.; t.e. 5,4 mió.kr. minni enn ásett.

Sambært avtalu við AMEG fær Landsbankin samsýning, svarandi til 0,025% av virðisbrævaognunum ultimo hvønn ársfjórðing. Í 2018 vóru inntøkurnar 1,3 mió.kr.

***Tilmæli um inntøkufíggjað virksemi.***

Í 2018 hevur nevndin samtykt innlánspolitikk viðvíkjandi umsiting av fíggjarognum hjá almennum grunnum og stovnum. Árliga umsitingargjaldið er ásett at vera 0,1% av miðalsaldu. Landsgrannskoðanin mælti til at kanna, um gjøldini svara til veruliga kostnaðin og reglur um prísáseting.

Í august 2018 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Landsbankin fór at eftirmeta, um gjaldið í innlánspolitikkinum svaraði til veruliga kostnaðin og reglur um prísáseting.

Landsstýrismaðurin kunnaði eisini um, at Landsbankin samanumtikið fylgir mannagongdunum hjá landinum. Landsbankin var farin undir at gera roknskaparreglugerð og skriva mannagongdir um m.a. journalisering, heimaarbeiðspláss, starvsfólkapolitikk og tíðarskráseting.

Í 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeiðið við játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarviðurskiftum verður upprøfest.

## 3.8 Talgildu Føroyar (LG 2018/203-0111)

Landsgrannskoðanin hevur kannað verkætlanina Talgildu Føroyar. Vit spurdu m.a., hvussu langt verkætlanin var komin pr. apríl 2019 í mun til tíðarætlanina, um kostnaðarætlanin helt, og um fíggingin var komin upp á pláss.

Vinnumálaráðið og Fíggjarmálaráðið tóku í 2015 stig til verkætlan at talgilda tænastur til borgarar, vinnu og almenna geiran í Føroyum árini 2016 til 2020. Í stuttum snýr verkætlanin seg um, at borgarar og fyritøkur kunnu samskifta talgilt við almenna geiran, at fyrisitingarligar tænastur hjá tí almenna eru tøkar á netinum, og at veitingar og mannagongdir í almennu fyrisitingini eru talgildar.

### Verkætlanarbygnaður

Fyrisitingarliga eru Talgildu Føroyar skipaðar undir landsstýrismanninum í fíggjarmálum. Verkætlanareigari er aðalstjórin í Fíggjarmálaráðnum. Harnæst er verkætlanarstýrisbólkur, har stjórin á Gjaldstovuni er formaður. Onnur í stýrisbólkinum eru umboð fyri kommunur og aðrar samstarvsfelagar. Undir stýrisbólkinum er verkætlanarskrivstova, sum er dagliga leiðslan av verkætlanini.

Ein verkætlanarstjóri er fyri allari verkætlanini. Ein verkætlanarleiðari er fyri hvønn verkætlanarpart, t.e. Heldin, Samleiki, Grundardáta og Tænastuportalur. Verkætlanarleiðararnir vísa til verkætlanarstjóran. Aðrir stuðlandi bólkar og funktiónir eru eisini knýtt at verkætlanini.

***Talgildu Føroyar er í fýra verkætlanarpørtum.***

Teir fýra verkætlanarpartarnir kunnu lýsast soleiðis:

Heldin er KT arkitekturur, sum er fortreyt fyri, at grunddátur kunnu verða endurnýttar, og at skipanir kunnu samskifta sínámillum við somu standardum í einum felags undirstøðukervi. Skipanir hjá almennum myndugleikum skulu knýtast í Heldina.

Talgildur samleiki kann nýtast til innritan og eyðmerking á portalum o.ø., bæði hjá stovnum, myndugleikum og fyritøkum.

Grundardátur er skipan, har upplýsingar um fyritøkur og borgarar skulu latast eina ferð. Grundardátur fevna um vinnuskrá, tinglýsing, fólkayvirlit, matrikkul og geodáta.

Tænastuportalur er ein heimasíða, sum er ein felags portalur og inngongd, har allar tænasturnar eru savnaðar, og har borgarar fáa eitt samlað yvirlit yvir persónlig viðurskifti, samskifti og tænastur.

### Framtíðar bygnaður

Í september 2019 hevur Fíggjarmálaráðið greitt frá, at avgerð er tikin um, at raksturin av Talgildu Føroyum verður skipaður sum partur av umhvørvinum hjá Gjaldstovuni á sjálvstøðugari høvuðskontu.

Fleiri avtalur eru gjørdar at tryggja raksturin av verkætlanini, tá ið hon er liðug. Rakstarleiðari er settur, og fyrireikingar eru gjørdar at skipa eina rakstrareind.

### Játtan og roknskapur

Talvan niðanfyri vísir roknskap og játtan fyri árini 2015 til 2018:

*t.kr.*

| | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir | 6 | 251 | 3.761 | 5.874 | 9.892 |
| Keyp av vørum og tænastum | 2.785 | 4.556 | 3.364 | 6.699 | 17.404 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 718 | 385 | 8.979 | 12.598 | 22.680 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 36 | 56 | 921 | 48 | 1.061 |
| Vanligar flytingarinntøkur | 0 | 0 | 0 | -7.000 | -7.000 |
| Innanh. flyt. ml. alm. stovn. | 424 | 659 | 1.602 | 3.261 | 5.946 |
| Flyting frá komm. til landið | 0 | 0 | 0 | -2.500 | -2.500 |
| **Tilsamans** | **3.969** | **5.907** | **18.627** | **18.980** | **47.483** |
| Játtan | 4.000 | 10.000 | 20.000 | 19.000 | 53.000 |

Viðmerkjast kann, at 19,7 mió.kr. eru játtaðar í fíggjarlógini 2019.

Í 2015 vórðu 2 mió.kr. játtaðar á undirkontu 6.11.1.06.23 at seta skjøtul á at talgilda tænastur til borgarar og vinnu. Í eykajáttanarlóg oktober 2015 vórðu 2 mió.kr. játtaðar afturat til m.a. at fyrireika útboð av talgildum samleika og at gera pilotverkætlan til Heldina. 4 mió.kr. vórðu nýttar í 2015.

Í 2016 vórðu 10 mió.kr. játtaðar í verklagslóg til Talgildu Føroyar, og í 2017 varð nýggj verklagslóg samtykt, galdandi til 31. desember 2023, har útreiðslurnar í mesta lagi kunnu verða 145 mió.kr. Útreiðslurnar hjá landinum kunnu í mesta lagi verða 85 mió.kr. Sambært verklagslógini er landsstýrismanninum heimilað at gera avtalur við fyritøkur, kommunur og grunnar um at fíggja part av verkætlanini.

***Útreiðslurnar hjá landinum kunnu í mesta lagi verða 85 mió.kr.***

Í 2016 vórðu 5,9 mió.kr. nýttar, tí er samlaða upphæddin, sum kann nýtast til verkætlanina 150,9 mió.kr. Við árslok 2018 vóru tilsamans 57 mió.kr. nýttar, harav hevur landið goldið 47,5 mió.kr.

Sambært viðmerkingunum til verklagslógina frá 2017, er fíggingarleisturin hesin:

*t.kr.*

| | Ár 2016 til 2020 |
|---|---|
| Land | 90.000 |
| Ymiskir samstarvsfelagar | 19.500 |
| Peningastovnar | 15.000 |
| Kommunur | 25.500 |
| **Tilsamans** | **150.000** |

***Fíggingarleisturin er broyttur, tí ikki øll fíggingin er fingin til vega.***

Seinkingar og ymiskar avbjóðingar hava gjørt, at ætlaði fíggingarleisturin er broyttur nakað. Sambært Talgildu Føroyum er tillagaði fíggingarleisturin í løtuni:

*t.kr.*

| | Ár 2016 til 2020 |
|---|---|
| Land | 90.214 |
| Ymiskir samstarvsfelagar | 17.200 |
| Peningastovnar | 9.000 |
| Kommunur | 10.600 |
| **Tilsamans** | **127.014** |

Verkætlanarstjórin kunnaði um, at allar kommunurnar, uttan Tórshavnar Kommuna, hava boðað frá, at tær fyribils ikki ynskja at luttaka í fíggingini av Talgildu Føroyum. Orsakað av tvístøðuni millum Fíggjarmálaráðið og Kommunufelagið, hevur Kommunufelagið steðgað øllum samstarvi og samskifti við Fíggjarmálaráðið, og hevur samstundis heitt á allar limakommunurnar um fyribils at steðga á við at skriva undir samstarvsavtalur við Fíggjarmálaráðið um Talgildu Føroyar.

Upprunaliga skuldu ymiskir samstarvsfelagar fíggja 19,5 mió.kr., men eftir samráðingar er upphæddin nú 17,2 mió.kr. Peningastovnarnir skuldu upprunaliga rinda 15 mió.kr. til verkætlanina, harav 2 mió.kr. um árið til rakstur í tíðarskeiðnum 2018 til 2020. Peningastovnarnir fíggja bert talgilda samleikan, og av tí at menningin av honum er seinkað, rinda peningastovnarnir einki í verkætlanartíðarskeiðnum. Avtalað er tó, at peningastovnarnir rinda 2 mió.kr. um árið til rakstur av Samleikanum, eftir 2020.

Av teimum 60 mió.kr., sum landið ikki sjálvt fíggjar, eru sostatt gjørdar avtalur við samstarvsfelagar, peningastovnar og kommunur fyri 36,8 mió.kr.

## Umsiting og stýring av verkætlanini

***Talgildu Føroyar rinda Gjaldstovuni fyri umsiting.***

Talgildu Føroyar hava felags umsiting við Gjaldstovuna, sum fevnir um roknskap og bókhald, móttøku, leiðslu, fyrisiting og HR. Fyri hesar tænastur rindaðu Talgildu Føroyar 700 t.kr. um árið í 2017 og 2018. Í 2016 rindaðu Talgildu Føroyar 300 t.kr. fyri leiðslu. Sambært Talgildu Føroyum er upphæddin grundað á eina frammanundan roknaða meting av útreiðslunum.

***Talgildu Føroyar rinda ikki fyri arbeiði, sum fleiri aðrir stovnar gera.***

Verkætlanarstjórin kunnaði um, at nógvir stovnar eisini gera forkanningar, kravfestingar v.m., sum Talgildu Føroyar ikki rinda fyri. Talan er um m.a. Umhvørvisstovuna, TAKS, Akstovuna, Almannaverkið, Studna, Ílegusavnið, Tórshavnar kommunu, Skráseting Føroya og Hagstovuna. Fleiri av stovnunum eru so ella so partur av at byggja infrastrukturin til Talgildu Føroyar, ella gera tað, sum skal til at gagnnýta hann. Torført er at seta tal á, hvussu nógvar ressursir stovnarnir nýta til verkætlanina.

Verkætlanarstjórin og roknskaparleiðarin á Gjaldstovuni gjøgnumganga roknskapartølini hvønn mánað, har teir hygga eftir, at tølini eru á leið, sum væntað.

Sambært verkætlanarstjóranum heldur fíggjarætlanin fyri teir partar, sum eru avtalaðir við undirveitarar.

Til at fylgja verkætlanini upp eru regluligir fundir í øllum bygnaðarløgum, frá starvsfólkum til landsstýrismannin í fíggjarmálum.

*Broytingar í verkætlanini*

Sambært verkætlanarstjóranum er verkætlanin í høvuðsheitum ikki broytt, síðani upprunaliga ætlanin varð gjørd. Talan er framvegis um 4 yvirskipaðar partar, Heldin, Tænastuportal, Samleika og Grundardátur. Av tí at øll fíggingin ikki er fingin til vega, hevur verið neyðugt at tillaga verkætlanina. Avgerð er tikin um fyribils at taka matrikkul- og tinglýsingarpartin umframt menning av virkisskránni burtur úr Grundardátum, til ein møgulig loysn verður fingin á fíggingini. Tó er ein partur av tinglýsingarpartinum gjørdur.

***Matrikkul- og tinglýsingarparturin er tikin úr verkætlanini, tí øll fíggingin er ikki fingin til vega.***

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at tað at taka matrikkul- og tinglýsingarpartin burturúr, er ein týðandi broyting av verkætlanini í mun til tað, sum varð samtykt av Løgtinginum.

***Týðandi broyting, at matrikkul- og tinglýsingarparturin ikki eru við.***

Í september 2019 hevur Fíggjarmálaráðið víst á, at landsstýrismaðurin støðugt er kunnaður um tillagingar í verkætlanini. Verkætlanin er løgd til rættis soleiðis, at hægst raðfestu partarnir verða gjørdir fyrst. Tað merkir ikki, at nakrir partar eru endaliga valdir frá, tí tað ber til at koma til teir seinni, um fíggingin lagar seg í gildistíðini av verklagslógini fram til og við 2023.

Sambært verkætlanarstjóranum verður strembað eftir at fylgja góðum prosjektleiðslusiði, tá ið broytingar verða gjørdar í verkætlanini. Áðrenn broytingar verða gjørdar, skal sonevnt “change request” verða góðkent av hægri myndugleikum fyri sjálva verkætlanina, ella fyri einkultu partsverkætlanina. Stýrisbólkur, umboðandi land, kommunur og uttanhýsis sponsorar, er settur til m.a. at góðkenna broytingar. Broytingar verða eisini viðgjørdar við verkætlanareigaran (Fíggjarmálaráðið), serliga um talan er um broytingar, sum verða hildnar at hava politiskan áhuga.

*Avtalur við undirveitarar*

Umframt at verkætlanin er býtt í 4 høvuðspartar, er hon eisini býtt upp í undirverkætlanir, sum verða bjóðaðar út at menna. Verkætlanarstjórin kunnaði um, at enn eru ikki allar undirverkætlanirnar bodnar út. Støðan nú er:

- Heldin: Avtalur vórðu gjørdar í sambandi við at loysnin varð sett upp í 2016. Ongar nýggjar avtalur eru gjørdar.
- Samleikin: Flestu avtalurnar eru gjørdar. Nakrar avtalur vanta í sambandi við at menna undirskriftarpartin og aðrar undirloysnir.
- Grundardátur: Avtalur eru gjørdar viðvíkjandi Fólkayvirlitinum og kort/geodáta, og at skanna tinglýsingar- og matrikkularkivið. Avtalur eru gjørdar um forkanning av Virkisskrá og at talgilda Tinglýsingarskipanina, men menningin er enn ikki boðin út.
- Tænastuportalur: Flestu avtalurnar eru gjørdar.

*Lógir og reglur*

Verkætlanarstjórin kunnaði um, at øll lóggáva er komin upp á pláss fyri teir partar av verkætlanini, sum eru sjósettir.

**Tíðarætlanin apríl 2019**

Verkætlanin byrjaði í 2016 og sambært heildarætlanini skal hon vera liðug og sett í verk í 2020. Sambært verkætlanarstjóranum er ætlanin nakað seinkað í ávísum pørtum:

***Partar av verkætlanini eru seinkaðir.***

Heldin: Í tráð við tíðarætlanina var Heldin sett í verk á heysti 2016, og klárt var at knýta KT skipanir hjá almennum stovnum uppí. 21. oktober 2016 setti Fíggjarmálaráðið rundskriv um Heldina í gildi. Í rundskrivinum er ásett, at alt nýtt dátusamskifti millum myndugleikar skal umvegis Heldina. Eisini er ásett sum mál, at alt dátusamskifti millum KT skipanir hjá almennum myndugleikum fer fram umvegis Heldina innan 3 ár.

Sambært verkætlanarstjóranum brúka fleiri og fleiri stovnar Heldina, men tað er ivasamt, um málið verður nátt, m.a. tí at eingir sanktiónsmøguleikar eru, sum kunnu tvinga myndugleikar at knýta KT skipanir uppí. Talgildu Føroyar eggja heldur stovnum til tað.

Samleikin: Sambært upprunaligu tíðarætlanini skuldi menningin av talgilda samleikanum verið liðug og sett í verk í 2018. Sambært verkætlanarstjóranum er menningin seinkað. Avgjørt er at býta menningina í tveir partar, menning av talgildari innritan og menning av talgildari undirskrift. Talgild innritan verður sett í verk beint eftir árslok 2019.

Talgildu Føroyar hava bíðað við partinum um talgilda undirskift, tí nýggjur ES standardur um talgilda undirskrift er mentur, men nú er klárt at fara í gongd. Í løtuni verður ætlan gjørd, hvussu farast skal fram, og verkætlanarstjórin væntar, at talgilda undirskriftin verður liðugt ment miðskeiðis í 2020, og at hon verður sett í verk í seinnu hálvu av 2020.

Grundardátur: Eingin ítøkilig tíðarætlan er nevnd í heildarætlanini fyri at menna og seta í verk Grundardátur, men sambært verkætlanarstjóranum er arbeiðið seinkað. Grundardátur eru í fimm pørtum, og eingin partur er liðugur enn.

Høvuðsorsøkirnar til seinkingina eru broytingar í leiðslu og prosjektbygnaði.

Geodátur, ella kortal.fo, er gjørt av nýggjum. Avgerð er tikin um, at menning av vinnuskránni, matrikkulparturin og restin av tinglýsingarpartinum ikki verða gjørd, fyrr enn fíggingin er komin upp á pláss.

Tænastuportalur: Eftir upprunaligu ætlanini skuldi arbeiðið við tænastuportalinum byrja í 2015, og skuldi setast í verk í 2016. Tað arbeiðið byrjaði í 2017. Ætlandi skal 1. slepping setast í verk samstundis sum talgilda innritanin, t.v.s. seint á sumri 2019. Ein orsøk til seinkingina er, at Talgildu Føroyar hava keypt ein menningarpall at menna tænastuportalin. Endamálið var at effektivisera menningina, men nógvir byrjanartrupulleikar hava verið.

***Bara menningin og íverksetanin av Heldini eru liðug til tíðina.***

Samanumtikið vórðu bara menningin og íverksetanin av Heldini liðug til tíðina. Allir hinir partarnir av verkætlanini eru seinkaðir. Sambært verkætlanarstjóranum eru orsøkirnar fleiri, m.a. at á onkrum parti hevur avbjóðingin verið størri enn væntað, og at Talgildu Føroyar hava bíðað eftir, at nýggir ES standardir eru liðugt mentir. Flestu partarnir verða eftir ætlan lidnir í 2020, hóast nakað skerdir.

### Aðrar avbjóðingar

Sambært verkætlanarstjóranum hava ikki aðrar týðandi avbjóðingar verið, enn tað sum kann væntast í stórum verkætlanum. Allar ósemjur og ymiskar fatanir eru handfarnar annaðhvørt við samrøðum, við at gera smærri tillagingar í avtalum, ella við at gera ískoytisavtalur. Allar uppgávur eru grundaðar á avtalur, og størri uppgávur/verkætlanir eru grundaðar í sáttmálum, sum skilliga greina, hvat uppgávan snýr seg um.

***Verkætlanarstjórin væntar ikki, at hóttandi avbjóðingar verða fyri framman.***

Verkætlanarstjórin væntar ikki, at hóttandi avbjóðingar verða fyri framman. Tó kunnu hesar avbjóðingar koma fyri:

- Vantandi fígging kann hava við sær, at matrikkulparturin í Grundardátum má veljast frá. Kommunurnar hava boðað frá, at tær fyribils ikki luttaka í fíggingini.
- Ein “yvirupphitaður” KT marknaður kann hava við sær, at ov fá KT fólk eru í Føroyum at menna loysnirnar, og at tær kunnu gerast dýrari, enn ætlað.
- At skriva og at seta í verk allar mannagongdir fyri Talgilda samleikan er ein uppgáva, sum hvørki Gjaldstovan ella rakstrarveitarin hava roynt áður. Tað fer eisini at krevja munandi hægri trygd, enn roynt er áður.

## 3.9 Avgjald av kapitaleftirlønum (LG 2017/220-0521)

Í undanfarnu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av umsitingini hjá TAKS av avgjaldi av kapitaleftirlønum.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum inngjøld av avgjøldum av kapitaleftirlønum, og hevði bert smávegis viðmerkingar. Samanumtikið virkar umsitingin væl, tá ið talan er um at tryggja, at tað, sum er goldið, er rætt. Tá ið stjórin góðkennir mánaðarroknskapin, váttar hann mótvegis Fíggjarmálaráðnum, at allar inntøkur eru við, og at roknskapurin er rættur og álítandi. Landsgrannskoðanin vísti á, at TAKS onga vissu hevur fyri, at øll, sum skulu rinda avgjald, hava rindað landskassanum avgjøldini.

Landsgrannskoðanin hevur áður umrøtt spurningin, um at grannskoðarin hjá eftirlønarveitarum árliga kundi váttað, at mannagongdir og bókhald eru hóskandi skipað við atliti at útrokning og avrokning av avgjøldunum. Sambært TAKS hava tey í longri tíð ynskt at fingið tað í lóggávuna, men komið er ikki á mál.

Landsstýrismaðurin kunnaði um, at hann ætlaði at fáa hetta inn í lógina, næstu ferð rentutryggingarlógin verður broytt.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at enn er eingin broyting gjørd í rentutryggingarlógini.

***Komið er ikki á mál við grannskoðaravváttan.***

## 3.10 Innheinting av barnapeningi (LG 2017/203-0151)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av innheintingini av barnapeningi.

### Heimildir at heinta inn barnapening

Barnapeningur verður heintaður inn sambært Lov nr. 150/1963[8]. Heimildir at heinta inn krøv uttan fyri Føroyar, eru sambært:

- Bekendtgørelse nr. 433/1965 “om inddrivelse af underholdsbidrag i henhold til den af De Forenede Nationer vedtagne konvention af 20. juni 1956”,
- Bekendtgørelse nr. 434/1965 “om anerkendelse og fuldbyrdelse af afgørelser om underholdsbidrag i henhold til Haagerkonventionen af 15. april 1958 om underholdspligt over for børn”, og
- Bekendtgørelse nr. 269/1963 “om inddrivelse af underholdsbidrag i henhold til konvention af 23. marts 1962 mellem Danmark, Finnland, Island, Norge og Sverige”.

TAKS hevur ikki sett nakra innheinting í verk uttan fyri Norðurlond, tí tað er ov kostnaðarmikið. TAKS sendir fráboðan til skuldarar, tá ið stovnurin fær mál frá Almannaverkinum. Óvist er, um fráboðanirnar yvirhøvur koma fram, og ofta gongur long tíð, áðrenn einstøk brøv koma retur.

***Eingin innheinting sett í verk uttan fyri Norðurlond.***

Spurdur, um TAKS hevur skyldu til at taka ímóti krøvum, sum kortini ikki verða heintað inn, svaraði landsstýrismaðurin, at TAKS hevur ábyrgd av innheintingini, og tí skyldu til at taka ímóti krøvunum.

***TAKS hevur skyldu at taka ímóti krøvum frá Almannaverkinum.***

### Eftirgeving av skuld

Sambært § 13, stk. 1, í Ll. nr. 71/1996 “um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl.” skal Almannaverkið eftirgeva forskotsvís útgoldin gjøld, sum ikki eru afturgoldin av tí gjaldskylduga, tá ið einki gjald er útgoldið síðsta árið, ella tá ið tann gjaldskyldugi hevur verið innsettur á stovni undir Kriminalforsorgini.

[8] “om inddrivelse af underholdsbidrag”, som ændret ved lov nr. 280 af 8. juni 1977.

*Ikki nøktandi, at TAKS einki yvirlit hevur yvir, hvussu nógv verður eftirgivið.*

Ein fyritreyt fyri at eftirgeva eftir stk. 1 er, at gjaldskyldugi ikki er førur fyri at rinda.

Landsgrannskoðanin heldur tað ikki vera nøktandi, at TAKS einki yvirlit hevur yvir, hvussu nógv er eftirgivið sambært § 13.

### Avskriving og avseting móti tapi

*Ivasamt um TAKS hevur heimild at avskriva.*

Í 2007 gjørdi TAKS eitt átak at rudda upp í skuldarunum og niðurskrivaði ein part av áognini. Ivasamt er, um stovnurin hevði heimild at avskriva, og tí er sannlíkt, at áognin hjá landskassanum átti at verið størri, enn hon er. TAKS heldur, at ein triðingur av skuldini kundi verðið avskrivaður, tí TAKS fær ongantíð peningin inn.

Sambært landsstýrismanninum skal fíggjarstøðan í landsroknskapinum vera so rættvísandi sum gjørligt. Í hesum føri er talan um persónar, sum eingi gjaldsevni hava og fara tí helst ikki at kunna rinda. Eru als eingi útlit fyri, at skuldin verður afturgoldin, eigur hon at verða avskrivað roknskaparliga.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Fíggjarmálaráðið, saman við TAKS, Almannamálaráðnum og Almannaverkinum, fer at viðgera málið, fyri at finna eina nøktandi loysn viðvíkjandi innheinting av barnapeningi og eftirgeving av skuld.

## 3.11 Bundin eftirløn av B-inntøkum (LG 2016/220-0521)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av bundnari eftirløn av B-inntøku.

Eftirlønarlógin kom í gildi 1. januar 2014 og er broytt síðani. Lógin áleggur øllum persónum at rinda til egna eftirløn. Fyrsta árið var gjaldið 1% av bæði A- og B-inntøkum og hækkar eitt prosent um árið til 2026, tá ið tað verður 12%. Skattur av eftirlønargjaldinum er millum 30% og 40% alt eftir inntøku.

Eftirlønargjald av A-inntøkum verður sjálvvirkjað tikið av lønunum og flutt á eftirlønarkontur hjá skattgjaldarum, og samstundis verður skatturin fluttur landskassanum.

Tey, ið hava B-inntøku skulu gera vart við eftirlønaruppsparingina á sjálvuppgávuni. Síðani verða eftirlønin og skatturin roknað sum partur av árligu skattauppgerðini. Rokning verður send teimum, og tá ið rokningin er goldin, verður eftirlønin flutt á persónliga eftirlønarkontu, og skatturin í landskassan.

Verða eftirlønargjøldini og eftirlønarskatturin ikki goldin til tíðina, hevur TAKS heimild at panta.

### Persónar við ongari eftirlønarkontu

*Fleiri mangla eftirlønarkontu.*

Fleiri persónar, sum verða kravdir eftir eftirlønargjaldi, hava ikki eftirlønarkontu. Tær upphæddirnar verða skrásettar á eina depotkontu í bókhaldinum hjá TAKS og verða bókaðar á aðra stuttfreistaða skuld í landsroknskapinum. Við árslok 2018 var upphæddin 3,5 mió.kr. netto.

Persónar við B-inntøku fáa hvørt ár skriv um, hvussu nógv skal rindast í eftirløn og í skatti. Í skrivinum verður upplýst, at sáttmáli skal gerast við ein eftirlønarveitara, og kontunummar latast TAKS.

TAKS hevur eina skipan, sum dagliga lesur í skattaskipanunum, um nýggjar eftirlønarkontur eru stovnaðar. Er ein eftirlønarkonta stovnað hjá einum persóni við depotkontu, verður upphæddin á depotkontuni sjálvvirkjað flutt til ta kontuna.

*Fíggjarmálaráðið heldur, at skipanin við fyribils depotkontum virkar sum ætlað.*

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Fíggjarmálaráðið framvegis heldur, at skipanin við fyribils depotkontum virkar sum ætlað.

## 3.12 Negativt meirvirðisgjald (LG 2016/220-0522)

Í seinastu ársfrágreiðing umrøddu vit umsitingina av negativum meirvirðisgjaldi.

### Innaneftirlit og eftirlitspolitikkur

Sum liður í innaneftirlitinum brúkti leiðslan á TAKS talgilda kekklistaskipan at stýra afturvendandi rutinuuppgávum innan tær freistir, hon ásetir.

Saman við eftirlitinum við játtanini er kekklistaskipanin ein týðandi partur av innaneftirlitinum hjá TAKS. Ein annar eins týðandi partur av innaneftirlitinum eru tey tiltøk, sum leiðslan og starvsfólk seta í verk og fremja fyri at røkka málinum, um at raksturin er málsøkin og effektivur, at roknskapurin er rættur og álítandi, og at lógir og reglur verða hildnar.

Leiðslan hevði ikki nágreinað, hvørji eftirlit skuldu gerast, ella hvussu hon vildi hava eftirlitini framd og skjalprógvað, fyri at tryggja sær, at tað, sum TAKS rindaði út, var rætt, og at roknskapurin tí kundi sigast at vera rættur.

***Leiðslan hevði ikki greinað, hvørji eftirlit skuldu gerast.***

Deildarleiðarin setti mál fyri eftirlitini, sum vanliga vóru tey somu, sum árið fyri. TAKS kannaði umleið 4% av øllum negativum MVG-uppgerðum, fyri tað mesta íløgur, sum á einstøkum uppgerðum gjørdu, at avgjaldstilsvarið varð negativt. Landsgrannskoðanin ivaðist í, um kanningarhátturin var nøktandi út frá týdningi og váða.

TAKS vísti á, at tey høvdu ikki og komu ongantíð at hava møguleika at kanna øll útgjøld, tí var tað altíð ein raðfesting.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað, at TAKS ikki hevði møguleika at kanna allar útgjaldingar, kundi ikki forða fyri, at leiðslan hevði greiðari ásetingar um, hvussu hon vildi hava eftirlitini framd og skjalprógvað, fyri at tryggjað sær, at tað, sum TAKS rindaði út, var so rætt sum gjørligt.

Í august 2018 greiddi landsstýrismaðurin frá, at sambært TAKS varð hugt eftir stødd og vinnugrein og samanborið við undanfarnar uppgerðir og ár, tá ið útgjøld vórðu kannað. Í hvørjum einstøkum føri varð støða tikin til, hvat skuldi kannast og ikki. Orka var ikki altíð til at gera eftirlit úti á virkjunum, men stakroyndir vórðu gjørdar, og tí varð tað eitt tilval og eitt frával.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at arbeitt verður støðugt við at hava eitt so virkið og neyvt eftirlit hjá TAKS sum møguligt, umframt at vunnin arbeiðsorka við talgilding ætlandi verður nýtt til at uppraðfesta eftirlitsøkið, herundir eftirlitið við negativum meirvirðisgjaldi.

***Arbeitt verður støðugt við at hava eitt so virkið og neyvt eftirlit, sum møguligt.***

## 3.13 Endurgjøld av meirvirðisgjaldi (LG 2018/220-0522)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað endurgjøld sambært §§ 3 a-d í MVG-lógini. Endamálið var at kanna, hvussu leiðslan tryggjar sær, at endurgjøldini eru røtt, og hvørji innaneftirlit TAKS hevur sett í verk, sum byrgja upp fyri, og varnast ætlaðar og óætlaðar feilir. Eisini hava vit við stakroyndum kannað nøkur endurgjøld.

Reglurnar um MVG eru í Ll. nr. 136/1992 “um meirvirðisgjald”. Sambært lógini skal avgjald rindast til landskassan í øllum liðum av vinnuligari sølu av vørum og tænastum og við innflutningi úr útlondum.

Í §§ 3 a-d eru ásetingar um, at søkjast kann um at fáa MVG'ið endurrindað fyri ávísar íløgur:

- § 3 a: Felagsskapir, stovnar og grunnar, ið gera íløgur í ikki-vinnuligt, almannagagnligt frítíðarvirksemi fyri meira enn 1 mió.kr.,
- § 3 b: Bygging/umbygging av bygningi til leigubústaðir, fyri meira enn 200 t.kr.,
- § 3 c: Akfar, sum bert nýtir ravmagn ella vetni, og
- § 3 d: Hitapumpuskipanir.

Umframt í MVG-lógini eru ásetingar um endurrindan av MVG í K. nr. 11/2018 sambært § 3 a, og í K. nr. 10/2016 sambært § 3 b.

Øll fýra sløgini av endurgjøldum eru tíðaravmarkað.

Játtanin til MVG er á høvuðskontu 20.52.2.01 Meirvirðisgjald. Í 2018 vóru 54 mió.kr. endurrindaðar eftir §§ 3 a-d. Sambært Búskaparskipan landsins eru upphæddirnar útgreinaðar soleiðis:

*t.kr.*

| StRk/Útgr. | | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 5490.5000 | Endurrindan smb. § 3 a | 31.437 | 18.077 | 13.759 | 9.031 | 18.570 |
| 5390.5000 | Endurrindan smb. § 3 b | 883 | 1.948 | 11 | 29.033 | 29.041 |
| 5290.5010 | Endurrindan smb. § 3 c | 0 | 0 | 0 | 504 | 3.609 |
| 5290.5000 | Endurrindan smb. § 3 d | 0 | 0 | 0 | 680 | 2.378 |
| **Tilsamans** | | **32.320** | **20.025** | **13.770** | **39.248** | **53.598** |

## Mannagongdir

Tá ið endurgjøld sambært §§ 3 a-c verða játtað, verða játtanarskriv send. Játtanarskriv verða ikki send viðvíkjandi endurgjøldum eftir § 3 d.

Tey, sum fáa endurgjøld játtað sambært §§ 3 a og b, fáa í játtanarskrivum boð um, at v-tal við MVG-skyldu verður stovnað, og at tey skulu senda MVG-uppgerðir inn, til verkætlanin er liðug. Endurgjøldini verða goldin út sum negativt MVG, ella mótroknað í inngangandi MVG'num, um umsøkjarin eisini rekur annað virksemi.

Endurgjøld sambært §§ 3 c og d, verða goldin eftir boðum frá málsviðgera.

***Deildarleiðari avgreiddi mál einsamallur. Mannagongdin er nú broytt.***

Felags fyri málsviðgerð av endurgjøldum er, at deildarleiðari, sum er málsviðgeri, avgreiðir málini einsamallur. Landsgrannskoðanin mælti til, at annar persónur eftirkannar málini, áðrenn upphæddir verða goldnar út. TAKS hevur eftirsíðan sett eitt starvsfólk at eftirkanna, áðrenn umsóknir sambært §§ 3 a og b, verða góðkendar.

Mannagongdirnar fyri einstøku sløgini av endurgjøldum eru:

### *Endurgjald sambært § 3 a*

Felagsskapir, stovnar og grunnar, ið gera ávísar íløgur, kunnu eftir umsókn fáa endurrindað inngangandi MVG'ið. Treytirnar fyri at fáa MVG endurrindað eru, at:

- íløgan skal verða størri enn 1 mió.kr., MVG ikki íroknað,
- talan skal vera um ikki-vinnuligt, almannagagnligt frítíðarvirksemi,
- í minsta lagi 33% av íløgukostnaðinum skal verða fingin til vega sum gáva ella við sjálvbodnum, óløntum arbeiði, og fígging skal vera til alla verkætlanina,
- arbeiðið skal vera byrjað eftir 1. januar 2013, og skal verða liðugt í seinasta lagi 5 ár eftir, at umsóknin er játtað,
- umsókn um endurgjald skal vera TAKS í hendi í seinasta lagi 31. desember 2019, og
- samlaða endurgjaldið kann ikki verða hægri enn MVG'ið í fíggjarætlanini og kostnaðarætlanini.

Góðkendur grannskoðari skal í góðkenning sínari av fíggjarætlanini og kostnaðarætlanini staðfesta, at íløgan er oman fyri 1 mió.kr., og at í minsta lagi 33% av samlaða íløgukostnaðinum, uttan MVG, er fingið til vega sum gáva ella innsavnað við ólønt um og sjálvbodnum arbeiði, og at fígging er til alla íløguverkætlanina. Eisini skal kommunan, har íløgan verður gjørd, góðkenna øll neyðug byggiteknisk myndugleikakrøv og –loyvi til verkætlanina.

Sambært TAKS koma flestu umsóknirnar frá ítróttafeløgum, samkomuhúsum, felagsskapum o.l. Higartil eru bert umsóknir komnar um nýbygging og umbygging av bygningum. Í løtuni koma so at siga ongar nýggjar umsóknir inn til TAKS.

TAKS tryggjar sær, at váttanir frá grannskoðara og kommunu fylgja við umsóknunum. TAKS ásannar, at tað er trupult at kanna eftir, at í minsta lagi 33% av íløgukostnaðinum er gáva og/ella ólønt arbeiði.

Eru kravdu váttanir og skjøl fingin til vega, og lýkur umsøkjarin treytirnar fyri at fáa endurgjald, verður goldið út so hvørt, sum umsøkjarin sendir MVG-uppgerðir inn.

Upphæddin søkt verður um, verður vanliga ikki broytt, um prísurin ikki heldur. Um umsøkjari boðar frá, at prísurin verður hægri enn søkt er um, verður hann biðin at senda nýggja umsókn. Higartil eru allar umsóknir gingnar á møti.

***Higartil eru allar umsóknir gingnar á møti.***

TAKS ætlar at skipa betri eftirlit við, at ikki meira verður goldið út enn MVG'ið, sum er givið upp í fíggjarætlanini og kostnaðarætlanini.

Um íløgan verður seld, ella virksemið heldur uppat innan 10 ár, skal endurgjaldið rindast aftur lutfalsliga eftir reglunum um javning.

*Endurgjald sambært § 3 b*

Tey, sum byggja ella umbyggja bygning til leigubústað, kunnu, um tey lúka ávísar treytir, fáa endurgoldið inngangandi MVG av byggikostnaðinum. Treytirnar eru, at:

- upphæddin skal verða størri enn 200 t.kr.,
- í minsta lagi 2 leigubústaðir eru í byggiverkætlanini,
- minst 10%, tó minst ein bústaður, skal verða atkomiligur og kunna nýtast av fólki í koyristóli,
- matrikkulnummarið inniheldur ikki lán, har rentustuðul verður veittur,
- landskassin fær tinglýst veðskuldarbræv, samsvarandi við virðið av endurgoldna MVG'num,
- arbeiðið skal vera byrjað eftir 1. januar 2012 og endað í seinasta lagi 5 ár eftir, at TAKS hevur fingið umsóknina,
- TAKS skal hava fingið umsóknina í seinasta lagi 31. desember 2019, og
- samlaða endurgjaldið kann ikki verða hægri enn MVG'ið í fíggjarætlanini og kostnaðarætlanini.

Fíggjarætlan og kostnaðarætlan at byggja ella umbyggja bygning til leigubústað skal vera góðkend av góðkendum grannskoðara. Kommunan skal vátta, at byggiverkætlanin er í samsvari við lóg um at byggja bygningar o.a.

TAKS tryggjar sær, at váttan frá grannskoðara fyriliggur, at kommunan hevur góðkent ætlanina, og at umsøkjararnir lúka treytirnar um tíðarfreistir o.a. Eisini tryggjar TAKS sær, at einki verður goldið út, uttan at veðskuldarbræv er tinglisið.

TAKS fylgir ikki altíð mannagongdunum og treytunum, tí TAKS fær ikki umsóknir frá Bústøðum til hvørja einstaka verkætlan. Bústaðir hava søkt einaferð, tá ið tey byrjaðu at byggja íbúðir, og eftir tað hevur TAKS bert fingið tinglýst veðskuldarbrøv sendandi,

so hvørt tey fara undir nýggja verkætlan. Tað vil siga, at TAKS ikki fær váttaða kostnaðarætlan frá grannskoðara og góðkenning frá kommunum fyri einstøku verkætlanirnar.

***Mannagongdin hjá TAKS er ikki altíð í tráð við reglurnar. TAKS fer at broyta mannagongd.***

Landsgrannskoðanin heldur, at mannagongdin hjá TAKS viðvíkjandi endurgjaldi til Bústaðir er ikki í tráð við reglurnar í lóg og kunngerð. TAKS hevur tikið viðmerkingina til eftirtektar og heitt á Bústaðir at senda umsókn til TAKS við tilhoyrandi loyvum til hvørja einstaka verkætlan.

Veðskuldarbrøvini liggja til skjals hjá TAKS. Íløgan kemur undir reglurnar um javning. Sambært TAKS hava tey ikki skipað, hvussu tey verða mint á at avlýsa veðskuldarbrøvini aftur, tá ið tann tíðin kemur.

*Endurgjald sambært § 3 c*

Tey, sum keypa motorakfar, ið bert nýtir ravmagn ella vetni til framdrátt, kunnu fáa MVG'ið endurrindað. Í mesta lagi 70 t.kr. kunnu endurrindast, og fyri at fáa endurgjaldið, skal akfarið vera skrásett í seinasta lagi 31. desember 2020.

Tá ið eigari av akfari søkir um at fáa MVG endurgoldið, skal hann senda TAKS faktura, skrásetingarskjal og kontunummar. Á skrásetingarskjalinum sæst, um talan er um ravmagns- ella vetnisakfar.

Um alt er í lagi, góðkennir TAKS endurgjaldið, og rindar tað út.

*Endurgjald sambært § 3 d*

Tey, sum keypa góðkendar hitapumpuskipanir til upphiting og heitt vatn í sethúsum ella bygningum, kunnu eftir umsókn fáa endurrindað MVG av íløgukostnaði til hitapumpu, útbúnað og arbeiðsløn. Fyri at fáa MVG endurgoldið, skulu hesar treytir verða loknar:

- talan skal vera um sethús ella bygning, har hitapumpa letur í minsta lagi 80% av samlaðu nýtsluni til upphiting og heitt vatn, og restin av nýtsluni skal verða grundað á el,
- samlaðu útreiðslurnar skulu vera hildnar í seinasta lagi 31. desember 2019 og umsókn skal vera TAKS í hendi í seinasta lagi 31. mars 2020,
- hitapumpur skulu vera góðkendar sambært Bygningskunngerðini,
- arbeiðið at installera hitapumpuskipanina skal vera gjørt av góðkendum installatøri, og um talan er um jarðhitaskipan, skal arbeiðið vera gjørt av góðkendum brunnborara, og
- Umhvørvisstovan skal vátta, at treytirnar eru loknar.

***Umhvørvisstovan málsviðger umsóknirnar.***

Umsóknin skal sendast TAKS á serskildum oyðublaði, saman við kvittanum fyri íløgu-útreiðslunum. TAKS og Umhvørvisstovan hava gjørt avtalu um, at Umhvørvisstovan skal málsviðgera umsóknirnar, tí tey hava fakkunnleika á økinum. Umhvørvisstovan kannar og váttar, at treytirnar at fáa endurgjald eru loknar. Tá ið TAKS fær váttanina frá Umhvørvisstovuni, rindar TAKS út uttan aðra viðgerð.

***Ivasamt, um heimild er at seta hámark fyri útreiðslur til elarbeiði og arbeiðsløn fyri íbinding.***

Á umsóknarblaðnum er ásett, at í mesta lagi verða útreiðslur upp til 7 t.kr. endurgoldnar fyri elarbeiði og arbeiðsløn fyri íbinding. Hámarkið er ikki heimilað í lógini, men Umhvørvisstovan hevur gjørt løgfrøðiligt upprit, har niðurstøðan er, at heimild til MVG afturbering ikki kann toyggjast til annað elarbeiði enn tað, sum krevst fyri at binda eina hitapumpuskipan í verandi elkervi í húsinum. Sambært Umhvørvisstovuni er upphæddin, í mesta lagi 7 t.kr., ásett eftir einari samlaðari meting av, hvat ein miðal kostnaður var fyri elarbeiði í sambandi við íbinding av hitapumpuskipan. Landsgrannskoðanin ivast í heimildini at áseta eitt slíkt hámark.

Í september 2019 hevur Fíggjarmálaráðið kunnað um, at ráðið fer at umrøða spurningin um hámarkið við TAKS, sum varðar av endurgjaldinum av MVG.

### Stakroyndir

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nøkur endurgjøld sambært §§ 3 a-d. Vit høvdu ikki aðrar viðmerkingar enn, at í einum máli, sambært § 3 d, manglaði skjalprógv fyri goldnum útreiðslum.

Landsgrannskoðanin mælti til, at skjalprógv, sum eru nevnd á umsóknarblaðnum, verða kravd frá umsøkjarum, áðrenn endurgjald verður rindað út.

## 3.14 Notat um keyp av vørum og tænastum (LG 2016/405-0008)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit notat um keyp av vørum og tænastum.

Í juni 2017 lat Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um keyp av vørum og tænastum hjá landinum. Kanningin tók støði í roknskaparárunum 2013 til 2016. Frágreiðingin er at finna á heimasíðuni hjá Landsgrannskoðanini.

Samanumtikið vísti kanningin, at almennir stovnar høvdu kunnleika til rundskrivið frá Fíggjarmálaráðnum um keyp av vørum og tænastum. Aktiviteturin á Keypsportalinum hevði tó ikki verið tann stóri, síðani rundskrivið varð sett í gildi.

Keypshátturin at biðja um tilboð frá minst tveimum veitarum var lættari hjá stovnunum at handfara. Tó vísti kanningin, at í meira enn helvtini av keypunum, vit spurdu um, var ikki biðið um tilboð frá minst tveimum veitarum.

***Eingin kendi ábyrgd av Keypsportalinum.***

Tað tyktist, sum tað var eingin, sum veruliga kendi ábyrgd av Keypsportalinum. Um tað almenna veruliga ætlar at skapa ein dynamiskan Keypsportal, har privata vinnan og tað almenna skulu møtast, krevst, at onkur fær ábyrgdina.

Tað má eisini fáast betri greiða á, hvørjar vørur kunnu vera undantiknar. Tað eru nógvar vørur og tænastur, sum lógu á markinum til ikki at egna seg til at verða bjóðaðar út, og sum ikki eru nevndar í undantakslistanum í rundskrivinum. Tað kann vera ein trupulleiki, tí kanningin hjá Landsgrannskoðanini vísti, at nógvir stovnar og ráð ikki halda ásetingarnar í rundskrivinum.

***Keyp landsins lagt til Gjaldstovuna at umsita og menna.***

Í juli 2019 hevur landstýrismaðurin greitt frá, at í dagførdum rundskrivi galdandi frá 1. juli 2019 er virkisøkið, Keyp landsins, lagt til Gjaldstovuna at umsita og menna. Gjaldstovan hevur í fíggjarlógini fingið játtan til endamálið, og hevur gjørt greining av landsins keypi av vørum og tænastum. Mest umráðandi er, at sýndur verður í verki ognarskapur av virkisøkinum. Leiðari er á heysti 2019 settur í starv til virkisøkið.

# 4. Fiskivinnumál

## 4.1 Fiskimálaráðið (LG 2016/205-0111)

*Roknskaparreglugerðin er ikki dagførd.*

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av Fiskimálaráðnum. Vit mæltu til at dagføra roknskaparreglugerðina, sum var frá 2011. Í juni 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at roknskaparreglugerðin ikki er dagførd enn.

Vit mæltu til, at Fiskimálaráðið, har tað bar til, savnar lønarskjølini, sum kundu sanna, at lønirnar vóru rættar. Í juni 2019 hevur Fiskimálaráðið kunnað um, at ráðið hevur verið í samband við Fíggjarmálaráðið/Lønardeildina og fingið øll skjøl til vega. Ætlanin er at gjøgnumganga øll lønarskjølini og setanarbrøvini seinni í 2019.

Í 2017 áttu fleiri starvsfólk nógvar tímar til góðar. Sambært landsstýrismanninum vóru avtalur gjørdar við nøkur um at fáa burtur saldu teirra í tímaroknskapinum.

*Avtala gjørd um tímasaldur.*

Í juni 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at avtala er gjørd um at avspáka og avgreiða tøka tímatalið í seinasta lagi 1. januar 2021.

## 4.2 Afturlatnar uppboðssølur (LG 2018/205-0111)

Landsgrannskoðanin hevur í 2018 og 2019 eftirkannað afturlatnu uppboðssølurnar, sum Vørn hevur hildið.

### Lógargrundarlag

Ll. nr. 161/2017 “um fyrisiting av sjófeingi”, fevnir um at gagnnýta livandi sjófeingi í føroyskum sjógvi og uttan fyri føroyskan sjógv, og at fáast við slíkt virksemi, sum stendur í sambandi við at gagnnýta sjófeingið, so sum at umskipa, leggja upp, taka ímóti, flyta, goyma, virka og selja ella umseta sjófeingi og úrdrátt úr hesum.

Við heimild í lógini er K. nr. 32/2018 sett í gildi. Kunngerðin fevnir um uppboðssølu í 2018 av fiskirættindum, og í §§ 17 – 22 er útgreinað tey fiskasløg, nøgdir og veiðuøki, sum rættindini fevna um. Sambært kunngerðini kunnu rættindi at veiða bjóðast persóni ella felag, sum lýkur treytirnar í § 5, stk. 1, og §§ 6, 7 og 9 í lógini. Landsstýrismaðurin skal lýsa við uppboðssøluni, í minsta lagi 5 vikur áðrenn uppboðssølan verður hildin, ella at boð skulu latast inn. Eftir § 15 í kunngerðini er Vørn uppboðssøluhaldari av afturlatnari uppboðssølu.

Tá ið uppboðssølan er hildin, eigur Vørn, sambært § 7 í kunngerðini, at senda rokning fyri gjaldið fyri rættindini. Upphæddin fellur til gjaldingar 31. desember 2018, og gjaldast skal hóast ikki verður avreitt.

Landsgrannskoðanin hevur kannað:

- um lýst hevur verið við afturlatnari uppboðssølu,
- um treytirnar fyri at bjóða hava verðið lýstar,
- um boðini, sum komu inn, eru viðgjørd eftir reglunum í kunngerðunum,
- um nakar, sum hevur boðið, hevur fingið upplýsingar frá uppboðssøluni fram um onnur, eftir at sølan var byrjað,
- um uttanhýsis grannskoðari hevur kannað rættleikan av boðunum, og um trygd er fyri boðunum,
- um landsstýrismaðurin hevur ásett minsta prís fyri uppboðið,
- um nakað er selt fyri minni enn minstaprís og fyri minni enn prísin, sum uppboðssølan ásetti,
- um landsstýrismaðurin hevur tikið støðu til og góðkent søluna, áðrenn hon varð almannakunngjørd,
- um boðini eru givin á kravda oyðublaðnum, og at
- um boðini vóru eins, varð farið fram eftir reglunum í kunngerðini.

### Rindan av gjaldi fyri rættindini

Sambært § 7 í kunngerðini skal rokning sendast keyparanum, tá ið uppboðssølan er hildin. Landsgrannskoðanin hevur kannað, at allir keypararnir hava fingið rokning dagin eftir, at uppboðssølan hevur verið hildin.

***Keyparar hava goldið fyri rættindi innan gjaldfreistina.***

Somuleiðis er ásett í § 7, at upphæddin fellur til gjaldingar 31. desember 2018. Landsgrannskoðanin hevur staðfest, at keypararnir hava goldið fyri rættindini innan gjaldfreistina.

### Rindan av uppboðssølugjaldi

§ 16 í kunngerðini ásetir, at uppboðssølugjaldið fyri afturlatna uppboðssølu er 10.000 kr. fyri hvørja seriu. Gjaldið verður býtt á vinnandi boðini eftir nøgd, og fellur til gjaldingar, tá ið avgerð er tikin um, hvør ella hvørji vinna boðið.

Landsgrannskoðanin hevur eftirkannað uppboðssølugjaldið og staðfest, at rokning er send fyri rætta upphædd til rætta tíð.

Á afturlatnari uppboðssølu vórðu veiðirættindi seld í 14 serium í 2018, og tað gav Vørn 140.000 kr. í ómaksgjaldi.

§ 11, stk. 5, í kunngerðini ásetir, at uppboðssølugjaldið fyri opna uppboðssølu er 10.000 kr. fyri hvørja seriu. § 11, stk. 6, heimilar Vørn at gera avtalu við privatan uppboðssøluhaldara. Vørn hevur gjørt avtalu við Fiskamarknað Føroya um at halda opnu uppboðssølurnar. Um Vørn ger avtalu við privatan uppboðssøluhaldara, kann gjaldið verða eitt annað, enn ásett í stk. 5. Vørn hevur avtalað við Fiskamarknað Føroya, at tey fáa 1,5% av søluni í ómaksgjaldi, ið svarar til um 500 t.kr.

### Uppboðssølurnar í 2019

Vørn skipaði fyri afturlatnari uppboðssølu fýra ferðir í 2019: 21. mars, 11. apríl, sum tó varð flutt til 26. apríl, 12. apríl, sum varð flutt til 29. apríl og 2. mai.

Uppboðssølan av rættindum varð skipað við K. nr. 5/2019. Ein broyting í uppboðssøluni í 2019 í mun til 2017 og 2018 er, at prísásetingin kann vera í tveimum.

Nýggja prísásetingin er lýst í K. nr. 13/2019. Broytingin, sum er lýst sum broyting til § 12, stk. 4, er: 1) Tey, sum hava vinnandi boð, skulu rinda prísin, ið svarar til boðið. 2) Lægst vinnandi boð ásetir prísin, sum øll við vinnandi boðum skulu rinda. Víðari verður ásett, hvørjar uppboðssølur skulu verða hildnar við hvørjari prísáseting.

Sostatt kann prísurin á rættindum ásetast á uppboðssøluni, við at tann, sum bjóðar og fær, skal rinda tað, sum boðið var, og ikki sum higartil, at lægsta vinnandi boðið ásetir prísin.

Landsgrannskoðanin hevur verið hjástødd á Vørn til afturlatnu uppboðssølurnar 21. mars, 11. apríl og 26. apríl í 2019, og hevur sæð báðar prísásetingarnar í verki.

Vørn hevði biðið uttanhýsis grannskoðara fylgja við afturlatnu uppboðssøluni. Landsgrannskoðanin hevur fingið yvirlit yvir boðini, trygdirnar og sølurnar frá Vørn, umframt eitt notat frá uttanhýsis grannskoðaranum. Landsgrannskoðanin hevur tikið niðurstøðuna í notatinum frá uttanhýsis grannskoðaranum til eftirtektar.

Samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin, at afturlatna uppboðssølan er hildin eftir galdandi reglum.

***Afturlatna uppboðssølan er hildin eftir galdandi reglum.***

## 4.3 Fiskiveiðieftirlitið (LG 2017/205-0342)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av Fiskiveiðieftirlitinum.

### Lønir

Starvsfólkini í umsitingini skrásettu arbeiðstíðina, t.v.s., at tey skrásettu komu, fráveru, feriu o.a., men ikki hvat arbeiðstíðin varð brúkt til. Fiskiveiðieftirlitið hevði skrivligar reglur um, nær dagliga arbeiðstíðin var. Eingin áseting var um, hvussu nógvar tímar starvsfólk kundu eiga til góðar ella skylda, men meginreglan var +37/-15 tímar.

Í januar 2018 áttu trý av teimum 16 starvsfólkunum væl meira enn 37 tímar til góðar, og tvey skyldaðu meira enn 15 tímar. Stovnurin hevði í serligum førum loyvt starvsfólkum at skylda fleiri tímar, men eingir tímar vóru avskrivaðir. Av tí at arbeiðsbyrðan til tíðir var so stór, áttu nøkur starvsfólk nógvar tímar til góðar. Stovnurin hevði fingið nógv nýggj arbeiðsøki seinastu árini, men fíggjarligi parturin var ikki øktur í mun til arbeiðsbyrðuna.

Í juni 2019 hevur Fiskimálaráðið kunnað um, at tað framvegis kemur fyri, at starvsfólk eiga meira enn 37 tímar til góðar ella skylda meira enn 15 tímar. Arbeitt verður við at fáa viðurskiftini í rættlag.

### Ognaryvirlit

Skipini og 4 bilar vóru skrásett í landsroknskapinum. Landsgrannskoðanin mælti til at dagføra ognaryvirlitið, tí innbúgv, teldur o.a. vóru ikki skrásett. Í juni 2019 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Fiskiveiðieftirlitið hevur yvirlit yvir alt, sum liggur á goymslu, so sum eykalutir, trossar, veirar og annað, og at innbúgvið á skrivstovuni manglar enn at verða skrásett, men ætlanin er at gera tað í næstum.

### KT viðurskifti

Grannskoðanarvirkið Januar hevði í 2014 gjørt eina váðameting fyri Fiskiveiðieftirlitið. Stovnurin hevði nógvar dátur, sum høvdu týdning fyri stovnin sjálvan og fyri samfelagið sum heild. Dáturnar vórðu goymdar á servarum, sum vórðu speglaðir til tveir aðrar servarar á øðrum staði. Persónsupplýsingar skrásetti stovnurin bert í sambandi við starvssetanir. Atgongdin til persónsupplýsingar var avmarkað til tvey fólk.

Síðani váðametingin varð gjørd, vóru gjørdar munandi ábøtur viðvíkjandi trygdini. Landsgrannskoðanin hevur mælt til at endurskoða váðametingina. Í juni 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Vørn hevur gjørt avtalu við grannskoðanarvirkið Januar um at gera eina nýggja váðameting í heyst.

***Gjørt avtalu um at gera nýggja váðameting.***

## 4.4 Fiskivinnuroyndir (LG 2018/205-0343)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað umsitingina av Fiskivinnuroyndum. Endamálið var at kanna, um roknskapurin er rættur, og um viðgerð av umsóknum og útgjald av stuðli til fiskivinnugransking eru í samsvari við galdandi reglur og mannagongdir.

***Endamálið við Fiskivinnuroyndum er at fremja royndir og kanningar.***

Endamálið við rakstrarjáttanini til Fiskivinnuroyndir er at fremja royndir og kanningar, bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleidni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfeinginum.

Roknskapartøl 2014 til 2018:

*t.kr.*

| Heiti | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 0 | 3 | 10 | 6 | 17 |
| Keyp av vørum og tænastum | 66 | 95 | 74 | 131 | 255 |
| Søla av vørum og tænastum | 0 | 0 | 2 | 0 | 0 |
| Stuðul til vinnu | 2.531 | 1.222 | 1.958 | 6.055 | 3.963 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (útr) | 1.171 | 1.164 | 1.554 | 2.484 | 2.787 |
| **Tilsamans** | **3.768** | **2.483** | **3.598** | **8.677** | **7.023** |

Fiskimálaráðið hevur tikið undir við stýrisbólkinum, hvussu økini skulu raðfestast. Seinasta raðfestingin varð gjørd fyri tíðarskeiðið 2017 til 2020, og er til:

- royndarveiðu og virðisøking av fiski og fiskavørum,
- burðardyggan fiskiskap, og
- búskaparliga og samfelagsliga menning av fiskivinnu og førleikamenning í øllum liðum.

Játtanin verður nýtt til verkætlanir, sum fiskivinnan og granskingarstovnar taka stig til einsæris ella í felag. Fiskimálaráðið hevur samskipara at taka sær av umsitingini av Fiskivinnuroyndum.

### Umsóknir um stuðul

Á heimasíðuni hjá Fiskivinnuroyndum er í 14 punktum ásettar mannagondir fyri viðgerð av umsóknum um stuðul. Játtanin verður alment lýst leys at søkja, og umsøkjarar kunnu verða fyritøkur, stovnar, einstaklingar ella samstarv millum hesi. Vanliga verður lýst eftir umsóknum eina ferð um árið. Í tíðarskeiðnum frá tí at lýst verður, og til freistin er farin, er samskiparin tøkur at ráðgeva umsøkjarum. Ráðgevingin heldur uppat sama dag freistin er.

Saman við umsóknarblaðnum fær umsøkjarin vegleiðing og umsóknartreytir. Í pkt. 9 í vegleiðingini "Endamál við royndini/verkætlanini" verður m.a. sagt, at "Endamálsorðingin hevur stóran týdning, tí allar eftirmetingar av tí, sum gjørt er, koma at taka støði í hesum endamáli." Vit hava spurt, um Fiskimálaráðið altíð ger niðurstøður um, um endamálið við verkætlanunum er rokkið, og um ja, hvussu tað ítøkiliga verður gjørt.

### Stýrisbólkur

Umsóknirnar verða viðgjørdar av einum stýrisbólki, og eftir tilmæli frá stýrisbólkinum veitir Fiskimálaráðið endaliga tilsøgn um stuðul. Samskiparin ger tilráðingar til stýrisbólkin. Deildarstjórin á Fiskivinnustovuni hevur ábyrgd av játtanini, og hann góðkennir stuðulsveitingarnar endaliga.

Stýrisbólkurin hevur skrivligar mannagongdir at virka eftir. Í stýrisbólkinum eru:

- Eilif Gaard, Havstovan
- Stefan í Skorini, Føroya Reiðarafelag
- Jóhannus M. Olsen, Føroya Ráfiskaseljarafelag
- Bárður Enni, Heilsufrøðiliga Starvsstovan
- Marner Pattinson, virkisleiðari

Umboðið frá Havstovuni er formaður. Umsitingin av Fiskivinnuroyndum er í Fiskimálaráðnum, har samskiparin er dagligur leiðari.

Í 2018 komu 34 nýggjar umsóknir inn um stuðul. 30 komu inn í 2017.

Stýrisbólkurin viðgjørdi umsóknirnar fyri 2018 í desember 2017 og í januar 2018, og gjørdi tilmæli til deildarstjóran, sum tók endaliga avgerð.

Stýrisbólkurin ger felags tilmæli. Hann atkvøður ikki um hvørja einstaka umsókn. Er stýrislimur ógegnigur, er viðkomandi ikki við í viðgerðini. Samskiparin og deildarstjórin skriva undir tilmæli/frásøgn til Fiskimálaráðið.

Mannagongdirnar viðvíkjandi útgjaldi eru, at 50% verða goldin, tá ið sáttmáli er undirskrivaður við umsøkjaran. 35% verða goldin, tá ávegis frágreiðing er latin Fiskivinnuroyndum, og tey seinastu 15% verða goldin, tá ið verkætlanin er liðug, og grannskoðaður roknskapur er latin Fiskivinnuroyndum. Um verkætlanin fær játtaðan stuðul í meira enn eitt ár, verða ávegis frágreiðingar gjørdar hvørt hálva ár.

***Í 2018 er stuðul játtaður til 19 nýggjar verkætlanir.***

Í 2018 hevur Fiskimálaráðið játtað pening til 19 nýggjar verkætlanir. Harumframt er framhaldandi játtan latin 7 verkætlanum. Tvær av verkætlanunum byrjaðu í 2016 og fimm byrjaðu í 2017.

Tilsamans fáa hesar 26 verkætlanirnar játtaðan stuðul í 2018 til 2020. Tilsamans eru játtaðar 11 mió.kr., harav 7,44 mió.kr. eru fyri 2018, 2,78 mió.kr. fyri 2019 og 0,78 mió.kr. fyri 2020.

Vit hava spurt, um umsøkjarar fáa skrivliga grundgeving fyri noktandi svari.

### Stakroyndir av verkætlanum

Landsgrannskoðanin kannaði fimm verkætlanir, ið hava fingið stuðul játtaðan frá Fiskivinnuroyndum í 2018.

#### *0144 Blóð vekk*

Søkt varð um stuðul til eina roynd/verkætlan, sum hevur til endamáls at minka um blóðið í fiski. Søkt varð um 160 t.kr. fyri 2016 og 150 t.kr. fyri 2017, og Fiskimálaráðið játtaði felagnum upphæddina í januar 2016. Eingin stuðul er goldin út. Samskiparin og felagið samskifta um frágreiðingina.

#### *0176 MVM*

Søkt varð um stuðul til forverkætlan, sum hevur til endamáls at koma eitt stig víðari við makrelframleiðslu í Føroyum m.a. við at menna servørur úr føroyskum makreli. Fiskimálaráðið játtaði verkætlanini 300 t.kr. fyri 2018, sum eina 1-ára forverkætlan. Eingin stuðul er goldin út.

#### *0181 Paneraðar og vakuumpakkaðar upsavørur*

Søkt varð um stuðul til virðisøking av upsa. Endamálið við verkætlanini er at byrja framleiðslu og sølu av upsavørum, sum verða seldar í matvøruhandlum og matstovum í Europa. Søkt varð um 1,4 mió.kr. fyri 2018 og 700 t.kr. fyri 2019. Verkætlanin er sett at byrja 1. januar 2018 og mett at enda 31. mars 2020. Fiskimálaráðið hevur í januar 2018 játtað verkætlanini 1.250 t.kr. fyri 2018, 650 t.kr. fyri 2019 og 200 t.kr. fyri 2020. Ávegis frágreiðing er latin og stuðulin fyri 2018 er goldin í mai 2018 og í januar 2019.

#### *0161 Toska-u-DNA*

Søkt varð um stuðul til verkætlan “Ein lovandi háttur at meta atlantstoskastovnin á Føroya Banka við at nýta umhvørvis DNA (Cod-e-DNA)”. Endamálið við verkætlanini er at styrkja vitanina um fiskalívfrøðina hjá toskinum á Føroya Banka, við tí endamáli at meta um toskastovnin á Føroya Banka.

Søkt varð um 565,6 t.kr. í 2017 og 464 t.kr. í 2018. Fiskimálaráðið játtaði peningin í januar 2017. Ávegisfrágreiðing er latin inn og stuðulin er goldin í februar 2018 og í februar 2019. Væntandi verður verkætlanin liðug við ársenda 2019.

*0180 Frystiturking av føroyskum sjógæti*
Søkt varð um stuðul til verkætlan "Turking av fiski og øðrum sjógæti, við frystiturking". Talan er um eina forverkætlan, sum skal fáa til vega útgerð til frystiturking og at gera vøruroyndir, finna keyparar til vørurnar, kanna framleiðsluhættir v.m. Eisini skulu marknaðir kannast í fleiri londum, fyri at staðfesta, hvussu vøran kann marknaðarførast á hesum marknaðum.

Søkt varð um 300 t.kr. fyri 2018 og 300 t.kr. fyri 2019. Verkætlanin er sett at byrja 1. januar 2018 og enda 31. desember 2019. Fiskimálaráðið játtaði 150 t.kr. í 2018. Stuðulin fyri 2018 er goldin í mars og september 2018. Írestandi 15% eru ikki goldin.

*Niðurstøða av stakroyndunum:*

- Verkætlanirnar 0144 og 0176 eru lidnar, men eingin stuðul er goldin út. Eingin frágreiðing og roknskapur eru latin Fiskivinnuroyndum,
- Verkætlanirnar 0181 og 0161 halda áfram, ávegis stuðul er goldin út, og ávegisfrágreiðing er latin inn, og
- Verkætlan 0180 er liðug, ávegis stuðul er goldin út, men tey írestandi 15% eru ikki goldin út, tí frágreiðing og roknskapur eru enn ikki latin inn.

***Ikki allur stuðul er goldin út, tí frágreiðing og roknskapir eru ikki latnir inn.***

Samanumtikið fylgir umsitingin skrivligu mannagongdunum í viðgerðini av umsóknunum og við at lýsa stuðulin alment.

## 4.5 Effektivar veðhaldsútreiðslur (LG 2017/205-0345)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av effektivum veðhaldsútreiðslum.

**Ábyrgdarbýtið**
Fiskimálaráðið er ánari av høvuðskontuni. Sambært ráðnum var uppgávan m.a. at taka sær av fyrispurningum um at flyta trygdir, strika veð, avskriva avsetta skuld og annars at viðgera ivamál, ið kundu stinga seg upp.

Gjaldstovan tekur sær av lánsbókhaldinum, og TAKS krevur inn. Í 1997 varð ábyrgdin av innkrevjingini av vinnulánum flutt frá Fíggjar- og Búskapardeildini til Gjaldstovuna, og varð hon flutt til TAKS í 1998, um sama mundi sum almenna innkrevjingin og pantifútarnir vórðu flutt frá Gjaldstovuni til TAKS.

Okkum kunnugt, var eingin skrivlig avtala viðvíkjandi ábyrgdarbýtinum, annað enn ein roknskaparleiðbeining, sum greinaði arbeiðs-/ábyrgdarbýtið millum stovnar, TAKS og Gjaldstovuna í sambandi við umsiting av lánum o.t.

Tá ið TAKS yvirtók innkrevjingina, vóru tað ávís starvsfólk, ið høvdu vinnulánini um hendi. TAKS hevði ikki pantiheimild fyri hesi lánini, og tey vóru heldur ikki skrásett í innheintingarskipanini hjá TAKS, tí høvdu pantifútarnir ikki gjørt nógv við innheintingina.

Spurdur, um stovnurin ætlaði at útvega innheintingarheimild, svaraði TAKS, at brúk var fyri greiðari heimild fyri at kunna gera nakað við vinnulánini. Vanliga vóru heimildirnar í avvarandi lógum. Í hesum førinum vóru lógirnar ikki til longur. Um politiski myndugleikin vil hava broytingar á økinum, krevst lógarheimild.

***Fiskimálaráðið hevur ongar ætlanir um at útvega TAKS pantiheimild.***

Landsstýrismaðurin kunnaði um, at *"Fiskimálaráðið hevur ongar ítøkiligar ætlanir um at útvega TAKS pantiheimild. TAKS hevur ikki vent sær til Fiskimálaráðið við trupul-*

*leikanum. Um TAKS metir, at ein pantiheimild kann betra innheintingina, vil Fiskimálaráðið stuðla TAKS í at finna eina loysn".*

### Upprunalig lánsskjøl

Sambært roknskaparleiðbeining frá 2002 skuldi Gjaldstovan goyma lánsskjøl. Gjaldstovan, Fiskimálaráðið og TAKS høvdu upprunaskjøl viðvíkjandi lánunum. Harumframt hevði advokaturin hjá TAKS í hesum máli eisini nøkur upprunaskjøl. Sambært TAKS var einki fullfíggjað yvirlit yvir støðuna, og helst vóru ikki øll upprunaskjøl til. TAKS ætlaði at gera nakað við at fáa yvirlit.

### Gongdin seinastu árini

Við árslok 2017 var eftirstøðan 104,7 mió.kr. fyri veðhaldsútlegg og 5,9 mió.kr. fyri Globallán, tilsamans góðar 110 mió.kr. Sambært saldulistum var talan um 79 lán. Onkrir skuldarar vóru skrásettir fyri fleiri enn eitt lán. Sambært Gjaldstovuni var bert goldið inn á eitt lán seinastu fimm árini, tilsamans slakar 277 t.kr.

Í 2014 fór TAKS við hjálp frá advokati ígjøgnum saldulistan fyri at rudda upp í eftirstøðum. Úrslitið var, at fleiri vinnulán vórðu fult avskrivað, tí feløgini vóru strikað í partafelagsskránni. Í 2014 vórðu 20,2 mió.kr. avskrivaðar, og í 2017 vórðu 18,4 mió.kr. avskrivaðar.

Sambært TAKS ætlaðu tey at fáa greiðu á restini av vinnulánunum, og fór stovnurin at seta fýra fólk at gjøgnumganga lánini. Ætlanin var at samla alt tilfar, sum tey kundu finna um tey einstøku lánini, og senda rykkjarar til tey, har lánini ikki vóru fyrnað, og síðani at avskriva tað, sum var fyrnað. TAKS segði í desember 2017, at arbeiðið skuldi verða liðugt innan 3 mánaðir.

Okkum kunnugt var einki skipað eftirlit við at halda lív í krøvunum. TAKS visti ikki at siga, hvørji krøv vóru fyrnað, ella hvørji vóru tætt at fyrningarfreistini. Afturat hesum vóru nøkur partsreiðarí, sum ikki vóru blivin individualiserað. Landsgrannskoðanin spurdi, um TAKS hevði ætlanir um at finna partsreiðararnar. TAKS vísti til uppruddingararbeiðið, sum skuldi verða sett í gongd.

### Viðmerkingar frá Fiskimálaráðnum

Í juni 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Fiskimálaráðið hevur sent Fíggjarmálaráðnum skrivliga áheitan um at fáa eina dagførda niðurstøðu í málinum, og at Fíggjarmálaráðið hevur sent áheitanina til leiðsluna á TAKS og Gjaldstovuni.

Sambært Fiskimálaráðnum er TAKS í gongd við at gjøgnumganga allar skuldarar við vinnulánum í saldulistanum hjá Gjaldstovuni, og at skriva frágreiðing um tað. Frágreiðingin viðger tey innheintingarstig, sum TAKS hevur tikið mótvegis skuldarum/skuldini, og ikki undirliggjandi krøv.

Greitt verður frá, at í hesum sambandi hevur TAKS innheintað skjøl frá Gjaldstovuni, advokatum, Fútarættinum og Skipaskránni. Einki yvirlit er yvir hesi skjøl, men TAKS hevur brúkt tey í málsviðgerðini, og víst verður til tey í frágreiðingini. Tey mál, sum ikki eru fyrnað, verða journaliserað hjá TAKS.

***Frágreiðing mælir til, at skuld, sum er fyrnað, verður avskrivað.***

TAKS hevur somuleiðis kunnað um, at tað í frágreiðingini verður mælt til, at skuldin, sum er fyrnað til innheintingar, verður avskrivað, men at skuldin, ið ikki er fyrnað til innheintingar, verður skrásett í serviceskipanini hjá TAKS (bókhaldinum), eins og skuldin verður innheintað á innheintingardeildini hjá TAKS.

***Ætlanin er at betra um innheintingina.***

Landsstýrismaðurin greiddi at enda frá, at Fiskimálaráðið, Fíggjarmálaráðið, Gjaldstovan og TAKS fara at umrøða málið í næstum í sambandi við, at nevnda frágreiðing verður tøk. Umrøðan skal taka støði í, at Fiskimálaráðið er kravánari, men at TAKS hevur skuldarrøktina. Ætlanin er eisini, at spurningurin um at betra um innheintingina, til dømis við pantiheimild til TAKS, skal verða viðgjørdur tá.

# 5. Mentamál

## 5.1 Nám (LG 2017/207-0231)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av Námi.

Ll. nr. 53/2014 “um at útvega undirvísingarmiðlar o.a.” varð sett í gildi í mai 2014. Í august 2018 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Mentamálaráðið arbeiddi við at umskipa Nám við atliti at bygnaðarbroytingum í ráðnum, har Nám skuldi átaka sær øktar uppgávur sum fakligur og námsfrøðiligur menningardepil. Tí var kunngerðin um virksemi á Námi ikki gjørd enn.

***Kunngerð um virksemi á Námi er ikki gjørd.***

Arbeiðið at skipa eftirútbúgvingina í síni heild, sum byrjaði í 2013, var ikki liðugt. Sambært landsstýrismanninum var tað arbeiðið eisini tongt at bygnaðarbroytingunum og broyttu uppgávunum hjá Námi.

Í august 2017 vóru enn stórar flexsaldur hjá starvsfólkunum í Prófstovuni, sum bygnaðarliga var flutt til Nám. Sambært landsstýrismanninum varð framvegis arbeitt við at finna loysn á flexsaldunum, ið vóru tongdar at stórum arbeiðsbyrðum í prófvtøkutíðarskeiðnum og at gera prófvtøkutilfar.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at flexsaldurnar í Prófstovuni enn vísa, at nøkur starvsfólk arbeiða ov nógvar tímar, og at Prófstovan arbeiðir við at loysa trupulleikan. Prófstovan hevur í ávísan mun loyst undirskotið av arbeiðsorku við at seta fyribilsstarvsfólk, og ætlar at seta eitt skrivstovufólk parttíð í heyst.

***Stórar flexsaldur.***

Í 2018 kannaði Landsgrannskoðanin við stakroyndum ferðaútreiðslur og umboðanarútreiðslur og mælti Prófstovuni til at fylgja reglunum í roknskaparreglugerðini og vegleiðingini frá Fíggjarmálaráðnum um ferðaútreiðslur.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Nám hevur rættað uppá mannagongdirnar og fylgir ásetingum fyri ferðir, ið eru fyriskrivaðar í roknskaparreglugerðini fyri Nám og vegleiðingini frá Fíggjarmálaráðnum um ferðaútreiðslur.

## 5.2 Glasir (LG 2017/207-0233)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Glasi.

Útbúgvingarnar á Glasi eru skipaðar sambært lógum. Eitt depilsráð virkar m.a. fyri, at Glasir í størst møguligan mun bjóðar út yrkisfakligar grund-, eftir- og víðariútbúgvingar, ið eru viðkomandi fyri vinnuna. Eisini hevur ráðið yvirskipaðu ábyrgdina av inntøkufíggjaða virkseminum hjá Glasi.

Sambært § 6, stk. 2, í Ll. nr. 79/2015 “um skúladepil í Marknagili” ger Depilsráðið starvsskipan, ið landsstýrismaðurin skal góðkenna. Mentamálaráðið hevði gjørt

viðmerkingar til uppskot frá Depilsráðnum um starvsskipan og sent tað aftur til Depilsráðið.

Ætlanin var, at Skeiðsdepilin skuldi verða partur av Glasi, tá ið fíggjarligu viðurskiftini viðvíkjandi sjálvsognarstovnunum vóru fingin í rættlag. Eisini var ætlanin at fáa loyvi at flyta ónýttan pening yvir ár.

Sambært viðmerkingum í fíggjarlógini 2017 vórðu sjálvsognarstovnarnir Tekniski skúlin í Tórshavn og Føroya Handilsskúli væntandi tiknir av. Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at sjálvsognarstovnarnir ikki eru tiknir av. Sambært landsstýrismanninum hongur ein endalig avtøka saman við spurninginum um heimildina at flyta møgulig avlop á inntøkufíggjaðum virksemi yvir ár; tað málið er ikki komið víðari.

### Roknskaparviðurskifti

Glasir hevði gjørt uppskot til roknskaparreglugerð, sum var sent Mentamálaráðnum. Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at roknskaparreglugerðin er viðgjørd, og at viðmerkingarnar í næstum verða sendar til Glasir.

*Peningastovnskontur o.a.*

Glasir hevði 6 peningastovnskontur, ið vóru skrásettar í Búskaparskipan landsins. Konturnar vórðu stemmaðar av hvønn mánað. Vit mæltu til, at avstemmingarnar vórðu skjalfestar.

Umsitingin av gjaldkortum var ikki í samsvari við reglurnar. Mentamálaráðið hevði boðað frá, at ráðið fór at biðja Glasir tryggja, at umsitingin av gjaldkortum var í samsvari við rundskrivið frá Fíggjarmálaráðnum um nýtslu av gjaldkorti og kredittkorti. Ráðið fór eisini at viðgera málið í sambandi við góðkenning av roknskaparreglugerðini.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Glasir fer at viðgera viðurskiftini viðvíkjandi umsitingini av gjaldkortum. Málið verður avgreitt saman við roknskapar-reglugerðini.

*Inntøkur*

Glasir krevur gjøld fyri hægri útbúgvingar. Sambært landsstýrismanninum var heimild fyri at taka gjøld í § 10 í lógini um stuttar framhaldsútbúgvingar. Mentamálaráðið hevði ikki ásett nærri reglur um gjøld, men fór at taka málið upp við Glasir.

***Tilmæli um, at inntøkufíggjað virksemi verður viðgjørt sambært játtanarreglunum.***

Landsgrannskoðanin vísti á, at Fíggjarmálaráðið kundi geva loyvi til inntøkufíggjað virksemi, og at tað sambært játtanarreglunum skuldi skrásetast á serliga undirkontu í Búskaparskipan landsins. Sambært Glasi var talan um langa siðvenju við inntøku-fíggjaðum virksemi. Landsgrannskoðanin mælti til, at inntøkufíggjað virksemi varð viðgjørt sambært játtanarreglunum.

Glasir hevði eisini inntøkur av at leiga skúlaheimið út, sølu av tilfari o.a. Tekniski Skúlin í Tórshavn hevði síðani 2008 havt avtalu við smápartafelag um leigu av Skúla-heiminum um summari fyri 5 t.kr. um dagin, íroknað hita og el. Sjálvsognarstovnurin fekk leiguinntøkurnar. Avtalan kundi sigast upp við 2 mánaða varningi til ein 1. september.

Av summarleiguni fekk Glasir 77 t.kr. Glasir fekk eisini gjaldið, sum næmingar rinda fyri húsaleigu og mat, t.e. 800 kr. um vikuna.

Landsgrannskoðanin mælti til at áseta skrivligar reglur um húsaleigu v.m. Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Glasir hevur gjørt skrivligar reglur um húsaleigu.

### *Keyp*

Glasir hevði ikki skrivligar mannagongdir um, hvørjar útreiðslur stovnurin rindaði í sambandi við starvsfólkakostnað og gávur. Mentamálaráðið hevur í juli 2019 boðað frá, at Glasir hevur gjørt nýggja innanhýsis mannagongd um umboðan innan- og uttanhýsis.

## Lønir

Grundarlagið undir lønunum hjá teimum, ið undirvísa eru lønarsáttmálar og virksemisætlanir. Eftir sáttmálanum hjá Tekniska Lærara Felagnum er arbeiðstíðin 2080 arbeiðstímar um árið íroknað feriu og aðrar frídagar, tað svarar til 1790 arbeiðstímar. Hjá lærarum, ið eru settir sambært YF sáttmálanum, var ásett í virksemisætlanunum, hvussu nógvar tímar hvør lærari undirvísti, og hvussu nógva tíð hvør lærari kundi nýta til aðrar uppgávur.

Eitt fult ársverk er 1750 tímar. Tímar, sum lærarar høvdu fingið í virksemisætlanina til umsiting o.a. vórðu ikki skjalprógvaðir á annan hátt. Síðani skipanin sambært YF sáttmálanum kom í gildi í 2013, vóru tímarnir hjá teimum lærarunum skrásettir í einum rokniarki. Arbeiðstíð hjá øðrum starvsfólkum varð ikki skrásett.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað kundi tykjast ótrygt at nýta rokniark sum grundarlag undir stórum parti av lønarútreiðslunum hjá stovninum. Rokniark kundi ikki sammetast við eina skipan sum t.d. eina forskipan til útrokning av einstøku útgjaldingunum. Leiðslan var samd við Landsgrannskoðanina, og vísti á, at skúlin hevði alla tíðina ynskt eina forskipan.

***Landsgrannskoðanin mælti til at styrkja um umsitingina.***

Landsstýrismaðurin tók undir við Landsgrannskoðanini, at tað kundi vera ein veikleiki fyri lønarumsitingina, at starvsfólk einsamalt avgreiddi lønirnar hjá so stórum parti av undirvísarum og ongan avloysara hevði. Mentamálaráðið fór at heita á Glasir um at styrkja lønarumsitingina.

Sambært landsstýrismanninum tók ráðið undir við Landsgrannskoðanini, at tað var týdningarmikið, at arbeiðstíðin varð hóskandi skrásett. Mentamálaráðið hevði tí heitt á skúlan um at tryggja eina hóskandi skráseting. Hartil fór Mentamálaráðið at kanna, um miðnámsskúlarnir kundu nýta Skúlaforskipanina.

### *Stakroyndir av lønum*

Vit valdu nøkur lønarmál út fyri at kanna, um lønirnar vóru rættar. Sambært Glasi høvdu nógvir lærarar meira enn fult ársverk, serliga lærarar, ið undirvísa í lærugreinum, har trupult var at fáa lærarar.

***Tíðarskrásetingin var ikki sambært almennu reglunum.***

Vit staðfestu, at tíðarskrásetingin ikki var sambært almennu reglunum. T.d. at tímar hjá undirvísarum til umsiting o.a. vóru ikki skjalprógvaðir. Tímar, ið vóru goldnir út, afturat brøki á 1,3 vóru ikki skjalprógvaðir. Starvsfólk við leiðsluábyrgd skrásettu ikki aðrar tímar enn fráverutímar ella undirvísingartímar. Onnur starvsfólk, t.d. í umsitingini og kantinuni skrásettu ikki arbeiðstíð.

### *Viðmerkingar frá Mentamálaráðnum*

Í juli 2019 hevur Mentamálaráðið boðað frá, at Glasir er farið burtur frá at brúka rokniark sum grundarlag undir lønarumsitingini og gjørt sær ein Microsoft SQL dátugrunn við lønarupplýsingum, sum allir lærarar hava atgongd til at lesa, og sostatt hava møguleika at gera vart við møgulig frávik. Glasir tekur trygdaravrit av skipanini hvønn dag. Harafturat er Glasir farið undir at brúka Totalview tíðarskráseting til starvsfólk í umsitingini, og arbeiðir við at fáa allar tímar skrásettar í nýggju SQL skipanini.

## 5.3 Lønir á serbreytunum (LG 2018/207-0233)

Sambært K. nr. 36/2017 "um serliga skipað skúlatilboð"[9] er talan um skúlatilboð eftir loknan fólkaskúla, ætlað næmingum, sum eru tarnaðir at gjøgnumføra miðnám undir vanligum treytum, hóast stuðulsmøguleikarnar, sum eru í vanligu skúlaskipanini. Útbúgvingin tekur í mesta lagi 4 ár, og er ætlað næmingum, ið eru ímillum 16 og 25 ár, og sum ynskja at nema sær førleikar í yrkisnámi.

Fyrsta serbreytin varð stovnað á Kambsdali í 2015, og í 2016 vórðu serbreytirnar á Tekniska Skúla í Klaksvík og á Tekniska Skúla í Tórshavn, nú Glasir, settar á stovn.

Mentamálaráðið gjørdi í juni 2016 "Námsskipan fyri serbreytina", ið lýsir endamál, innihald, førleikamál, eftirmeting og próvtøku og at skipa undirvísing. Undirvísingin byggir á einstaklingslæruætlan, og er skipað eftir OCN-skipanini[10].

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað lønirnar hjá lærarunum á serbreytunum á Miðnámi á Kambsdali, Tekniska skúla í Klaksvík og á Glasi í Tórshavn. Endamálið var at kanna, um lønirnar eru rættar, og at samanbera lønirnar á serbreytunum.

***Landsgrannskoðanin kann ikki við vissu siga, at lønirnar eru rættar, við at samanbera tær.***

Landsgrannskoðanin kann ikki við vissu siga, at løninar eru rættar, við at samanbera tær. Grannskoðanin vísti, at tað m.a. er ymiskt, hvussu ársverk, skráseting av arbeiðstíð, lønarsáttmálar, flokkingar, starvsaldur o.a. verða umsitin.

Á Tekniska skúla í Klaksvík og Miðnám á Kambsdali høvdu øll starvsfólkini ástøðiligar útbúgvingar, og luku førleikakrøvini í K. nr. 36/2017 "um serligt skipað miðnám". Á Glasi høvdu tvey starvsfólk ikki ástøðiligar útbúgvingar.

***Ein námsskipan, tveir ymiskir lønarsáttmálar.***

Hóast talan er um *eina námsskipan*, eru *tveir* ymiskir lønarsáttmálar brúktir. Setanar- og lønarviðurskiftini hjá lærarunum á serbreytini eru eftir sáttmálum, sum eru ætlaðir til miðnám og yrkisnám annars. Eyðkennið við serbreytini er, at hon hevur ikki vanlig upptøkukrøv og miðar ikki eftir vanligum miðnámsprógvi.

Tað er eyðvitað ein fyrimunur at hava ymiskar undirvísingarførleikar, útbúgvingar og royndir á serbreytini. Landsgrannskoðanin heldur tó, at tað er ikki nøktandi, at starvsfólk verða viðgjørd ymiskt, alt eftir nær tey eru sett í starv, ella á hvørjum skúla tey eru sett.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at frá byrjan varð gjørd eina lýsing av førleikum, arbeiðstíð og arbeiðsuppgávum á serbreytini. Viðvíkjandi arbeiðstíð varð tikið støði í sáttmálanum millum yrkisfelagið miðnám og Fíggjarmálaráðið, tí hesin var galdandi á Kambsdali, har fyrsta serbreytin varð sett á stovn, og sum frammanundan hevði fingið góðkenning frá Lønardeildini. Hinir skúlarnir hava ikki vent sær til Lønardeildina, áðrenn størvini vóru lýst leys. Síðani eru serbreytir settar á stovn á tekniska útbúgvingarøkinum, og av tí at fakbólkar og sáttmálar eru so ymiskir, hevur verið trupult at tryggja javnlík viðurskifti skúlanna millum.

### Útbúgvingarkrøv, arbeiðstíð, lønaráseting o.a.

Útbúgvingarkrøvini til starvsfólk á serbreytunum eru sambært § í 7 kunngerðini: *Námsfrøðilig útbúgving, eitt nú læraraútbúgving, námsfrøðingaútbúgving ella hægri útbúgving innan sernámsfrøðiliga økið og hóskandi yrkisfakligar førleikar.* Serbreytin á Kambsdali hevði virkað í tvey ár og hinar í eitt ár, tá ið kunngerðin um serliga skipað skúlatilboð varð sett í gildi 4. apríl 2017.

Vit spurdu, hvørji útbúgvingarkrøv vóru kravd fyri lærararnar á serbreytunum, áðrenn kunngerðin varð lýst. Mentamálaráðið svaraði, at útbúgvingarkrøvini til starvsfólk á

[9] Við heimild í Ll. nr. 107/1998 "um støðisútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið".
[10] OCN-skipanin: Open College Network, sum er ein skipan til validering og skjalfesting av óformellari læring.

serbreytunum vórðu lýst í tilmæli og kunngjørd í starvslýsingini, tá søkt varð eftir fólki. Krøvini vóru tey somu, sum seinni komu í kunngerðina um serliga skipað skúlatilboð.

***Útbúgvingarkrøv ásett í kunngerð.***

Sambært setanarskrivunum, eru setanartreytirnar eftir:

- Føroya Tekniska Lærarafelag: sum eru galdandi fyri setan av lærara, sum lýkur treytirnar fyri at undirvísa á teknisku skúlunum. Sambært sáttmálanum telur fulltíðarstarv *2080* tímar um árið, og eftir
- Yrkisfelagið Miðnám: sum í høvuðsheitum fevnir um lærarar, sum eftir 1. august 2013 undirvísa sambært Ll. nr. 62/2012 "um gymnasialar miðnáms-útbúgvingar". Ásetingar eru eisini í K. nr. 23/2014 "um fakligan førleika hjá lærarum í gymnasialu miðnámsútbúgvingini". Sambært sáttmálanum telur fulltíðarstarv *1750* tímar um árið.

Starvsbólkarnir á miðnámi eru:

- Á Miðnám á Kambsdali: ein Cand.pæd.pæd.psyk, tveir námsfrøðingar BA og ein fólkaskúlalærari.
- Tekniski Skúli í Klaksvík: tveir námsfrøðingar BA og ein fólkaskúlalærari.
- Glasir: ein Cand.pæd, ein námsfrøðingur, ein elektrikkari og eitt hjálparfólk.

### *Arbeiðstíð*

Grannskoðanin vísti, at tað eru ymiskar mannagongdir á skúlunum, fyri t.d. ársverk í tímum sambært setanarbrøvunum, mannagongdir við protokollum, tali av arbeiðstímum á skúlanum og skráseting av arbeiðstíð o.a.

Sambært setanarbrøvunum eru ársverkini 1750 tímar á Miðnámi á Kambsdali, 1690 tímar á Tekniska Skúla í Klaksvík og 2080 tímar á Glasi í Tórshavn.

Við setan fingu læararnir á Miðnámi á Kambsdali og á Glasi løn frá 1. august, og læararnir á Tekniska Skúla í Klaksvík fingu løn frá 15. august.

Miðnám á Kambsdali og Tekniski Skúli í Klaksvík føra næmingaprotokollir. Á Glasi førdu tey protokoll fyrsta árið, men vegna góða uppmøting góvust tey við tí.

Lærarar skráseta ikki tímar út yvir skematímar og fráveru. Tekniski Skúli í Klaksvík er í 2018 farin at skráseta allar tímarnar.

Skúlatíðin hjá næmingunum er millum 23 og 24 tímar um vikuna, og arbeiðstíðin hjá lærarunum í skúlanum er millum 32 og 40 tímar um vikuna.

### *Lønaráseting*

Samanumtikið er tað trupult at samanbera lønirnar á serbreytini og at staðfesta, um lønirnar eru rættar. Skúlaleiðslurnar hava tikið støðu til starvsaldurin í hvørjum einstøkum føri. Tað tykist, sum tær hava brúkt somu mannagongdir, sum tá ið lærarastørv á miðnámi og yrkisnámi annars verða sett, tó at talan er um námsfrøðingar, handverkarar og fólkaskúlalærarar, sum vanliga verða løntir eftir øðrum sáttmálum.

***Trupult at samanbera lønirnar.***

Á Tekniska skúla í Klaksvík verða lærarar við og uttan bachelorútbúgving og við ymiskum undirvísingarroyndum løntir í sama lønarflokki og á sama stigi. Á hinum skúlunum verða somu útbúgvingar løntar lægri, t.v.s. mánaðarlønin er lægri. Lærarar við handverkaraútbúgving og lærari uttan teoretiska útbúgving fáa eins løn, og hægsta starvsaldur, sum er hægri enn hjá nøkrum námsfrøðingum við BA.

Starvsaldurin hjá tveimum kandidatum er roknaður ymiskt; hjá øðrum út frá kandidataldri og hjá hinum eru arbeiðsroyndir taldar við.

### Ætlanir um at rætta skeivleikarnar

Mentamálaráðið hevur í mai 2019 kunnað um, at tey hava tikið málið upp við Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum, fyri at tryggja, at førleikar, setanartreytir og arbeiðstíð verða handfarin á sama hátt.

Okkum kunnugt, byrjaði samskiftið millum Mentamálaráðið og Fíggjarmálaráðið um lønarviðurskiftini longu í 2016, og enn er ikki komið á mál.

Mentamálaráðið hevur greitt frá, at í apríl 2019 var semja undirskrivað millum Føroya Tekniska Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið. Partarnir samdust um, at størvini á serbreytunum skulu flokkast og avtala gerast um arbeiðstíð.

***Mentamálaráðið krevur, at partarnir semjast.***

Í samráðingunum við Yrkisfelagið Miðnám hevur Mentamálaráðið eisini kravt, at partarnir semjast um at endurskoða lønirnar á serbreytunum.

Undirvísingarstýrið og Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum gera í løtuni upplegg til samráðingar við partarnar um viðurskiftini. Arbeitt verður við at flokka størvini skjótast gjørligt, og væntar ráðið, at tað verður avgreitt í ár.

## 5.4 Tekniski skúli í Klaksvík, løgujáttan (LG 2018/207-0233)

Verklagslógin Ll. nr. 77/2012 kom í gildi í juni 2012, og fór úr gildi aftur 1. januar 2017. Sambært verklagslógini kundi byggikostnaðurin í mesta lagi vera 36 mió.kr. Slakar 37,2 mió.kr. eru játtaðar í fíggjarlógum og eykajáttanarlóg.

Játtanin er veitt sum rentu- og avdráttarfrítt stuðulslán til sjálvsognarstovnin Tekniska Skúla í Klaksvík, við tí treyt, at Mentamálaráðið lýsir veðrætt í skúlanum fyri einum rentu- og avdráttarfríum stuðulsláni, svarandi til byggikostnaðin.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at í februar 2019 vórðu tvey rentu- og avdráttarfrí lán undirskrivað, og veð lýst í bygninginum, matr. nr. 752b, 14 mió.kr. sum trygd fyri 4. veðrætti fyri umbyggingina í 2006 til 2009, og 36 mió.kr. sum trygd fyri 5. veðrætti fyri umbyggingina í 2012 til 2016.

### Byggikostnaður

Roknskapartøl 2012 til 2016:

*t.kr.*

| VE | Heiti | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1001 | Handverkaraútr. | 14 | 0 | 8.975 | 9.155 | 7.662 | 25.806 |
| 1002 | Projekteringsútr. | 275 | 1.841 | 341 | 6 | -1.525 | 938 |
| 1003 | Eftirlit og byggileiðsla | 0 | 0 | 282 | 898 | 1.625 | 2.805 |
| 1004 | Intern ráðg. og leiðsla | 126 | 320 | 481 | 413 | 93 | 1.433 |
| 1005 | Útgerð og tól | 0 | 0 | 0 | 2.000 | 1.053 | 3.053 |
| 1006 | Málásettar útr. | 0 | 36 | 97 | 151 | 52 | 336 |
| 1007 | Eyka og meir/minni veiting | 0 | 0 | 0 | 859 | 1.354 | 2.213 |
| 1008 | Prísvøkstur | 0 | 0 | 0 | 0 | 53 | 53 |
| | **Tilsamans** | **415** | **2.197** | **10.176** | **13.481** | **10.366** | **36.635** |

***Landið goldið meira, enn skúlin kostaði sambært landsroknskapinum.***

Sambært landsroknskapinum kostaði skúlin 36,6 mió.kr. Tó hevur landið goldið 38,2 mió.kr. fyri byggingina. Munurin stendst av, at Landsverk í 2016 hevur sent høvuðsráðgevanum ein faktura, 1,6 mió.kr., har Landsverk vísti til, at feilir hjá ráðgevanum høvdu gjørt, at aðrar arbeiðstøkur vórðu vornar dýrari. Upphæddin er mótroknað í prosjekteringsútreiðslunum.

***Roknskapurin fyri byggingina ikki rættur.***

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað var lítið sannlíkt, at landið fór at fáa peningin frá høvuðsráðgevanum, og at roknskapurin fyri byggingina tí ikki var rættur.

Í desember 2018 hevði høvuðsráðgevin einki goldið. Mentamálaráðið tók undir við Landsgrannskoðanini, at bókingarhátturin gjørdi, at roknskapurin var ikki rættur.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Landsverk roynir at fáa semju við høvuðsráðgevan, tí at eitt sakarmál er kostnaðarmikið og tíðarkrevjandi.

***Royna at fáa semju.***

### Útbjóðing og avtalur um arbeiðstøkur

Arbeiðið at byggja skúlan varð boðið út, og avtalur vórðu gjørdar við fleiri arbeiðstakarar um arbeiðstøkur og um meir- og minniveitingar. Í fleiri førum var tó ikki samsvar ímillum tilboð/avtalur og útgoldnar upphæddir. Landsverk hevur ikki altíð gjørt skrivligar avtalur við arbeiðstakarar, men gjørt avtalur á staðnum.

***Landsverk hevur ikki altíð gjørt skrivligar avtalur.***

Av tí at útgoldnu upphæddirnar ikki altíð vóru í samsvari við tilboð ella avtalu, kundi Landsgrannskoðanin ikki sanna, at kostnaðurin svaraði til tað, sum upprunaliga varð avtalað. Transaktiónsslóðin var ikki greið, tí avtaluseðlar vantaðu, ella teir sóust ikki aftur í rokningum.

Landsgrannskoðanin mælti til, at skrivligir avtaluseðlar vórðu gjørdir í mest møguligan mun. Um umstøður gera, at møguleiki ikki er at gera skrivligan avtaluseðil, áðrenn arbeiði fer í gongd, varð mælt til at gera hann sum skjótast, eftir at arbeiðið varð avtalað.

Sambært landsstýrismanninum hevði Mentamálaráðið heitt á Landsverk um at tryggja, at allar avtalur, sum vórðu gjørdar fyri løgujáttanir á § 7 Mentamál, verða gjørdar við skrivligum avtaluseðlum. Eisini hevði ráðið heitt á Landsverk um at fylgja tilmælinum frá Landsgrannskoðanini viðvíkjandi meir- og minniveitingum. Um umstøður forða tí, áðrenn arbeiði fer í gongd, skulu avtaluseðlar gerast sum skjótast, eftir at arbeiðið er avtalað.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Landsverk hevur váttað fyri Mentamálaráðnum, at eftir viðmerkingarnar hjá Landsgrannskoðanini hevur stovnurin sett øll neyðug tiltøk í verk, so allar áheitanir frá Mentamálaráðnum verða fylgdar. Tað er galdandi fyri allar verkætlanir undir § 7.

***Neyðug tiltøk sett í verk.***

### Ráðgevingaravtala

Eftir at hava havt trupulleikar við høvuðsráðgevanum, gjørdi Landsverk avtalu við aðra ráðgevingarfyritøku um at hava byggileiðsluna. Sambært avtaluni skuldi samsýningin fyri byggileiðsluna vera 428 t.kr., tó rindaði Landsverk góðar 1,3 mió.kr.

Orsøkin til meirútreiðslurnar var, at byggingin av ymiskum orsøkum var seinkað, og neyðugt varð at hava byggileiðsluna væl longri, enn ætlað. Eingin formlig avtala varð gjørd; sambært Landsverki rindaðu tey sama mánaðarliga takst, sum í upprunaligu avtaluni.

Í desember 2018 segði landsstýrismaðurin, at sambært Landsverki var vanlig mannagongd at leingja verandi avtalu við sama mánaðarliga taksti, ið var nýttur áður. Mentamálaráðið helt, at Landsverk átti at hava formligar avtalur í málum sum hesum, og hevði ráðið tí heitt á Landsverk um at tryggja tað framyvir.

Spurdur, hvat síðani er hent í málinum, hevur landsstýrismaðurin í juli 2019 svarað, at mannagongdin hjá Landsverki er, at tá ið arbeiðir taka longri tíð, enn ætlað, og avtalurnar ikki kunnu haldast innan fyri avtalaða kostnaðin, verða í dag nýggjar avtalur gjørdar, um tørvur er á at leingja byggileiðslu- og fakeftirlitstíðarskeiðið.

## 5.5 Frítíðarundirvísing (LG 2014/207-0235)

Landsgrannskoðanin hevur í fleiri ár umrøtt reglurnar um frítíðarundirvísing. Í august 2015 greiddi landsstýrismaðurin frá, at kunngerðirnar vóru ikki dagførdar, tí Mentamálaráðið helt, at neyðugt var at dagføra lógina, Ll. nr. 70/1983 "um frítíðarundirvísing v.m."

Í august 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at greining av einari komandi vaksnamannaútbúgving fór møguliga at verða grundarlag undir einari lógarbroyting.

***Kunngerðir enn ikki gjørdar.***

Í juli 2019 boðaði landsstýrismaðurin frá, at kunngerðirnar enn ikki vóru gjørdar.

## 5.6 Fróðskaparsetur Føroya (LG 2018/207-0236)

Endamál, virksemi og uppgávur hjá Fróðskaparsetri Føroya eru lýst í Ll. nr. 58/2008 "um Fróðskaparsetur Føroya", kunngerðum, fíggjarlóg og á heimasíðuni setur.fo.

Stýrið er evsti myndugleiki Setursins, og hevur ábyrgdina av virksemi stovnsins mótvegis landsstýrismanninum. Stýrið hevur gjørt strategi fyri stovnin, galdandi frá 2014 til 2024, og stýrið býtir játtanina á deildirnar.

Roknskapartøl seinastu 5 árini fyri høvuðskontu 7.23.6.16, undirkonta 20:

*t.kr.*

| Heiti | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 62.923 | 65.641 | 73.757 | 78.146 | 81.354 |
| Keyp av vørum og tænastum | 10.865 | 11.193 | 12.018 | 11.396 | 13.656 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 1.093 | 664 | 966 | 650 | 1.569 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur + avskr. | 2.808 | 2.920 | 2.708 | 2.682 | 7.695 |
| Søla av vørum og tænastum | -1.201 | -553 | -1.037 | -749 | -2.077 |
| Tilskot til einstaklingar o.a. | 243 | 130 | 130 | 86 | 143 |
| Vanligar flytingarinntøkur | -1.066 | 0 | -1.483 | -36 | 660 |
| Flytingarinntøkur úr útlandinum | 0 | -68 | -17 | 0 | -16 |
| Innanh. flyt. (útr) | 63 | 60 | 53 | 57 | 146 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (innt) | -2.327 | -2.494 | -2.403 | -4.511 | -3.933 |
| Flyting frá kommununum til landið | -1.609 | -1.712 | -1.922 | -1.797 | -1.915 |
| **Tilsamans** | **71.792** | **75.781** | **82.770** | **85.924** | **97.281** |
| *Játtan* | *71.752* | *75.764* | *82.315* | *85.366* | *97.281* |

Játtan og nýtsla samsvara so at siga øll árini frá 2014 til 2018. Stóri vøksturin í leiguútreiðslum í 2018 stendst av leigu av Sjóvinnuhúsinum. Undir "innanhýsis flytingar millum almennar stovnar (inntøkur)" eru 2,2 mió.kr. í inntøkum um árið frá høvuðskontu 3.15.1.13 "Búskaparráðið". Hækkingarnar í 2017 og 2018 standast av inntøkum frá TF Holding, sum fyrst eru bókaðar á stuðulsfíggjað virksemi.

### Roknskaparviðurskifti o.a.

Mentamálaráðið hevur góðkent roknskaparreglugerðina hjá Setrinum.

Landsgrannskoðanin mælti til, at heimildir, prísáseting og møguligir kredittir og avsláttir viðvíkjandi inntøkum verða tikin við í roknskaparreglugerðina. Eisini mæltu vit til at skjalfesta eftirlitini í sambandi við mánaðarligu góðkenningina av roknskapunum, og at konterað verður sambært Kontuskipanini hjá Gjaldstovuni. Setrið tekur undir við tilmælunum.

*Inntøkur av skeiðsvirksemi*
Prísáseting á skeiðsvirkseminum er ikki nevnd í roknskaparreglugerðini, og Setrið kundi ikki greiða nágreiniliga frá prísásetingini. Setrið fær vanliga 20% í umsitingargjaldi fyri verkætlanir, men aðrar skipanir eru eisini, har støddin á umsitingargjaldinum verður mett.

Landsgrannskoðanin mælti til, at greið heimild verður fingin til vega til at áseta gjøld fyri skeið v.m.

*Útreiðslur*
Landsgrannskoðanin mælti til, at Setrið heldur reglurnar í rundskrivi um Keypsportalin og reglurnar um at taka búskaparlig atlit. Vit mæltu til at viðmerkja á t.d. rokningar fyri gistingar, hvørjar persónar goldið verður fyri.

***Løn goldin sum keyp av tænastum.***

Vit vístu á, at samsýningar fyri undirvísing og nevndarsamsýningar til fólk, ið ikki búgva í Føroyum eru at roknað sum A-inntøka, um arbeiðið er útint í Føroyum, og at tær samsýningarnar tí áttu at verðið goldnar sum løn heldur enn "keyp av tænastum".

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Mentamálaráðið hevur vent sær til TAKS fyri at fáa teirra meting av málinum.

*Stuðul frá TF Holding*
Fróðskaparsetrið og TF Holding hava gjørt avtalu, galdandi frá 1. juli 2015 til 31. juli 2020, um at TF Holding stuðlar Setrinum við 5 mió.kr. til at virka við til at uppbyggja búskaparfrøði sum granskingar- og undirvísingarøki á Setrinum. Treyt fyri stuðlinum var m.a., at Setrið bjóðaði bachelorútbúgving í búskaparfrøði út, lestrarárið 2016/2017.

Sambært avtaluni skuldi TF Holding gjalda eina mió.kr. um árið, fyrstu ferð 1. juli 2015 og seinastu ferð 1. juli 2019. Einki varð rindað út í 2015 og 2016.

Í 2016 inntøkuførdi Setrið 1.408 t.kr. frá TF holding og støðlaði sum ágóða, ið Setrið átti hjá TF Holding.

Í 2017 rindaði TF Holding 2 mió.kr. Av teimum vórðu 300 t.kr. mótroknaðar í ágóðanum og 1,7 mió.kr. inntøkuførdar. Um Setrið hevði mótroknað alla upphæddina í ágóðanum hevði meirnýtslan í 2017 verið 1,1 mió.kr. størri, enn hon annars var. 31. desember 2017 stóð 1,1 mió.kr. eftir av støðlaðu upphæddini frá 2016.

Í 2018 rindaði TF Holding 2 mió.kr. Setrið inntøkuførdi 1,5 mió.kr., og mótroknaði 500 t.kr. í ágóðanum. 31. desember 2018 stóðu 598 t.kr. eftir av støðlaðu upphæddini frá 2016.

***Viðgerðin fløkt og ikki nóg gjøgnumskygd.***

Landsgrannskoðanin heldur, at roknskaparliga viðgerðin av stuðlinum er fløkt og ikki nóg gjøgnumskygd. Roknskapurin 2017 kann heldur ikki sigast at vera rættur.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at sambært Setrinum hevur roknskaparliga viðgerðin av hesari stuðulsjáttanini verið akkurát tann sama, sum hon hevur verið fyri alt annað stuðulsfíggjað virksemi hjá Setrinum. Mentamálaráðið fer at venda sær til Gjaldstovuna um yvirskipaðu roknskaparligu viðgerðina av stuðulsfíggjaða virkseminum hjá Setrinum, og eftir tað verður málið tikið uppaftur við Setrið.

*Peningastovnskontur og kassar v.m.*
Fróðskaparsetrið hevur fýra peningastovnskontur, ið eru skrásettar í Búskaparskipan landsins. Landsgrannskoðanin heldur, at flestu útgjaldingarnar av peningastovnskontunum áttu heldur at verðið rindaðar um Búskaparskipan landsins, og mælti til at gera konturnar upp regluliga.

Setrið hevur 5 gjaldkort/Eurocard til keyp, sum áður vórðu goldin úr forskotskassunum. Leiðreglur um nýtslu av kortunum eru í roknskaparreglugerðini. Deildirnar hava fingið boð um, at kortini sum høvuðsregla ikki skulu nýtast, uttan í serligum førum, m.a. til gjald av lisensum. Keypið við kredittkortunum verður rindað eftir mánaðarligum rokningum. Setrið hevur gjørt heimildarváttanir, sum starvsfólkini hava skrivað undir.

Námsvísindadeildin, Føroyamálsdeildin og Søgu- og samfelagsdeildin hava kopikassar, ið verða brúktir, tá ið lesandi keypa kort til kopimaskinurnar. Í roknskaparreglugerðini eru ongar leiðreglur um kassarnar. Peningur, sum kemur í kassan verður partvís brúktur til at keypa vørur fyri, og nettoupphæddin verður síðani sett inn í peningastovn.

Landsgrannskoðanin mælti til, at leiðslan tekur støðu til, um neyðugt er at varðveita kassarnar, og um so er, at skráseta teir í Búskaparskipan landsins.

*Yvirlit yvir ognir*

Setrið eigur Lindbergs hús, ið er skipað sum sjálvsognarstovnur. Landið eigur fyrisitingarbygningin hjá Setrinum og húsini í J. C. Svabos gøtu 7, sum Setrið nýtti til KT skrivstovu til mai 2018. Sambært Setrinum húsast bert skrivstovan hjá MFS í húsinum í løtuni.

Setrið hevur yvirlit yvir teldur í serstakari skipan. Innbúgv o.a. er skrásett í rokniarki, tó ber ikki til at eyðmerkja ognirnar út frá listanum. Setrið ætlar at útvega onkra einfalda talgilda skipan, har til ber at eyðmerkja ognirnar t.d. við at nýta strikukotur. Innbúgvið til Sjóvinnuhúsið, ið er goldið av løgujáttanini, er ikki skrásett enn.

## Leiga

Landið hevur goldið 10,6 mió.kr. at innrætta hølini í Sjóvinnuhúsinum, sum Setrið í 2017 hevur gjørt 10 ára sáttmála við Tórshavnar havn um at leiga.

Hølini eru 4035 m$^2$, og leigan sambært sáttmálanum er 1.133 kr./m$^2$ íroknað gjald fyri felagsøkir og nýtslu av auditorium. Íroknað innrættingarkostnaðin er árliga leigan góðar 5,5 mió.kr., ella 1.359 kr./m$^2$.

***Leiguprísur hægri enn miðalleiguprísur.***

Spurt, um Mentamálaráðið heldur leiguprísin vera hóskandi, hevur ráðið svarað, at sambært Landsverki er hægsti leiguprísur fyri fyrsta floks skrivstovuhøli í Tórshavn 1.300 kr./m$^2$. Tær 1.359 kr./m$^2$, eru tí nakað oman fyri miðalleiguprísin; men sambært Landsverki eru nøkur serlig viðurskifti við Sjóvinnuhúsinum, sum tala fyri einari høgari leigu, tey eru:

- sera attraktiv staðseting við sjógv og tætt við miðbýin,
- stórt p-øki, sum eigarin heldur viðlíka,
- nýinnrættað høli, sum eftir umbygging er innrættað til virksemið hjá Setrinum, og
- eitt einastandandi auditorium, sum ikki telur við í fermetrum, men sum Setrið hevur brúksrætt til.

Um hædd verður tikin fyri, at Setrið hevur nýtslurætt yvir Kongshøll, heldur Mentamálaráðið, at leiguprísurin er rímiligur í mun til onnur leigumál, sum landið hevur í Tórshavn.

***Ivasamt, um tað er røtt mynd av kostnaðinum.***

Landsgrannskoðanin vísti á, at hølisleiga og -umvælingar, sum eru til sama endamál, eru játtaðar og skrásettar á fleiri høvuðskontur; og tí er ivasamt, um tað gevur rætta mynd av høliskostnaðinum.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at tá ið umbyggingin av Sjóvinnuhúsinum varð fíggjað av løgujáttanini til universitetskampus, tí Sjóvinnuhúsið var partur av universitetskampusinum, heldur Mentamálaráðið, at valdi bókingarhátturin var rætta loysnin fyri at fáa málið avgreitt.

*Húsaleiga bókað í skeivum ári*
Setrið hevur skrásett eina mió.kr. í húsaleigu í 2018, sum hoyrir til 2017. Landsgrannskoðanin heldur tí, at roknskapirnir hjá Setrinum eru ikki rættir.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Mentamálaráðið er ikki ósamt við Landsgrannskoðanini um, at leigugjaldið fyri september til desember 2017 av røttum skuldi verði bókað í 2017. Mentamálaráðið hevði hesa útreiðsluna við í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2018, sum seinni bleiv samtykt av Løgtinginum, soleiðis at kunnað varð um ætlanina, tó at tað ikki gongur nóg greitt fram í fíggjarlógartekstinum. Mentamálaráðið ásannar, at rætta periodiseringin hevði verið, at leigugjaldið varð bókað á fíggjarárið 2017.

***Ikki røtt periodisering.***

*Leiga av kopimaskinum*
Fróðskaparsetrið rindar 9.311 kr. um mánaðin fyri 9 leigu- og tænastusáttmálar um kopimaskinur. Sambært játtanarreglunum er ikki loyvt at langtíðarleiga. Í serligum førum kann loyvi tó fáast til tað frá Fíggjarmálaráðnum.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað tyktist sum, at talan er um langtíðarleigu-/leasing, sum er komin í lag í staðin fyri keyp. Roknskaparliga eiga avtalurnar tí at viðgerast sum keyp, og útreiðslurnar at verða bókaðar sambært tí.

Mentamálaráðið tekur undir við, at talan tykist vera um langtíðarleigu í staðin fyri keyp av kopimaskinum. Mentamálaráðið vísir á, at sambært Fíggjarmálaráðnum hava tey áður noktað øðrum stovnum loyvi at langtíðarleiga kopimaskinur, men hava loyvt tænastusáttmálum um sjálvan raksturin.

Mentamálaráðið ætlar at boða Setrinum frá, at Fíggjarmálaráðið skal góðkenna slíkar leigusáttmálar.

***Fíggjarmálaráðið skal góðkenna langtíðarleigusáttmálar.***

## Lønir

*Vísindalig starvsfólk*
Lønirnar hjá vísindaligu starvsfólkunum eru sambært sáttmála ímillum Akademikarafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið. Arbeiðstíðin er býtt í granskingartíð, undirvísingartíð og fyrisiting. Í øllum trimum tættunum er talan um framleiðsluskyldu, sum skal skjalprógvast og góðkennast av dekani, sum hevur ábyrgd av, at tað verður gjørt.

Fróðskaparsetrið ger avtalu við hvørt einstakt vísindastarvsfólk um, hvussu stór undirvísingarbyrðan er, og hvussu nógv granskingin skal vera. Greiðar starvstreytir og –skyldur skulu standa í setanarbrævinum. Uppgávurnar eru býttar í triðingar til undirvísing, gransking og fyrisiting. Einki yvirlit er, sum vísir, hvussu nógvar tímar starvsfólkini brúka til hvørt økið.

Spurt, um Fróðskaparsetrið heldur, at uppbýtið er nøktandi, hevur Setrið svarað, at *"Tá ið talan er um undirvísing og gransking, so verður í dag miðað eftir, at 50% av samlaðu arbeiðstíðini fer til undirvísing, og hini 50% fara til gransking. Tað er givið, at partur av hesi tíðini verður brúktur til fyrisitingarligar uppgávur, so sum skeið, fundir v.m., men hvussu stórur hesin parturin er, er torført at siga. Skipanin hjá vísindafólkunum er lík tí skipan, sum vit eitt nú kenna á donskum universitetum, og verður hetta mett at vera ein nøktandi skipan."*

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at í búskettgreiningini av Setrinum, frá 2. mai 2018, verður mælt til, at deildirnar, og ikki persónarnir, skráseta arbeiðstíðina eftir einum yvirskipaðum leisti. Sum partur av arbeiðstíðarskrásetingini er skráseting av sjúku og hildnari frítíð, soleiðis at roknskaparhaldið kann sanna, at tað er rætt.

*Skráseting av arbeiðstíð og stakroyndir av lønarmálum*

Ásannandi, at lønarútreiðslur eru størsti útreiðsluposturin hjá Fróðskaparsetri Føroya, heldur Landsgrannskoðanin, at tað er týdningarmikið, at leiðslan tryggjar sær, at lønarútgjaldingarnar eru rættar. Tað kann m.a. verða gjørt við at hava hóskandi tíðarskráseting, tryggar góðkenningarmannagongdir og neyvar ásetingar um arbeiðstíðir.

Tó at Setrið onga veruliga tíðarskráseting hevur, brúka tey flexstíð, og rinda nógvum starvsfólkum løn fyri serstaka fríviku. Fróðskaparsetrið ásannar, at tíðarskrásetingin er ikki nøktandi, og tey arbeiða við at finna eina loysn.

***Tíðarskráseting ikki nøktandi.***

Vit kannaðu nøkur lønarmál, um rættir lønarsatsir eru nýttir, um starvslýsing, prógv o.a. eru í lønarmálunum, um útgjaldingin samsvarar við hóskandi tíðarskráseting, um tíðarskrásetingin verður váttað av persóni við heimild, um talið av tímum er rætt, um lønartímarnir eru rætt bólkaðir, og um pensjónsinngjaldingarnar eru rættar. Vit høvdu einki at finnast at viðvíkjandi setanarskrivum, prógvum, lønarsatsum v.m., men vit kunnu ikki sanna, at tímarnir, ið Setrið rindar fyri, eru rættir, tá ið stovnurin onga tíðarskráseting hevur.

Í juli 2019 hevur Mentamálaráðið greitt frá, at starvsfólk í fyrisitingini eiga at skráseta sína arbeiðstíð, sum vanligt er á øðrum stovnum, og at ráðið fer at taka stig til, at Setrið ger leiðreglur fyri, hvussu hóskandi skráseting av arbeiðstíð verður framd.

*Fráfaringaravtalur*

***4 fráfaringaravtalur gjørdar.***

Setrið hevur í 2017 og 2018 gjørt 4 fráfaringaravtalur við starvsfólk. Setrið hevði ikki ítøkiliga uppgerð, sum vísti, hvør kostnaðurin hevði verið av at siga starvsfólki upp sambært sáttmála, heldur enn at gera fráfaringaravtalur.

Ásannandi, at tíðarskeiðið við uppsagnartilgongd kann vara longri, enn ein fráfaringaravtala, valdi Setrið heldur at gera fráfaringaravtalur. Sambært Setrinum samskifta tey við Gjaldstovuna, tá ið fráfaringaravtalur verða gjørdar, og at Gjaldstovan kann fylgja við, um persónur fær annað starv hjá landinum, har mótroknast kann í.

Í juli 2019 hevur Mentamálaráðið víst á, at tá ið talan er um starvsfólk við einari slíkari funktión, at tað er umráðandi fyri stovnin at fáa uppsøgnina avgreidda skjótt, so ber til at forsvara hendan framferðarháttin. Tá ið fráfaringaravtala verður gjørd, er umráðandi, at treytirnar í avtaluni eru rímiligar og ikki seta starvsfólkið í eina nógv verri støðu, enn um ein vanlig uppsagnartilgongd varð nýtt. Umráðandi er eisini, at starvsfólk fær nøktandi kunning, áðrenn ein fráfaringaravtala verður undirskrivað.

Mentamálaráðið heldur samanumtikið ikki, at ein long uppsagnartilgongd er nóg góð grundgeving fyri at velja fráfaringaravtalur heldur enn vanliga uppsagnartilgongd. Fráfaringaravtalur skulu bert nýtast í heilt serstøkum førum.

*Annar starvsfólkakostnaður*

Setrið keypir fartelefonir til øll starvsfólkini. Setrið rindar upp til 1.500 kr. fyri hvørja telefon.

*Undirvísing, prógvdøming o.a.*

***Løn goldin sum keyp av tænastum.***

Fróðskaparsetrið hevur rindað samsýningarnar fyri undirvísing, prógvdøming v.m. sum "keyp av tænastum". Í 2017 og 2018 rindaði Setrið 1,1 mió.kr. til 9 móttakarar, t.e. persónar, firma og smápartafeløg. Taksturin er tímaløn eftir AKF sáttmálanum +12% í frítíðarløn. Á nøkrum rokningum er MVG lagt á. Uppgávurnar eru ikki bodnar út.

Spurt, um talan ikki er um nettoinntøkur, ið skulu gjaldast um lønarskipanina hjá Gjaldstovuni, svaraði Fróðskaparsetrið, at *"Setrið heldur seg ikki kunna nokta firmaum ella fyritøkum at loysa uppgávur fyri Setrið. Gjaldið fyri tænasturnar fylgja ásetingunum í § 23 í sáttmálanum hjá Akademikarafelag Føroya."*

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað er týdningarmikið, at almennir stovnar rinda samsýningar, sum eru løn, um Lønarskipanina hjá Gjaldstovuni. Tá ið arbeiðsgevarar rinda løntakarum frítíðarløn, skal frítíðarlønin rindast á frítíðarlønarkontu avvarðandi løntakarafelags e.a. Viðvíkjandi meirvirðisgjaldi vístu vit á, at sambært meirvirðisgjaldslógini er m.a. undirvísing í skúla ella á fróðskaparsetri undantikið MVG skyldu.

Í juli 2019 hevur Mentamálaráðið kunnað um, at ráðið hevur vent sær til TAKS við spurningunum, og at málið verður síðani tikið upp við Setrið.

### Inntøkufíggjað virksemi

Vísandi til ásetingarnar í kunngerðini um rakstrarjáttan mælti Landsgrannskoðanin til, at greitt verður frá virkseminum í fíggjarlógini.

### Stuðulsfíggjað virksemi

Landsgrannskoðanin mælti til at greiða nærri frá virkseminum í fíggjarlógini, soleiðis sum ásett er í kunngerðini um stuðulsfíggjað virksemi.

Verkætlanarleiðarar (t.d. Ph.d. lesandi) hava ábyrgd av, at játtanir til stuðulsfíggjað virksemi halda. Dekanur og stjórin góðkenna verkætlanir. Roknskapur fyri stuðulsfíggjaða virksemið seinastu 5 árini:

*t.kr.*

| Heiti | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 3.377 | 3.112 | 3.276 | 4.064 | 4.664 |
| Keyp av vørum og tænastum | 1.931 | 2.446 | 2.984 | 1.903 | 1.877 |
| Útbúnaður, leiga o.a. | 170 | 110 | 66 | 193 | 212 |
| Søla o.a. | -1.594 | -78 | 287 | 489 | 224 |
| Vanligar flytingarinntøkur | -2.696 | -1.574 | -2.859 | -6.653 | -6.816 |
| Flytingarinntøkur úr útlandinum | -802 | -3.496 | -3.626 | -1.551 | -1.199 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovn. (útr) | 0 | 0 | 0 | 1.690 | 1.500 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovn. (innt) | -386 | -520 | -128 | -135 | -462 |
| | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |

Í 2018 eru slakar 4,7 mió.kr. goldnar í lønum, og 9,6 fulltíðarstørv eru lønt av stuðulsfíggjaðum virksemi.

### *Óbrúktur granskingarstuðul*

Seinastu 5 árini hevur óbrúktur granskingarstuðul verið støðlaður í fíggjarstøðuni:

*t.kr.*

| StRk | Heiti | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 0881 | Ikki inntøkuført – granskingarstyrkur, gávur o.t. | -11.523 | -13.113 | -12.966 | -11.782 | -11.305 |

***Peningur staðið óbrúktur í nógv ár.***

Landsgrannskoðanin hevur hugt nærri at trimum verkætlanum, har peningur hevur staðið ónýttur í nógv ár. Í talvuni niðanfyri er yvirlit yvir tær verkætlanirnar seinastu 10 árini.

*t.kr.*

| Heiti | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Menning av kolvetnisverkfrøði | -1.058 | -1.058 | -1.058 | -1.058 | -1.058 | -978 | -978 | -978 | -978 | -978 |
| BOK-2 | -1.106 | -1.106 | -1.106 | -1.106 | -1.106 | -1.106 | -1.106 | -1.106 | -1.106 | -1.598 |
| Førleikamenning í varandi orku | 0 | 0 | 0 | 0 | -400 | -4.300 | -4.300 | -4.300 | -4.110 | -3.676 |
| **Tilsamans** | **-2.165** | **-2.165** | **-2.165** | **-2.165** | **-2.565** | **-6.384** | **-6.384** | **-6.384** | **-6.194** | **-6.252** |

### *Menning av kolvetnisverkfrøði*

31. desember 2018 standa 978 t.kr. støðlaðar til verkætlanina “Menning av kolvetnisverkfrøði”. Tað einasta sum er hent síðani 2004 er, at 80 t.kr. vórðu goldnar inn í 2009, og at 80 t.kr. eru inntøkuførdar í rakstrinum hjá Fróðskaparsetrinum 2014.

Í februar 2019 hevur Fróðskaparsetrið greitt frá, at:
*"Kolvetnisverkfrøði var nýtt øki á Setrinum seinast í 1990 og fyrst í 2000-árunum. M.a. legði Setrið seinast í 1990-unum eina bachelorútbúgving í kolvetnisverkfrøði til rættis í samstarvi við Høgskolen i Stavanger. Kolvetnisverkfrøði var nýtt evni á Setrinum, og tað eydnaðist at fáa fígging frá oljufeløgum til at menna tað her – m.a. til at seta útbúgvingina í gongd. Oljufeløg, ið vildu virka í føroyskum øki, høvdu bundið seg til at avseta upphæddir til førleikamenning í Føroyum, og partur av hesum kom til Setrið. Játtanin var latin Setrinum at ráða yvir.*

*Útbúgvingin bleiv tó ikki eitt varandi tilboð hjá Setrinum, tí áhugin fyri útbúgvingini minkaði burtur í næstan einki, so hvørt sum vónirnar um oljuvirksemi við Føroyar minkaðu vegna turru leitiboringarnar. Bachelorútbúgvingin varð bert bjóðað tríggjar ella fýra ferðir. Kolvetnisverkfrøði sum fakøki varð lagt stilt í óásetta tíð. Tí bleiv fíggjarstøðan á hesi kontu soleiðis, sum hon nú er."*

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at sambært Setrinum er eingin verkætlan í gongd innan hetta fakøkið. Sum nú er, er ætlanin at peningurin, sum varð latin til verkætlanina "Menning av kolvetnisverkfrøði", framhaldandi skal verða støðlaður, til gongd aftur kemur á verkætlanararbeiðið.

*BOK-2*
31. desember 2018 standa 1,6 mió.kr. støðlaðar til verkætlanina, BOK-2, harav hava 1,1 mió.kr. staðið frá 2009 til 2017. Seinasta inngjaldið er í 2008. Í 2018 eru 492 t.kr. fluttar frá uppgerð av einari aðrari verkætlan (RAD-3).

Í februar 2019 hevur Setrið greitt frá, at:
*"BOK-2 er eitt langtíðar norðurlendskt samstarv um kanningar av geislavirknari umhvørvisdálking. Meginparturin av arbeiðinum er fíggjað av luttakandi stovnunum, men eitt sindur er komið gjøgnum árini frá NKS (Nordic Nuclear Safety research). Í okkara føri er hetta m.a. ætlað til eksterna fígging til dagføringar av útgerð og software til kanningararbeiði - hetta er kostnaðarmikið og tað kann ikki roknast við, at hetta kann fíggjast av vanliga rakstrinum. Talan kann m.a. vera um keyp av útgerð (sum detektor), ið knappliga gongur fyri (prísir fyri t.d. detektor eru í fleiri 100 t.kr. klassanum)."*

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at eingin verkætlan er í gongd innan verkætlanarøkið "Geislavirkin umhvørvisdálking". Sum nú er, er ætlanin at peningurin, sum varð latin til hetta fakøkið, framhaldandi skal verða støðlaður, til gongd aftur kemur á verkætlanararbeiðið.

*Førleikamenning í varandi orku*
3,7 mió.kr. eru støðlaðar til "Førleikamenning í varandi orku". Setrið fekk 4,3 mió.kr. í 2014 frá Statoil Farøyene AS til gransking og undirvísing. Í 2017 vórðu 190 t.kr. brúktar. Í 2018 eru 434 t.kr. brúktar.

Fyrsta Ph.d. verkætlanin við fígging av hesum stuðlinum er nú í gongd. Ein granskari er settur í tíðaravmarkað starv 1. februar 2018 til 1. februar 2021, til Ph.d. verkætlanina "Greining og myndlan av vindorkutilfeinginum í Føroyum".

**Kunningartøkni v.m.**
Setrið hevur skipanir, sum eru týdningarmiklar fyri stovnin, lesandi og granskarar. Skipanirnar eru: Teldupostur, fílugoymslur, journal, Prógvbók, Moodle og Office365. Setrið nýtir heimasíðuna "atgongumerki.fo" at krevja gjald fyri skeið.

Teldupostur, fílugoymslur, journal, Prógvbók og Moodle verða hýstar av P/f Formula. Setrið hevur eisini eina eldri journalskipan, sum er á Havstovuni, og sum nú bert verður brúkt til uppslag.

### *Politikkur um KT trygd*

Setrið hevur skrivligan KT trygdarpolitikk við yvirskipaðum ásetingum um KT trygd, umframt ásetingar um nøkur ítøkilig økir, sum KT politikkur skal gerast fyri.

Setrið hevur ikki skipaða kunning til starvsfólk um KT trygd, har starvsfólk verða biðin um at vátta, at tey eru kunnað um, hvat tey kunnu, og ikki kunnu gera á KT økinum. Landsgrannskoðanin vísti til brúkaraleiðreglurnar og brúkaraváttanina hjá Landsneti, sum eitt dømi, og mæla vit til at gera meira ítøkiligan KT politikk við ætlanum um, hvussu Setrið ætlar at bøta um KT trygdina í mun til váðametingina. Eisini mæltu vit til, at Setrið ger skrivligar brúkaraleiðreglur til starvsfólkini, og at tey vátta, at tey hava lisið tær.

***Tilmæli um at bøta um KT trygdina***

Setrið hevur ikki skrivligar mannagongdir fyri, hvussu váðameting og trygdarpolitikkur verða hildin viðlíka. Landsgrannskoðanin mælti til, at Setrið skipar ein leist nær, og hvussu váðameting og trygdarpolitikkur verður hildin viðlíka.

***Mælt var til, at Setrið skipar váðameting og trygdarpolitikk.***

Sambært váðametingini hevur Setrið ein KT trygdarbólk, sum er settur saman av KT leiðaranum, einum dekani og fyrisitingarstjóranum. KT økið verður umsitið av einum KT leiðara, sum er settur hálva tíð. Uppgávan hjá KT leiðaranum er at halda váðameting og trygdarpolitikk víðlíka.

### *Sáttmáli um rakstur av KT kervi við SLA*

Setrið hevur gjørt SLA[11] avtalu við Formula.

### *Skipan av KT trygd*

Sambært Setrinum eru tey í holt við at gera nágreiniligar mannagongdir um KT trygd, og leiðslan heldur, at Setrið fylgir ásetingunum í rundskrivi frá 21. juni 2007 “um at seta í verk KT trygd.”

Stovnurin eigur sjálvur flestu dáturnar, sum liggja á netinum. Harafturat hevur Føroya-málsdeildin eitt bandasavn við upptøkum av samrøðum og myndum.

Skipanir og dátur liggja á servarum hjá Formula, sum eisini skipar trygdartiltøkini. KT grannskoðarin hjá Formula hevur fyri árið 2017 givið eina ISAE 3402 váttan um almennar KT eftirlitsskipanir í hýsingartænastuni hjá P/f Formula, sum eisini umfatar Setrið. Grannskoðarin vísti á ein serligan eftirlitsveikleika, at trygdaravrit verður goymt í sama húsi, sum ambætararnir standa.

Í februar 2019 hevur Fróðskaparsetrið kunnað um, at sambært Formula verða trygdaravrit eisini goymd í øðrum húsi.

Í váttanini eru eisini nevnd KT viðurskifti, sum Setrið sjálvt hevur ábyrgd av, m.a. royndarkanningar av trygdaravritum og at gera penetratiónsroyndir móti egnum skipanum.

Setrið hevur ikki biðið Formula um at endurskapa dátur úr prióvbókini seinastu 2 árini. Setrið hevur ikki gjørt penetratiónsroynd móti prióvbókini.

Sambært Setrinum verða royndarkanningar av trygdaravritum og penetratiónsroyndir av egnum skipanum í næstum tiknar upp við Formula í sambandi við endurskoðan av hýsingaravtalu.

Landsgrannskoðanin mælti til at fremja átøkini, ið Setrið sjálvt hevur ábyrgd av sambært grannskoðanarváttanini.

***Mælt varð til at fremja átøk.***

[11] Tænastusáttmála.

*Flokking og váðameting*
Uttanhýsis KT grannskoðari hevur gjørt váðameting av KT nýtslu, og er hon seinast dagførd í november 2014. Dátuflokking er partur av váðametingini. Yvirskipaði KT trygdarpolitikkurin er seinast dagførdur í desember 2015. Í váðametingini eru nevndar fleiri hóttanir móti KT trygdini, og fleiri tilmæli, sum KT grannskoðarin hevur givið til at bøta um KT trygdina, eru ikki avgreidd.

*Atgongdarstýring*
Vanlig trygdartiltøk eru sett í verk fyri teldur og farútgerð. Sambært Setrinum verður atgongdin stýrd við profilum, soleiðis at starvsfólk fáa atgongd, eftir hvat starvsøkið er. Landsgrannskoðanin mælti til at gera leiðreglur um KT trygdina á teldum og farútgerð.

Sambært Setrinum fara tey at taka stig til, at generellar leiðreglur um KT trygdina á teldum og farútgerð verða gjørdar. Uppskot um mannagongd fyri viðgerð av persónsupplýsingum er gjørt.

Sambært Setrinum eru allar teldur skrásettar, og Setrið fer at skráseta aðra KT útgerð í Sjóvinnuhúsinum. Setrið fer at gjøgnumganga brúkararættindi hjá starvsfólkum og at syrgja fyri, at tey bert hava atgongd til tær skipanir, tey hava tørv á.

Bert KT leiðarin hevur rættindi til at leggja software á telduútgerðina. Atgongd til skipanirnar er avmarkað við atgongdarstýring.

Setrið hevur samskift við Dátueftirlitið um goymslu av persónsupplýsingum. Persónsupplýsingar eru í Prófvbókini, umframt umsóknir og próvtøl. Avmarkað tal av persónum hava atgongd til persónsupplýsingarnar. Starvsfólkamál eru í journalskipanini, umframt í avlæstum skápi.

Lesandi brúka Office365, og Setrið rindar fyri lisensirnar. Setrið hevur annars einki við KT nýtsluna hjá teimum lesandi at gera. Lesandi hava eisini atgongd til studentaportalin, har tey síggja egnar upplýsingar.

*Tilbúgving*
Fróðskaparsetrið hevur ikki yvirlit yvir trygdarhendingar. Setrið hevur ikki verið varugt við nakað trygdarbrot. Tey hava onkuntíð sæð, at netið er álopið, men trygdarverjan hevur fangað tað. Sambært Setrinum eru ásetingar um uppitíð o.a. í SLA avtaluni við Formula.

Setrið hevur ikki skipaðar mannagongdir fyri, hvussu trygdarhendingar verða handfarnar. Sambært KT leiðaranum verða tær loystar ad-hoc.

Setrið hevur ikki gjørt tilbúgvingarætlan fyri KT trygdarhendingar. Um fasta netið ikki er tøkt, ella brek er á linjuni til Formula, er møguligt at nýta 4G at fáa samband við servararnar. Starvsfólkini hava fartelefon og møguleika fyri roaming.

Formula tekur sær av dagføringum og uppstigingum av skipanunum hjá Setrinum. Setrið hevur ongar skipaðar reglur um change management.

Allar broytingar, sum verða gjørdar, eru umbidnar av Setrinum frammanundan. Í dag er tað ein uttanhýsis veitari, sum viðlíkaheldur prófvbókina.

***Mælt varð til dagføringar og uppstiganir.***

Landsgrannskoðanin mælti til, at dagføringar og uppstiganir av Prófvbókini verða gjørdar eftir skipaðum skrivligum leisti. Í februar 2019 hevur Setrið kunnað um, at tey fara at orða eina tilbúgvingarætlan.

*Burturbeining av KT útgerð*
Sambært Setrinum verða harðdiskarnir oyðilagdir, tá ið teldur verða burturbeindar. Teldurnar eru altíð eldri enn 4 til 5 ár, áðrenn tær verða skiftar út. Vit mæltu til, at halda ásetingarnar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um burturbeining av KT útbúnaði.

## 5.7 Vinnuháskúlin (LG 2018/207-0236)

Vinnuháskúlin virkar eftir Ll. nr. 55/2001 "um útbúgving av manning á skipum o.ø." Útbúgvingarnar eru skipara-, skipsførara-, maskinist- og maskinmeistarútbúgving. Skúlin skipar eisini fyri skeiðsvirksemi og eftirútbúgvingarskeiðum fyri maskinistar og maskinmeistarar v.m.

**Roknskaparviðurskifti**
Mentamálaráðið hevur góðkent roknskaparreglugerðina hjá skúlanum í 2016.

Landsgrannskoðanin gjørdi kassaeftirlit í 2018. Vit mæltu til at gera kassan upp, bóka og seta pening í bankan eina ferð um mánaðin, og at gera kantinukassan upp eina ferð um vikuna.

*Lønir o.a.*
Í 2018 vóru lønirnar 18,7 mió.kr. av samlaðu útreiðslunum, ið vóru 23 mió.kr. Lærararnir eru løntir eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Maskinmeistaralærarar og Fakfelag Sjómansskúlalærara.

Við støði í lønarútgjaldingum juni 2018 kannaði Landsgrannskoðanin við stakroyndum, um lønirnar vóru rættar. Vit samanhildu setanarskrivini, prógvini o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Vit høvdu ikki aðrar viðmerkingar enn tær, sum nevndar eru niðanfyri.

Vinnuháskúlin hevur goldið lærara 4.828 kr. í 2018 sum samsýning fyri verkætlanarleiðslu hjá skipsføraralesandi. Sambært Vinnuháskúlanum var avtalan um samsýningina gjørd, áðrenn Maskinmeistaraskúlin varð lagdur saman við Føroya Sjómansskúla, men avtalan er ikki at finna.

***Avtalan um samsýning fyri verkætlanarleiðslu var ikki at finna.***

Í juli 2019 hevur Undirvísingarstýrið biðið skúlan gera eina nýggja avtalu, fáa hana góðkenda av Fíggjarmálaráðnum, og boða Undirvísingarstýrinum frá, tá ið hon er sett í gildi.

*Keyp*
Sambært roknskaparkunngerðini skulu útreiðslur rindast um Búskaparskipan landsins, og hvør einstøk bóking skal kunna fylgjast aftur til eitt elektroniskt skjal.

Vinnuháskúlin hevur ávíst pening fyri rokningar um FSL-inngjaldskipanina hjá Gjaldstovuni. Skúlin hevur rindað upphæddirnar av egnari peningastovnskontu uttan at leggja skjøl við, og heldur ikki er meirvirðisgjald bókað. Skjølini eru tó til skjals á skúlanum.

FSL-inngjaldsskipanin er ikki ætlað at rinda útreiðslur við. Landsgrannskoðanin vísti á, at tað forðar fyri gjøgnumskygni, at útgjøld verða avgreidd um FSL-inngjaldsskipanina, uttan at skjøl eru viðheft. Vit mæltu til, at alt keyp verður avgreitt um verkgongdarskipanina, at skjalfesta tað, sum verður keypt á alnótini og at leggja skjølini við bókingunum. Eisini mæltu vit til at kontera neyvari.

Vit mæltu til at kontera ferðaútreiðslur innanlands neyvari. Fyri at kunna staðfesta, at dagatalið í uppgerðum av ferðum uttanlands er rætt, mæltu vit til, at skúlin viðheftir innbjóðing, skrá e.l., tá ið søkt verður um ferðaloyvi.

Dømi var um eina ferðauppgerð, har dagpeningurin varð roknaður í útlendskum gjaldoyra. Vit bóðu Vinnuháskúlan kanna, um tað er komið fyri áður.

Ístaðin fyri vekslara og borðtelefonir, avgjørdi stjórin at rinda lærarum endurgjald fyri at brúka egnar telefonir. Vinnuháskúlin rindaði lærarum og undirvísingarleiðarum ávikavist 50 og 300 kr. um mánaðin fyri at brúka egnar telefonir fyri skúlan. Mannagongdin er broytt í 2019. Nú rindar skúlin fyri telefonhald hjá stjóranum, undirvísingarleiðarunum, skeiðsleiðaranum, leiðaranum á Trygdardeplinum, telduumsitaranum, kantinuleiðaranum, húsavørðinum og fíggjarleiðaranum.

### *Gjaldkort og heimildarváttan*

Eingin heimildarváttan var til gjaldkortið, og ongar skrivligar reglur vóru heldur um, hvat gjaldkortið kann verða brúkt til. Kortið er í navninum hjá telduumsitaranum. Sambært stjóranum, verður tað vanliga brúkt til at keypa ferðaseðlar og annað, sum ikki kann verða goldið um Búskaparskipan landsins. Landsgrannskoðanin hevur fleiri ferðir mælt til, at skúlin útvegar sær heimildarváttan til gjaldkortið. Leiðslan hevur kunnað um, at heimildarváttan nú er gjørd.

### *Ognaryvirlit*

Í frágreiðing okkara 2012 mæltu vit Vinnuháskúlanum til at gera ognaryvirlit, samsvarandi § 20 í roknskaparkunngerðini.

***Ognaryvirlitið er ikki fullfíggjað.***

Arbeiðið at gera ognaryvirlit byrjaði í 2014. Vinnuháskúlin hevur gjørt yvirlit yvir teldur, skermar og stórskermar til klassastovurnar, og ætlar at útbyggja tað til eisini at fata um tekniskan útbúnað til undirvísingina.

### Krøv til undirvísarar

Í frágreiðing okkara 2012 umrøddu vit, at lærarar skuldu lúka krøv til undirvísingarførleikar, og at lærarar sjálvir skuldu taka stig til at lúka treytirnar innan 5 ár sambært kunngerðum frá 2005.

Spurdur, um allir læararnir nú lúka treytirnar um undirvísingarførleika, svaraði Vinnuháskúlin, at "gomlu" læararnir hava fingið undantak frá Mentamálaráðnum, men at allir nýggir lærarar skulu lúka krøvini. Nakrir lærarar fingu førleikakrøvini uppá pláss beinanvegin, og tveir eru nú í holt við at taka BSC í maskinfrøði. Nakrir lærarar lúka ikki førleikakrøvini.

***Fimm lærarar fingið undantaksloyvi frá at lúka førleikakrøv.***

Undirvísingarstýrið hevur í august 2019 kunnað um, at í 2010 fingu fimm lærarar undantaksloyvi at halda fram sum lærarar, tó at teir ikki luku førleikakrøvini.

### Eftirlit við innlatan av uppgávum

Vit spurdu, hvussu leiðslan tryggjar sær, at næmingar lata inn uppgávur, og at tær verða rættaðar. Eisini spurdu vit um skjalprógv/hagtøl finnast fyri, hvussu nógvar uppgávur eiga at vera givnar, eru givnar, eru latnar inn og rættaðar.

Vinnuháskúlin greiddi frá, at læararnir hava ábyrgd av at føra protokoll yvir innlatnar uppgávur og at stilla inn til próvtøku. Um næmingur ikki hevur latið í minsta lagi 80% av uppgávunum inn, gevur lærarin næminginum boð um, at hann verður ikki innstillaður til próvtøku. Skúlastjórin hevur ikki eftirlit við, at allar uppgávurnar verða latnar inn.

***Tilmæli um innaneftirlit.***

Landsgrannskoðanin mælti til, at leiðslan setir í verk innaneftirlit, fyri at tryggja sær, at uppgávur veruliga eru latnar inn, og at treytirnar fyri at verða innstillaður til próvtøku eru loknar. Undirvísingarstýrið heitti í juli 2019 á Vinnuháskúlan, um at fylgja tilmælinum frá Landsgrannskoðanini um innaneftirlit.

## KT viðurskifti

### *Váðameting*

Vinnuháskúlin hevur ikki gjørt váðameting sambært rundskrivi frá Vinnumálaráðnum 21. juni 2007 um "at seta í verk KT trygd". Skúlin hevur samskift við Dátueftirlitið um, hvussu persónsupplýsingar skulu viðgerast. Landsgrannskoðanin mælti til, at viðurskiftini vórðu fingin í rættlag. Leiðslan hevur svarað, at tey samskifta enn við Dátueftirlitið.

***Eingin váðameting.***

### *Trygdarpolitikkur*

Vinnuháskúlin hevur skjal, nevnt "IT-dokumentatión-sikkerhedspolitik". Skjalið inniheldur ásetingar og lýsir stórtsæð øll viðurskifti, sum hava við trygdarpolitikk at gera; tó tykist skjalið at vera ófullfíggjað. Tað framgongur ikki, hvør hevur gjørt skjalið, nær tað er gjørt, og í skjalinum verða fleiri spurningar reistir, sum vit ikki duga at síggja eru svaraðir.

Sambært skjalinum skulu starvsfólk og lesandi kunnast um trygdarpolitikkin, og trygdarpolitikkurin skal góðkennast av leiðsluni árliga. Eisini skal leiðslan gera greiðar reglur um handfaring av kunningartøknini. Harafturat er tað uppgávan hjá leiðsluni, at trygdin er í lagi og verður hildin. Leiðslan skal hava fatan av teimum vandum og veikleikum, skúlin kann koma fyri.

Landsgrannskoðanin mælti til, at skúlin endurskoðar trygdarpolitikkin, og at øll ivamál verða svaraði. Leiðslan hevur greitt frá, at KT viðurskiftini, serliga trygdin, verða endurskoðað í løtuni.

***Landsgrannskoðanin mælti til at endurskoða trygdarpolitikkin.***

## Góðskumeting av sjóvinnuútbúgvingunum

Sambært avtalu við Mentamálaráðið vitjar Søfartsstyrelsen Vinnuháskúlan regluliga. Endamálið við vitjanunum er at meta um, um skúlin:

- greiðir sínar útbúgvingar í tráð við endamálið í lógini,
- fylgir reglunum um góðskustýring av maritimu útbúgvingunum, og
- fylgir øðrum reglum um útbúgvingina, herundir reglum um prógvdøming og eftirmeting.

Í 2012 umrøddu vit, at leiðslan fór at gera eina ætlan fyri innanhýsis skoðan av dygdarmenningarskipan skúlans. Spurd, hvat síðani var hent, svaraði leiðslan, at Søfartsstyrelsen vitjaði í apríl 2016, og lat okkum eitt útkast til frágreiðing frá vitjanini.

Viðmerkingarnar frá Søfartsstyrelsen í 2016 vóru, at skúlin:

1) *har ikke en procedure for registrering af afvigelser og korrigerende handlinger i kvalitetssystemet,*
2) *det er uklart om undervisningsplaner godkendes af ledelsen forud for registrering i skolens system og præsentation på informationsportalen for eleverne,*
3) *ledelsesevalueringen følger ikki kvalitetsstandarden, jf. Bekendtgørelse nr. 1373/2009 om godkendelse og kvalitetssikring m.v. af maritime uddannelser,*
4) *skolens struktur for planlægning og afholdelse af interne audit er uklare, og*
5) *nødudgang i tavlerum ved DG-genset på den maskintekniske afdeling fører til frit fald på en 1 meter på den anden side af døren.*

Vinnuháskúlin svaraði ikki okkara spurningi í juni 2019, hvat skúlin hevði gjørt við viðmerkingarnar frá Søfartsstyrelsen frá 2016, men leiðslan greiddi frá, at Søfartsstyrelsen hevði verið á nýggjari vitjan 13. mai 2019. Frágreiðing frá tí vitjanini fyrilá ikki, men leiðslan kunnaði um, at viðurskiftini frá vitjanini í 2016 eisini vórðu gjøgnumgingin.

***Fleiri viðmerkingar frá Søfartsstyrelsen.***

Vit bóðu landsstýrismannin um viðmerkingar til frágreiðingina frá Søfartsstyrelsen. Landsstýrismaðurin svaraði ikki beinleiðis, men vísti á, at Mentamálaráðið í skrivi 9. juli 2019 hevur heitt á skúlan um at svara Landsgrannskoðanini. Ráðið bað skúlan

greiða Landsgrannskoðanini frá, hvørji tiltøk skúlin hevur sett í verk í sambandi við viðmerkingarnar frá góðskumetingini.

Landsgrannskoðanin undrast á svarið frá landsstýrismanninum, og hevur enn ikki frætt frá skúlanum.

*Nýggj góðskumeting*

Í september 2019 hevur Mentamálaráðið latið Landsgrannskoðanini avrit av frágreiðing frá Søfartsstyrelsen frá 21. mai 2019 (ikki undirskrivað) saman við fylgiskjali 1 og 2. Sambært frágreiðingini hevur Søfartsstyrelsen noterað 7 frávik og eina "observation". Harumframt vóru tvey frávik í sambandi við audit á Brandskúlanum.

Umframt frávikini, vóru aðrar viðmerkingar frá Søfartsstyrelsen, um at:

- *Skolen skal fremover sørge for, at der bliver fulgt effektivt og hurtigt op på audit med korrigerende handlinger herunder skal man sikre, at de korrigerende handlinger er implementeret hos alle skolens ansatte.*
- *Skolen skal med jævne mellemrum efterprøve og kvalitetssikre skolens kerneydelser, f.eks. ved at gennemføre interne audits, afvigelses-rapportering og opfølgning på korrigerende handlinger.*
- *Skolen bør sikre et velfungerende elevråd, hvor de studerende er aktive med hensyn til at kunne bidrage til skolens og lærerens udvikling.*
- *Auditors anbefaler, at der bl.a. bliver fulgt op på alle afvigelser og observationer i denne rapport, ved at der gennemføres et eksternt audit inden udgangen af 2019.*

***Nýggj audit longu seinni í ár.***

Sambært frágreiðingini í 2019, er lítið og einki er hent í hesum týðandi máli síðani 2016. Nýggj frávik og nýggjar fráboðanir eru løgst afturat. Søfartsstyrelsen mælir til nýggja uttanhýsis audit seinni í ár.

***Úrslitið kann verða álvarsamt fyri virksemi skúlans.***

Landsgrannskoðanin dugir ikki at síggja annað enn, at úrslitið av auditeringini frá Søfartsstyrelsen kann verða álvarsamt fyri virksemi skúlans. Vit hava tí spurt Mentamálaráðið, hvussu ráðið metir úrslitið av auditeringini, og hvørji stig Mentamálaráðið hevur tikið fyri at bøta um viðurskiftini.

## 5.8 Granskingarráð Føroya (LG 2014/207-0236)

***Framvegis ógreiða um óbrúkta játtan.***

Í frágreiðingum seinastu árini hevur Landsgrannskoðanin umrøtt roknskaparreglugerðina hjá Granskingarráð Føroya og Granskingargrunninum. Reglugerðin, sum var frá 2012, var send Mentamálaráðnum, men varð ikki góðkend, tí ógreiða var, hvørt avlop av óbrúktari játtan hjá grunninum skuldi fella aftur til landskassan.

Í grannskoðanarprotokollini hjá Granskingargrunninum stóð, at *"í januar 2012 ger stjórin greitt, at til annað svar fyriliggur, verður hildið fram við verandi praksis."* Grannskoðarin mælti enn eina ferð til, at leiðslan skundaði undir at fáa svar frá Mentamálaráðnum.

Í uppskoti til samtyktar (Lm. nr. 37/2016) hildu løgtingsgrannskoðararnir, at tað var ikki nøktandi, at so long tíð gekk, uttan at prinsipiellu spurningarnir frá grunninum vórðu svaraðir og mæltu landsstýrismanninum til skjótast at taka stig til at fáa viðurskiftini í rættlag.

Í august 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Mentamálaráðið síðani seinastu frágreiðing m.a. hevði kannað, hvussu Mentanargrunnur landsins umsat sína játtan, og at ráðið fór saman við Fíggjarmálaráðnum at koma til endaliga niðurstøðu í 2017.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at eingin endalig avgerð er tikin um at broyta verandi praksis.

## 5.9 Málráðið (LG 2017/207-0241)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Málráðnum.

Sambært § 3, stk. 3, í Ll. nr. 59/2012 “um málráð” kann landsstýrismaðurin áseta neyvari reglur um at tilnevna Málráðið, og sambært § 4, stk. 2, ásetir landsstýrismaðurin starvsskipan og nærri reglur um virksemið hjá Málráðnum og starvsnevndini í samráði við Málráðið.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at starvsskipanirnar eru góðkendar 12. apríl 2018.

Tíðliga í 2017 mælti Landsgrannskoðanin til at dagføra peningastovnskonturnar hjá stovninum og at skráseta seinastu kontuna í Búskaparskipan landsins. Í juli 2019 boðaði landsstýrismaðurin frá, at kontan er skrásett í Leiðslukunningarskipanini, og at Málráðið hevur tríggjar kontur skrásettar.

## 5.10 Tjóðpallur Føroya (LG 2015/207-0242)

Í mars 2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Mentamálaráðið fór at tryggja, at roknskaparhaldið á Tjóðpallinum bleiv nøktandi skipað við mannagongdum sambært roknskaparkunngerðini. Sambært landsstýrismanninum fór Mentamálaráðið at tryggja, at greiðar ásetingar fóru at verða í reglugerðini um prísásetingar. Í juni 2018 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Mentamálaráðið hevði fingið uppskot til reglugerð.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at roknskaparreglugerðin enn ikki er góðkend.

## 5.11 Mentanargrunnur landsins (LG 2015/207-0242)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Mentanargrunninum.

Vanligar mannagongdir vóru ásettar í lóg, kunngerð og starvsskipan fyri grunnin. Aðrar mannagongdir vóru ikki niðurskrivaðar. Har lóg ella kunngerð ikki ásetti nærri boð, var tað ein kvalifiserað meting hjá nevndini, ið ásetti, hvør skuldi hava stuðul, og hvat ein hóskandi upphædd var. Landsgrannskoðanin helt, at tað kundi vera ein vansi fyri umsitingina, ella t.d. fyri eina nýggja nevnd, at ongar skrivligar mannagongdir vóru, og mælti til at lýsa mannagongdirnar í t.d. roknskaparreglugerðini.

Grunnurin sendi í januar 2016 eina roknskaparreglugerð til Mentamálaráðið at góðkenna.

Í august 2018 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Mentamálaráðið hevði heitt á Mentanargrunnin um at eftirhyggja og dagføra uppskotið til roknskaparreglugerð og senda tað aftur til ráðið at góðkenna.

Landsgrannskoðanin vísti á, at so leingi tað var ásett í skattalógini, at stuðul var A-inntøka, átti stuðulin at verða ávístur um skattaskipanina. Var ætlanin, at stuðulin ikki skuldi vera A-inntøka, máttu reglurnar broytast.

Í uppskoti til samtyktar (Lm. nr. 37/2016) mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum til beinanvegin at fáa tað í rættlag.

Í august 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at *"Mentamálaráðið hevur arbeitt saman við nýggju leiðslu grunsins at fáa greiðu á øllum teimum spurningum, ið Landsgrannskoðanin hevur víst á. Fundur hevur eisini verið við TAKS um útgjaldsmannagongdina. Enn er ikki komið heilt á mál."*

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2016 hildu løgtingsgrannskoðararnir tað ikki var nøktandi og mæltu enn eina ferð landsstýrismanninum til beinanvegin at fáa tað í rættlag.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Mentamálaráðið er í samskifti við Mentanargrunnin um ymisku viðurskiftini, sum vóru umtalað í frágreiðingini hjá Landsgrannskoðanini, og at roknskaparreglugerðin hereftir verður góðkend.

## 5.12 Kirkjugrunnurin og Tiltaksgrunnurin (LG 2018/207-0245)

### Lógargrundarlag

Í 2013 umrøddu vit lógargrundarlagið og spurdu, um t.d. kunngerðir vóru gjørdar við heimild í lóggávuni. Í 2019 hava vit gjøgnumgingið nakrar heimildir og uppgávur at skipa reglur og virksemi hjá fólkakirkjuni.

Fólkakirkjan er skipað sambært Ll. nr. 60/2007 "um fólkakirkjuna í Føroyum" og Ll. nr. 61/2007 "um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar". Aðrar serstakar lógir eru:

- Ll. nr. 27/2008 "um kirkjuráð og próstadømisráð",
- Ll. nr. 107/2009 "um val til kirkjuráð, próstadømisráð og stiftsstjórn",
- Anordning nr. 888/1999 "om ikræfttræden for Færøerne af lov om folkekirkens kirkebygninger",
- Ll. nr. 42/2008 "um at brúka kirkju og um limaskap í fólkakirkjuni", og
- Ll. nr. 48/2013 "um embæti og størv í fólkakirkjuni".

*Stiftsstjórnin*

Sum sæst í § 6 í lógini um fólkakirkjuna, eru Føroyar eitt biskupsdømi við stiftsstjórn. Tríggir limir eru í stjórnini. Biskupur er formaður. Landsstýrismaðurin tilnevnir ein lim, sum er embætisfólk í tænastu landsins, og limirnir í kirkjuráðunum velja ein lim. Sambært stk. 4 ásetir landsstýrismaðurin neyvari reglur um virksemið hjá stiftsstjórnini.

Í 2013 greiddi biskupur frá, at arbeitt varð eftir einum uppskoti til kunngerð "um virksemið hjá stiftsstjórnini", sum ikki var sett í gildi, hóast tað longu var klárt á ólavsøku 2007.

***Neyvari reglur enn ikki ásettar.***

Í september 2019 hevur biskupur greitt frá, at enn hevur landsstýrismaðurin ikki ásett neyvari reglur um virksemið hjá stiftsstjórnini, og stiftsstjórnin arbeiðir framvegis eftir uppskotinum til kunngerð.

*Kirkjusóknir og prestagjøld*

Eftir tilmæli frá biskupi og stiftsstjórnini skipar landsstýrismaðurin fólkakirkjuna í kirkjusóknir, prestagjøld og próstadømi.[12] Ongar broytingar eru gjørdar í kirkjusóknum, síðani yvirtøkuna av kirkjuni til føroyskt málsøki. Tvey nýggj prestagjøld eru skipað og kirkjan hevur fingið fimm nýggj embæti síðan á ólavsøku 2007.

[12] Sambært § 3, stk. 4, § 4, stk. 3, og § 5, stk. 1, í lógini um fólkakirkjuna.

*Tænastan í prestagjøldunum og kirkjuráðini*

Biskupur hevur evstu umsjón og umsorgan við biskupsdøminum, og hevur eisini umsjón við sóknarprestunum, og við kirkjuráðunum. Sambært § 7, stk. 3, ger biskupur nærri skipan fyri, hvussu tænastan í prestagjøldunum skal røkjast.

Spurdur, um og hvussu tílík skipan er gjørd, svarar biskupur, at kirkjuráðini eru rættiliga sjálvstøðug í sínum virki innan fyri lóg og regluverk fólkakirkjunnar. Biskupur hevur regluligt og virkið samskifti við umsitingina úti um landið, við fakligari hjálp og ráðgeving. Við atliti at roknskapi, umbygging og viðlíkahaldi er eftirlitið meira formligt, og próstadømisráðið tekur sær fyri stóran part av tí arbeiðinum, meðan biskupur/stiftsstjórnin er eftirlitsmyndugleiki.

Sambært § 19, stk. 3, í lógini "um kirkjuráð og próstadømisráð", ásetir stiftsstjórnin neyvari reglur um virksemið hjá kirkjuráðunum. Biskupur kunnaði um, at tað eru kirkjuráðini, ið venda sær til stiftsstjórnina. Stiftsstjórnin tekur ikki stig til at stýra kirkjuráðunum.

Vendir eitt kirkjuráð sær til umsitingina við ítøkiligum málum, kann stiftsstjórnin áseta neyvari reglur fyri virkseminum hjá kirkjuráðnum. Sambært biskupi hevur stiftsstjórnin ikki ásett skrivligar reglur, tí tað hevur ikki verið neyðugt ella aktuelt. Sambært § 14, stk. 4, kann kirkjuráðið gera starvsskipan, sum stiftsstjórnin góðkennir. Samskiftið við kirkjuráðini á hesum øki hevur verið vegleiðandi.

*Kirkjukassin*

Sambært § 1, stk. 1, í lógini "um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar" umsita kirkjuráðini kirkjukassarnar í kirkjusóknunum. Inntøkurnar eru avkast av ogn kirkjunnar, talvupeningur til frama fyri kirkjuna og gjøld fyri at nýta kirkjuna umframt avlopið í kirkjukassanum árið fyri. Kirkjugrunnurin fíggjar tann partin av góðkendu útreiðslunum, sum inntøkurnar hjá kirkjukassanum ikki røkka til.

Í § 3, stk. 1, eru ásetingar um tær útreiðslur, kirkjukassin fíggjar. Sambært stk. 5 ásetir landsstýrismaðurin eftir tilmæli frá stiftsstjórnini neyvari reglur um tílík viðurskifti. Ásett verður, hvør samsýning kann vera til hjálparfólk, stødd av tiltøkupeningi og reglur fyri tann pening, sum verður savnaður inn í kirkjuni til at fremja arbeiðið í kirkjuliðnum.

Kirkjukassar kunni eisini hava inntøkur av staðbundnum kirkjuskatti til ávís endamál, umframt av talvupeningi til ávís endamál. Til at spara upp hava kirkjukassarnir serligar kontur. Sambært § 5, stk. 3, ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð, hvussu konturnar verða nýttar.

Kirkjuráðini gera fíggjarætlan fyri inntøkur og útreiðslur og senda próstadømisráðnum hana til góðkenningar í seinasta lagi 1. juni undan fíggjarárinum, sí § 6, stk. 1. Landsstýrismaðurin ásetir sambært stk. 2 reglur fyri, hvussu kirkjuráðini gera fíggjarætlanina. Somuleiðis ásetir landsstýrismaðurin reglur um roknskap, grannskoðan o.t.

***Uttanhýsis ráðgevi ger útkast til reglugerð.***

Biskupur hevur greitt frá, at landsstýrismaðurin hevur ikki ásett reglur hesum viðvíkjandi. Arbeiðið hevur drigið út, og fyri umleið tveimum árum síðan fekk stiftsstjórnin málið. Ein nevnd varð sett at gera uppskot til reglugerð. Komið varð ikki á mál. Á vári 2019 hevur biskupur sett ein uttanhýsis ráðgeva at greina tekstin og at gera eitt útkast til eina reglugerð, ið ætlanin er at fáa Mentamálaráðið at góðkenna, tillaga og síðan staðfesta. Tað arbeiðið verður eftir ætlan liðugt í oktober 2019.

Kirkjuráðini góðkenna roknskapirnar á fundi og senda teir til góðkendan grannskoðara. Kirkjuráðini senda síðani grannskoðaðu roknskapirnar til próstadømisráðið.

*Kirkjuskattur*

Landsstýrismaðurin ásetir kirkjuskattaprosentið eftir tilmæli frá stiftsstjórnini, sbrt. § 12, stk. 1. Tað kann í mesta lagi vera 0,65%. Landsstýrismaðurin kann eisini loyva staðbundnum kirkjuskatti. Staðbundni skatturin kann í mesta lagi vera 0,3%. Sambært § 15 ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð neyvari reglur um landskirkjuskatt og um staðbundnan kirkjuskatt.

***Eingin kunngerð er gjørd; brúka siðvenju.***

Sambært biskupi eru ongar reglur ásettar av politiska myndugleikanum, men mannagongdin er siðvenjan. Arbeiðið virkar væl, bæði at áseta kirkjuskattin og at taka støðu til staðbundnan kirkjuskatt. Fíggjarætlanin er eitt samstarv ímillum kirkjuráðini, próstadømisráðið og stiftsstjórnina. Niðurstøðan verður send landsstýrismanninum sum eitt tilmæli.

*Kirkjugrunnurin og Tiltaksgrunnurin*

Í § 18 er ásett, at stiftsstjórnin stjórnar Kirkjugrunninum. Inntøkur grunsins eru landskassastuðul, avkast av ognum grunsins og sjálvboðin gjøld, umframt landskirkjuskattur. Tá ið serligar umstøður tala fyri tí, kann stiftsstjórnin gjalda út úr Tiltaksgrunninum. Í § 19 eru ásetingar um raksturin hjá Kirkjugrunninum, t.d. lønir til sóknarprestar. Grunnurin eigur og rekur prestagarðar og biskupsgarðin.

Sambært § 21 kann stiftsstjórnin seta av ávísa, avmarkaða upphædd til ávís kirkjulig endamál. Landsstýrismaðurin kann sambært stk. 2 áseta neyvari reglur um tiltøkupening, m.a. um hvørji endamál hann kann fara til.

Stiftsstjórnin hevur ikki brúkt møguleikan við serligum tiltøkupeningi og landsstýrismaðurin hevur ongar reglur gjørt á økinum.

***Eingin kunngerð gjørd.***

Sambært § 25 ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð reglur um Kirkjugrunnin. Ásett verður, hvussu stiftsstjórnin stjórnar Kirkjugrunninum, og hvussu virksemið hjá Kirkjugrunninum skal vera skipað í mun til próstadømisráðið. Eingin kunngerð er gjørd við atliti at viðurskiftunum ímillum Kirkjugrunnin og próstadømisráðið.

Stiftsstjórnin stjórnar eisini Tiltaksgrunninum. Inntøkurnar eru inngjald og avlop úr Kirkjugrunninum. Tiltaksgrunnurin fíggjar serligan útreiðslutørv hjá Kirkjugrunninum. Landsstýrismaðurin kann sambært § 26, stk. 5, áseta neyvari reglur um Tiltaksgrunnin.

***Ongar neyvari reglur.***

Ongar neyvari reglur eru gjørdar um Tiltaksgrunnin.

*Bygningar fólkakirkjunnar*

Anordning om lov om folkekirkens kirkebygninger er galdandi fyri bygningar fólkakirkjunnar. Sambært biskupi verður arbeitt við einari nýggjari lóg um kirkjubygningar.

Sambært biskupi er tað ein almenn staðfesting millum kirkjunnar fólk, at lógin og reglugerðin um bygningar fólkakirkjunnar er als ikki nøktandi. Lógin er ein fløskuhálsur, tá ið hugsað verður um eldri kirkjur, kirkjur yvir 100 ár og friðaðar kirkjur. Tað er eitt álvarsmál fyri kirkjuna, tí meira enn helvtin av kirkjunum er í hesum eldra bólkinum.

Kjakið snýr seg um antin kirkjan er ein halgidómur og bygningur til nýtslu, ella hon er ein mentanararvur. Bæði sjónarmiðini eru í lógartekstinum. Tað er sera torført og viðhvørt ómøguligt at náa bæði sjónarmiðini í eini og somu kirkju. Sambært biskupi meta innankirkjuligu myndugleikarnir, at fyrr nevnda atlitið eigur at hava yvirvág.

Spurdur, vísir biskupur á, at tað er politiska fyrisitingin, sum hevur lógarsmíð um hendi, og hann veit ikki hvussu langt arbeiðið við nýggju lógini er komið.

*Nýtsla av kirkjuni og um limaskap í fólkakirkjuni*

Sambært § 7, stk. 2, §13 og § 16, stk. 2, í lógini um at brúka kirkjuna og um limaskap í fólkakirkjuni kann landsstýrismaðurin áseta neyvari reglur um limaskap og annað.

Í § 26 í lógini er ásett, at landsstýrismaðurin, eftir bindandi tilmæli frá biskupi, í kunngerð ásetir neyvari reglur um at brúka kirkjuna.

Landsstýrismaðurin hevur ongar neyvari reglur ásett um limaskap og annað.

***Ongar neyvari reglur.***

*Val til kirkjuráð*

Í lógini um val til kirkjuráð, próstadømisráð og stiftsstjórn eru nakrar heimildir at áseta neyvari reglur. Sambært § 34, § 41, stk. 2, og § 48, stk. 2, kann landsstýrismaðurin áseta gjøllari reglur um val, uppgerð, kunning o.a.

Biskupur hevur greitt frá, at reglur eru ásettar, og mannagongdin er væl lýst. Samskiftið við politisku fyrisitingina er gott, og arbeiðið væl skipað. Mentamálaráðið hevur lim í valnevndini til próstadømisráðið og stiftsstjórnina. Umsitingin hjá stiftsstjórnini samskipar valini.

## Roknskaparviðurskifti

Roknskapur verður gjørdur fyri kirkjukassarnar, Kirkjugrunnin og Tiltaksgrunnin. Teir eru ikki við í fíggjarlógini. Studningur til Kirkjugrunnin og landskirkjuskatturin eru tó í fíggjarlógini; kirkjuskatturin sum inntøka, ið verður flutt til Kirkjugrunnin. Roknskapirnir fyri Kirkjugrunnin og Tiltaksgrunnin eru skrásettir í Búskaparskipan landsins, men eru ikki við í landsroknskapinum.

*Kirkjugrunnurin*

§ 23, stk. 1, í lógini um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar ásetir, at stiftsstjórin á hvørjum ári sendir landsstýrismanninum uppskot til fíggjarætlan til góðkenningar. Fíggjarætlanin kann, frároknað sáttmálabundnar lønarhækkingar, ikki vera meira enn 10 prosent hægri enn miðal fíggjarætlanin seinastu 4 árini.

Roknskapartøl fyri Kirkjugrunnin seinastu árini:

*t.kr.*

| Rakstur | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 14.701 | 15.568 | 16.005 | 16.909 | 17.271 | 18.828 |
| Keyp av vørum og tænastum | 2.576 | 2.933 | 3.345 | 3.951 | 4.483 | 3.386 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 693 | 713 | 802 | 509 | 466 | 615 |
| Leiga, viðlíkah. og skattur | 5.069 | 2.167 | 2.850 | 2.359 | 2.353 | 1.889 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | 133 | 121 | 103 | 107 | 79 | 79 |
| Søla av vørum og tænastum | -308 | -299 | -318 | -327 | -295 | -337 |
| Útvegan av løgu o.ø. | 0 | 0 | 0 | 2.664 | 1.332 | 0 |
| Stuðul til annað virksemi | 25.448 | 28.102 | 28.849 | 34.598 | 35.577 | 31.007 |
| Skattur og avgjøld | -39.064 | -42.997 | -45.271 | -53.015 | -55.288 | -51.587 |
| Vanligar flytingarinntøkur | -8.192 | -9.030 | -9.030 | -9.000 | -9.000 | -9.000 |
| Rentuinnt. og vinningsbýti | -349 | -252 | -397 | -72 | 0 | 146 |
| Innanh. flytingar (útr.) | 0 | 2.031 | 1.922 | 349 | 1.905 | 4.100 |
| Keyps-MVG | 1.324 | 943 | 1.140 | 968 | 1.117 | 874 |
| Innanh. flytingar (innt.) | -2.031 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |

Úrslitið hjá Kirkjugrunninum verður flutt í Tiltaksgrunnin. Tað sæst aftur á upphæddunum, sum eru skrásettar á innanhýsis flytingum.

*t.kr.*

| Fíggjarstøða | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 0120. Grundøki | 355 | 355 | 355 | 355 | 355 | 355 |
| 0131. Bygningar | 17.600 | 17.600 | 17.600 | 18.932 | 17.600 | 17.600 |
| 0139. Samanlagdar avskrivingar | -17.600 | -17.600 | -17.600 | -17.600 | -17.600 | -17.600 |
| 0221. Keyp av virðisbrøvum | 12.047 | 12.047 | 2.016 | 0 | 0 | 0 |
| 0330. Persónsskattur | 861 | 848 | 881 | 928 | 986 | 1.053 |
| 0360. Tøknilig millumrokning | 0 | 0 | 72 | -208 | -1.258 | -822 |
| 0363. Millumrokning við landsk. | -23.735 | -26.916 | -28.264 | -25.378 | -25.217 | -30.212 |
| 0371. Onnur áogn | 246 | 0 | 3 | 25 | 0 | 0 |
| 0416. Kontur í Landsbankanum | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 19.584 |
| 0429. Banka- og girokont. (onnur) | 13.309 | 18.361 | 27.920 | 26.789 | 28.433 | 12.791 |
| 0881. Ikki inntøkuført – gávur o.t. | -256 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0888. Skuld, annað | -381 | -1.789 | -291 | -1.322 | -1.180 | -307 |
| 0889. Skyldur, ikki endaligar | -2.446 | -2.906 | -2.692 | -2.521 | -2.119 | -2.442 |

### *Roknskaparhald o.t.*

Stiftsstjórnin hevur eina góðkenda roknskaparreglugerð frá 2010. Reglugerðin fatar um Kirkjugrunnin og Tiltaksgrunnin.

### *Ognaryvirlit*

Stiftstjórnin arbeiðir við at gera ognaryvirlit fyri hvønn garð og ætlar at skráseta allan útbúnað í Búskaparskipan landsins.

### *Gjaldføri*

***Eingin reglugerð.***

Stiftsstjórnin hevur ongan kontantkassa, men hevur tvey gjaldkort, sum fíggjarleiðarin og stiftsfulltrúin umsita. Í 2013 var ætlanin at orða eina reglugerð um kort og nýtslu, sum skuldi staðfestast av stiftsstjórnini. Í 2019 spurdu vit aftur, um reglugerðin var gjørd, men fingu ikki svar.

Við árslok 2018 vóru tilsamans 12,8 mió.kr. á 23 peningastovnskontum skrásettar í Búskaparskipan landsins. Rentuinntøkurnar í 2018 vóru 270 t.kr.

Stiftsstjórnin hevur eisini gjørt avtalu við Landsbankan um at umsita aðrar 20 mió.kr. Í 2018 vóru 416 t.kr. í halli. Við árslok 2018 var upphæddin tí 19,6 mió.kr.

Landsgrannskoðanin hevur stemmað konturnar av við saldurnar, sum vóru við árslok 2018 í Búskaparskipan landsins. Vit høvdu onki at finnast at.

### *Rakstrarútreiðslur*

Kirkjugrunnurin rindar fyri útreiðslur av skrivstovum hjá prestunum, herundir internet og fartelefon. Prestarnir rinda 33 kr. um mánaðin fyri egna telefonnýtslu. Prestarnir rinda sjálvir fyri el og olju, og teir fáa endurgoldið 15% av oljuútreiðslunum, og fasta gjaldið og 10% av elútreiðslunum.

Í onkrum føri hevur Kirkjugrunnurin goldið beinleiðis til elveitaran. Tað er fyri tríggjar garðar, har sóknarprestarnir fyribils eru loystir frá bústaðarskylduni, tí garðarnir skulu umvælast.

Prestar, løntir eftir sáttmála millum Kirkeministeriet og Den danske præsteforening fáa fast gjald fyri ferðing innanlands, meðan prestar løntir eftir semju millum Prestafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið fáa m.a. endurgjald fyri koyring í egnum bili sambært rundskrivi Fíggjarmálaráðsins frá 28. mars 2007.

Sambært semju millum Prestafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið verður ferðaendurgjald latið eftir somu treytum sum hjá tænastumonnum landsins. Tá ið prestar verða bidnir um at halda gudstænastu uttanlands í sambandi við umboðan ella kirkjuliga hátíð ella stevnu hjá grannalondum, stendur tað prestunum í boði at taka makan við,

og siðvenja er, at Kirkjugrunnurin tá rindar fyri ferðing og uppihald. Í 2013 greiddi biskupur frá, at hann fór at taka stig til at gera reglugerð um viðurskiftini.

Spurdur, um tílík reglugerð er gjørd, svarar biskupur, at stiftsstjórnin metir málið verða avgreitt við svarinum, ið Landsgrannskoðanin fekk 22. mars 2013, nevniliga at stiftsstjórnin rindar fyri ferðing og uppihald hjá makanum, tí tað er kirkjulig siðvenja, at makin hjá presti fær møguleikan at fara við til kirkjuligar tænastur uttanlands. Talan er í høvuðsheitum um gjald fyri ferðaseðilin. Kirkjuligu tænasturnar talan er um, eru guds-tænastur og umboðan í sambandi við kirkjuliga hátíð/stevnu hjá grannalondunum. Er prestur uttanlands í embætisørindum so sum fakligum fundi, nevndararbeiði ella á skeiði, er makin ikki við á ferðini.

*Tiltaksgrunnurin*

Einasta rørsla í rakstrinum hjá Tiltaksgrunninum er, at úrslitið frá Kirkjugrunninum er flutt til Tiltaksgrunnin. Avlopini í 2017 og 2018 vóru ávikavist 1,9 mió.kr. og 4,1 mió.kr. Við árslok 2018 var samlaða ognin hjá Tiltaksgrunninum 31,2 mió.kr.

*Kirkjukassin, fíggjarætlan og roknskapur*

Sambært § 7 í lógini um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar boðar próstadømisráðið umboðum fyri kirkjuráðini til samráð, har fíggjarætlanirnar verða viðgjørdar og raðfestar. Við støði í viðgerðini gevur próstadømisráðið fyri 15. november stiftsstjórnini boð um, hvussu stór upphæddin verður at krevja inn við landskirkjuskatti.

## Onnur viðurskifti

***Brúka almennar reglur.***

Fólkakirkjan er ikki samanrunnin partur av landsfyrisitingini. Biskupur hevur greitt frá, at tey tó brúka viðkomandi almennar reglur. Ávís frávik eru á onkrum øki, tí fólkakirkjan er ein kirkja og ikki eitt verk. Tilgongdin at seta fólk í embæti og ein møgulig uppsøgn fylgir almennu reglunum á økinum.

Tá ið embæti sum sóknarprestur verður lýst leyst at søkja, innstilla kirkjuráðini ein skikkaðan umsøkjara og skulu ikki grundgeva fyri sínari avgerð. Landsstýrismaðurin setir sóknarprestar eftir tilmæli frá biskupi.

Stiftsstjórnin og næstan allir prestarnir eru við í Landsneti. Rakstraravtala er gjørd við Landsnet.

## Viðmerkingar í seinastu frágreiðingunum

Kirkjugrunnurin hevur áður verið umrøddur í frágreiðingum frá Landsgrannskoðanini.

Í fleiri ár hevur Landsgrannskoðanin víst á, at sambært Ll. nr. 60/2007 “um fólkakirkjuna í Føroyum” ásetir landsstýrismaðurin neyvari reglur um virksemið hjá stiftsstjórnini, og sambært Ll. nr. 61/2007 “um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar” ásetir landsstýrismaðurin reglur fyri, hvussu kirkjuráðini gera fíggjarætlanir.

Í september 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ætlanin var at gera kunngerðirnar í 2015, og í august 2017 upplýsti landsstýrismaðurin, at enn varð arbeitt við kunn-gerðunum.

Í uppskoti til samtyktar at góðkenna landsroknskapin 2016 vóru løgtingsgrann-skoðararnir ónøgdir við, at kunngerðirnar enn ikki vóru gjørdar, hóast meira enn 10 ár vóru liðin, síðani lógirnar komu í gildi.

Í august 2018 ásannaði Mentamálaráðið, at gott hevði verið, um kunngerðir vórðu gjørdar; men av tí at virksemið var í hampiliga tryggari legu, hevði Mentamálaráðið fyri ein part valt at raðfesta annað virksemi, og lutvíst høvdu viðurskifti, ið ráðið ikki var harri yvir, kravt stóran part av teirri avmarkaðu orku, ið var til meira yvirskipaða málsviðgerð viðvíkjandi kirkjuøkinum. Tí var arbeiðið ikki gjørt enn.

***Mentamálaráðið hevur ikki raðfest kunngerðirnar.***

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Mentamálaráðið heldur, at virksemið enn er í hampiliga tryggari legu, og hevur ráðið tí ikki raðfest hesar kunngerðirnar, og at einki nýtt er hent í málinum síðan seinastu frágreiðing.

## 5.13 Ítróttahøll á Sandoynni (LG 2018-207-0246)

Í 2017 vóru 485 t.kr. játtaðar til endaliga avhendan av ítróttahøllini á Sandoynni, harav 289 t.kr. vóru til at rinda kostnaðin at tinglýsa eitt veðskuldabræv sum 1. veðrætt í ognini. Veðskuldarbrævið varð ikki lýst í 2017; og Mentamálaráðið bað um at fáa upphæddina støðlaða, tí tinglýsingin fór at verða avgreidd eftir ársskiftið.

Í 2018 eru tær 289 t.kr. inntøkuførdar í roknskapinum, uttan at nøkur útreiðsla er til tinglýsing. Landsgrannskoðanin hevur í august 2019 spurt Mentamálaráðið um veðbrævið er tinglýst, og um ítróttahøllin er avhendað.

# 6. Heilsu- og innlendismál

## 6.1 Heilsu- og innlendismálaráðið (LG 2016/211-0111)

Í seinastu frágreiðing greiddi Heilsu- og innlendismálaráðið frá, at bíðað var við dagføra roknskaparreglugerðina, sum var frá 2013, til Gjaldstovan og Fíggjarmálaráðið høvdu dagført reglurnar. Roknskaparreglugerðin var ikki dagførd, men ráðið hevði dagført, hvørji starvsfólk høvdu atgongd til rokningarverkgongd og web-løn, og gjørt ískoytisskjal viðvíkjandi sjúklingatryggingini.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ikki øll roknskaparreglugerðin er dagførd. Tað arbeiðið verður gjørt saman við Almannamálaráðnum vegna fleiri felags funktiónir, og verður væntandi liðugt um hálvan august í ár.

***Roknskaparreglugerðin ikki heilt liðug enn.***

## 6.2 Fólkaheilsuráðið (LG 2016/211-0201)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Fólkaheilsuráðnum.

Heilsu- og innlendismálaráðið hevði fingið eitt dagført uppskot til roknskaparreglugerð frá stovninum. Landsstýrismaðurin skal sambært § 4, í Ll. nr. 56/2000 “um Fólkaheilsuráð”, áseta starvsskipan fyri stovnin eftir tilmæli frá Fólkaheilsuráðnum.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at ráðið saman við stovninum hevur gjørt dagføringar í roknskaparreglugerðini, og verður reglugerðin undirskrivað skjótt. Starvsskipanin varð orðað og avgreidd í desember 2018.

## 6.3 Heilsutrygd (LG 2015/211-0202)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Heilsutrygd.

Í august 2018 ætlaði Heilsutrygd at broyta roknskaparreglugerðina, nú Gigni var lagt til Heilsutrygd. Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at roknskaparreglugerðin enn er óbroytt, men Heilsutrygd ætlar at byrja arbeiðið eftir summarfrítíðina.

***Roknskaparreglugerðin er ikki dagførd, síðani Gigni er lagt til Heilsutrygd.***

## 6.4 Ílegusavnið (LG 2018/211-0202)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Ílegusavninum. Ílegusavnið er føroyski biobankin, sum umsitur allar upplýsingar um blóðroyndir, vevnaðarroyndir, staðfestar sjúkur og ættarbond hjá føroyingum. Uppgávan hjá stovninum er at tryggja, at upplýsingarnar eru rættar, at tær verða væl vardar og goymdar trygt. Lógargrundarlagið er Ll. nr. 62/2005 “um gransking í mannaílegum”.

Játtanin er á høvuðskontu 11.20.2.11. Tríggjar undirkontur eru. Undirkonta 21 er til verkætlanina FarGen, hvørs endamál er at menna granskingarumhvørvið og førleikarnar at fyribyrgja og viðgera sjúku í Føroyum. Undirkonta 45 er til stuðulsfíggjað virksemi. Peningurin, sum kemur inn, t.d. stuðul til verkætlanir, verður brúktur til samsýningar og tilfar til verkætlanir.

***Roknskaparreglugerðin ikki dagførd síðani 2010.***

Roknskaparreglugerðin hjá stovninum er frá 2010. Sambært landsstýrismanninum verður reglugerðin endurskoðað og dagførd í næstum.

## Lønir

Við stakroyndum kannaðu vit nakrar lønir, um tær vóru í samsvari við lýsingar, setanarskriv, prógv o.a. Viðbótin og eftirlønin hjá stjóranum vóru ikki í samsvari við sáttmála og lønartalvu. Viðbótin var ongantíð reguleráð, og eftirløn var ikki roknað av viðbótini. Eftirsíðan er feilurin rættaður.

### *Skráseting av arbeiðstíð*

***Arbeiðstíðin verður ikki hóskandi skrásett.***

Landsgrannskoðanin vísti á, at sambært roknskaparkunngerðini skal stovnsleiðari skipa fyri hóskandi skráseting av arbeiðstíð, fráveru, frítíð o.t., fyri at tryggja, at lønarútgjaldingarnar eru rættar. Vit mæltu til, at øll starvsfólkini skráseta arbeiðstíðina á hóskandi hátt.

Sambært stjóranum hevur stovnurin hóskandi tíðarskráseting við at skráseta sjúku, feriu, yvirarbeiði og avspáking. Starvsfólk fáa ikki serstaka fríviku goldna út, um tey ikki kunnu prógva, at tey hava vunnið rætt til tað.

Landsstýrismaðurin hevur víst Ílegusavninum á, at kunngerðin skal haldast, og biðið stovnin skráseta arbeiðstíðina skipað frameftir.

### *Aðrar samsýningar*

Ílegusavnið hevur í onkrum føri latið gávukort sum samsýning fyri arbeiði. Landsgrannskoðanin vísti á, at allar lønir skulu gjaldast um felagslønarskipanina hjá Gjaldstovuni.

Ílegusavnið ynskir ikki at eyðmerkja persónar, ið lata tilfar/royndir til verkætlanir, við at rinda endurgjøld umvegis lønarskipan, tí talan er um viðbreknar upplýsingar. Eftir siðvenju samsýnir Ílegusavnið teimum við gávukortum. Stovnurin hevur boðið luttakarum at fáa ferðaútreiðslur endurgoldnar, men tað er ein avbjóðing at rinda endurgjøld navnleyst. Yvirlit yvir, hvørji hava fingið gávukort, er til taks á Ílegusavninum.

## Útreiðslur

### *Ferðaútreiðslur*

Útreiðslur fyri gisting uttanlands eru onkuntíð hægri enn mest loyvdar upphæddir. Landsgrannskoðanin mælti til at skjalfesta grundgevingarnar fyri, hví ikki ber til at halda seg innan fyri ásettu upphæddirnar. Eisini mæltu vit til at lýsa ørindi við ferðum neyvari, og at hava betri eftirlit við ferðauppgerðum.

Starvsfólk á Ílegusavninum hava fyri tað mesta brúkt hýruvognar til flutning, tó at almenna ferðasambandið skal nýtast í størst møguligan mun. Stjórin rindar ferðaútreiðslur við Eurocard. Landsgrannskoðanin mælti til at nágreina, hvar koyrt er, fyri at skjalfesta, hvat goldið er fyri, og at ferðast er fyri arbeiðsgevaran.

### *Bløð, mánaðarlig gjøld o.t.*

Ílegusavnið hevur rindað *mánaðarlig* gjøld fyri talgild hald av fjølmiðlum, goymsluplass á netinum og Dropbox. Tá ið haldini einans eru tøk hjá stjóranum, rokningarnar eru stílaðar til stjóran, og onkur hald líkjast dagdvølju, ivast Landsgrannskoðanin í, um tað eru útreiðslur hjá Ílegusavninum.

Sambært Ílegusavninum er talan um tíðarrit, sum eru fremst við rákinum innan biobankar, heilsugransking og serliga genomgransking. Faklitteraturur og semi faklitteraturur er neyðugt fyri at kunna virka so væl sum gjørligt í starvinum, og er eisini partur av netverksuppbyggjan.

Landsstýrismaðurin vísir á, at stovnsleiðarin er best førur fyri at meta um tørvin, og Heilsu- og innlendismálaráðið hevur biðið stovnin vísa skynsemi og møguliga víðka atgongdina til onnur starvsfólk.

*Umboðan*

Ílegusavnið hevur bjóðað starvsfólki og øðrum at venja í venjingarmiðstøð. Stovnurin hevur í 2019 goldið 42 t.kr. fyri fitnesshald, og latið starvsfólk venja 2 tímar um vikuna í arbeiðstíðini. Stjórin vísir á, at endamálið við Ílegusavninum er eisini at skapa fortreytir fyri og stimbra gransking í mannaílegum í Føroyum, soleiðis at slík gransking kann vera við til, sum tað stendur í ílegulógini § 1, stk. 2, litra c, at menna granskingarumhvørvið. Fyri at menna granskingarumhvørvið er starvsfólkarøkt av týdningi.

Starvsfólkarøkt er umráðandi fyri trivnaðin, og kanningar vísa, at likamlig rørsla hevur jaliga ávirkan á avrik á arbeiðsplássinum. Stjórin hevur mett tað vera etiskt rætt, at Ílegusavnið sum arbeiðspláss eggjar starvsfólkum at vera likamliga virkin, og vónar, at hetta tilboð kann viðvirka til, at starvsfólkini halda fram, eisini tá ið haldið, ið er fíggjað av Ílegusavninum, gongur út. Stjórin heldur seg hava tikið neyðug búskaparlig atlit, tó at upphæddin er høg.

Landsgrannskoðanin vísti á, at gjøld til fitness vanliga eru privatar útreiðslur, og at tað ikki kann sigast at hoyra til arbeiðið at íðka fitness í arbeiðstíðini, uttan lønarmiss.

***Landsgrannskoðanin vísti á, at gjøld til hald í venjingarmiðstøð eru privatar útreiðslur.***

Í august 2019 hevur Heilsu- og innlendismálaráðið boðað frá, at ráðið er samt við Landsgrannskoðanini, og hevur heitt á stovnin um at fáa viðurskiftini í rættlag.

*Søla av tænastum*

Í roknskaparreglugerðini eru ongar reglur um umsitingargjøld. Stovnurin brúkar danskar takstir, sum “Undervisnings- og Forskningsministeriet” hevur ásett. Ílegusavnið heldur tað vera torført at áseta umsitingargjald í roknskaparreglugerðini. Sambært Heilsu- og innlendismálaráðnum verða reglur um umsitingargjald í dagførdu roknskaparreglugerðini.

## Gjaldkort

Landsgrannskoðanin mælti til at rinda allar rokningar um Búskaparskipan landsins, sum til ber at avgreiða tann vegin.

***Landsgrannskoðanin mælti til at rinda allar rokningar um Búskaparskipan landsins.***

Ílegusavnið hevur útvegað sær Eurocard í 2016. Stovnurin hevði onga heimildarváttan, og hevði ikki fingið loyvi frá Gjaldstovuni.

Landsgrannskoðanin gjørdi vart við, at tað eigur als ikki at koma fyri, at reiður peningur verður tikin út. Avgjald fyri kontantúttøku er heldur ikki útreiðsla, sum landið eigur at gjalda.

***Reiður peningur eigur ikki at verða tikin út við gjaldkortinum.***

Í september 2019 hevur Heilsu- og innlendismálaráðið sent Ílegusavninum áheitan um at fáa viðurskiftini í rættlag og fylgja reglunum á økinum.

*Rentur og rykkjaragjøld*

Sum meginregla skulu almennir stovnar rinda undan gjaldkomudegi fyri at sleppa undan rentu. Ílegusavnið hevur goldið rentu og rykkjaragjøld fyri ov seint goldnar rokningar frá Eurocard. Landsgrannskoðanin mælti til at seta mannagongdir í verk, sum tryggja, at tað ikki er neyðugt at rinda rykkjaragjøld og rentur fyri ov seint goldnar rokningar.

**KT trygd, skoðan o.a.**
Ílegusavnið hevur ásett ein *"Kunningartrygdarpolitikk (KT politikk) hjá Ílegusavninum (ÍLS) hvat viðvíkur fyrisitingarkervið í J. C. Svabosgøtu 43 og Progeny-skipanini"*.

KT trygdarpolitikkurin, sum byggir á ISO 27001 og er galdandi fyri nevndu skipanir, er dagførdur 2. mars 2017. Tað er í tráð við tágaldandi rundskriv frá Vinnumálaráðnum frá juni 2007 "um at seta í verk KT trygd".

Nýggja rundskrivið um KT trygd frá 29. apríl 2019 ásetir, at tær skipanir og skráir, sum liggja uttan fyri Landsnet skulu eisini verða skoðaðar av KT grannskoðara, sum Fíggjarmálaráðið hevur góðkent.

***Ílegusavnið kemur undir høg KT trygdarkrøv.***

Ílegusavnið hevur ikki fingið boð frá Fíggjarmálaráðnum um, at stovnurin hevur serliga týðandi upplýsingar, soleiðis at hann kemur undir høg KT trygdarkrøv, vísandi til punkt 7.2 í nýggja rundskrivinum. Stovnurin vísti á, at tey vita, at Ílegusavnið kemur undir høg KT trygdarkrøv, og at stovnurin hevur SLA avtalur við veitarar, sum hýsa dátum uttan fyri Landsnet.

Sambært stjóranum skoðar Gjaldstovan fyrisitingarkervið, og skoðan hevur verið fyri stuttum.

Landssjúkrahúsið hýsir hinum partinum, sum fevnir um Progeny-skipanirnar, og tær verða umsitnar av einum smápartafelag, og mentar av einum øðrum smápartafelag. Skipanirnar sjálvar eru ikki skoðaðar, men umstøðurnar kring servararúm og fysiska trygdin á Landssjúkrahúsinum eru skoðaðar av Elektron í 2018.

***Ílegusavnið skal skoðast av góðkendum KT grannskoðara.***

Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Ílegusavnið skal skoðast av góðkendum KT grannskoðara, og at uttanhýsis skoðan er á raðfestingarlistanum, tá ið fígging er til tess.

*iCloud-goymsla og Dropbox*
Ílegusavnið rindar fyri hald av "iCloud-lagringsplads" og fyri Dropbox. Sambært stjóranum verða m.a trygdaravrit av telefon og teldli goymd í iCloud. Í Dropbox verða t.d. framløgur goymdar, og eisini er samskifti við totalt anonymiserað data, t.v.s. at tað t.d. ber til fáa atgongd til genomdata úr Biobank.

Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at talan er um genomdata úr Biobank UK, og ikki teirra biobanka, og tí er Dropbox eitt hent amboð hjá stovninum.

## 6.5 Elveiting, umsiting (LG 2017/211-0321)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin Elveiting, umsiting á høvuðskontu 11.32.1.06. Umhvørvisstovan umsitur játtanina.

*Roknskaparviðurskifti*
Kostnaðurin av umsitingini seinastu 5 árini:

*t.kr.*

| Heiti | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 1.158 | 1.178 | 1.371 | 1.536 | 1.267 |
| Keyp av vørum, tæn. og útbúnaði | 448 | 332 | 798 | 1.755 | 1.095 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 0 | 10 | 152 | 0 | 2 |
| Eftirlits- og umsjónaravgjøld | -1.915 | -1.799 | -2.322 | -3.291 | -2.463 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn (útr) | 308 | 286 | 0 | 0 | 376 |
| Inn. flyt. millum alm. stovn (innt) | 0 | 0 | 0 | 0 | -277 |
| **Tilsamans** | **0** | **7** | **0** | **0** | **0** |

Allar fyritøkur, ið hava fingið framleiðsluloyvi, skulu rinda gjald til fígging av útreiðslunum til umsitingina av elveitingarlógini[13]. Almennar og privatar fyritøkur og kommunur rinda fyri kostnaðin, ið Umhvørvisstovan hevur í tí einstaka málinum[14].

Fimm fólk starvaðust á deildini Orka, harav tvey vóru lønt av Elveiting burturav. Elfeløgini rindaðu tilsamans 3,3 mió.kr. í 2017, harav lønir vóru 1,5 mió.kr. Elveiting rindaði 2/43 av felagsútreiðslum, umframt 152 t.kr. at umbyggja hølir í 2016.

Sambært Umhvørvisstovuni stóðst meginparturin av umbyggingini av, at orkudeildin varð flutt til Umhvørvisstovuna. Elveiting skuldi gjalda sín part, t.e. 2/5 av samlaðu umbyggingini í 2016, sum svarar til 152 t.kr.

Í august 2018 vísti Heilsu- og innlendismálaráðið á, at tá ið felags rakstur og umsitingarfólk fevndu um fleiri høvuðskontur, átti tað at verða gjørt upp soleiðis, sum tað var lýst í kontuskipanini undir høvuðsslagi 7. Í juli 2019 hevur ráðið kunnað um, at Umhvørvisstovan tekur viðmerkingarnar til eftirtektar.

*Keyp og útbjóðing*

Elveiting bað ikki um tilboð frá fleiri, tá ið stovnurin keypti tænastur. Sambært Umhvørvisstovuni valdu tey ráðgevar eftir uppgávuslagi, og í summum førum fór rokningin upp um 50 t.kr. Elveiting bað um tilboð frá trimum veitarum til pumpukraftverk í Vestmanna.

***Landsgrannskoðanin mælti til at bjóða keyp út alment.***

Vísandi til reglurnar um at bjóða keyp av vørum og tænastum hjá tí almenna út ímillum fleiri veitarar og til rundskrivið um at taka búskaparlig atlit, mælti Landsgrannskoðanin til, at størri keyp vórðu boðin út.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Umhvørvisstovan hevur tikið viðmerkingarnar frá Landsgrannskoðanini til eftirtektar, og fer í størri mun at bjóða út, hóast stovnurin metir, at tað í onkrum førum ikki er mest skynsamt at bjóða út. Ráðið hevur biðið Umhvørvisstovuna biðja Keypsportalin um undantøku, tá ið stovnurin ikki bjóðar keyp út alment.

*Flyting ímillum høvuðskontur*

***Umhvørvisstovan fer at syrgja fyri, at útreiðslur verða goldnar av rættari játtan.***

Vit vístu á, at tað var ikki heimild at rinda fyri rokning av aðrari høvuðskontu, enn har útreiðslan hoyrdi til. Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Umhvørvisstovan tekur viðmerkingarnar til eftirtektar og fer at syrgja fyri, at útreiðslur verða goldnar av rættari játtan.

## 6.6 Ferð á grøna orku (LG 2017/211-0321)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin “Ferð á grøna orku” á høvuðskontu 11.32.1.06. Umhvørvisstovan umsat játtanina.

Í 2016 rindaði “Ferð á grøna orku” slakar 160 t.kr. fyri borihol til Búnaðardepilin og til Fiskaaling við Áir. Boriholið til Búnaðardepilin varð borað í januar/februar 2017. Í 2018 var boriholið til Fiskaaling við Áir enn ikki borað.

Sambært Umhvørvisstovuni vóru boriholini, ið vóru goldin av “Ferð á grøna orku”, ogn hjá landinum, og fór stovnurin at bóka tey á støðisogn hjá Gjaldstovuni.

Landsgrannskoðanin vísti á, at roknskapirnir 2016 og 2017 hjá “Ferð á grøna orku” vóru skeivir, tá ið 160 t.kr. vóru útreiðsluførdar, uttan at nøkur vøra ella tænasta var

[13] Sambært K. nr. 121/2008 “um gjald fyri umsitingina av elveitingarlógini”.
[14] Sambært K. nr. 102/2012 “um gjøld hjá Umhvørvisstovuni fyri umsiting og eftirlit sambært lóggávuni á umhvørvisøkinum”.

fingin afturfyri[15]. Eisini undraðust vit á, at ein stovnur skuldi rinda so langt forút fyri eina tænastu. Um ein stovnur av onkrari góðari orsøk rindar forút fyri arbeiði, skal tað vísast greitt í roknskapinum[16].

***Útreiðslur og inntøkur skulu verða skrásettar, tá ið tær eru latnar.***

Í juli 2019 hevur Heilsu- og innlendismálaráðið kunnað um, at ráðið hevur mint Umhvørvisstovuna á, at útreiðslur og inntøkur, sum stava frá vørum og tænastuveitingum skulu verða skrásettar, tá ið tær eru latnar, og at ráðið hevði biðið Umhvørvisstovuna um at fáa hesi viðurskifti á beint. Umhvørvisstovan fer at venda sær til veitaran at fáa eina kreditnotu uppá veitingina, sum ikki varð latin. Stovnurin tekur annars viðmerkingarnar til eftirtektar, og fer at syrgja fyri, at hesi viðurskifti eru í lagi frameftir.

Í desember 2016 rindaði "Ferð á grøna orku" 176 t.kr. fyri sólselluanlegg, sum varð sett upp hjá privatari fyritøku, og í 2017 rindaði stovnurin 100 t.kr. fyri at seta anleggið upp. Hvørki keypið ella uppsetingin av anlegginum vóru boðin út alment.

Landsgrannskoðanin fekk avrit av nøkrum tollrokningum, sum vóru stílaðar til privatu fyritøkuna, men tær vístu ikki til fakturan, ið Umhvørvisstovan hevði goldið til útlendsku fyritøkuna.

Í juli 2019 hevur Heilsu- og innlendismálaráðið kunnað um, at tollingin er gjørd í tveimum. Í fyrsta lagi hevur fyritøkan tollavgreitt, men av tí at hetta varð gjørt eftir einum proformafaktura, varð neyðugt at gera eina rætting. Ta rættingina gjørdi Umhvørvisstovan og rindaði munin. Tað er orsøkin til, at fyrra tollrokningin ikki vísti til goldnu fakturarnar. Sambært Heilsu- og innlendismálaráðnum fer Umhvørvisstovan framyvir at syrgja fyri, at slíkt ikki hendir aftur.

## 6.7 Umhvørvisstovan (LG 2017/211-0374)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av Umhvørvisstovuni.

### Roknskaparviðurskifti

Í 2017 ætlaði Umhvørvisstovan at dagføra og umskriva roknskaparreglugerðina, ið var frá 2014, so hon kundi gerast eitt virkið amboð í bókhalds- og roknskapararbeiðinum.

Vit vístu á, at roknskapurin fyri inntøkufíggjaða virksemið var ikki í samsvari við játtanar- og roknskaparreglurnar; m.a. hevði Umhvørvisstovan flutt avlop/hall av inntøkufíggjaða virkseminum til fíggjarstøðuna.

Tilmælið hjá Landsgrannskoðanini um at fylgja roknskaparreglunum stóð við í 2018, og vit mæltu Umhvørvisstovuni til at leggja skjalprógv við øllum bókingum. Eisini mælti Landsgrannskoðanin til, at leiðslan við innanhýsis mannagongdum tryggjaði, at eftirlitsumhvørvið á roknskaparøkinum varð styrkt við virknum innaneftirliti, og at eftirlitini vórðu skjalfest.

Í juni 2018 greiddi Umhvørvisstovan frá, at Talgildu Føroyar fóru at hava stóra ávirkan á virksemið hjá stovninum, og at tað setti krøv til menning og dagføring av skipanum og mannagongdum. Umhvørvisstovan skuldi taka sær av rakstrinum, so hvørt talgildingin varð verksett. Tað setti eisini krøv á roknskaparliga økinum.

Umhvørvisstovan ætlaði at raðfesta fíggjarstýringina hægri og at seta ferð á dagføringina av roknskaparreglugerðini. Eisini fór Umhvørvisstovan at skipa eitt starv, sum skuldi hava dagligu fíggjarligu stýringina í tøttum samstarvi við stjóran.

[15] Sí § 13, stk. 2, í roknskaparkunngerðini.
[16] Sí § 13, stk. 4, í roknskaparkunngerðini.

Landsgrannskoðanin helt, at tað var eitt stig rætta vegin, at Umhvørvisstovan fór at raðfesta roknskaparøkið hægri.

***Roknskaparreglu-gerðin er góðkend, og fíggjarstýringin styrkt.***

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at roknskaparreglugerðin varð góðkend av Heilsu- og innlendismálaráðnum 1. januar 2019, og at ein fíggjarfulltrúi varð settur í starv fyri at styrkja fíggjarstýringina.

*Konteringar*

Landsgrannskoðanin vísti á nógvar skeivar konteringar. Inntøkur skulu ikki mótbókast útreiðslum. Landsgrannskoðanin helt, at um stovnurin lat stuðul, skuldu upphæddirnar bókast sum stuðul, t.d. undir høvuðsslagi 5 “Flytingarútreiðslur”.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Umhvørvisstovan fer at leggja seg eftir at kontera sambært krøvunum.

*Ferðakostnaður og starvsfólkakostnaður*

Tað gekk upp til eitt ár, til starvsfólk gjørdu tænastuferðir innanlands upp. Vit mæltu til at gera upp oftari, t.d. eina ferð um mánaðin, sum reglurnar frá Fíggjarmálaráðnum áseta. Umhvørvisstovan helt, at talan var um so smáar upphæddir, at tað als ikki var proportionalt at fylgja tilmælinum hjá Landsgrannskoðanini og gera upp eina ferð um mánaðin.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Umhvørvisstovan fer at bøta um hesi viðurskifti.

*Kassaeftirlit hjá Skógrøktini*

Landsgrannskoðanin mælti til, at kassin hjá Skógrøktini verður gjørdur upp regluliga og bókaður so hvørt í Búskaparskipan landsins.

Sambært Umhvørvisstovuni varð arbeitt við at leggja mannagongdirnar á Gróður-støðini í fasta legu, herundir handfaringina av kassaskipanini.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Umhvørvisstovan hevur arbeitt við málinum, og fer at bøta um kassauppgerðirnar, tá ið háárstíðin hjá Skógrøktini er av.

# 7. Almannamál

## 7.1 Almannamálaráðið (LG 2016/212-0111)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin, at Almannamálaráðið bíðaði við at dagføra roknskaparreglugerðina frá 2013, til Gjaldstovan og Fíggjarmálaráðið høvdu dagført reglurnar.

Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at roknskaparreglugerðin er ikki dagførd, men ætlanin er at dagføra hana í hesum árinum.

***Ætlanin er at dagføra roknskaparreglugerðina í 2019.***

## 7.2 Stuðulsjáttanir, § 12 Almannamál (LG 2017/212-0211)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av stuðulsumsitingini undir § 12. Almannamálaráðið var samt við Landsgrannskoðanini, at stuðulsmóttakarar lata roknskapir ov seint inn. Ráðið hevði átalað teir fyri ikki at halda tíðarfreistina, og nógvir høvdu svarað, at neyðug stig vórðu tikin, soleiðis at freistin varð hildin frá komandi ári.

Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at 8 feløg hava hildið tíðarfreistina. Ávís feløg hava trupulleikar av, at ársaðalfundurin ikki verður hildin, áðrenn tíðarfreistin fyri innlating er farin, og hava tey tí latið inn fyribilsroknskap, sum ikki er undirskrivaður av nevndini. 4 feløg lata vanliga tilfarið inn seinni í apríl ella í mai, og seinasti roknskapurin frá felagsskapi kemur inn í juni. Samanumtikið sigur landsstýrismaðurin tað vera ein trupulleika at fáa feløgini at halda tíðarfreistina.

***Ikki øll lata roknskapin inn til tíðina.***

*Frágreiðing, hvat stuðul er nýttur til*

Almannaverkið ætlaði at heita á feløgini um at syrgja fyri, at roknskapir framhaldandi skuldu innihalda serstaka frágreiðing um, hvussu stuðulin varð nýttur.

***Frágreiðing skal vera um, hvussu stuðulin er nýttur.***

Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at tað er ymiskt, hvussu frágreiðingin er, tí at onkrir roknskapir innihalda serstaka frágreiðing um, hvussu stuðulin er nýttur, og ein vísti til notur sum frágreiðing. Í nøkrum roknskapum verður greitt frá í leiðslufrágreiðingini, hvat stuðulin verður brúktur til.

*Grannskoðan eftir játtanarreglunum*

Í ongum føri vísti átekningin, at roknskapurin var grannskoðaður sambært reglunum í K. nr. 125/2011 “um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan”. Í flestu førum varð víst til góðan roknskaparsið, samsvarandi ársroknskaparlógini e.l.

Landsgrannskoðanin vísti á, at sambært § 22, stk. 2, nr. 6 í kunngerðini, skuldi grannskoðaði roknskapurin fáa eina átekning, sum vísir, at hann var grannskoðaður sambært reglunum í kunngerðini.

Í august 2017 tók Almannamálaráðið til eftirtektar, at tað ikki var nøktandi at grannskoða roknskap sambært roknskaparlógini, altjóða standardum e.t. og ætlaði at

seta øllum feløgum krøv um, at roknskapirnir skuldu grannskoðast samsvarandi kunngerð um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

***Váttað verður, at roknskapurin er grannskoðaður sambært K. nr. 125/2011.***

Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at fleiri av roknskapunum høvdu eina átekning, sum vísti, at teir vóru grannskoðaðir sambært reglunum í kunngerðini. Tríggir roknskapir høvdu ikki hesa átekningina, men tey feløgini sendu eina váttan frá grannskoðaranum um, at roknskapurin var grannskoðaður í tráð við kunngerðina. Almannamálaráðið fekk bert ein roknskap, har átekning ikki var til staðar, og eingin váttan kom frá grannskoðaranum; í tí førinum var talan um serligar umstøður. Roknskapirnir fyri Serflutningsskipan landsins og Barnaverndarstovuna hava ikki hesa átekning.

## 7.3 Almannaverkið (LG 2017/212-0211)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Almannaverkinum.

***Almannaverkið fyrisitur Trivnaðartænastur, sum tí rindar Almannaverkinum endurgjald fyri fyrisitingarútreiðslur.***

Trivnaðartænastur rinda Almannaverkinum endurgjald fyri fyrisitingarútreiðslur o.a.:

*t.kr.*

| | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Fyrisitingargjald o.a. | 4.374 | 4.519 | 9.189 | 10.302 | 10.657 |

Í fyrisitingarbygninginum húsast stovnar við trimum játtanum, t.e. Almannaverkið, Trivnaðardepilin og Endurmenning. Allar fyrisitingarútreiðslurnar vóru bókaðar á játtanina hjá Almannaverkinum á høvuðskontu 12.21.1.02.

Almannaverkið roknaði fyrisitingargjaldið út eftir einum býtislykli, sum var ein samanrenning av ymiskum viðurskiftum við útgangsstøði í 2012 og eftir, hvar útreiðslurnar í gamla Nærverkinum vórðu bókaðar. Reguleringar vóru gjørdar seinni. Almannaverkið helt, at býtislykilin gav eina rættvísandi mynd av veruligu útreiðslunum. Býtislykilin varð javnaður hvørt ár, tá ið samráðingar vóru millum Almannaverkið og Trivnaðartænastur um býtið av útreiðslunum.

Landsgrannskoðanin mælti Almannaverkinum til at skjalfesta neyvt, hvussu tey vóru komin til býtislykilin.

***Frágreiðing verður gjørd saman við býtislykli, ið verður eftirhugdur árliga.***

Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Almannaverkið hevur gjørt býtislykil fyri 2019 saman við einari frágreiðing, og at býtislykilin verður eftirhugdur hvørt ár í mun til broytingar í virkseminum.

### Roknskaparviðurskifti

Roknskaparreglugerðin var frá 2010. Almannaverkið hevði bíðað við at gera nýggja reglugerð, tí Gjaldstovan hevði arbeitt við at gera nýtt roknskaparrundskriv. Almannaverkið helt, at galdandi vegleiðing hóskaði ikki til ein so samansettan stovn sum Almannaverkið.

***Roknskaparreglugerðin er ikki dagført.***

Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Almannaverkið er komið væl ávegis at dagføra roknskaparreglugerðina, og miðar eftir, at arbeiðið verður liðugt í heyst.

*Peningastovnskontur*

Almannaverkið hevði tvær peningastovnskontur, sum fyri tað mesta vórðu brúktar til lógarbundin útgjøld um Viðskiftafólkaskipanina (VFS). Sambært Almannaverkinum minkaðu útgjøldini av peningastovnskontunum, so hvørt sum útgjøld vórðu flutt yvir í Heildarskipanina.

Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at VFS verður ikki brúkt longur, og útgjøldini fara umvegis skipanina hjá Gjaldstovuni. Peningastovnskonturnar verða eisini brúktar til ymiskt annað, og Almannaverkið fer at samla øll viðurskifti undir eina peningastovnskontu og niðurleggja hina.

*Lønir*

Starvsfólkini skrásettu arbeiðstíðina í Totalview og kundu eiga ella skylda 20 tímar. Landsgrannskoðanin helt tað vera í meira lagi, at 40 av 115 starvsfólkum áttu ella skyldaðu meira, enn innanhýsis reglurnar áseta.

***Fleiri starvsfólk áttu ella skyldaðu fleiri tímar, enn innanhýsis reglurnar loyva.***

Sambært Almannaverkinum vóru tímasaldurnar minkaðar nógv síðani, og leiðslan heitti javnan á leiðararnar um at halda eyga við teimum.

Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at uppgerðin við ársenda 2018 vísir, at tímasaldurnar eru minkaðar, og at sambært Almannaverkinum verður áhaldandi hildið eygað við teimum.

### KT viðurskifti

Almannaverkið hevur tikið nýggju Heildarskipanina í nýtslu, sum hevur stóran týdning fyri stovnin og landið sum heild. Heildarskipanin skuldi eftir ætlan verða latin Almannaverkinum í 2018. Skipanin skuldi avgreiða veitingarnar, sum Almannaverkið umsat. VFS fór í eina tíð at virka sum søguligur dátugrunnur. Allar dáturnar skuldu flytast í nýggju skipanina.

Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at frá 20. juni 2019 hevur bara verið atgongd til at lesa úr VFS, og at allar dátur eru fluttar yvir í Heildarskipanina.

***Allar dátur eru fluttar í Heildarskipanina.***

Dáturnar vóru sambært stovninum klassifiseraðar eftir leisti frá Gjaldstovuni. Almannaverkið hevði gjøgnumgingið og klassifiserað yvirlit yvir servarar frá Landsneti. Landsgrannskoðanin mælti til at leggja dagføringina av klassifiseringunum í fasta legu.

Almannaverkið hevði gjørt váðameting av øllum skipanunum, men var ikki komið á mál at lýsa, hvussu váðarnir skuldu handfarast. Landsgrannskoðanin mælti til, at váðametingin varð gjørd liðug, og at dagføringin varð løgd í fasta legu. Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at tað nú er komið í fasta legu, og ábyrgdari er settur innan KT trygd. Klassifiseringin varð seinast dagførd 18. mars 2019.

Persónsupplýsingar verða viðgjørdar í Heildarskipanini, og útgangsstøðið er, at øll starvsfólk hava atgongd til allar upplýsingar í skipanini. Leiðslan hevur kunnað starvsfólkini um, at allar gerðir verða loggaðar, og at starvsfólk hava ikki loyvi til at leita fram upplýsingar, sum ikki eru neyðugar fyri teirra arbeiði.

***Øll starvsfólk hava atgongd til allar upplýsingar í skipanini. Allar gerðir verða loggaðar.***

Landsstýrismaðurin væntaði, at formligar mannagongdir blivu innbygdar í Heildarskipanina fyri, hvussu stakroyndir skulu takast av, hvør hyggur eftir hvørjum upplýsingum. Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at málið er ikki komið uppá pláss enn, men at miðað verður eftir, at tað kemur uppá pláss miðskeiðis í 2020.

Almannaverkið hevði ikki roynt at endurskapa dátur frá trygdaravritum av Heildarskipanini í síni heild, men bert av einstøkum fílum. Almannaverkið hevði ikki formligar mannagongdir um tilbúgving. Stovnurin hevði havt eina einstaka trygdarhending, sum varð avgreidd og skjalfest.

Landsgrannskoðanin mælti til, at gera mannagongdir um tilbúgving.

Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Almannaverkið hevur gjørt avtalu við veitara um at endurskapa dáturnar.

***Avtala er gjørd við veitara um at endurskapa dátur.***

## 7.4 Kassaeftirlit á Almannaverkinum (LG 2018/212-0211)

Landsgrannskoðanin hevur verið á ófráboðaðum kassaeftirliti á Almannaverkinum. Vit kannaðu um umsitingin av kassa, peningastovnskontum, gjaldkortum og netbanka er í samsvari við innanhýsis reglurnar og reglurnar í roknskaparkunngerðini og rundskrivi nr. 9002/2009 “um nýtslu av gjaldkorti og kredittkorti fyri landsstovnar”.

*Ófráboðað kassaeftirlit*

Almannaverkið hevur ein forskotskassa til smærri útreiðslur og kassaáfyllingar hjá Eindunum.

Í mai 2019 staðfestu vit, at kassin seinast var gjørdur upp í januar, og bókaður fyri alt árið 2018. Sambært roknskaparreglugerðini skal kassin verða bókaður, tá ið tørvur er á kassaáfylling og annars hvønn ársfjórðing. Almannaverkið tekur undir við, at kassin eigur at verða bókaður oftari.

***Avgerð tikin um at niðurleggja forskots-kassan.***

Landsgrannskoðanin taldi peningin í kassanum. Vit høvdu einki at finnast at. Spurt, um stovnurin framvegis hevði tørv á at hava forskotskassa, svaraði Almannaverkið, at tey eftirfylgjandi hava mett um tørvin, og gjørt av at niðurleggja forskotskassan.

*Peningastovnskontur*

Almannaverkið hevur tvær peningastovnskontur. Konturnar verða bókaðar hvønn mánað og avstemmaðar við kontuavrit frá banka.

Landsgrannskoðanin hevur eftirkannað, at peningastovnskonturnar stemma við kontu-avrit við ársbyrjan og ársenda 2018 og ultimo apríl 2019. Vit høvdu einki at finnast at.

Peningastovnskonta, ið tveir stovnar brúktu á ferðum í 2018, er gjørd upp nú, og restpeningurin er fluttur á aðra kontu hjá Almannaverkinum.

Gjaldkort hevur verið knýtt at ferðakontuni. Sambært Almannaverkinum bílegði stovnurin gjaldkort til ábyrgdarpersónar til ávísu ferðirnar. Tá ið ferðirnar vóru lidnar vórðu gjaldkortini klipt og strikað.

***Ikki er loyvt at taka út reiðan pening.***

Tað er komið fyri, at starvsfólk hava tikið kontantan pening út av kontuni til at rinda smáting á ferðini. Landsgrannskoðanin vísti á, at sambært rundskrivinum um nýtslu av gjaldkorti og kredittkorti er ikki loyvt at taka út reiðan pening til annað enn áfylling av stovnskassa.

*Gjaldkort*

Høvuðsreglan er, at allar útgjaldingar skulu fara fram um Búskaparskipan landsins. Gjaldkort kann verða nýtt eftir reglum, sum Fíggjarmálaráðið ásetir, og skal frágreiðing um kortnýtsluna verða ásett í roknskaparreglugerðini fyri stovnin.

Almannaverkið hevur trý Mastercard og eitt Eurocard. Sambært roknskaparreglu-gerðini eru Mastercard bert ætlað til keyp á alnótini, t.d. lisensir.

Sambært heimildarváttanunum og umbønunum um upprættan av gjaldkorti kunnu Mastercard nýtast til keyp á alnótini. Gjaldkortini eru brúkt á ferðum og í handlum. Almannaverkið er samt við Landsgrannskoðanini, at kortini eru ikki nýtt í samsvari við endamálið, og fer at rættað tað frameftir.

Stjórin hevur Eurocard at brúka í sambandi við ferðing og umboðan. Kortið er ikki er knýtt at peningastovnskontu. Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið kortnýtsluna í 2018 og fram til apríl 2019. Vit høvdu einki at finnast at.

*Uttanlandsferðir*

Almannaverkið brúkar oyðublaðið fyri ferðauppgerðir hjá landinum. Sambært rundskrivi frá 23. november 2018 “um tænastuferðir uttanlands”, sum kom í gildi 1. februar 2019, skal ferðaavrokningarskipanin hjá Gjaldstovuni nýtast til at avrokna ferðir uttanlands. Landsgrannskoðanin mælti Almannaverkinum til at brúka nýggju ferðaavrokningarskipanina.

***Mælt verður til at nýta nýggju ferðaavrokningarskipanina.***

*Netbanki*

Almannaverkið nýtir netbanka til skundflytingar, einstakar flytingar og ikki automatiseraðar flytingar. Landsgrannskoðanin hevur fingið dagført yvirlit yvir brúkarar og teirra heimildir pr. juni 2019. Almannaverkið hevur greitt frá, at allar flytingar verða gjørdar av tveimum starvsfólkum í felag. Eingin hevur møguleika at gera flytingar einsamallur.

## 7.5 Barnapeningur veittur í forskoti (LG 2015/212-0213)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av barnapeningi, m.a. innheinting av barnagjøldum móttikin av órøttum. Í august 2016 var eftirstøðan 445 t.kr. Almannaverkið krevur eftirstøðuna inn, og tey roknaðu við, at meginparturin fór ikki at verða goldin.

***Innheintingin kundi virkað betur, og heimild átti at verðið veitt TAKS at heinta inn.***

Í august 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at hóast tað var óvist, hvussu nógv veruliga kundi krevjast inn, helt Almannamálaráðið, at heimild helst átti at verða veitt TAKS at fremja innheintingina, tá ið ikki bar til at fáa gjaldsavtalu við gjaldskylduga.

Fyrireikingar vóru farnar í gongd til møguligar lógarbroytingar. Sambært landsstýrismanninum varð arbeiðið gjørt í samráð við TAKS og Almannaverkið.

Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at einki nýtt er hent í málinum, og at Almannamálaráðið hevur fyri stuttum tikið málið uppaftur við TAKS.

***Einki nýtt er í málinum.***

## 7.6 Einkjubarnastyrkur (LG 2014/212-0213)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av umsitingini av játtanini til einkjubarnastyrk.

Ásetingarnar um einkjubarnastyrk eru í §§ 15-19 í Ll. nr. 71/1996[17] og fevna um gjøld til børn, hvørs faðirskapur ikki er staðfestur og til børn, har annað ella bæði foreldrini ikki eru á lívi. Landsstýrismaðurin hevur heimild at áseta nærri reglur um fyrisitingina av lógini. Landsstýrismaðurin hevði ikki ásett nærri reglur, tí tørvur hevði ikki verið at áseta tær.

Sambært § 21, stk. 2, í lógini skal barnagjald, sum umsøkjari hevur móttikið av órøttum, gjaldast aftur. Tað framgekk ikki av lógini, hvørji amboð Almannaverkið kundi ella skuldi brúka at krevja gjaldið aftur.

Landsgrannskoðanin vísti á, at við hesum í huga átti Almannaverkið at styrkt um eftirlitið, sum skuldi forða fyri, at barnagjald varð móttikið av órøttum.

***Almannaverkið átti at styrkt um eftirlitið.***

Viðvíkjandi reglum um innkrevjing av útgjøldum, helt Almannamálaráðið tað vera neyðugt at umrøða málið nærri saman við TAKS og Almannaverkinum.

Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at einki nýtt er hent í málinum, og at Almannamálaráðið hevur fyri stuttum tikið málið upp aftur við TAKS.

***Einki nýtt er í málinum.***

[17] um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl.

## 7.7 Barnaískoyti (LG 2015/212-0213)

Landsgrannskoðanin hevur vístá, at ivi var um innheintingarheimildirnar hjá Almannaverkinum. Sambært § 21, stk. 2, í Ll. nr. 71/1996 skal tann, sum hevur móttikið barnaískoyti móti betri vitan, gjalda upphæddina aftur. Tað framgongur ikki av lógini, hvørji amboð Almannaverkið kann ella skal brúka at krevja peningin aftur.

*Heimild átti at verðið veitt TAKS at heinta inn.*

Í august 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hóast tað var óvist, hvussu nógv gjøld, ið vóru móttikin av órøttum og ímóti betri vitan, veruliga kundu krevjast inn, metti Almannamálaráðið, at heimild helst átti at verði veitt TAKS at fremja innheintingina, tá ið tað ikki bar til at fáa í lag gjaldsavtalu við gjaldskylduga. Fyrireikingar vóru farnar í gongd til møguligar lógarbroytingar.

Í august 2018 greiddi Almannamálaráðið frá, at fundur hevði verið um málið ímillum TAKS, Almannaverkið og Almannamálaráðið. Eingin niðurstøða var gjørd, tí talan var m.a. um fíggjarlig, teknisk og løgfrøðilig atlit, sum støða skuldi takast til.

*Einki nýtt er í málinum.*

Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at einki nýtt er hent í málinum, og at Almannamálaráðið hevur fyri stuttum tikið málið uppaftur við TAKS.

## 7.8 Dagpeningur vegna sjúku v.m. (LG 2014/212-0214)

Í undanfarnum frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av dagpeningaskipanini.

Almannaverkið skrásetti krøvini, sum skuldu krevjast inn frá arbeiðsgevarum fyri tveir teir fyrstu sjúkradagarnar hjá løntakarum, í Heildarskipanini. Sambært § 20 í dagpeningalógini skal TAKS krevja peningin inn, og TAKS hevur heimild at panta eftir reglunum í skattalógini. TAKS skrásetti eftirstøðuna í landsroknskapin saman við øðrum krøvum. Mannagongdin gjørdi, at Almannaverkið hevði ikki yvirlit yvir útistandandi pening.

Almannaverkið ætlaði at gera mannagongdir fyri, hvussu inntøkur, skrásettar í Búskaparskipan landsins, vórðu stemmaðar av ímóti teimum krøvum, sum vóru send TAKS. Almannaverkið ætlaði eisini at gera mannagongdir fyri avskrivað krøv, soleiðis at samsvar var ímillum TAKS og Almannaverkið.

Í august 2017 segði landsstýrismaðurin, at Almannaverkið og TAKS høvdu havt fund, har tey høvdu avtalað eina mannagongd viðvíkjandi avstemman av krøvum, sum vóru send TAKS.

Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Almannaverkið hevur sett mannagongd í verk. Avskrivingar verða bókaðar serskilt, soleiðis at Almannaverkið kann stemma krøvini av, og TAKS hevur fingið atgongd til at síggja avskrivingarnar. TAKS skal eisini á hvørjum ári senda Almannaverkinum fráboðan um útistandandi og mett virði av avsetingum.

## 7.9 Almannaverkið, Trivnaðartænastur (LG 2018/212-0216)

### 7.9.1 Trivnaðartænastur

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað felagsraksturin fyri Trivnaðardepilin og roknskapin hjá Eind 1 í Trivnaðartænastunum.

Trivnaðartænasturnar hjá Almannaverkinum eru skipaðar í tveir deplar við hvør sínum depilsstjóra.

Í 2018 var játtanin 306 mió.kr. á høvuðskontu 12.21.6.09, undantikið virksemið uttanlands. Játtanin er býtt í eindir.

Landsgrannskoðanin valdi at grannskoða ein part av játtanini. Heitið Trivnaðardepil verður brúkt um báðar deplarnar, sum hava heitið "Felagsrakstur í Trivnaðartænastum". Heitið: Trivnaðartænastur, er fyri alla játtanina á høvuðskontu 12.21.6.09. Trivnaðardepilin heldur til hjá Almannaverkinum á høvuðsdeildini í Havn.

Endamálið við grannskoðanini er at kanna, um roknskapurin er rættur, um innanhýsis mannagongdir verða fylgdar, og um lógarverk um sambýli v.m. verður hildið. Grannskoðanin er í ávísan mun bygd á grannskoðanina í 2017 av roknskapinum hjá Eind 4 fyri 2016.

### Skipan av trivnaðartænastunum

Roknskapurin á høvuðskontu 12.21.6.09 er greinaður á staðartátt eftir sama leisti, sum Trivnaðartænasturnar eru býttar í eindir. Vit hava grannskoðað stað 9000 og 9100 hjá Trivnaðardeplinum, og stað 9001 hjá Eind 1.

Almannaverkið bókar inntøkur og útreiðslur av húsaleigu í felagsrakstrinum hjá Trivnaðardeplinum. Lønir til depilsleiðsluna og fyrisitingarútreiðslur til Almannaverkið fara av felagsrakstrinum. Eisini rindar felagsraksturin viðlíkahaldsútreiðslur og endurnýggjan av akførum, innbúgvi v.m.

Trivnaðardepilin heldur til á høvuðsdeildini hjá Almannaverkinum í Tórshavn. Eind 1 heldur til í Norðoyggjum við egnum eindarleiðara og leiðara. Í Eindini eru tvey sambýli og eitt frítíðartilboð.

### Reglur um vardir bústaðir

*Lógargrundarlag*

Heimild at seta á stovn sambýli er í Forsorgarlógini, Ll. nr. 100/1988, har heitið er "Vardir bústaðir". Í Eind 1 eru sambýlini "Kelduskákið" og "á Mýruvegi".

Landsstýrismaðurin góðkennir staðseting, fysiskar karmar í mun til málbólk, fígging, kostnað og ábyrgdarbýti hjá vardum bústøðum. Landsstýrismaðurin hevur ásett nærri reglur um upptøku, leigurættindi, virksemi og gjøld sambært K. nr. 3/2005 "um skipan av bústovnum" og við rundskrivi nr. 9003 frá 1. januar 2009 "um skipan av sambýlum".

Almannaverkið metir sambýlini í Eind 1 at vera góðkend, tá ið Almannamálaráðið hevur sett tey á stovn. Reglugerðirnar fyri bæði sambýlini innihalda upplýsingar um m.a. staðseting, upptøku, fígging, kostnað og ábyrgdarbýti, og eru undirskrivaðar av landsstýrismanni og aðalstjóra í 2010 og 2011.

*Egingjald*

Kunngerðin um skipan av sambýlum ásetir, at búfólk skulu rinda fyri húsaleigu og til felags útreiðslur. Gjaldið kann tó ikki fara upp um ta upphædd, sum svarar til veruligu útreiðslurnar av at reka sambýlið. Rundskrivið frá 2009 ásetir nærri reglur um, hvat búfólkini vanliga skulu rinda fyri, og hvat felagskontan skal brúkast til.

***Búfólk skulu rinda húsaleigu og fyri felagsútreiðslur.***

Í einum skjali hjá Almannaverkinum, nevnt "Trivnaðardepilin - Eind 1: Fólk við autismu í Norðoyggjum", er upplýst, hvør býr á sambýlunum, og hvussu nógv tey skulu rinda. Búfólkini rinda húsaleigu, el og olju til raksturin hjá Trivnaðardeplinum, afturat tí rinda tey til felagskassan hjá sambýlinum. Av teimum 6.500 kr., tey rinda um mánaðin, er húsaleiga 2.500 kr., el 250 kr., olja 250 kr. og felagskassin 3.500 kr.

***Gjaldið má ikki vera hægri enn veruligu útreiðslurnar.***

Landsgrannskoðanin hevur fyrr gjørt vart við, at samhaldsfasta gjaldið, sum borgararnir rindað fyri el og olju, samsvarar ikki við ásetingarnar í kunngerðini og

*Samhaldsfasta gjaldið samsvarar ikki við ásetingarnar í kunngerðini.*

rundskrivinum um skipan av sambýlum, um at gjaldið ikki kann fara upp um ta upphædd, sum svarar til veruligu útreiðslurnar.

Almannaverkið hevur ásett eins gjald fyri orkunýtsluna hjá øllum sambýlum fyri at javnseta borgararnar, tí orkunýtslan er ymisk, vegna ójøvnu bjálvingina av bústøðunum. Borgarar hava ikki møguleika at velja bústað, men fáa tilboð, har pláss er. Almannaverkið fer at heita á Almannamálaráðið um at broyta ásetingarnar í kunngerðini og rundskrivinum, soleiðis at gjøldini verða lagað til núverandi støðuna á bústøðunum.

*Landskassin rindar fyri búfólk yngri enn 18 ár.*

Búfólk á Kelduskákinum, ið eru undir 18 ár, rinda ikki húsaleigu. Raksturin hjá Kelduskákinum rindar teirra part til el, olju og til felagskassan.

### *Upptøka*

Sambært kunngerðini skulu limirnir í upptøkunevndini fyri sambýli vera: deildarleiðari frá Heimarøktini og Serforsorgini, leiðarin fyri viðkomandi sambýli og eitt umboð fyri Almannastovuna. Síðani kunngerðin varð lýst, hava bygnaðarbroytingar gjørt, at Serforsorgin, sambýlini og Almannastovan eru partur av Almannaverkinum.

Í dag hevur Almannaverkið somu mannagongd fyri visitering til allar tænastur á trivnaðarøkinum. Depilsleiðslan í Viðskiftadeplinum og Trivnaðardeplunum manna avgerðarfundir. Avgerðarskrivstovan er skrivari.

### *Innanhýsis reglur*

Í 2017 vóru somu reglur galdandi fyri sambýli og felagskassar í Eind 4. Tá vísti Landsgrannskoðanin á, at í rundskrivinum frá 2009 var eingin verulig vegleiðing um, hvat felagskontan kundi ella skuldi brúkast til.

Almannaverkið hevur nú orðað eina vegleiðing um útreiðslur, har greiðari yvirlit er yvir, hvar útreiðslurnar hoyra til. Útreiðslurnar eru:

- Rakstur, t.e. útreiðslur, sum fevna um økið hjá starvsfólkunum og generellar útreiðslur.
- Felagskassi, t.e. útreiðslur, ið eru felags hjá øllum búfólkunum.
- Búfólk, t.e. útreiðslur, sum hoyra til einstaka búfólkið.

Hvør bólkur er nærri greinaður í vegleiðingini.

## Felagskonta

Sambært rundskrivinum um skipan av sambýlum skulu stovnarnir føra roknskap fyri alla nýtslu av felagskontunum, sum er ætlað dagliga rakstrinum hjá sambýlunum. Øll skjøl skulu finnast í roknskaparskipanini, eins og eitt yvirlit skal vera yvir ymisku sløgini av útreiðslum, sum verða goldnar av felagskontunum.

Leiðarin á einstaka sambýlinum hevur ábyrgd av umsitingini av kontuni, og myndugleikin, sum sambært kunngerð hevur eftirlit við sambýlinum, skal skipa fyri grannskoðan av felagskontuni minst eina ferð um árið. Einstaka búfólkið hevur rætt til innlit í felags fíggjarviðurskifti hjá sambýlinum.

*Felagskonturnar eru frá 2018 í Búskaparskipan landsins, men eru ikki partur av landsroknskapinum.*

Frá 2018 eru roknskapir hjá felagskontunum bókaðir í Búskaparskipan landsins undir “umsiting av ogn og skuld hjá øðrum”.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað er gott, at roknskapirnir nú verða førdir í Búskaparskipan landsins, tí roknskaparliga viðgerðin er einsháttað og gjøgnumskygni betri.

*Felagskonturnar eru ikki grannskoðaðar seinastu árini.*

Felagskassarnir eru ikki partur av landsroknskapinum, og hava tí ikki verið grannskoðaðir í sambandi við grannskoðan av Trivnaðartænastum. Okkum kunnugt grannskoðaði privatur grannskoðari áður felagskassarnar hvørt ár, tó ikki seinastu árini. Landsgrannskoðanin heldur, at tað er ikki nøktandi.

Umleggingin av felagskassunum hevur sambært Almannaverkinum kravt nógva orku, og hevur ávirkað ætlanina um at fáa allar roknskapirnar bókaðar og grannskoðaðar. Í 2017 gjørdi Almannaverkið av ikki at bóka roknskapirnar fyri 2014 til 2016, men brúkti heldur orkuna at leggja bókhaldið í Búskaparskipan landsins. Endamálið var at sleppa undan at verða langt afturút.

Almannaverkið ger í løtuni átøk at fáa bókað allar roknskapirnar fyri felagskassarnar fyri 2018, og at senda teir til uttanhýsis grannskoðan í ár. Eftir tað verða roknskapirnir fyri 2017 gjørdir lidnir. Framyvir er ætlanin at leggja alt í eina fasta legu, soleiðis at allir roknskapirnir verða gjørdir lidnir og klárir at grannskoða um várið.

***Frá 2019 grannskoðar Landsgrannskoðanin felagskassarnar.***

Almannamálaráðið hevur heitt á Landsgrannskoðanina um at átaka sær uppgávuna at grannskoða felagskassarnar sum ein part av virkseminum hjá Trivnaðartænastuni. Landsgrannskoðanin hevur játtað, og frá roknskaparárinum 2019 verða felagskassarnir partur av grannskoðanini av Trivnaðartænastum.

## Roknskaparviðurskifti

### *Roknskaparreglugerð*

Almannaverkið hevur fyrr boðað frá, at stovnurin arbeiddi við einari felags roknskaparreglugerð fyri alt virksemið. Arbeiðið er enn ikki komið á mál. Tey hava í samstarvi við Gjaldstovuna gjørt eitt uppskot til roknskaparreglugerð eftir skabelón hjá Gjaldstovuni.

Trivnaðartænastur eru partur av roknskaparreglugerðini hjá Almannaverkinum, sum hevur ræði á fleiri stovnsnumrum og umsitur fleiri ymiskar játtanir.

### *Roknskapartøl*

Játtanin til vanligt virksemi hjá Trivnaðartænastum í 2018 var 305,7 mió.kr. Brúktar vórðu 306,6 mió.kr., sum gevur 900 t.kr. í meirnýtslu.

Trivnaðartænastur eru í 12 eindum, og virksemið á eindunum er býtt út á “stað” í Búskaparskipan landsins. Vardir bústaðir, fyriskipanir v.m. eru býtt út á “endamál”. Afturat tí er eitt “stað” til sjálvsognarstovnar og felagsrakstur v.m.

Endamálið við uppbýtinum er at síggja kostnaðin á hvørjum stovni sær, og ymisku aktivitetirnar í eindunum.

Roknskapartøl, býtt á standardkontur:

*t.kr.*

| Heiti | R2018 | J2018 |
|---|---|---|
| Lønir v.m. | 273.351 | 284.464 |
| Keyp av vørum og tænastum | 26.148 | 16.575 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 4.726 | 2.063 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 11.102 | 7.447 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | 1.457 | 1.258 |
| Søla av vørum og tænastum | -15.860 | -10.303 |
| Ymsar rakstrarinntøkur | -742 | -433 |
| Tilskot til útlandið o.a.[18] | 52 | 0 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (útr) | 12.910 | 10.364 |
| Flytingar frá landi til kommunur (land) | 815 | 0 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (innt) | -552 | 0 |
| Flyting frá kommununum til landið | -6.762 | -5.724 |
| **Tilsamans** | **306.645** | **305.711** |

[18] Tær 52 t.kr. undir “tilskot til útlandið o.a” eru ein feilkontering.

Størsti parturin av útreiðslunum fer til lønir v.m., men Trivnaðartænastur hava eisini nakað av inntøkum. Inntøkurnar eru fyri tað mesta húsaleiga/íbúðargjøld og brúkaragjøld frá búfólkum.

Útreiðslurnar í 2018 til Trivnaðartænastur, útgreinaðar á stað:

*t.kr.*

| Stað | Heiti | |
|---|---|---|
| 0000 | Ógreinað | -1.412 |
| 1000 | Keyp av tænastum frá kommunum | 875 |
| 4000 | Tórshavnar Privata Vistarheim | 4.764 |
| 5100 | Frítíðarheimið í Skrivaragøtu | 3.445 |
| 5200 | Eysturstræti/Sólteigur | 3.990 |
| 5100 | Umlættingarheimið Dáin | 3.224 |
| **9000** | **Felagsrakstur, Trivnaðardepilin** | **7.929** |
| **9001** | **Fólk við autismu Norðoyggjar og Eysturoy** | **17.983** |
| 9002 | Fólk við menningartarni Norðoyggjar | 22.995 |
| 9003 | Fólk við autismu Suðurstreymoy og Sørvágur v.m. | 18.752 |
| 9004 | Fólk við menningartarni Suðurstreym | 30.442 |
| 9005 | Ung og vaksin við menningartarni Suðurstreym og Suðuroy | 16.166 |
| 9006 | Vaksin við menningartarni Suðurstreym | 20.031 |
| 9007 | Fólk við menningartarni og øðrum brekum Suðurstreym og Sandoy | 28.946 |
| 9008 | Fólk við sálarsjúku og seinheilaskaða | 38.679 |
| 9009 | Verkstaðir og Verkhús | 22.380 |
| 9010 | Barnavernd | 35.800 |
| 9011 | Eind 11 Suðuroy | 15.183 |
| 9012 | Eind 12 | 15.235 |
| **9100** | **TDS felags** | **1.236** |
| | **Tilsamans** | **306.645** |

Eind 1 er á stað 9001, og felagsraksturin, Trivnaðardepilin, er á stað 9000 og 9100. Keyp av akførum, innbúgvi v.m. verða goldin av felagsrakstrinum. Inntøkurnar verða eisini skrásettar í felagsrakstrinum.

Tórshavnar Privata Vistarheim, Eysturstræti/Sólteigur og Umlættingarheimið Dáin verða grannskoðað av privatum grannskoðarum.

Eindarroknskapirnir eru fyri tað mesta lønir, og hjá sambýlum er gerandisraksturin í felagskontuni.

## Lønir

***Í 2018 vóru 89% av nettoútreiðslunum lønir.***

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað nakrar lønir hjá Trivnaðartænastunum. Endamálið er at tryggja, at útgoldnu lønirnar eru rættar, og at kanna um Almannaverkið sum setanarmyndugleiki fylgir almenna setanarpolitikkinum. Í 2018 vóru lønarútreiðslurnar 89% av nettoútreiðslunum til Trivnaðartænastur.

### *Skipan av lønarmálum*

Almannaverkið hevur greitt frá, hvussu tey hava skipað setanarmál og lønarmál, og hvussu stovnurin ætlar, at tað skal verða framyvir. Munur kann vera á nýggjum og eldri setanum, tí Trivnaðartænasturnar hava verið merktar av bygnaðarbroytingum. Prógv o.a. eru ofta í aðalráðunum, serliga hjá tænastumannasettum starvsfólkum.

***Almannaverkið ætlar at dagføra lønarmálini.***

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað er týdningarmikið, at Almannaverkið hevur skjalprógv fyri, at starvsfólk hava ta útbúgving, sum er viðkomandi. Sambært Almannaverkinum høvdu tey ætlanir um at dagføra øll lønarmál so við og við.

Almannaverkið hevur nú nýggja skipan til at lýsa eftir og seta starvsfólk, og hevur sett fólk burturav at umsita setanarmál. Skjøl frá umsøkjarum, sum ikki fáa starv, verða burturbeind eftir tvey ár.

Setanarbrøv vóru ikki í øllum lønarmálunum.

Sambært almenna setanarpolitikkinum er krav um, at setanarbræv skal vera latið, áðrenn persónur byrjar í starvi. Almannamálaráðið tekur undir við Almannaverkinum, at tað kann vera ringt at tryggja, at løntakarin fær setanarbræv áðrenn starvsbyrjan.

Landsgrannskoðanin mælti til, at setanarbrøv verða undirskrivað og dagfest, og at tey altíð eru at finna í lønarmálunum.

*Stakroyndir av lønarmálum*
Við stakroyndum kannaðu vit lønir hjá nøkrum starvsfólkum. Talan er bæði um starvsfólk í fyrisiting og røkt, og um mánaðarlønt og tímalønt.

Landsgrannskoðanin hevði ikki aðrar viðmerkingar enn, at í einum føri var skeiv viðbót latin fyri tænastubúnar. Almannaverkið skuldi gera Gjaldstovuna varuga við feilin.

### 7.9.2 Felagsrakstur í Trivnaðardeplinum

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað útreiðslur, um tær eru veruligar, hoyra til virksemið, eru rætt tíðargreinaðar og rætt konteraðar. Niðanfyri er ein gjøgnumgongd av felagsrakstrinum.

Samanløgd roknskapartøl, stað 9000 og 9100 fyri 2018: *t.kr.*

| **Heiti** | |
|---|---|
| Lønir v.m. | 3.005 |
| Keyp av vørum og tænastum | 3.551 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 2.373 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 8.624 |
| Søla av vørum og tænastum | -13.894 |
| Ymsar rakstrarinntøkur | -87 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (útr.) | 12.910 |
| Flytingar frá landi til kommunur (land) | -5 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (innt.) | -550 |
| Flyting frá kommununum til landið | -6.762 |
| **Tilsamans** | **9.165** |

Trivnaðardepilin hevur ikki egnar peningastovnskontur ella gjaldkort. Vardu bústaðirnir hava kort og kontur í matvøruhandlum. Almannaverkið hevur virkiskort til ferðing við Strandferðsluni, og fær faktura, tá ið kortini verða nýtt. Almannaverkið hevur ikki skrivligar reglur um nýtslu av kortunum.

#### Keyp av vørum og tænastum

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað er týdningarmikið, at Almannaverkið konterar neyvt, ikki minst tí at stovnurin virkar við nógvum stovnsnummurum á fleiri høvuðskontum. Skulu einstøku roknskapirnir undir staðar- og endamálstátti brúkast sum álítandi amboð, mugu konteringarnar vera rættar.

***Tað er týdningarmikið at kontera neyvt, um roknskapir skulu kunna brúkast sum álítandi amboð.***

Almannaverkið tekur undir við týdninginum av røttum konteringum, og fer at skipa fyri at tær fylgja einum felags leisti.

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið nakrar ferðaútreiðslur í felagsroknskapinum. Vit høvdu ikki stórvegis viðmerkingar, men mæltu til at brúka ferðaavrokningarskipanina hjá Gjaldstovuni.

#### Keyp av útbúnaði og ognaryvirlit

Í roknskapinum hjá Trivnaðardeplinum er nógv goldið, sum er til stovnarnar úti í eindunum. Okkurt er eisini keypt saman við Almannaverkinum og bókað eftir einum býtislykli.

Landsgrannskoðanin hevur kannað keyp av útbúnaði 2016 til 2018, serliga keyp av KT útgerð og akførum.

Yvirlit yvir KT útbúna hjá Trivnaðardeplinum eru í rokniarki. Tað framgongur ikki av rokniarkinum, nær tað seinast er dagført, men á onkrum stendur, nær KT útgerðin er latin starvsfólki.

Á rokniarkinum er KT útgerðin greinað í stovnarnar úti í eindunum. Vit tóku nakrar stakroyndir og kannaðu, um KT útgerðin var á stovnunum undir Eind 1. Vit høvdu einki at finnast at.

***Støðisognin er ikki dagførd í Búskapar-skipan landsins.***

Landsgrannskoðanin hevur áður gjørt vart við, at støðisognin í Búskaparskipanini er ikki dagførd. Vit duga ikki at síggja, at húsaognin Kelduskákið er skrásett, og eingin av bilunum hjá Trivnaðardeplinum, sum eru keyptir, árini 2016 til 2018, er skrásettur.

Almannaverkið hevur greitt frá, at tey í juni 2018 sendu Gjaldstovuni skjøl at skráseta fyri bygningar og akfør keypt í 2017 og áðrenn. Í juli 2019 eru skjølini fyri akfør, keypt í 2018, send Gjaldstovuni.

*Merking av akførum*

Í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum 21. februar 2011 er ásett, at øll akfør hjá landinum skulu verða týðiliga merkt við navninum á tí stovni, sum akfarið hoyrir undir ella við búmerki stovnsins. Akstovan hevur eftirlit við, at bilarnir verða merktir, og kann í heilt serligum førum loyva undantøkum.

***Ikki øll akfør eru merkt, og ikki øll undantaksloyvi eru fingin til vega.***

Ikki allir bilarnir hjá Almannaverkinum eru merktir, og tey hava søkt um nøkur undantaksloyvi. Við árslok 2018 hevði Almannaverkið 97 akfør. Til tey er bert eitt undantaksloyvi givið, meðan fýra liggja til endaliga avgerð. Akstovan hevur skotið upp, at Fíggjarmálaráðið útgreinar krøvini til undantaksloyvi, tí er avgerðin ikki tikin.

**Søla av vørum og tænastum**

Inntøkurnar hjá Trivnaðardeplinum í 2018 eru 13,9 mió.kr. Samlaðu inntøkurnar frá húsaleigu og gjøldum fyri umlætting vóru 8,2 mió.kr.

Vit hava samanhildið inntøkurnar frá húsaleigu við húsaleigugjaldið, sum er í yvirlitinum “Trivnaðardepilin – Eind 1: Fólk við autismu í Norðoyggjum”.

***Trivnaðardepilin fær inntøkur frá m.ø. lógarbundnari játtan, sum Almannaverkið umsitur.***

Trivnaðardepilin fær inntøkur frá lógarbundnu játtanini, § 16 í forsorgarlógini. Sambært Almannaverkinum verður kostnaðurin ásettur í samráð við eindarleiðaran, og er m.a. grundaður á, hvussu nógvir tímar verða settir av til borgaran. Kostnaðurin er ikki givin frammundan, og kann broytast gjøgnum árið.

Í einum rokniarki, Almannaverkið hevur gjørt í sambandi við fíggjarlógararbeiðið 2018 fyri lógarbundnu játtanina á § 16, eru væntaðar útreiðslur til fyriskipanir sambært § 16 í forsorgarlógini.

Spurt, um Almannaverkið hevur eina endauppgerð, sum vísir, hvat inntøkurnar frá § 16 í forsorgarlógini í 2018 hava verið, svaraði Almannaverkið, at tað hava tey ikki, men inntøkurnar frá § 16 í forsorgarlógini svara til ta tænastu, sum Trivnaðardepilin hevur veitt í 2018 til teir borgararnar.

***Landsgrannskoðanin heldur, at ein endauppgerð hevði bøtt um gjøgnum-skygnið.***

Almannaverkið hevur gjørt fleiri rættingar í Búskaparskipanini við árslok 2018. Landsgrannskoðanin heldur, at ein endauppgerð hevði bøtt um gjøgnumskygnið, tá ið stovnurin eisini umsitur lógarbundnu játtanina, sum rindar fyri § 16 fyriskipanirnar.

### 7.9.3 Eind 1

**Skipan av arbeiðstíð - at leggja vaktarætlanir**

Eindarleiðarar leggja vaktætlanir fyri sína eind, og torført kann vera at taka atlit at hvílitíðum, tí starvsfólk kunnu arbeiða í fleiri eindum.

Sambært Almannaverkinum eiga hvílitíðarreglurnar at verða hildnar, men verandi skipan til vaktir megnar ikki at handfara setanir, sum eru í fleiri støðum. Arbeitt verður við at gera eina loysn, ið møguliga má verða manuell.

***Torført at taka atlit at hvílitíð, tá ið starvsfólk arbeiða í fleiri eindum.***

Í Eind 1 hava tey rullandi vaktir yvir 10 vikur, sum ger, at øll starvsfólkini eftir 10 vikum hava arbeitt nøkulunda eins dag-, kvøld- og náttarvaktir. Atlit verða tikin at ferium og avspáking. Mánaðarløntu starvsfólkini kunnu eiga +/- 40 tímar. Um starvsfólk kemur at eiga ov nógva avspáking, verða meirtímarnir goldnir út.

Stórur partur av meirtíðini eru vaktir, har starvsfólk sjálvi bjóða seg fram at taka eykavaktir. Er leiðslan hinvegin noydd at kalla starvsfólk inn til eykavaktir, so rindar stovnurin yvirtíð fyri tað. Tað hevur verið vanlig mannagongd. Tá ið Landsgrannskoðanin grannskoðaði lønir í Eind 4 í 2017, vístu vit eisini á hesi viðurskifti.

Almannaverkið hevur greitt frá, at síðani grannskoðanina av Eind 4 hevur eitt fakfelag stevnt eftir yvirtíðargjaldi. Sambært Almannamálaráðnum er tað eitt mál millum samráðingarpartarnar, og spurningurin verður í løtuni viðgjørdur millum Føroya Pedagogfelag, Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum og Almannaverkið. Í síðsta enda kann talan vera um eitt mál, ið verður lagt fyri gerðarrætt.

***Arbeiðsbólkur settur at fáa greiðu á spurninginum um meirtíð ella yvirtíð hjá fulltíðarsettum.***

### Roknskapartøl fyri Eind 1

Roknskapurin fyri Eind 1 er skrásettur á stað 9001. Roknskapurin kann útgreinast víðari í endamál, so raksturin av hvørjum bústaði ella fyriskipan sæst.

Í Eind 1 eru:

0000 Ógreinað – útreiðslur til eindarleiðsluna
2700 Sambýlið á Mýruvegi
2750 Íbúðin á Mýruvegi
2800 Bústaðurin Kelduskákið
7001 Stuðlar til børn Eind 1 (frítíðartilboð)

Eindarleiðarin leysgevur, og leiðarin góðkennir rokningar.

Niðanfyri eru roknskapartølini 2018 í Eind 1. Uttast til høgru er samlaði roknskapurin fyri eindina.

*t.kr.*

| Endamál | 0000 | 2700 | 2750 | 2800 | 7001 | *Stað 9001* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 1.138 | 7.145 | 2.506 | 5.280 | 861 | ***16.930*** |
| Keyp av vørum og tænastum | 291 | 193 | 54 | 308 | 27 | ***873*** |
| Keyp av útbúnaði, netto | 34 | 13 | 20 | 0 | 0 | ***66*** |
| Leiga, viðlíkah. og skattur | 0 | 31 | 9 | 30 | 21 | ***92*** |
| Ymsar rakstrarútr. | 0 | 0 | 2 | 17 | 3 | ***22*** |
| **Tilsamans** | **1.463** | **7.382** | **2.591** | **5.635** | **911** | ***17.983*** |

*Konteringar*

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið endamálsroknskapirnar fyri 2018.

Bókhaldið hjá Almannaverkinum konterar rokningarnar, og sendir tær til góðkenningar og leysgevingar. Tað áliggur eindarleiðslunum at kanna, um alt er rætt, áðrenn tey góðkenna og leysgeva. Nakrar rokningar verða sendar beint inn í skipanina talgildar.

Landsgrannskoðanin hevur ikki sæð týðandi feilir, sum gera, at roknskapurin hjá Trivnaðartænastunum ikki gevur eina rættvísandi mynd, men vit mæla til at kanna konteringarnar, soleiðis at útgreinaðu roknskapirnir geva eina rættvísandi mynd. Serliga er tað týdningarmikið, um eindar- og endamálsroknskapir skulu brúkast sum álítandi amboð.

*Lummapengar*
Starvsfólk í Eind 1 umsita lummapengarnar hjá nøkrum búfólkum, og UAP-toymið hjá Almannaverkinum hevur eftirlit við tí. Toymið kannar umsitingina regluliga á staðnum. Lummapengarnir hjá øðrum búfólkum verða umsitnir av avvarandi. Leiðslan var ikki greið yvir, hvat eftirlit tey høvdu, tá ið avvarandi umsita lummapengarnar.

Leiðarin heintar lummapengarnar í bankanum. Tá ið leiðarin rindar lummapengarnar til búfólk, er eitt annað starvsfólk hjástatt, sum váttar á eitt skjal, at røtt upphædd er goldin út.

**Hølisviðurskifti**
Á sambýlunum hava búfólkini hvør sína íbúð ella størri kamar við egnum baðirúmi. Næmingarnir, sum ganga á serliga skipaðum miðnámi, hava felags baðirúm. Búfólkini eiga sjálvi innbúgvið í íbúðini ella kamarinum.

Síðani 2016 hevur leiðslan ført ognaryvirlit yvir felagsinnbúgvið. Allir bilar eru merktir við búmerki, og starvsfólk eru kunnaði um, at privatnýtsla er ikki loyvd. Sambært leiðsluni kemur tað ikki fyri, at bilarnir verða brúktir privat.

Leiðslan lat væl at hølunum. Kelduskákið hevði havt sínar avbjóðingar, og øll baðirúmini vóru nýliga gjørd av nýggjum. Á báðum sambýlunum vóru skrivstovur og WC til starvsfólk.

Frítíðartilboðið heldur til í hølum hjá Klaksvíkar kommunu.

**Trygdarfyriskipanir og harðskapur**
Leiðslan greiddi frá, at seinasta brandskeiðið hevði verið í 2018, og at fyritøkan Ansni kannar sløkkiútgerðina.

Starvsfólk høvdu upplivað harðskap, men við tiltøkum, har stovnurin millum annað er meira opin enn áður, er næstan einki av tí longur.

Hendingar við harðskapi skulu skjalfestast og fráboðast eftir innanhýsis mannagongd. Fráboðanarskjøl eru gjørd til starvsfólk og eindarleiðslu at brúka. Hendingar skulu fráboðast depilsstjóranum, og fráboðanarskjøl verða skrásett í journal hjá depils-leiðsluni.

**KT nýtsla og persónsupplýsingar**

***Eind 1 skrásetir bæði vanligar og viðkvæmar persóns-upplýsingar.***

Eindin skrásetir persónsupplýsingar og viðkvæmar persónsupplýsingar. Starvsfólka-rúm við teldum eru á sambýlunum, og búfólkini hava ikki atgongd til rúmini.

Øll starvsfólkini hava atgongd til at síggja viðurskifti um øll búfólkini, men tað er ikki loyvt at sneyta um onnur, sum starvsfólk einki hava við at gera.

Bæði sambýlini hava vakjandi náttarvakt, sum má ferðast millum felagsøkini. Náttarvaktin situr ikki inni hjá búfólkunum. Sum hjálp til at síggja ella hoyra, um onkur vaknar ella fer upp, hava tey keypt smábarnaalarmar, harav ein hevur myndatól. Myndirnar verða ikki goymdar, og avvarandi hava givið munnligt loyvi.

***Almannaverkið hevur vent sær til Dátu-eftirlitið um smábarnaalarmar.***

Síðani Landsgrannskoðanin var á vitjan hevur Almannaverkið sett seg í samband við Dátueftirlitið fyri at fáa greiðu á, um smábarnaalarmar, serliga við myndatóli, eru fevndir av persónsdatalógini.

### 7.9.4 Uppfylging av grannskoðan, Eind 4
Í seinastu frágreiðingum umrøddu vit grannskoðan av Trivnaðartænastum, serliga Eind 4.

### Vardir bústaðir

Forsorgarlógin er broytt gjøgnum tíðirnar. Í 2013 varð heimildin at skipa bústovnar sambært § 16 broytt, og § 27 um bú- og viðgerðarstovnar varð sett í lógina. § 27 heimilar at veita persónum við ávísum brekum ella víðfevndum sosialum trupulleikum tilboð á bú- og viðgerðarstovnum og á stovnslíknandi fyriskipanum. Um einki nøktandi tilboð kann veitast í Føroyum, kann persónur fáa tilboð uttanlands.

Í § 32 er heimild at veita persónum, ið bera ávís brek ella hava víðfevndar sosialar trupulleikar, vardan bústað, eisini nevnd sambýli.

Sambært § 16, stk. 2, í forsorgarlógini ásetir landsstýrismaðurin "*nærri reglur um trygdarfyriskipanir á nevndu stovnum og skyldu at veita hesi tilboð til persónar*,

1. *sum sambært rættarúrskurði skulu sinniskannast,*
2. *sum sambært rættarúrskurði ella dómi skulu setast í vardan bústað ella vera undir eftirliti, undir hesum við møguleika fyri fyrisitingarliga at verða settir í vardan bústað, ella*
3. *sum treyt fyri ákæruafturtøku ella royndarleysgeving verða settir í vardan bústað, ella vera undir eftirliti, undir hesum við møguleika fyri fyrisitingarliga at verða settir í vardan bústað."*

Eingin kunngerð var lýst sambært § 16, stk. 2.

***Átrokandi at gera reglur.***

Almannaverkið helt tað vera átrokandi, at reglur vórðu gjørdar viðvíkjandi trygdarfyriskipanum í vardum bústøðum og viðvíkjandi skyldu at veita tilboð til persónar, sum verða dømdir at vera undir eftirliti av Almannaverkinum ella at verða settir í vardan bústað.

Í august 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Almannamálaráðið var í holt við at gera nýggja lóggávu um almannahjálp, tænastur, rættartrygd og tvingsil. Landsstýrismaðurin ætlaði at leggja lógaruppskotið fyri Løgtingið í tingsetuni, og at lóggávan skuldi fáa virknað frá 1. januar 2019.

Sambært landsstýrismanninum var endamálið við nýggju lóggávuni m.a. at tryggja rættindini hjá borgarum, sum bera brek. Í sambandi við nýggju lóggávuna skuldu kunngerðir, heimilaðar í verandi forsorgarlóg, endurskoðast, eins og nýggjar kunngerðir skuldu orðast.

Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at hann á vári 2019 legði vælferðarpakkan fyri Løgtingið. Í pakkanum eru 6 lógaruppskot, sum samanlagt skipa stóran part av vælferðartænastunum á almannaøkinum. Lógaruppskotini vóru:

- Uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð,
- Uppskot til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin,
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m,
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd,
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir, og
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kærunevnd í almanna- og heilsumálum.

Sambært landsstýrismanninum hava trý av uppskotunum reglur um trygdarfyriskipanir á vardum bústøðum, bú- og viðgerðarstovnum og skyldu til at veita tilboð til persónar, sum verða dømdir at vera undir eftirliti av Almannaverkinum ella at verða settir í vardan bústað. Tey lógaruppskotini eru: Uppskotið til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð, uppskot til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin umframt uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd.

Vælferðarpakkin datt burtur, tá ið tingárið endaði.

*Skipan av bústovnum*

Áðrenn 2013 vórðu bústovnar skipaðir eftir kunngerð, sum hevði heimild í § 16, stk. 2 og 3 í forsorgarlógini. Í 2013 varð § 16 orðað av nýggjum, og § 27 sett í lógina. Landsstýrismaðurin skuldi sambært stk. 5 áseta nærri reglur um virksemi, upptøku og gjald, og um treytir fyri at veita tilboð uttanlands. Eingin kunngerð var lýst. Almannaverkið helt tað vera átrokandi, at reglur vórðu ásettar.

***Átrokandi at gera reglur.***

Kunngerðin frá 2005 um bústovnar hevði heimild í tágaldandi reglum í § 16, stk. 2, í lóg "um skipan av bústovnum". Íbúgvarnir á bústovnunum bera víttfevnandi brek, og sambært Almannaverkinum fylgir stovnurin kunngerðini, tó at hon treingir til dagføringar.

Í august 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at umskipanin av bústovnum til sambýli hekk ikki saman við broytingum í forsorgarlógini, men saman við, at løgtingslóg "um uppihald á stovni" varð sett úr gildi. Broytingar eru síðani gjørdar í forsorgarlógini. Verandi kunngerðir vórðu ikki dagførdar, men nýggjar kunngerðir fóru sambært landsstýrismanninum at verða settar í gildi samstundis, sum nýggj lóggáva varð sett í gildi.

Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Almannamálaráðið hevur raðfest arbeiðið við vælferðarpakkanum, og hevur í sambandi við lógarsmíðið lagt seg eftir at hava greiðar og neyvar reglur í lóggávuni. Uppskotið til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð hevur neyvari ásetingar um ymisk bústaðartilboð, endamálið við bútilboðunum, hvussu bútilboð kunnu skipast og um innihald og skipan av tænastum á bústaðnum.

Við uppskotinum fær landsstýrismaðurin heimild til at áseta nærri reglur um m.a. áseting av húsaleigu, nær húsaleigan kann lækkast, grundað á inntøkuviðurskifti leigarans, felags útreiðslur, foreldragjald, leigureglur og reglur um skilhald. Sambært landsstýrismanninum er arbeiðið við hesum reglum byrjað, men verður raðfest, tá lóggávan er samtykt. Vælferðarpakkin datt burtur, tá ið tingárið endaði.

*Sambýli*

Í august 2017 ásannaði Almannamálaráðið, at tað vóru ikki nóg nágreiniligar ásetingar um eftirlitsskyldu í verandi regluverki, og at kunngerðirnar vóru ikki dagførdar samsvarandi samanleggingunum av stovnum o.ø. Sambært landsstýrismanninum fóru reglur um eftirlit at verða settar í nýggju lóggávuna, soleiðis at tað bleiv greitt, hvør hevði eftirlitsskylduna, og hvat eftirlitið skuldi fevna um. Kærumøguleikar fóru eisini at verða í nýggju lóggávuni.

Fleiri sambýli í Eind 4 høvdu onga reglugerð. Almannamálaráðið hevði góðkent virksemisætlan fyri Íslandsveg og reglugerð fyri Bóndaheyg. Stoffalág hevði góðkenda virksemisætlan, umframt at uppskot til reglugerð var gjørt og skuldi sendast ráðnum at góðkenna. Almannamálaráðið hevði ábyrgd av, at reglugerðir vórðu gjørdar fyri øll sambýlini.

Í august 2018 hevði Almannaverkið sent Almannamálaráðnum uppskot til reglugerðir fyri trý sambýli undir Eind 4 í Vágum.

***Almannamálaráðið góðkendi reglugerðirnar, tá ið tingárið endaði, og vælferðarpakkin datt burtur.***

Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at í sambandi við at Almannamálaráðið hevur arbeitt við vælferðarpakkanum, hevði ráðið ikki raðfest góðkenning av reglugerðunum. Ráðið hevði mett, at reglugerðirnar møguliga skuldu gerast av nýggjum í tráð við nýggja lóggávu. Vælferðarpakkin varð ikki samtyktur, áðrenn Løgtingið fór í summarferiu, so Almannamálaráðið góðkendi reglugerðirnar.

## 7.10 Vanlig forsorg (LG 2014/212-0217)

*Síðani nítiárini hevur verið arbeitt við nýggjari lóggávu.*

Síðani nítiárini hava skiftandi landsstýrismenn í almannamálum boðað frá, at teir arbeiddu við nýggjari lóggávu, og at øll almannalóggávan fór at verða lagað til føroysk nútíðarviðurskifti.

Fyrsta stigið í broytingunum var skipanin við hjálparráðum frá 2010. Annað stigið var lógin um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum kom í gildi í 2013. Tá vantaði at endurskoða ásetingarnar um fyribils og varandi hjálp, um tilboð til børn, sum bera brek, og um tilboð til eldri og vaksin við serligum tørvi.

Í oktober 2013 ásannaði landsstýrismaðurin, at forsorgarlóggávan átti ikki at vera savnað í einari einstakari lóg, og broytti tí upprunaligu verkætlanina. Yvirskipað var ætlanin at gera nýggja lóggávu um uppihaldsveitingar og nýggja lóggávu um tænastur. Tær skuldu, sum frá leið, avloysa verandi forsorgarlóg.

Í apríl 2015 setti landsstýrismaðurin ein arbeiðsbólk at orða tænastupolitikk, sum skuldi vera grundarsteinurin undir nýggjari tænastulóg. Lógin skuldi betra innihaldið í tænastunum og rættartrygdina hjá borgarum við serligum avbjóðingum.

Í juni 2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at miðað varð eftir at fáa tænastupolitikkin lidnan á sumri 2016. Gekst sum ætlað, fór landsstýrismaðurin at leggja fram uppskot um nýggja tænastulóg fyri Løgtingið tíðliga í 2017. Tænastulógin skuldi eftir ætlan verða ein nýggj høvuðslóg, sum kom í staðin fyri ásetingarnar í forsorgarlógini um tænastur, sum t.d. stuðulsfólkaskipanin og bútilboð.

Í august 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at tilmæli um tænastupolitikk hevði verið til aðalorðaskifti í Tinginum. Arbeiðsætlan fyri lógaruppskotið var gjørd.

Í august 2018 var nýggj lóggáva til hoyringar, og landsstýrismaðurin væntaði, at lógaruppskotið varð lagt fyri Løgtingið seinni í árinum.

*Lógaruppskot um nýggja vælferðarlóg var lagt fyri Løgtingið, men datt burtur, tá ið tingárið endaði.*

Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at lógaruppskot, ið skuldi avloysa forsorgarlógina, varð lagt fyri Løgtingið í seinastu tingsetu í løgtingsmáli nr. 127/2018 “Uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð (Vælferðarlógin)”, men at vælferðarpakkin datt burtur, tá ið tingárið endaði.

## 7.11 Arbeiðsfremjandi tiltøk (LG 2017/212-0217)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av høvuðskontu 12.21.7.02 “Arbeiðsfremjandi tiltøk”.

Landsgrannskoðanin kannaði, hvussu Almannaverkið grundgav og skjalprógvaði avgerðir, og um útgjøldini vóru røtt.

Heimild at veita lønarískoyti er í Ll. nr. 63/2012 “um arbeiðsfremjandi tiltøk”. Endamálið við lógini er at stuðla undir eitt virkið arbeiðslív hjá persónum, sum hava ella kunnu fáa trupulleikar við at varðveita tilknýti til arbeiðsmarknaðin.

Við stakroyndum kannaðu vit nøkur mál, um treytirnar í § 21 og annars aðrar treytir í §§ 22-23 vóru loknar.

Landsgrannskoðanin hevði ongar týðandi viðmerkingar til málsviðgerðirnar.

*Eftirlitið var ikki nóg neyvt.*

Nakrir feilir vóru í útgjøldum, serliga vóru tað feilir í rokningum frá arbeiðsgevarum. Landsgrannskoðanin helt, at eftirlitið hevði ikki verið nóg neyvt. Sambært Almanna-

verkinum var nýggj mannagongd sett í verk 1. januar 2018, og fór lønarískoytið at verða goldið út, eftir at arbeiðsgevarin hevði goldið lønina. Tað hevði við sær, at lønarískoytið verður javnað mánaðarliga. Almannaverkið helt, at skipanin minkaði um vandan fyri, at líknandi feilir henda.

Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Almannaverkið hevur sett nýggju mannagongdina í verk, og lønarískoytið verður nú goldið umvegis Heildarskipanina.

***Almannaverkið hevur sett nýggja mannagongd í verk, og styrkt um eftirlitið.***

Almannaverkið sendir ikki rokningar longur, men rindar sín part út, tá ið arbeiðsgevarin hevur rindað. Almannaverkið ger stakroyndir av útgjøldum, ið víkja frá tí, ið sáttmáli ásetir. Í teimum førum kannar Almannaverkið málið nærri.

### Avtalað løn sambært § 24

Landsgrannskoðanin kannaði nøkur mál viðvíkjandi løn, sum arbeiðstakari kann avtala við fyritíðarpensjónistar, og sum er lægri enn sáttmálaløn. Nøkur mál snúðu seg um persónar í starvi í royndartíð, uttan løn. Landsgrannskoðanin ivast í, um heimild er fyri tí í fyriskipanini.

***Ivi um heimild til royndartíð uttan løn.***

Tá ið ásett er í lógini, at avtala skal gerast í samráði við viðkomandi fakfelag, helt Landsgrannskoðanin tað vera umráðandi, at fakfeløg verða kunnað í hvørjum einstøkum føri.

***Fakfeløg eiga at verða kunnað, men ógreitt um hvør skal kunna.***

Landsstýrismaðurin var samdur við Landsgrannskoðanina, at tað hevði týdning, at fakfeløg vórðu kunnað í hvørjum einstøkum føri. Men lógin fyriheldur seg ikki til, hvør hevur ábyrgd av at kunna fakfelagið í sambandi við eina avtalu. Landsstýrismaðurin fór at taka málið upp við Almannaverkið, soleiðis at fakfeløgini á ein smidligan hátt verða kunnað um einstøku avtalurnar.

Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at einki nýtt er hent í málinum.

### Yrkisútbúgving og arbeiðsvenjing

Sambært § 9, stk. 1, í lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk kann Almannaverkið veita stuðul til m.a. yrkisútbúgving og arbeiðsvenjing.

Vit kannaðu nøkur mál viðvíkjandi yrkisútbúgving og nøkur viðvíkjandi arbeiðsvenjing.

*Yrkisútbúgving*

Sum heild vóru málini væl lýst. Sambært Almannaverkinum skulu arbeiðsgevarar tryggja, at lønirnar eru rættar, og stovnurin skal tryggja, at lønarískoytið er í samsvari við sáttmála ímillum arbeiðsgevara, borgara og Almannaverkið.

Í einum máli var ivi um, hvørt starvið var rætt flokkað. Landsgrannskoðanin var samd við Almannaverkið, at stovnurin ikki kann gera av, hvussu kommunur og Yrkisdepilin avtala lønarflokkingar. Landsgrannskoðanin helt tó, at tað samsvaraði ikki við § 14, sum greitt tilskilar, at grundarlagið fyri lønarískoytinum er lærlingaløn ella minstaløn sambært viðkomandi sáttmála.

Landsgrannskoðanin vísti á, at rindar arbeiðsgevari hægri løn, kann Almannaverkið bert rinda lønarískoyti, grundað á eina løn, sum viðkomandi hevur rætt til. Vit mæltu til, at Almannaverkið tryggjar sær, at lønin, sum lønarískoytið er grundað á, er sambært røttum sáttmála, flokki og stigi, áðrenn sáttmáli um lønarískoyti til yrkisútbúgving verður settur í verk.

***Lønarískoyti sambært § 14 er grundað á lærlingaløn ella minstaløn sambært sáttmála.***

Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Almannaverkið nú tryggjar, at nýggjar avtalur, sum verða gjørdar millum arbeiðsgevara og arbeiðstakara, eru sambært § 14. Tey tryggja, at lønarískoytið er lærlingaløn ella minstaløn sambært viðkomandi sáttmála, og at lønarískoytið svarar til tað, ið arbeiðsførleikin verður mettur at

vera skerdur. Almannaverkið fylgir við møguligum broytingum, so sum lønarhækkingum v.m. Gjørdar avtalur verða eisini kannaðar, um tær eru sambært ásetingini í § 14.

*Arbeiðsvenjing*
Landsgrannskoðanin mælti til, at arbeiðsbúgvingarfundurin, sum játtar arbeiðsvenjingina, eisini skuldi áseta mettan arbeiðsførleika. Almannaverkið segði, at mannagongdin hevði verið nýtt higartil, men stovnurin hevði nú strammað upp við at upplýsa betur í avgerðarskrivum.

Vit mæltu til neyvari eftirlit við rokningum. Mælt varð eisini til at tryggja, at borgarin fær løn eftir røttum sáttmála, flokki og stigi, tá ið sáttmáli verður undirskrivaður millum Almannaverkið, arbeiðsgevara og arbeiðstakara.

Í august 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at starvsfólk hevur fingið uppgávuna at tryggja, at nevndu viðurskifti verða avgreidd sambært galdandi reglum, eisini at rokningar frá arbeiðsgevarum eru í tráð við undirskrivaðan sáttmála.

***Starvsfólk hevur fingið til uppgávu at tryggja, at galdandi reglur verða fylgdar.***

## 7.12 Fólkapensjón (LG 2018/212-0218)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað fólkapensjón og viðbøtur til ávísar pensjónistar fyri 2018.

Fólkapensjón verður veitt við heimild í § 1 í Ll. nr. 48/1999 “um almannapensjónir o.a.” Upphæddirnar eru ásettar í kunngerð fyri eitt ár í senn.

Roknskapartøl 2014 til 2018, býtt á grundupphædd, viðbót og aðrar viðbøtur.

*t.kr.*

| | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Grundupphædd | 310.800 | 319.461 | 277.753 | 287.071 | 293.916 |
| Viðbót | 172.062 | 186.264 | 207.014 | 211.843 | 217.304 |
| Aðrar viðbøtur | 1.914 | 2.335 | 2.933 | 2.640 | 2.459 |
| **Tilsamans** | **484.776** | **508.060** | **487.700** | **501.554** | **513.679** |
| Tal av pensjónistum | 7541 | 8022 | 8058 | 8250 | 8570 |

Rætt til pensjón hevur persónur, ið:

1. hevur danskan heimarætt ella er giftur við ella seinast hevur verið giftur við einum persóni við donskum heimarætti,
2. hevur fastan bústað í Føroyum ella hevur hýru við skipi skrásett í Føroyum, og
3. hevur havt fastan bústað í danska ríkinum í minsta lagi 3 ár, tá ið viðkomandi var millum 15 og 67 ár.

Sambært § 3, stk. 2 og 3, kann landsstýrismaðurin gera undantøk frá reglunum í stk. 1.

Rætt til fólkapensjón hava øll, sum fylla 67 ár og lúka treytirnar annars í lógini. Pensjónin er sett saman av grundupphædd og møguligari viðbót. Fyri at fáa fólkapensjón útgoldna, skal umsókn sendast til Almannaverkið. Í umsóknarblaðnum ber til at søkja um grundupphædd, ella grundupphædd og viðbót.

Persónur, sum hevur búð tilsamans 40 ár í Føroyum, Grønlandi ella Danmark, frá tí at viðkomandi var 15 til 67 ár, hevur rætt til fulla pensjón. Hevur persónur búð styttri enn 40 ár í nevndu londum, hevur hann rætt til fólkapensjón í samsvari við bústaðartíðina. Pensjónin verður tá ásett eftir lutfallinum millum bústaðartíðina og 40 ár.[19]

[19] Brotpensjón.

## Grundupphædd

Tey, ið hava rætt til fólkapensjón, fáa grundupphædd, sum er óheft av aðrari inntøku. Grundupphæddin er ikki skattskyldug. Í 2018 vóru upphæddirnar:[20]

*Grundupphæddin er ikki skattskyldug.*

*kr.*

| | um árið | um mánaðin |
|---|---|---|
| Grundupphædd til fólkapensjón, støk | 43.068 | 3.589 |
| Grundupphædd til fólkapensjón, gift hvør | 32.796 | 2.733 |

### *Viðbót*

Umframt grundupphæddina, hava fólkapensjónistar rætt til viðbót. Viðbøturnar verða á hvørjum ári javnaðar í kunngerð, og í 2018 vóru tær:

*kr.*

| | um árið | um mánaðin |
|---|---|---|
| Viðbót til fólkapensjón, støk | 45.252 | 3.771 |
| Viðbót til fólkapensjón, gift hvør | 36.372 | 3.031 |

*Upphæddirnar verða ásettar 1. januar fyri eitt álmanakkaár.*

Pensjónsupphæddirnar verða ásettar 1. januar við gildi fyri eitt álmanakkaár eftir inntøkugrundarlagnum. Inntøkugrundarlagið er seinast uppgjørda skattskylduga inntøkan sambært skattalógini, undantikið sosialar pensjónir og arbeiðsmarknaðar-eftirløn.

*Viðbótin verður lækkað, um pensjónisturin hevur inntøku.*

Um pensjónistur hevur aðra inntøku enn pensjónina, verður viðbótin lækkað við 60% av einum inntøkugrundarlagi, sum er útgreinað í § 20 í pensjónslógini. Er talan um hjún, har bæði fáa fólkapensjón, verður viðbótin lækkað við grundarlagi í helvtini av samlaðu inntøkuni hjá báðum hjúnafeløgunum tilsamans.

Inntøkugrundarlagið er seinast uppgjørda skattskylduga inntøkan, netto kapital-vinningur, og forsorgarhjálp, men undantikið sosialar pensjónir og arbeiðsmarknaðar-eftirløn. Í 2018 var frádráttarfría inntøkuupphæddin 61.900 kr. Hesin frádráttur verður gjørdur í inntøkugrundarlagnum hjá pensjónistum, áðrenn viðbótin verður lækkað.

Tíðarskeiðið fyri uppgerð av inntøkugrundarlagnum er seinasta álíknaða inntøkuárið. Um broytingar eru í inntøkum og persónligum viðurskiftum, sum hava ávirkan á støddina av veitingini, skal pensjónisturin boða Almannaverkinum frá. Tá ið Almanna-verkið hevur fingið fráboðan um ella hevur staðfest broytingar í ásetta inntøkugrundar-lagnum, verður pensjónin umroknað. Pensjónin verður umroknað frá 1. í mánaðinum eftir, at broytingin er staðfest.

Um pensjónisturin ikki sjálvur boðar frá inntøkubroytingum, fáa broytingarnar ikki ávirkan fyrr enn annað árið eftir. Orsøkin til tað er, at pensjónsárið verður eftirroknað við støði í veruligu inntøkuni, ið er endaliga líknað hjá TAKS, t.e. í apríl, juli og oktober árið eftir útgjald.

*Aðrar viðbøtur eru ikki skattskyldugar.*

Afturat pensjón og viðbót, kann verða veitt barnaviðbót, hjálparviðbót, røktarviðbót og persónlig viðbót. Hesar viðbøtur eru undantiknar skattskyldu.

### *Mannagongdir*

Almannaverkið skrásetir mál um fólkapensjón í Heildarskipanini.

Almannaverkið hevur mannagongdir fyri málsviðgerð. Fakdeildin ger yvirskipaðar leið-beiningar, og Útgjaldsdeildin hevur sínar egnu meiri ítøkiligu arbeiðsmannagongdir. Almannaverkið dagførir ikki innanhýsis mannagongdirnar hjá Útgjaldsdeildini so tíðum, men dagførir yvirskipaðu mannagongdirnar hvørja ferð, broytingar eru á økinum.

[20] K. nr. 150/2017 “um áseting og javning av almannaveitingum”, sum broytt við k. nr. 4/2018.

Almannaverkið sendir øllum borgarum bræv, tríggjar mánaðir áðrenn tey fylla 67 ár, við áminning um at senda umsókn um fólkapensjón. Málið hjá stovninum er, at málsviðgerðartíðin fyri fólkapensjón er 14 dagar.

Viðgerðartíðin í málum um brotpensjón er longri, av tí at skjøl skulu heintast inn frá myndugleikum uttanlands, eitt nú lívváttan, inntøkuváttan og bútíð. Málið er tó, at viðgerðartíðin er tvær vikur, tá ið øll skjøl eru fingin til vega.

### *Stakroyndir av fólkapensjón*

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað útgjøld av fólkapensjón í Heildarskipanini, herundir um útgjaldið av pensjón og møguligum viðbótum er rætt, og hvussu long málsviðgerðartíðin er. Vit høvdu einki at finnast at útgjøldunum, men mæla til, at øll skjøl eru í skipanini, soleiðis at málini kunnu lýsast til fulnar.

***Landsgrannskoðanin mælir til, at øll skjøl eru í Heildarskipanini.***

Í fleiri málum í Heildarskipanini vóru fá skjøl, og í onkrum førum vóru skjølini, ið játta útgjald av fólkapensjón, ikki í málinum.

Almannaverkið vísti á, at øll skjølini í gomlu skipanini vóru ikki flutt í Heildarskipanina enn. Í ScanJour lógu umsóknir og játtanir til øll tey eldru málini, uttan trý. Orsøkin til tað var, sambært Almannaverkinum, at tey skjølini hava verið skrásett í FIP skipanini[21], og eru av onkrari orsøk ikki vorðin skrásett í nýggju skipanunum.

Tó at hagtølini hjá Almannaverkinum vísa, at miðal viðgerðartíðin er 10 dagar, gongur ofta væl longri tíð, frá tí at umsókn um fólkapensjón er móttikin, til hon er játtað. Almannaverkið hevur greitt frá, at ein orsøk til tað er, at summir borgarar senda umsókn inn, langt áðrenn tey hava rætt til fyrstu veitingina. Í teimum førunum setir Almannaverkið umsóknirnar í bíðistøðu.

Hagtølini yvir viðgerðartíð verða tikin úr Heildarskipanini, og eru í tveimum, t.e. brutto- og nettomálsviðgerðartíð.

Bruttomálsviðgerðartíð er, frá tí at mál verður stovnað og áminning send umsøkjara, til játtan er send. Tað tekur sum oftast langa tíð, tí áminning verður send umsøkjarum 3 mánaðir fyri, at rættur til fólkapensjón byrjar.

***Bruttoviðgerðartíð: Tíðin frá tí, at málið er stovnað, til játtan er send.***

Nettomálsviðgerðartíð er tíðin, mál er “aktivt”, t.v.s. tá ið mál er tikið úr bíðistøðu og viðgjørt. Almannaverkið tekur umsókn úr bíðistøðu, nakrar dagar áðrenn persónur fær rætt til pensjón, játtar umsóknina og sendir svar.

***Nettoviðgerðartíð: Tíðin, tá ið málið er aktivt og verður viðgjørt.***

Til útrokning av miðal viðgerðartíð brúkar Almannaverkið nettomálsviðgerðartíðina.

Heildarskipanin kann ikki senda fólkapensjónistum játtanarskriv fyrr, enn hon ger nú, av tí at upplýsingarnar í skrivinum hanga neyvt saman við útgjaldskoyringini av fyrsta útgjaldinum hjá viðkomandi pensjónisti.

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at hóast borgari sendir umsókn inn, væl áðrenn hann fyllir 67 ár, nýtist stovnurin ikki at bíða við at svara. Almannaverkið eigur, sambært góðum fyrisitingarsiði, at svara skjótast gjørligt.

***Góður fyrisitingarsiður er at svara skjótast gjørligt.***

Vanliga má roknast við, at málsviðgerðartíð byrjar, tá ið borgari letur umsókn til myndugleikan, og endar, tá ið myndugleikin hevur svarað borgaranum. Eftir tí er veruliga viðgerðartíðin av fólkapensjón longri enn teir 10 dagarnir, og viðhvørt upp í 3 mánaðir.

***Veruliga viðgerðartíðin byrjar, tá ið borgarin letur umsókn inn og endar, tá ið borgarin fær svar.***

[21] ScanJour avloysti FIP skipanina í 1999.

*Brotviðbót*

Brotviðbót verður rindað teimum, ið vóru í skipanini áðrenn 28. desember 2015, og sum ikki fingu fulla upphædd frá Samhaldsfasta, tá ið fólkapensjónin varð skerd. Um tey fingu minni útgoldið, eftir at grundupphæddin til fólkapensjónina varð lækkað, høvdu tey rætt til brotviðbót.

Útgjaldið frá Samhaldsfasta hækkaði til 4.145 kr. frá 1. januar 2018, harumframt hækkaði útgjaldið aftur í mai 2018, afturvirkandi frá 1. januar 2018. Tí fingu pensjónistar eftirgoldið 2.000 kr., t.e. 400 kr. fyri hvønn mánað í fimm mánaðir.

Afturvirkandi broytingin kann hava havt við sær ávirkan á brotviðbótina hjá nøkrum pensjónistum, tí tað ávirkar útrokningargrundarlagið, umframt at viðbótin sambært Ll. nr. 164/2015, § 3, stk. 4, fellur burtur, tá ið árliga viðbótin er minni enn 1/40 av grundupphæddini.

Millum stakroyndirnar vit kannaðu, fingu tveir fólkapensjónistar brotviðbót. Hjá øðrum steðgaði útgjaldið av brotviðbót 1. oktober 2018. Spurt, hvussu tey ætla at viðgera málið, tá ið pensjónin fyri 2018 verður eftirroknað, svaraði Almannaverkið, at brotviðbótin verður ikki eftirroknað. Grundgevingin er, at hækkaða útgjaldið er viðurlag, sum Almannaverkið skuldi gjalda út, tó at TAKS umsitur Samhaldsfasta.

Landsgrannskoðanin spurdi eisini, hví útgjald av brotviðbót steðgaði í oktober 2018, og ikki í mai, tá ið útgjaldið av Samhaldsfasta broyttist í mai. Í september 2019 hevur Landsgrannskoðanin biðið landsstýrismannin um viðmerkingar.

*Reglur fyri eftirrokning*

Reglur fyri eftirrokning eru ásettar í § 21a í pensjónslógini. Pensjón verður eftirroknað eftir skattskyldugu inntøkuni o.ø. sambært § 20, tá ið inntøkan fyri álmanakkaárið er endaliga uppgjørd av skattamyndugleikunum. Eftirrokningin er fyri eitt heilt ár hvørja ferð. Um pensjónin er roknað eftir væntaðari inntøku, verður eftirroknað fyri tíðarskeiðið frá tillutanardegnum og árið út.

Almannaverkið eftirroknar pensjónirnar fyri at kanna, um viðbøtur eru rættar. Tað kunnu vera viðurskifti, sum gera, at viðbót ikki er røtt, eitt nú um samlaða inntøkan hjá pensjónisti broytist í árinum, ella um broytingar eru í persónligu viðurskiftunum.

***Eftirgjøld verða ikki fráboðað.***

Hevur pensjónistur fingið lægri veiting, enn hann hevur rætt til, verður munurin útgoldin. Pensjónisturin fær ikki fráboðan um tað.

Hevur pensjónistur fingið hægri veiting, enn hann hevur rætt til, verður ov nógv útgoldna upphæddin kravd aftur. Um Almannaverkið heldur, at afturgjaldskravið ikki kann fremjast, uttan at pensjónisturin kemur at vanta tað, ið er hóskandi til egið uppihald ella uppihaldsskyldu, kann ein afturgjaldskipan gerast.

Mál, har persónar hava fingið ov nógv útgoldið, skulu til málsviðgera. Heildarskipanin roknar út, hvussu nógv er útgoldið ov nógv og stovnar krøv. Eftir at málsviðgeri hevur biðið um og fingið rokning frá bókhaldinum, sendir hann rokning til pensjónistin saman við einum skrivi. Tá ið kravið er goldið, verður umbøn send TAKS um umlíkning.

Almannaverkið heldur at fólkapensjónistar eiga at fáa fráboðan, tá ið tey eiga pening tilgóðar. Orsøkin, til at Almannaverkið ikki hevur sent teimum kunnandi skriv, er, at stovnurin hevur havt tøkniligar avbjóðingar, og at øll skriv skulu gerast manuelt. Almannaverkið ætlar at gera tillagingar í skipanina, soleiðis at pensjónistar, ið fáa eitt eftirgjald, verða kunnaðir skrivliga.

### Stakroyndir av eftirrokning av fólkapensjón

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað eftirrokningina av fólkapensjónum, sum er gjørd í 2018 fyri 2017.

Sambært mannagongdunum eru eftirrokningarnar fyri eitt ár lidnar í síðsta lagi í oktober árið eftir. Fleiri eftirrokningar fyri 2017 vóru ikki gjørdar upp endaliga fyrr enn í februar 2019.

Sambært Almannaverkinum var orsøkin, at tey høvdu havt tøkniligar avbjóðingar við Heildarskipanini, og at tað manglaðu starvsfólk á deildini, ið umsitur pensjón.

Í yvirlitinum yvir allar eftirrokningar fyri 2017, var ósamsvar í 6 málum ímillum yvirlitið og upphæddirnar í Heildarskipanini um ov lítið ella ov nógv útgoldið. Upphæddirnar í Heildarskipanini samsvaraðu við upplýsingarnar frá TAKS og við tær upphæddir, ið eru ásettar í kunngerðini.

Sambært Almannaverkinum er ein orsøk til munirnar, at yvirlitið ikki bara tekur útgangsstøði í viðbótum, sum skulu eftirroknast, og tí vóru upphæddir við í yvirlitinum, sum ikki áttu at verið við. Ein onnur orsøk var, at summi mál vóru umskift í 2017, og teir pensjónistarnir vóru eftirroknaðir í nýggjasta málinum í árinum.

Almannaverkið hevur greitt frá, at feilirnir vórðu rættaðir til eftirrokningina fyri 2018. Almannaverkið hevur kannað tey málini, har samsvar ikki var ímillum yvirlitið og upphæddirnar í Heildarskipanini, og í øllum málunum fingu pensjónistarnir røtt útgjøld.

Í fleiri málum vóru fá skjøl, serliga í teimum málum, har eftirrokningin vísti, at ein fólkapensjónistur hevur fingið ov lítið útgoldið.

*Avstemman av skipanum*
Í sambandi við grannskoðanina hava vit biðið Almannaverkið um avstemmanir millum Heildarskipanina og Búskaparskipan Landsins. Almannaverkið hevur stemmað av millum skipanirnar viðvíkjandi Fólkapensjón. Eftir okkara tykki var úrslitið av avstemmanini nøktandi.

### 7.12.1 Viðbót til ávísar pensjónistar

Viðbót til ávísar pensjónistar verður veitt við heimild í Ll. nr. 35/1997 “um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.”, sum seinast broytt við Ll. nr. 189/2018. Viðbótarupphæddin verður ásett í serligari løgtingslóg.

Viðbótin verður veittur frá mánaðinum eftir, at rætturin til veitingina er staðfestur, og verður útgoldin eina ferð um mánaðin. Í 2018 var upphæddin 7.608 kr. um árið.

Roknskapartøl árini 2014 til 2018.

*t.kr.*

| | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Viðbót til ávísar pensjónistar | 30.745 | 30.674 | 30.758 | 26.059 | 31.778 |
| Tal av pensjónistum | 4093[22] | 8560 | 8059 | 8820 | 8300 |

Fólkapensjónistar og fyritíðarpensjónistar hava rætt til ávísa viðbót. Treytin er, at pensjónistur, saman við hjúnafelaga ella samlivandi, ikki hevur hægri ársinntøku, umframt pensjónina, enn 80.000 kr. Stakur pensjónistur skal ikki hava hægri ársinntøku, umframt pensjónina, enn 60.000 kr.

Hjún, har bæði eru pensjónistar, fáa eina viðbót í felag, ið verður útgoldin við einari helvt til hvønn. Um annar hjúnafelagin flytur á stovn, fær tann heimabúgvandi fulla viðbót. Fyritíðarpensjónistar, ið búgva á stovni, ið er góðkendur sambært lóg um almenna forsorg, hava ikki rætt til viðbót. Viðbótin er harafturat treytað av, at virðið av

[22] Tá talan er um giftar pensjónistar, fekk bert annar fólkapensjónisturin viðbót útgoldna til 1. apríl 2015. Aftan á 1. apríl fingu báðir fólkapensjónistarnir ½ viðbót útgoldna.

nettoinntøku, ið verður skattað eftir reglunum í kapitalvinningsskattalógini, og sum er partur av inntøkugrundarlagnum, ikki er oman fyri 2.000 kr. árliga.

Neyðugt er ikki at søkja um at fáa ávísu viðbótina, tí stuðulin verður latin øllum, ið uppfylla treytirnar. Persónur fær ikki viðbót, um hann bara hevur søkt um grundupphædd. Persónur, sum bert søkir um grundupphædd, gevur ikki Almannaverkinum loyvi til at síggja inntøkuupplýsingarnar; tí er ikki møguligt hjá Almannaverkinum at kanna, um tey uppfylla treytirnar fyri at fáa ávísu viðbótina.

Vit hava við stakroyndum kannað ávísu viðbótina, sum var útgoldin í 2018. Einki var at finnast at.

# 8. Uttanríkis- og vinnumál

## 8.1 Uttanríkis- og vinnumálaráðið (LG 2016/213-0111)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin m.a. tímaskráseting hjá starvsfólkum í Uttanríkis- og vinnumálaráðnum. Ráðið arbeiddi tá við at bøta um mannagongdina.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur í september 2019 greitt frá, at ráðið hevði arbeitt miðvíst fyri, at allar saldur vóru innanfyri ásettu mørkini. Av og á hendir tó, at onkur salda kemur út um ásettu mørkini. Tá avtalar ráðið við starvsfólk, hvussu saldan skal avviklast.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið var farið í holt við at dagføra roknskaparreglugerðina. Í september 2019 hevur ráðið greitt frá, at arbeiðið við roknskaparreglugerðini hevur ligið stilt eina tíð, men er tikið uppaftur, og er dagføringin um at vera komin á mál.

### Eigarapolitikkur landsins

Í august 2017 greiddi Uttanríkis- og vinnumálaráðið frá, at embætisbólkurin, sum gjørdi uppskot til eigarapolitikk landsins, var um at vera liðugur við arbeiði sítt, og at frágreiðing og tilmæli eftir ætlan fóru at verða handað landsstýrismanninum á heysti 2017.

Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum var embætisbólkurin liðugur við arbeiðið og hevur handað landsstýrismanninum frágreiðing og tilmæli. Frágreiðing og tilmæli vórðu løgd fyri Løgtingið í heyst.

Á várið 2019 var eigarapolitikkur landsins til aðalorðaskiftis í Løgtinginum í Lm. nr. F-006/2018: Frágreiðing sambært § 51, stk. 4, í tingskipanini um eigarapolitikk landsins.

***Eigarapolitikkur landsins var til aðalorðaskiftis í Løgtinginum.***

## 8.2 Stuðulsjáttanir, § 13 Uttanríkis- og vinnumál (LG 2016/213-0111)

Landsstýrismaðurin greiddi í 2017 frá, at ráðið kannaði, hví upphæddin til IMO í 2015 var hægri enn hini árini, og hví eykarokning var komin viðvíkjandi NASCO.

Í august 2018 greiddi Uttanríkis- og vinnumálaráðið frá, at ráðið var ikki liðugt við eftirkanningarnar av millumtjóða limagjøldunum.

*Játtanarslag*

Sambært játtanarlógini verður rakstrarjáttan brúkt, tá ið endamálið við játtanini fyrst og fremst verður rokkið við virksemi, sum fevnir um at seta starvsfólk og at halda útreiðslurnar í hesum sambandi, herímillum at keypa vørur og tænastur.

Sambært fíggjarlógini fevna uttanríkismál undir Uttanríkis- og vinnumálaráðnum um millumtjóða samstarv. Limaskapur í millumtjóða samstarvi kann tískil metast sum ein

partur av virkseminum hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, og endamálið við játtanini verður rokkið við m.a. limaskapi í millumtjóða felagsskapum. Útreiðslurnar av at vera í millumtjóða samstarvi kunnu samanberast við aðrar rakstrarútreiðslur, tí tær standast av virkseminum hjá stovninum.

Í august 2018 boðaði Uttanríkis- og vinnumálaráðið frá, at ráðið fór at taka málið upp við Fíggjarmálaráðið.

Í fíggjarlógini 2019 eru játtanirnar rakstrarjáttanir.

*Stuðul til ferðavinnu*
Løgtingsgrannskoðararnir hildu tað ikki vera nøktandi, at freistin at lata inn ársroknskap hjá P/f Visit Faroe Islands var sett til 1. juni í avtaluni, hóast freistin í kunngerðini um stuðulsjáttan er 1. apríl.

***Freistin at lata inn roknskap er broytt.***

Í september 2019 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið greitt frá, at í nýggja sáttmálanum við P/f Visit Faroe Islands er freistin broytt til 1. apríl.

*Ov nógv goldið út í stuðli*
Í seinastu frágreiðing okkara varð greitt frá, at P/f Visit Faroe Islands í februar 2018 hevði gjørt eina avtalu um afturgjald av ov nógv útgoldnum stuðli av krónu fyri krónu játtanini. Peningurin er nú goldin aftur.

## 8.3 Jarðfeingi (LG 2017/213-0321)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Jarðfeingi.

Roknskaparreglugerðin var ikki góðkend. Fyri tænastur, stovnurin ger fyri feløg og stovnar í Føroyum, var samsýningin tímaløn hjá starvsfólki +110%. Taksturin fyri granskingararbeiðið er 890 kr./tíman. Landsgrannskoðanin mælti til at áseta í roknskaparreglugerðini, hvussu prísásetingin verður gjørd.

Í august 2018 kunnaði Uttanríkis- og vinnumálaráðið um, at ráðið hevði umrøtt málið við Jarðfeingi, og Jarðfeingi tók undir við at seta takstirnar í roknskaparreglugerðina.

Í uppskotinum um roknskaparreglugerð, sum ráðið fekk, stóð: "*Samsýningar fyri veittar tænastur verða í høvuðsheitum ásettar við støði í tímalønum hjá starvsfólkum, ið veita tænasturnar, og einum gjaldi til felags útreiðslur hjá stovninum. Samsýningarnar kunnu tó vera hægri, t.d. í summum granskingarverkætlanum, har ein felags tímasatsur verður avtalaður fyri allar partarnar í verkætlanini".*

***Roknskaparreglugerðin er enn ikki góðkend.***

Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum hava tey ikki móttikið nýtt uppskot til roknskaparreglugerð.

*Avskriving*
Jarðfeingi hevði avskrivað 139 t.kr., sum útlendskur keypari mátti rinda í meirvirðisgjaldi í heimlandinum eftir at hava keypt dátur frá stovninum.

Spurt, um heimild at eftirgeva skuld ella at lata avsláttur, vísti Jarðfeingi til sølusáttmála á heimasíðuni hjá stovninum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunnaði um, at orðingin í sølusáttmálanum ikki legði upp til avsláttur í prísinum. Ráðið fór at mæla Jarðfeingi til at endurskoða ásetingina í sáttmálanum, tí sáttmálin mátti ikki vera forðing fyri kappingarførinum hjá Føroyum mótvegis øðrum oljuleitiøkjum.

Í september 2019 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunnað um, at Jarðfeingi hevur endurskoðað sølusáttmálan, og gjørt ta niðurstøðu, at stovnurin hevur heimild at áseta prísin á dátum.

Jarðfeingi hevur í sambandi við 5. útbjóðingarumfar avgjørt at geva oljufeløgunum dátur fyri einki, burtursæð frá einum tilfars- og umsitingargjaldi. Orsøkin er, at onnur lond gera tað sama.

### Verkætlan 7120 FIEC[23]

Síðani 2014 høvdu pengar verið støðlaðir á FIEC verkætlanini:

*t.kr.*

| Heiti | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Stuttfreistað skuld | -490 | -392 | -349 | -242 | 0 |

Útreiðslurnar til FIEC verkætlan í 2017 vóru 107 t.kr. og eru fíggjaðar av støðlaðum pengum.

FIEC ráðstevnan hevur til endamáls at fáa vitan um kolvetnisrelevanta jarðfrøði á føroyska landgrunninum lagda fram fyri almenninginum. Ráðstevnan er hildin 4 ferðir og varð fíggjað við leigu av básum, sponsorum og luttøkugjøldum. Tær tvær fyrstu ráðstevnurnar vórðu væl vitjaðar og góvu yvirskot, meðan hinar góvu hall, sum varð fíggjað av støðlaðum yvirskoti.

Tær 242 t.kr. í fíggjarstøðuni 2017 vóru ætlaðar at fíggja komandi ráðstevnu um evnið. Um hesin peningur ikki var tøkur, so helt Jarðfeingi, at tað var ivasamt, um stovnurin kundi átikið sær váðan at skipa fyri slíkari ráðstevnu, ið kundi verða rættiliga kostnaðarmikil, um undirtøkan ikki var nøktandi.

Í august 2018 greiddi Uttanríkis- og vinnumálaráðið frá, at ráðið helt ikki, at mannagongdin at flyta játtan til seinni fíggjarár var í samsvari við § 13[24] í játtanarskipanini, og legði afturat, at játtan í fíggjarlógini umfataði eisini játtan til at hava inntøkur.

Jarðfeingi hevur í 2018 inntøkuført tær 242 t.kr., sum stóðu í fíggjarstøðuni.

***Ágóðin er inntøkuførður í 2018.***

### Lønir

16 fólk starvaðust á Jarðfeingi. Í 2017 boðaði stjórin frá, at stovnurin fór burtur frá at stempla arbeiðstíð. Í uppskoti til samtyktar av landsroknskapinum 2016 vístu løgtingsgrannskoðararnir m.a. á, at teir vóru ósamdir við landsstýrismanninum í uttanríkis- og vinnumálum um, at ásetingarnar um hóskandi tíðarskráseting eru ógreiðar. Eisini hildu teir, at tað kundi als ikki góðtakast, at stovnur fór burtur frá at skráseta arbeiðstíð.

Í mars 2018 greiddi stjórin frá, at starvsfólk skrásettu feriur og sjúkudagar, men annars varð arbeiðstíðin ikki skrásett. Onkur starvsfólk skrásettu tó arbeiðstíð í Totalview.

Landsgrannskoðanin vísti á, at umframt ásetingina í roknskaparkunngerðini um hóskandi tíðarskráseting var ásett í lønarsáttmálum, hvussu starvsfólk hjá landinum vórðu samsýnt. Landsgrannskoðanin helt tí, at Jarðfeingi hevði skyldu til at tryggja, at teir tímarnir, ið stovnurin rindaði løn fyri, vóru arbeiddir.

Í apríl 2018 gjørdi Jarðfeingi vart við, at tað var ikki rætt, tá ið Landsgrannskoðanin segði, at stovnurin ongar skrivligar reglur hevði um arbeiðstíð. Flestu starvsfólkini arbeiddu við prosjektum, og sambært innanhýsis reglunum um arbeiðstíð/tíðarskráseting *"er ikki neyðugt hjá starvsfólki at skráseta alla arbeiðstíð, til tess at skjalfesta*

[23] Faroe Islands Exploration Conference.
[24] § 13 ásetir, at ikki ber til at flyta játtan millum høvuðskontur ella flyta játtanir til seinni fíggjarár.

*samlaðu tíðarnýtsluna á stovninum, tá avrikið hjá hvørjum einstakum starvsfólki sæst aftur í prosjektstýringini."*

Landsgrannskoðanin vísti á, at í mars 2018 var parturin í prosjektstýringsmyndlinum hjá stovninum viðvíkjandi tímaskrásetingini ikki komin at virka. Tí helt Landsgrannskoðanin, at Jarðfeingi leyk ikki krøvini um hóskandi tíðarskráseting.

Í august 2018 vísti Uttanríkis- og vinnumálaráðið á, at tað vóru fleiri hættir at tryggja, at avtalaðu vikutímarnir hjá starvsfólkunum verða nýttir til arbeiði á stovninum, m.a. við neyvari verkætlanarstýring ella á annan hátt. Tað hevði ikki verið krav um beinleiðis tíðarskráseting, men tað var tó broytt við K. nr. 110/2017 "um roknskaparverk landsins o.t." Í § 5, stk. 4, er ásett, at stovnsleiðarin skal skipa fyri, at hóskandi skráseting av arbeiðstíð, fráveru, frítíð o.t. er á stovninum, so lønarútreiðslurnar eru rættar.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið er samt við Landsgrannskoðanina, at Jarðfeingi hevði ikki lokið treytirnar í § 5, stk. 4, í roknskaparkunngerðini.

***Sambært ráðnum skráseta starvsfólk nú arbeiðstíðina.***

Í september 2019 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunnað um, at Jarðfeingi nú nýtir Totalview at skráseta arbeiðstíð og feriu o.a. Øllum starvsfólkum er álagt at skráseta sína arbeiðstíð.

### KT viðurskifti

Jarðfeingi hevði gjørt eina váðameting, ið ikki var heilt liðug, og var í holt við at verkseta hana. Sambært stjóranum var dátusavnið tað mest kritiska. Dáturnar viðvíkjandi boringum liggja hjá KT Landsins. Savnið av lutum var í kjallaranum hjá Jarðfeingi.

Upplýsingarnar hjá Jarðfeingi eru viðkvæmar, men tey hava ongar viðkvæmar persónsupplýsingar.

***Váðametingin er ikki liðug.***

Í september 2019 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunnað um, at arbeitt hevur verið við váðametingini, men verksetingararbeiðið hevur verið tarnað.

## 8.4 Djóralæknatænastur (LG 2017/213-0331)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av høvuðskontu 13.33.1.04 "Djóralæknatænastur", sum Heilsufrøðiliga starvsstovan umsitur.

Endamálið við játtanini er at veita samsýning til privatar djóralæknar fyri vaktarhald uttan fyri vanliga arbeiðstíð, soleiðis at djóraeigarar kunnu fáa djóralæknahjálp alt samdøgrið.

Grannskoðanin vísti, at fleiri rokningar vóru skeivar hjá øðrum veitaranum. Landsgrannskoðanin helt, at rokningarnar vóru ov illa útgreinaðar, og at tað gjørdi tað trupult at hava eftirlit við, at útgjøldini vóru røtt.

Heilsufrøðiliga starvsstovan ætlaði at avtala við fyritøkurnar, hvussu viðurskiftini kundu betrast, fyri at kunna hava betri eftirlit.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur greitt frá, at vaktaruppgerðirnar nú hvønn mánað verða eftirkannaðar, um tímatalið er rætt, og rætt vaktargjald er brúkt, og einki hevur verið at funnist at síðani.

## 8.5 Sjóvinnustýrið (LG 2015/206-0351)

Í 2018 kunnaði Uttanríkis- og vinnumálaráðið um, at Sjóvinnustýrið húsaðist nú í skrivstovuhølum í Tórshavn. Ætlanin var at byggja nýggj skrivstovuhøli til stovnin í Vágum. Verklagslóg er samtykt, og 5 mió.kr. vóru játtaðar í 2018 og eftir ætlan 4,9 mió.kr. í 2019, tilsamans 9,9 mió.kr. Landsverk stóð fyri byggiverkætlanini, og eftir ætlan varð bygningurin klárur at flyta inn í á heysti 2019.

***Byggingin av nýggjum hølum í Vágum hevur drigið út.***

Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum var upprunaliga ætlanin, at Sjóvinnustýrið skuldi flyta inn í nýbygd hølir í Vágum á heysti 2019. Landsverk hevur í samstarvi við Vága kommunu og Sjóvinnustýrið funnið eina hóskandi staðseting av skrivstovubygninginum. Yvirtøkan av økinum hevur drigið út, m.a. tí, at kommunan átti ein part, og ein privatur ánari átti ein part av økinum, sum ætlanin var at nýta til staðsetingina av bygninginum til Sjóvinnustýrið. Kommunan fór tí undir at ognartaka henda partin av økinum, og hevur tað tikið drúgvari tíð enn fyrst mett. Væntað verður, at grundøkið er avgreitt í næstum.

## 8.6 Vinnustovnurin (LG 2017/213-0371)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Vinnustovninum.

Vinnustovnurin hevði ikki formligt loyvi frá Fíggjarmálaráðnum at nýta egna búskaparskipan, men hevði í februar 2018 søkt um loyvi.

***Einki formligt loyvi til egna búskaparskipan.***

Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum hevur Vinnustovnurin ikki frætt frá Gjaldstovuni enn. Ráðið leggur afturat, at skipanin hjá landinum megnar ikki at umsita allar skrásetingarnar hjá Vinnustovninum, og er tað upprunaliga í samstarvi við Gjaldstovuna, at Vinnustovnurin hevur egna búskaparskipan til debitorar. Tó var eingin formlig avtala gjørd tá.

Sambært kontuvegleiðingini skulu umvælingar á leigaðan bygning verða tiknar við á StRk 1610 “Húsaleiga”, tá ið tær eru at meta sum partur av leigukostnaðinum. Vinnustovnurin hevði bókað útreiðslurnar til umvæling av hølunum á StRk 1651 “Umvæling- og viðlíkahaldsútr., bygningar”. Sambært Vinnustovninum høvdu tey bókað soleiðis, fyri betur at halda skil á, hvat var føst húsaleiga, og hvat var umbyggingar, men um tað var skeivt, so varð mannagongdin broytt.

Kostnaður av leigu og umvælingum 2008 til 2018[25]:

*t.kr.*

| Heiti | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Húsaleiga | 703 | 609 | 591 | 787 | 713 | 572 | 588 | 586 | 674 | 699 | 626 | 7.148 |
| Umvæl. og viðl. | 1 | 0 | 1.270 | 2.066 | 207 | 48 | 656 | 0 | 97 | 590 | 1.191 | 6.126 |
| Útl.stovan[26] | | | | -168 | -126 | -22 | | | | | | -316 |
| **Tilsamans** | **704** | **609** | **1.861** | **2.685** | **794** | **598** | **1.244** | **586** | **771** | **1.288** | **1.817** | **12.958** |

***Vinnustovnurin rindar lutfalsliga lága húsaleigu, tí stovnurin rindar umvælingar.***

Landsgrannskoðanin mælti til at bóka sambært kontuvegleiðingini, eisini fyri at vísa samlaða kostnaðin fyri hølini.

Í september 2019 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunnað um, at Vinnustovnurin broytir mannagongd frá januar 2019.

[25] Vit hava ikki tikið tær 510 t.kr., sum FAS/Sjóvinnustýrið sambært Vinnustovninum hava goldið til 2015.
[26] Leigukostnaður, áðrenn Útlendingastovan varð flutt til Vinnustovnin.

## 8.7 Skráseting Føroya (LG 2017/213-0371)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Skráseting Føroya.

Sambært § 159 í ársroknskaparlógini hevur Skráseting Føroya skyldu til, í ávísan mun at gera kanningar av teimum ársfrásagnum, sum vinnufeløg lata inn.

Landsgrannskoðanin spurdi Skráseting Føroya, hvørjar mannagongdir stovnurin hevði í sambandi við, at feløg lata ársfrásagnir inn og í sambandi við gjøgnumgongd av ársfrásagnum. Eisini kannaðu vit, hvussu viðgerðin fór fram, tá ið eitt felag hevur frávalt grannskoðan sambært § 135 í ársroknskaparlógini.

***Talgilding hevur higartil ikki fingið positivu ávirkanina, sum væntað.***

Talgilding hevði ikki fingið ta positivu ávirkan á tænastustøðið, sum Vinnustovnurin væntaði í 2013, tí at Skrásetingin hevði nýtt nógva arbeiðsorku at fáa skipanina XBRL at virka eftir ætlan. Tað hevði havt við sær, at aðrar uppgávur vóru útsettar.

***Skrivligu mannagongdirnar til roknskapareftirlit eru enn mangulfullar.***

Skrivligu mannagongdirnar hjá Skrásetingini til roknskapareftirlit vóru enn mangulfullar og vórðu tí heldur ikki brúktar í sambandi við eftirlitsarbeiðið. Sambært Skrásetingini vórðu mannagongdirnar gjørdar lidnar í 2017.

Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum verða somu mannagongdir enn nýttar.

### Kanning av ársfrásøgnum

Sambært § 161 í ársroknskaparlógini kann Skráseting Føroya taka ymisk stig mótvegis feløgum, hvørs ársfrásagnir ikki lúka allar treytir. Skráseting Føroya hevur valt ein fyribyrgjandi leist, har stovnurin luttekur á aðalfundum hjá grannskoðarunum, har stovnurin tekur manglarnar í innlatnu ársfrásagnunum upp undir einum og eisini vegleiðir um krøv o.a. Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum tók ráðið undir við hesum leistinum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið vísti á, at í sambandi við at farið varð undir arbeiðið at talgilda umsitingina (Talgildu Føroyar), var tað eitt ynski/krav frá ráðnum, at Skrásetingin fór undir miðvísa talgilding av sínum tænastum. Tað skuldi lætta um hjá vinnulívi og borgarum, tí tey frameftir kunnu avgreiða síni viðurskifti á netinum sum t.d. at stovna feløg og lata inn ársfrásagnir.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið helt, at Skrásetingin sjálvsagt átti at hava neyðuga arbeiðsorku at fremja lógarkravda eftirlitið, men viðurkendi, at játtanarhátturin møguliga eisini hevði verið ein forðing fyri tí, við tað at stovnurin var 100% inntøkufíggjaður, og nógv arbeiðsorka og peningalig orka var í hesum tíðarskeiðnum farin til talgildingararbeiðið.

***Talgilding so krevjandi, at eftirlitið er viknað heldur enn styrknað.***

Uttanríkis- og vinnumálaráðið harmaðist um, at arbeiðið, sum í veruleikanum skuldi rationalisera umsitingina og frígeva orku, hevði verið so arbeiðskrevjandi, at orkan til eftirlit viknaði heldur enn at styrkna. Tá ið XBRL-innlatingin fór at virka, skuldi eftirlitið blivið meira automatiserað og harvið effektivari, umframt at orka varð frígivin til betri uppfylging.

***Arbeiðið ligið stilt í eina tíð.***

Í september 2019 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið greitt frá, at arbeitt hevur verið við málinum, tó hevur arbeiðið ligið stilt í eina tíð, men verður eftir ætlan tikið upp aftur í heyst.

### Frával av grannskoðan

Síðani 1. januar 2009 kunnu smærri vinnufeløg, sum uppfylla ávísar treytir, frávelja grannskoðan. Í viðmerkingunum til lógarbroytingina stendur m.a., at tað kann lætta um byrðarnar hjá íverksetarum og smáum feløgum, og áhugin fyri hesum hevur verið vaksandi seinastu árini.

Í 2016 kom møguleikin at stovna íverksetarafeløg (ÍVF), t.e. feløg við lægri krøvum til stovnsfæ. 97 tílík feløg vóru stovnað í 2017. Nógv bendi á, at fleiri valdu at stovna íverksetarafelag heldur enn smápartafelag.

Skrásetingin helt tað vera sannlíkt, at góðskan á ársfrásagnum, sum ikki vórðu grannskoðaðar, var verri enn á teimum, ið vórðu grannskoðaðar. Einsæris vóru tær frásagnirnar smáar, og tí var váðin helst lítil. Vert var tó at leggja til merkis, at fleiri feløg nú frávaldu grannskoðan, og tí var samanlagdi váðin ikki heilt ótýðandi.

***Sannlíkt, at ársfrágreiðingar hava verri dygd, tá ið grannskoðan er frávald.***

Samlaða talið av skrásettum feløgum og talið av teimum, ið hava frávalt grannskoðan:

| Ár | Skrásett feløg tilsamans | Feløg, sum hava frávalt grannskoðan |
|---|---|---|
| 2013 | 2720 | 577 |
| 2016 | 2795 | 1.268 |

Lutfalsliga nógvar viðmerkingar vóru hjá feløgum, sum høvdu frávalt grannskoðan. Skrásetingin valdi at kanna 60 feløg; av teimum vóru viðmerkingar til 40 ársfrásagnir um júst tey viðurskifti, ið viðvíkja frávali.

Landsgrannskoðanin vísti á, at svenska ríkisgrannskoðanin í 2017 gjørdi eina kanning av feløgum, ið høvdu valt grannskoðan frá, og kom til ta greiðu niðurstøðu at mæla myndugleikunum til at seta grannskoðanarskyldu aftur í gildi fyri øll feløg.[27] Í Svøríki hava reglurnar um frával av grannskoðara verið galdandi síðani 2010.

***Svenska ríkisgrannskoðanin mælti myndugleikunum til at seta grannskoðanarskyldu aftur í gildi.***

Ein av grundgevingunum fyri at slaka í krøvum til m.a. grannskoðan, hevur verið, at tað skal vera lættari og bíligari hjá feløgum at virka. Tað er ivasamt, um sparingin hjá smærru feløgunum av at frávelja grannskoðan stendur mát við versnaðu góðskuna av innlætnu ársfrásagnunum, tá ið kanningin hjá grannskoðanarvirkinum vísir, at tað vóru lutfalsliga nógvir feilir í ársfrásagnum, har feløg hava frávalt grannskoðan.

***Ivasamt, um sparingin, at velja grannskoðan frá, stendur mát við versnaðu góðskuna.***

Í juli 2018 greiddi Uttanríkis- og vinnumálaráðið frá, at Føroyar hava, á sama hátt sum onnur lond, arbeitt við at lætta um umsitingarligu byrðarnar hjá vinnuni. Eitt av tiltøkunum er at sleppa smærri vinnufyritøkum undan kravinum um grannskoðan.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið vísti á, at tey høvdu ov lítið av royndum til at staðfesta, um tað sama ger seg galdandi í Føroyum, sum í okkara grannalondum, har eftirlitið hevur víst á ónøgd við hesi feløg. Sambært ráðnum varð fylgt við gongdini, og um grannalondini fóru at herða lóggávuna fyri hesi feløg var sannlíkt, at vit eisini fóru at herða krøvini.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið fór at taka málið upp við Skrásetingina fyri at finna ein leist, har eftirlitið við hesum roknskapum og við íverksetarafeløgum varð styrkt. Samanumtikið helt Uttanríkis- og vinnumálaráðið, at tær avbjóðingar, sum hava verið við eftirlitinum av ársfrásagnum, vóru við at koma í rættlag.

## 8.8 Rúsdrekkasøla landsins (LG 2018/213-0373)

Í august 2018 kunnaði Uttanríkis- og vinnumálaráðið um, at Rúsdrekkasølan arbeiddi við at dagføra roknskaparreglugerðina, sum var frá 2007.

***Roknskaparreglugerðin frá 2007 er ikki dagførd.***

Roknskaparreglugerðin er ikki gjørd.

[27] RIS 2017:35 Avskaffandet av revisionsplikten för små aktiebolag.

Landsgrannskoðanin mælti til, at Rúsdrekkasølan steingir tíðarskeiðini í búskaparskipanini Navision samstundis, sum stovnurin rapporterar til Búskaparskipan landsins. Stovnurin svaraði, at tey vóru sjáldan klár at rapportera og lata tíðarskeiðini aftur, tá ið Gjaldstovan lat aftur fyri bókingum í Búskaparskipan landsins ímillum 8. og 10. í mánaðinum. Stovnurin legði afturat, at alt, sum skuldi skrásetast, var ikki avgreitt um tað mundi.

*Landsgrannskoðanin mælti til at steingja tíðarskeiðini í Navision samstundis sum í Búskaparskipan landsins.*

Í august 2018 greiddi Uttanríkis- og vinnumálaráðið frá, at tað var ein avbjóðing fyri fleiri stovnar, at Gjaldstovan lat mánaðarroknskapirnar aftur ov tíðliga. Rúsdrekkasølan hevði nógvar bókingar og hevði stóran tørv á at hava "rættar" mánaðir í bókhaldinum. Ein av stóru postunum var tolling, og uppgerðirnar/rokningarnar frá TAKS komu somikið seint, at Gjaldstovan hevði latið aftur fyri bókingum, tá ið uppgerðirnar komu. Tí rapporteraði Rúsdrekkasølan ein mánað afturút. Ráðið fór at umrøða nærri við Gjaldstovuna, hvørjir møguleikar vóru fyri, at mánaðarroknskapirnir kundu verða rættir hjá Gjaldstovuni og hjá Rúsdrekkasøluni.

### Kassa- og goymslueftirlit

Seinasta árið hevur Landsgrannskoðanin verið á ófráboðaðum kassa- og goymslueftirlitum á nøkrum deildum hjá Rúsdrekkasølu landsins. Vit stemmaðu dagligu søluna av við bókhaldið og peningastovnskonturnar, og vit stemmaðu goymslurnar á sølustaðnum við goymsluyvirlitið í høvuðsbókhaldinum. Um ársskiftið gjørdu vit eftirlitsuppteljingar av høvuðsgoymsluni á Hjalla. Samanumtikið stemmaðu kassarnir stórt sæð eftirlitsdagin, men nakrir munir vóru á goymslunum úti á deildunum.

## 8.9 Heilsufrøðiliga starvsstovan (LG 2017/213-0375)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevði fingið dagførda roknskaparreglugerð at góðkenna og var, sambært ráðnum, í samskifti við stovnin um ymiskar viðmerkingar, sum ráðið hevði til reglugerðina.

*Roknskaparreglugerðin er nú góðkend.*

Roknskaparreglugerðin er góðkend í september 2018.

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur ásett í roknskaparreglugerðini, at keyp av størri lutum og tænastum skulu viðgerast í leiðslubólkinum. Einki størri keyp má gerast uttan við samtykki frá stjóranum, og skal stovnurin miða ímóti, at størri keyp byggja á tilboð.

Heilsufrøðiliga starvsstovan keypir sjáldan vørur ella tænastur, sum kosta meira enn 500 t.kr. Størri keyp eru ofta knýtt at vanligu latarunum, og stovnurin hevði nýtt Keypsportalin eina ferð.

Landsgrannskoðanin mælti til at fylgja reglunum um at bjóða størri keyp út á Keypsportalinum, at bjóða keyp út ímillum fleiri veitarar og at taka neyðug búskaparlig atlit.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur umrøtt málið við Heilsufrøðiligu starvsstovuna. Heilsufrøðiliga starvsstovan nýtir ymisk tól, sum eru verifiserað frá einum veitara. Tað er alt ov orkukrevjandi at skifta veitara og fáa alla útgerðina verifiseraða av nýggjum. Uttanríkis- og vinnumálaráðið fer at umrøða møguleikan at biðja um undantak frá reglunum um útboð við Heilsufrøðiligu starvsstovuna.

### Aliskipanin

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevði upprunaliga serstaka játtan til at gera og viðlíkahalda aliskipanina. Tann menningin er sprottin úr einari royndarverkætlan, sum var ein farsóttarfrøðilig kanning og økiskoppseting móti ILA í Føroyum. Verkætlanin, sum

byrjaði í 2005, varð framd í samstarvi millum Landsdjóralæknan, Heilsufrøðiligu starvsstovuna og útlendskar kanningarstovur.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið greiddi frá, at tá ið farið varð undir verkætlanina "Basan av fiskasjúkum", varð eisini farið undir at menna eina skipan, sum skuldi taka ímóti upplýsingum frá alarum. Henda skipan var vorðin so týðandi fyri eftirlitsarbeiðið í alivinnuni, at hon var vorðin kritisk. Skipanin er víðariment og útbygd til m.a. eisini at rapportera lúsatøl í aliringunum.

Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum hevði eingin serstøk játtan verið til økið síðani 2012. Eftir tað høvdu dagføringar verið gjørdar, tá ið Heilsufrøðiliga starvsstovan hevði havt fíggjarligt rásarúm til tess. Hesar fortreytir gjørdu tað trupult at dagføra skipanina á skynsaman hátt. Aliskipanin er ein av hornasteinunum undir alivinnuni og er so mikið týðandi fyri umsitingina og eftirlitið av alivinnuni, at skipanin ikki má gerast óvirkin ella hava feilir.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið var av teirri áskoðan, at hetta keypið kom undir undantøkini í rundskrivi um keyp av vørum og tænastum frá juli 2016, petti 6 *"tó ikki, um veitingin er størri enn 500 t.kr. u/MVG. Um veitingin er størri enn 500 t.kr. u/MVG, og mett verður, at uppgávan ikki er egnað til útboð, eigur at verða biðið um undantak, sí eisini petti 6."*

***Biðja um undantak frá at bjóða keyp út.***

Uttanríkis- og vinnumálaráðið fór at mæla Heilsufrøðiligu starvsstovuni til at biðja Fíggjarmálaráðið um undantak og tók annars undir við, at farið varð undir samráðingar við fyritøkuna um lægri tímaprís.

Í september 2019 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið víst á, at Heilsufrøðiliga starvsstovan er bundin at veitaranum, sum hevur ment aliskipanina. Higartil hevur ikki verið mett, at tað ber til og ei heldur loysir seg fíggjarliga at skifta veitara.

### Inntøkur

Heilsufrøðiliga starvsstovan nevnir í roknskaparreglugerðini, hvørji inntøkusløg stovnurin hevur, men ikki nærri reglur um prísáseting v.m.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið var samt við Landsgrannskoðanini, at tað var ikki samsvar ímillum ásetingina í rundskrivinum og uppskotið til roknskaparreglugerð. Ráðið fór saman við Heilsufrøðiligu starvsstovuni at broyta ásetingina um inntøkur í samsvari við rundskrivið.

#### *Søla millum deildir hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni*

Heilsufrøðiliga starvsstovan helt tað vera greiðast at skráseta allar inntøkur sum sølu, serliga nú privat kanningarstova kappast við stovnin. Landsgrannskoðanin vísti á, at ov stórur umsetningur verður í landsroknskapinum, tá ið stovnurin bókar innanhýsis sølu og keyp, sum um talan var um sølu til onnur. Sambært kontuvegleiðingini skal innanvirkissøla og -keyp skrásetast á ávísa standardkontu fyri at eliminera innanhýsis umsetning. Heilsufrøðiliga starvsstovan kunnaði um, at tað bar ikki til hjá teimum at bóka innanhýsis sølu og keyp, soleiðis at tann kontan kundi vera nullstillað hvønn mánað.

Landsgrannskoðanin mælti til, at stovnurin fann eina loysn, soleiðis at roknskapurin varð rættur, tá ið árið er av, t.d. við at regulera sølu og keyp við ársenda.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið helt, at eftirsum talan var um 1 mió.kr. av 10,8 mió.kr. í árligari sølu, var talan um eina lutfalsliga týðandi upphædd. Ráðið fór at taka upp við Heilsufrøðiligu starvsstovuna og Gjaldstovuna, hvussu tey á ein skynsaman hátt kundu fáa roknskapin rættari.

Í september 2019 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið greitt frá, at innanhýsis søla verður framvegis faktureræd sum søla. Skipanin hjá Gjaldstovuni er ikki ment til tørvin hjá Gjaldstovuni at gera innanhýsis fakturar. Skuldi tað sæð rætt út, áttu hesir fakturar at verið bókaðir á t.d. 71 “Innanhýsis flyting millum almennar stovnar”. Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur gjørt sær eina mannagongd, sum er praktisk og skynsom í mun til arbeiðsorku.

# 9. Samferðslumál

## 9.1 Landsverk (LG 2018/217-0381)

### 9.1.1 Keyp og søla av amboðum

Landsgrannskoðanin vísti í seinastu frágreiðingini á, at keypini av útbúnaði vóru ikki altíð nóg væl skjalprógvað. Sambært Samferðslumálaráðnum hevur Landsverk tikið tilmælið frá Landsgrannskoðanini til eftirtektar og ger nærri útgreiningar ella heftir fylgiskjøl við fakturunum.

### 9.1.2 Leiga av asfaltvirki

Í seinastu ársfrágreiðingini umrøddi Landsgrannskoðanin leigu av asfaltvirki á Sundi.

Landsverk hevði gjørt leigusáttmála við privat felag um at leiga asfaltvirkið við tilhoyrandi rakstrarútgerð, eykalutum, amboðum, goymslu v.m. Landsverk leigaði eisini undirlendið og hevði yvirtikið goymsluna av tilfari.

Leigutíðarskeiðið var frá 1. november 2016 til 1. november 2021, og kundi leingjast við einum árið. Samlaði kostnaðurin til 1. november 2021 hevði verið 24,9 mió.kr. Til august 2018 hevði Landsverk brúkt 8,1 mió.kr. til viðlíkahald og størri ábøtur á asfaltverkið.

*Leiga av virki og søla av ognum*

Einki yvirlit ella skrá var yvir ognir, sum vóru leigaðar og yvirtiknar, bert nakrar myndir. Virðismeting var ikki gjørd av ognunum. Til- og frágongd í sambandi við virkið varð ikki skrásett uttan sum útreiðslur ella inntøkur í rakstrinum. Øll nýgerð o.a. fall til eigaran, um virkið ikki varð keypt. Tað hoyrir til vanligt fíggjarligt ansni at hava eina skrá yvir ognir, sum verða keyptar ella leigaðar, serliga í sambandi við tílíka leigu. Í minsta lagi mugu ognirnar verða virðismettar, um støða skal kunna takast til leigu og fíggjarligar avleiðingar annars.

***Útgerðin var ikki skrásett ella eyðmerkt.***

***Ognirnar vóru ikki virðismettar.***

Leigugjaldið var eisini fyri væntaða sølu og goymslu hjá útleigaranum. Í sambandi við leigusáttmálan seldi Landsverk útleigaranum áleggingarútgerð, ið var neyvt eyðmerkt, og har samlaða metta virðið var 3,4 mió.kr. Útleigarin hevði ikki bundið seg til ikki at framleiða asfalt. Landsgrannskoðanin undraðist á, at ójavni skuldi vera millum sáttmálapartarnar, herundir gjald fyri væntaða sølu.

*Rindan av leigu*

Sambært sáttmálanum kundi Landsverk rinda forút ella seinni. Partarnir høvdu síðani avtalað, at talan var um leigu fyri eitt 5 ára skeið, og tí var ikki nøkur føst árlig leiga. Tað er grundleggjandi regla, at allar útreiðslur skulu tíðargreinast eftir einum føstum leisti. Í leigumáli skal leigan útreiðsluførast javnt yvir leiguáramálið. Landsgrannskoðanin helt, at grundleggjandi roknskaparligar reglur vórðu ikki virdar.

*Rakstrarhall*

Asfaltvirkið á Sundi hevði 2,5 mió.kr. í hallið í 2018, tilsamans 13,4 mió.kr. í hallið árini 2016 til 2018. Í 2018 greiddi Landsverk frá, at tá virkið hevði ligið stilt vegna

umvælingar, kundi tað síggjast aftur sum meirsøla í Hundsarabotni. Landsgrannskoðanin helt ikki, at betraða úrslitið hjá virkinum í Hundsarabotni samsvaraði við hallið hjá virkinum á Sundi.

*Nýgerð og størri ábøtur*

Landsverk greiddi eisini frá, at nýgerð og størri ábøtur higartil vóru gjørdar eftir ætlan fyri at kunna nøkta søluordra til undirsjóvartunlarnar. Inntøkurnar av tí koma seinni. Landsgrannskoðanin hevði ikki fingið skjøl við ætlanum ella metingum og kundi tí ikki sanna, um og hvørjar ætlanir vóru gjørdar.

*Búskaparlig atlit*

***Ivasamt, um búskaparlig atlit vóru tikin.***

Landsverk vísti á, at asfaltvirki eru kostnaðarmikil og marknaðurin var lítil. Stovnurin tók tí av, tá ið hann fekk boðið at leiga virkið á Sundi, og hevði gjørt eina ætlan fyri neyðugar ábøtur og nýgerð. Landsgrannskoðanin hevði ikki fingið skjalprógv fyri, at prísir o.a. vóru kannað, og kundi tí ikki sanna, um og hvørjar atgerðir vóru framdar fyri at taka búskaparlig atlit. Kostnaðurin av leigumálinum var eisini munandi hægri, enn roknskaparliga/metta virðið á tí leigaða og yvirtikna. Vit ivaðust tí í, um búskaparlig atlit vóru tikin.

***Eingin fíggjarætlan gjørd fyri yvirtikna virksemið.***

Landsverk greiddi frá, at víðkanin av asfaltframleiðsluni var sprottin natúrliga úr vanliga virkseminum, og sambært stovninum var marknaðurin kendur, men tey høvdu ikki gjørt nakra fíggjarætlan fyri yvirtikna virksemið.

Landsgrannskoðanin hevði ikki sæð nøkur skjøl í hesum sambandi, onnur enn eitt skjal frá 2018 um prísbroytingar. Vit kundu tí ikki sanna, hvørji tøl lógu til grund fyri prísásetingum; heldur ikki kundu vit sanna, um víðkanin var í samsvari við reglurnar um inntøkufíggjað virksemi.

Landsgrannskoðanin undraðist á, at málið ikki var betri skjalfest.

*Samanumtikið*

***Játtanarreglur og roknskaparreglur ikki hildnar.***

Landsgrannskoðanin vísti á fleiri týðandi viðurskifti í niðurstøðunum av framdu grannskoðanini, herundir brot á játtanarligar og roknskaparligar reglur. Landsstýrismaðurin tók ikki í svari sínum støðu til viðurskiftini, men vísti til frágreiðing frá Landsverki. Landsgrannskoðanin helt ikki, at frágreiðingin frá Landsverki broytti týðandi niðurstøður av framdu grannskoðanini.

***Langtíðarleiga skal viðgerðast roknskaparliga sum keyp.***

Landsgrannskoðanin staðfesti, at leigusáttmálin um asfaltvirkið á Sundi kom undir fíggjarliga langtíðarleigu. Tílík leiga er at rokna sum keyp og skal viðgerast samsvarandi. Tá ið talan er um upphædd, sum er hægri enn 10 mió.kr., skal løguverkætlan gerast við grundarlagi í verklagslóg.

Um Landsverk ikki hevði játtanarligan ella roknskaparligan fakkunnleika í málinum, átti stovnurin at vent sær til Fíggjarmálaráðið at fáa vegleiðing. Í øðrum lagi hevði Landsverk ikki biðið um loyvi frá Fíggjarmálaráðnum um at langtíðarleiga asfaltvirkið, sum annars ásett í kunngerðini um rakstrarjáttan.

***Til ber ikki at siga, at Landsverk hevur tikið neyðug búskaparlig atlit.***

Virðið á tí, sum varð leigað, stóð ikki mát við kostnaðin av leigumálinum. Landsverk rindaði eisini fyri annað enn bara leigu og hevði heldur ikki gjørt virðismetingar, prískanningar o.a. fyri at tryggja sær, at stovnurin rindaði hóskandi gjald. Tað bar tí ikki til at siga, at stovnurin hevði tikið neyðug búskaparlig atlit.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kann loyva inntøkufíggjaðum virksemi, um tað er sprottið natúrliga úr vanliga virkseminum. Stovnurin kundi tí ikki av sínum eintingum leggja niður og víðka um virksemið og útvega eitt virki til endamálið.

Landsgrannskoðanin hevði ikki sæð fíggjarætlanir ella skjøl við eitt nú viðlíkahaldsætlanum ella útrokningum av prísum. Í § 8 í K. nr. 84/2011 “um rakstrarjáttan” er ásett,

at meðal langtíðarkostnaðurin skal fíggjast; einstøku prísirnir skulu grundast á hann. Landsgrannskoðanin helt, at málið var so mikið illa skjalfest, at tað bar ikki til at sanna, um Landsverk hevði borið seg nøktandi at viðvíkjandi stýring, búskaparligum atlitum ella um víðkanin av virkseminum var í samsvari við reglurnar um inntøkufíggjað virksemi.

Í juni 2019 hevur Samferðslumálaráðið greitt frá, at Asfaltverkið á Sundi er keypt, og er ogn hjá Landsverki. Sambært ráðnum er málið sostatt avgreitt. Samferðslumálaráðið leggur afturat, at viðmerkingarnar hjá Landsgrannskoðanini annars eru tiknar til eftirtektar.

***Landsverk hevur nú keypt Asfaltverkið á Sundi.***

Í landsroknskapinum fyri 2018 er nýggj høvuðskonta 17.38.1.22 “Keyp av asfaltsverki” stovnað. Høvuðskontan hevur ikki heimild í fíggjarlógini ella eykajáttanarlóg.

***Nýggj høvuðskonta hevur ikki heimild í fíggjarlóg ella eykajáttanarlóg.***

### 9.1.3 Royndarverkætlan við orkusparing í landsins bygningum

Játtan til “Royndarverkætlan við orkusparing í landsins bygningum” er á høvuðskontu 17.38.1.02 “Landsverk (rakstrarjáttan)”, undirkontu 23 “Royndarverkætlan við orkusparing í landsins bygningum”.

Í viðmerkingunum stendur, at farið er undir Orkutøk, fyri at minka um orkunýtsluna, og samstundis betra landsins bygningar, og minka landsins útreiðslur, sum frálíður. Arbeiðið verður gjørt í tøttum samstarvi við stovnar og føroyska vinnu.

***Farið er undir Orkutøk at minka um orkunýtsluna og betra um landsins bygningar.***

Landsstýrismaðurin í samferðslumálum fekk í november 2016 undirtøku á landsstýrisfundi fyri at fremja orkusparingar í landsins bygningum. Í uppritinum til landsstýrisfund um málið stendur m.a., at *“orkusparandi tiltøk kunnu verða framd, sum ein partur av viðlíkahaldi, bjálving, og umbygging av landsins bygningum.”*

Játtanin í 2017 og 2018 var 3.060 t.kr. í inntøkum og 3.060 t.kr. í útreiðslum, og roknskaparliga úrslitið var ávikavist -20 t.kr. og 26 t.kr.

*Oljuavsláttur*

Inntøkurnar eru frá avsláttri, ið Landsverk hevur fingið frá oljufeløgum við at bjóða oljulatingarnar út samlaðar. Størsti parturin av upphæddini, sum stovnar spara, verður fluttur til Landsverk, og Landsverk brúkar sparingina, ímillum 1,2 og 1,4 mió.kr. um árið til at gera umvælingar á almennar bygningar.

***Landsverk fær inntøkur av oljuavsláttri hjá landsins stovnum.***

Gjaldstovan hevur av praktiskum ávum góðtikið, at avslátturin av orkukeypi verður bókaður við negativari upphædd á StRk 1442 “Orkukeyp”, tí tann kontan verður brúkt til at bóka alt orkukeyp til upphiting hjá landinum á.

*Væntað sparing*

Sambært Landsverki fara inntøkur eisini at koma frá væntaðum sparingum í sambandi við umvælingar og bjálvingar av bygningum.

Landsverk hevur gjørt av at senda stovnum rokningar fyri væntaða orkusparing. Tað merkir í stuttum, at tá ið ein almennur bygningur verður umvældur og bjálvaður, og harvið sparir pening til orku, sendir Landsverk stovninum rokning upp á væntaðu sparingina. Upphæddin verður útreiðsluførd hjá stovninum og inntøkuførd hjá Landsverki.

***Landsverk fær sær inntøkur av væntaðum sparingum hjá øðrum landsstovnum.***

Í mai 2019 hevur Landsverk sent faktura til Landsbókasavnið fyri orkusparing 1. hálvár 2019, 30.475 kr. + MVG.

### Roknskaparviðurskifti v.m.

Roknskapartøl fyri 2017 og 2018:

*t.kr.*

| Royndarverkætlan við orkusparing í landsins bygningum | 2017 | 2018 |
|---|---|---|
| Ferðing uttanlands og umboðan | 13 | 38 |
| Orkukeyp til hiting - olja, oljuúrdráttir og orka annars | 0 | -1.758 |
| Orkukeyp, mask., flutningsútb. o.a., olja, oljuúrdr. og orka annars | -132 | -77 |
| Keyp av prentlutum og vørum annars | 7 | 6 |
| Grannskoðanar-, roknskapar- og løgfrøðiligar tænastur og KT | 6 | 79 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 86 | 603 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 0 | -35 |
| Umvæl.- og viðlíkahaldsútr., bygningar | 0 | 1.063 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr. | 0 | 107 |
| **Tilsamans** | **-20** | **26** |

Avslátturin av oljukeypi er bókaður sum negativar upphæddir á orkukeyp. Í 2018 eru inntøkurnar 273 t.kr. ov høgar, tí MVG er bókað saman við avsláttrinum.

*Útboð av uppgávum*

Spurt, um uppgávurnar eru bodnar út, ella um biðið er um tilboð frá fleiri, tá ið umvælingar eru gjørdar, svaraði Landsverk, at vanliga mannagongdin er altíð at biðja um prís fyri veitingar frá tveimum skikkaðum veitarum. Landsverk spyr vanliga veitarar einsæris í sambandi við smærri uppgávur, um at geva ein prís, har latarin er vitandi um, at annar partur væntandi eisini gevur prís.

Landsgrannskoðanin vísti á, at alment útboð skal verða nýtt fyri keyp oman fyri 500 t.kr., men kann eisini verða brúkt til keyp undir hesa upphædd. Sjálvt um rundskrivið um keyp av vørum og tænastum ikki er galdandi fyri løgu- og byggiverkætlanir, tí lisitatiónslógin er galdandi fyri byggiverkætlanir, er eingin forðing fyri at leggja slíkar uppgávur á Keypsportalin.

***Landsgrannskoðanin mælti til, at størri keyp verða lýst á Keypsportalinum.***

Landsgrannskoðanin mælti til, at størri keyp verða lýst á Keypsportalinum, soleiðis at til ber hjá øllum at bjóða vøru ella tænastu fram. Til smærri keyp verður mælt til at biðja um prís frá fleiri og at skjalprógva, at tað er gjørt.

Í juni 2019 hevur Samferðslumálaráðið kunnað um, at Landsverk heldur seg sum heild til hesar ásetingar.

*Søla*

***Inntøkur verða mótroknaðar í keypi.***

Á undirkontu “Royndarverkætlan við orkusparing í landsins bygningum” hevur Landsverk m.a. skrásett sølu av verkfrøðingatímum, og eisini eru aðrar inntøkur mótbókaðar “keyp av útbúnaði”.

***Søla av verkfrøðingatímum er at líkna við inntøkufíggjað virksemi.***

Landsgrannskoðanin vísti á, at søla av tænastum, so sum verkfrøðingatímum er at líkna við inntøkufíggjað virksemi, og skal stovnurin hava loyvi til tað frá aðalráðnum. Virksemið skal eisini setast upp á serskildari undirkontu undir rakstrarjáttan. Í hesum sambandi varð nevnt, at Landsverk frammanundan hevur inntøkufíggjað virksemi á undirkontu, ið verður nýtt til sølu av skervi, asfalti v.m.

Í august 2019 hevur Samferðslumálaráðið svarað, at ráðið er samt við Landsgrannskoðanina, at Orkutøk eru at líkna við inntøkufíggjað virksemi. Ráðið vísir á, at heimildin til virksemið er givin við landsstýrissamtykt, samskifti millum Samferðslumálaráðið og Landsverk, og frá Løgtinginum við játtan í fíggjarlógini. Samferðslumálaráðið svarar ikki spurninginum, um at virksemið hjá Landsverki at selja verkfrøðingatímar skal verða sjónligt í roknskapinum.

Stovnar hjá landinum skráseta keyps-MVG á eina felags kontu, 7510. Nakrir almennir stovnar reka MVG-skyldugt virksemi, og eru tí skrásettir í vinnuskránni hjá TAKS. Teir

stovnarnir hava skyldu at gera MVG-roknskap, og at bókað keyps- og sølu-MVG í fíggjarstøðuni.

Landsverk er MVG-skrásett, tí stovnurin selur skerv, asfalt o.a. Roknskapurin er á undirkontu 40 "Inntøkufíggjað virksemi", og MVG'ið verður bókað í fíggjarstøðuni.

Sølu-MVG'ið, sum Landsverk hevur kravt, við at fakturera fyri umvælingar, og orkusparingar v.m. er mótbókað á kontu 7510, og tí er MVG-roknskapurin hjá Landsverki ikki rættur.

### Umvælingar av bygningum

Fleiri rokningar eru fyrst bókaðar á Orkutøk fyri síðani at verða fluttar til játtanina "Umvælingar av almennum bygningum".

***Útreiðslur fluttar ímillum játtanir.***

Landsverk gjørdi við ársbyrjan av, at 2 mió.kr. av játtanini til viðlíkahald av almennum bygningum skuldu nýtast til orkuátøk á bygningarnar, og fyri betri at kunna fylgja hesum útreiðslum, vórðu orkuátøkini í fyrstu atløgu bókað á játtanina til orkuátøk.

Vit hava hugt nærri at umvælingini av Búnaðardeplinum og Umhvørvisstovuni, ið eru umvældir fyri oljuavsláttur v.m.

Umvælingar av Búnaðardeplinum 2016 til 2018:

*t.kr.*

| Høvuðskonta | Búnaðardepilin | 2016 | 2017 | 2018 | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|
| 17.38.1.02.23 | Royndarverkætlan við orkusparing | | | 276[28] | 276 |
| 17.38.1.11 | Umv. av alm.bygningum,VÆ 4079 | 574 | 244 | | 818 |
| 17.38.1.11 | VÆ 4224 Orkutøk | | | 887 | 887 |
| 11.32.1.10 | Ferð á grøna orku | 80 | | | 80 |
| 5.33.2.08 | Búnaðarstovan (Løguj.) | | | 1.498 | 1.498 |
| 5.33.2.01 | Landbúnaðarroyndir og -ráðgeving | | | 463 | 463 |
| | **Tilsamans** | **654** | **244** | **3.124** | **4.022** |

Seinastu 3 árini eru góðar 4 mió.kr. brúktar av 6 ymiskum játtanum. Av løgujáttanini 5.33.2.08, hevur Búnaðarstovan goldið Landsverki 700 t.kr. + MVG fyri jarðhitaskipan.

***6 játtanir brúktar til at rinda umvælingar av Búnaðardeplinum.***

Umvælingar av Umhvørvisstovuni 2016 til 2018:

*t.kr.*

| Høvuðskonta | Umhvørvisstovan | 2016 | 2017 | 2018 | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|
| 17.38.1.02.23 | Royndarverkætlan við orkusparing | | | 115 | 115 |
| 17.38.1.11 | Umv. av alm.bygningum,VÆ 4146 | 125 | 236 | 174 | 535 |
| 17.38.1.11 | VÆ 4224 Orkutøk | | | 59 | 59 |
| 11.37.4.02 | Umhvørvisstovan | 429 | 80 | 302 | 811 |
| | **Tilsamans** | **554** | **316** | **650** | **1.520** |

Yvirlitini yvir umvælingarútreiðslur til Búnaðardepilin og Umhvørvisstovuna eru dømi, sum vísa, at útreiðslurnar eru spjaddar yvir nógvar játtanir.

***Útreiðslur spjaddar yvir nógvar játtanir.***

Landsverk hevur greitt frá, at tað er samanfall ímillum Orkutøk og Umvælingar av almennum bygningum, og at bæði Búnaðarstovan og Brandskúlin við Áir høvdu niðurslitnar hitaskipanir og gamlar oljutangar, sum skuldu skiftast. Slík dagføring kemur vanliga undir umvæling av almennum bygningum.

Búnaðarstovan hevði ynski um eina jarðhitaskipan, og fekk játtað 700 t.kr. frá Fiskimálaráðnum til uppgávuna, sum varð mett at kosta eina mió.kr. Avtalað varð, at Landsverk skuldi standa fyri verkætlanini, og skuldi fakturera til Búnaðarstovuna, tá ið arbeiðið var liðugt.

[28] Á rokningini stendur: "Fyri ráðgeving viðvíkjandi Búnaðarstovuni og Brandskúlanum við Áir".

*Trupult at síggja samlaðu nýtsluna til umbygging av Búnaðarstovuni.*

Í august 2019 hevur Samferðslumálaráðið tikið undir við, at tað er trupult at síggja samlaðu nýtsluna til umbygging av Búnaðarstovuni í landsroknskapinum, og at best hevði verið, um alt varð játtað á einari høvuðskontu. Ráðið heldur tað vera í lagi, at Landsverk stóð fyri verkætlanini um jarðhitaskipan og faktureraði til Búnaðarstovuna, tá ið arbeiðið var liðugt.

## Spjaðing av útreiðslum

Í ársfrágreiðingini 2017 vísti Landsgrannskoðanin á, at bókingar av oljurokningum og útreiðslum til umvælingar av almennum bygningum, gjørdu, at grundleggjandi reglur í játtanarlógini og roknskaparlógini vórðu ikki hildnar.

*Roknskapurin er ikki gjøgnumskygdur.*

Bókingar (flytingar av upphæddum) ímillum oljuútreiðslur og umvælingar av almennum bygningum ger, at roknskapurin verður ikki gjøgnumskygdur.

Í august 2018 segði Landsverk seg skilja sumt av tí, ið Landsgrannskoðanin førdi fram um háttin, Landsverk ætlaði at brúka til at bóka í sambandi við Orkutøk.

*Óheppið at blanda avsláttur av oljukeypi og umvælingar saman roknskaparliga.*

Landsgrannskoðanin heldur, at tað er óheppið, at Landsverk blandar avsláttur av oljukeypi og umvælingar av almennum bygningum saman roknskaparliga. Tað ger, at tað við tíðini fer ikki at bera til at brúka roknskapin til tað, sum hann er ætlaður til, nevniliga at vísa, hvat játtaði peningurin verður nýttur til. Eisini halda vit, at tað gruggar roknskapin, tá ið umvælingar av einum bygningi verða spjaddar á so nógvar játtanir.

Sambært Landsverki hevur stovnurin roynt at tikið atfinningarnar hjá Landsgrannskoðanini til eftirtektar. Fyri at tryggja gjøgnumskygni við játtanini til viðlíkahald, eru allar bókingar viðvíkjandi “grønum viðlíkahaldsarbeiði” fluttar frá undirkontu 23 “Royndarverkætlan við orkusparing í landsins bygningum” til játtanina “Umvæling av almennum bygningum”.

Fleiri av bygningunum, sum eru umvældir fyri pening á játtanini til Orkutøk, eru eisini umvældir við peningi frá “Umvæling av almennum bygningum”. Á hesari játtan hevur Landsverk býtt bygningarnar upp í verkætlanir, soleiðis at tað sæst, hvussu stórar upphæddir verða brúktar til hvønn bygning.

Spurt, um Landsverk hevur umhugsað at skrásett peningin frá sparingunum í sambandi við oljukeyp á eina serskilda verkætlan á tí kontuni, hevur Landsverk svarað, at stovnurin hevur ráðført seg við Gjaldstovuna fyri at finna eina góða loysn til bóking av peninginum, sum er komin við sparingum í oljuinnkeypinum.

Sambært Landsverki er niðurstøðan eftir drúgva umhugsan, at rættast er at eykainntøkurnar frá oljuútboðnum skuldu bókast beinleiðis á verkætlanina Orkutøk.

*Játtanin, Umvæling av almennum bygningum, verður eisini brúkt til Orkutøk.*

Í august 2019 hevur Samferðslumálaráðið greitt frá, at játtanin til viðlíkahald av landsins bygningum[29] verður brúkt til at umvæla, viðlíkahalda og bjálva landsins bygningar, og verður ein partur av játtanini brúktur til Orkutøk, hvørs endamál er at minka orkunýtsluna í bygningum landsins og samstundis at betra landsins bygningar. Á henda hátt røkkur játtanin longri, tí sparingin kann verða við til at fíggja orkuloysnir.

Sambært Samferðslumálaráðnum er talan í veruleikanum um eina játtan, og somu bygningar, og er tað tí natúrligt, at Orkutøk verður ein undirkonta á játtanini til viðlíkahald av landsins bygningum. Tað er eitt samanfall millum konturnar (nýtsluna), tí viðlíkahald og bjálving av bygningum eisini minkar um orkunýtsluna. Samstundis sum umvælingar verða gjørdar í einstøkum bygningum, kunnu nýggjar orkuskipanir verða settar upp.

[29] Høvuðskonta 17.11.1.56 “Umvæling av almennum bygningum (løgujáttan)”.

Samferðslumálaráðið hevur ikki nakra avgjørda støðu til, hvørt sparingin við oljukeypi skal verða skrásett á viðlíkahaldskontuni ella beinleiðis á Orkutøkum. Tað er eitt mál Landsverk má loysa saman við Gjaldstovuni. Sambært ráðnum hevur ávíst samskifti verið millum Landsverk og Gjaldstovuna, sum hevur vent sær til Fíggjarmálaráðið, men enn er eingin loysn funnin.

Samferðslumálaráðið vísir á, at Viðlíkahald av almennum bygningum er ein løgujáttan, meðan Orkutøk er ein rakstrarjáttan. Fíggjarmálaráðið og síðani Løgtingið mugu játta, at Orkutøk verður ein partur av løgujáttanini, um nevnda loysn skal bera til.

### Flyting av játtanum

Sum áður nevnt sendir Landsverk stovnum rokningar fyri væntaðar sparingar. Spurt, eftir hvørjari heimild Landsverk fakturerar "væntaða orkusparing", svaraði Landsverk, at heimildin, sum stovnurin arbeiðir eftir, er góðkenning av verkætlanini Orkutøk, sum fór fram á landsstýrisfundi 14. november 2016 av einum samlaðum landsstýri. Í stuttum fekk Landsverk heimild til at standa fyri orkukeypi til stovnar og at víðarifakturera stovnar fyri orku (stovnur skal fáa ein part av sparing). Harnæst er heimild fingin til ESCO leist, har Landsverk fíggjar orkuátak, sum Landsverk fær afturgoldið yvir ár sum part av meirsparing.

***Landsverk fakturerar "væntaðar sparingar".***

Landsgrannskoðanin vísti á, at mannagongdin, at fakturera "væntaða sparing", er ikki í samsvari við vanligar bókhalds- og roknskaparreglur, tí talan er ikki um nakra vøru ella tænastu (veiting).

***Mannagongdin er ikki í samsvari við vanligar bókhalds- og roknskaparreglur.***

Í august 2019 hevur Samferðslumálaráðið greitt frá, at ráðið metir, at Orkutøk er eitt gott tiltak til at minka orkunýtslu landsins, og samstundis at viðlíkahalda landsins bygningar. Tað eru ávísir byrjanartrupulleikar roknskaparliga, og má Landsverk støðugt samskifta við Gjaldstovuna og Fíggjarmálaráðið um roknskaparlig viðurskifti.

Sambært Samferðslumálaráðnum kann Landsverk við orkustýringsskipanini rættiliga neyvt skjalfesta og útgreina orkunýtsluna í hvørjum bygningi sær hvørt einstakt ár. Tá ið Landsverk ger sparingar upp fyri fyrra hálvár, so er tað tann veruliga nýtslan fram til uppgerðardagin, sum liggur til grund fyri útrokningini, og sama er galdandi við ársenda.

Landsgrannskoðanin er samd við Landsverki og Samferðslumálaráðnum, at tað er gott átak, at landið sparir pening til orkunýtslu, men vit skulu vísa á, at við at fakturera væntaða sparing til stovnarnar, játtar Landsverk sær upphæddir, ið Løgtingið hevur játtað einstøku stovnunum til m.a. olju og el.

Roknskaparliga mannagongdin er við til at máa støðið undan játtanarskipanini. Harafturat ger hon, at gjøgnumskygni í landsroknskapinum versnar meira og meira. Hevur Løgtingið játtað stovnum meira til olju og el, enn stovnarnir brúka, eigur tað at síggjast aftur í nýtsluni hjá einstaka stovninum.

***Roknskaparliga mannagongdin máar støðið undan játtanar-skipanini.***

Tað er av alstórum týdningi, at landsroknskapurin er rættur, í hesum føri merkir tað, at Landsverk ella aðalráð kann ikki flyta pening, sum ein stovnur sparir, til eina aðra høvuðskontu.

***Loyvt er ikki at flyta pening ímillum høvuðskontur.***

Samsvar skal vera ímillum játtaðu upphæddirnar og skrásetingarnar í landsrokn-skapinum. Landsstýrið kann ikki við samtykt flyta eina játtan í fíggjarlógini til eina aðra játtan. Tað er greitt brot á játtanarreglurnar.

Meginreglan í játtanarreglunum er, at eingin útreiðsla má verða goldin og ikki má verða tikið ímóti inntøku, er játtan ikki útvegað frammanundan. Fíggjarlógin skal fevna um allar inntøkur og útreiðslur landsins og vera grundað á veruleikakendar vónir og so hollar ætlanir, sum til ber, um inntøkur og útreiðslur í fíggjarárinum.

***Allar inntøkur og útreiðslur skulu játtast í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg.***

Fíggjarlógin skal verða ætlað eftir somu meginreglum, sum eru galdandi fyri ger og uppseting av landsroknskapinum, sambært lóg um landsins almenna roknskaparhald v.m.

### 9.1.4 Løgujáttanir

*Norðoya røktarheim*

Í august 2016 greiddi landsstýrismaðurin frá, at bygningarnir, Norðoya røktarheim og Suðuroyar røktarheim, fylgdu ikki við, tá ið eldraøkið varð flutt til kommunurnar at fyrisita og fíggja. Heimini eru á matriklunum hjá Klaksvíkar- og Suðuroyar sjúkrahúsi, sum vóru bygningar, ið landið átti, og vóru í stóran mun samanbygdir og integreraðir partar av sjúkrahúsunum við fleiri felags funktiónum og útreiðslum.

Sambært Samferðslumálaráðnum arbeiddu avvarðandi partarnir við at finna eina praktiska loysn at býta útreiðslurnar eftir. Prinsippið var, at kommunurnar rinda fyri rakstur og viðlíkahald av tí partinum av bygningunum, sum røktarheimini brúka.

Í august 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at eingin avtala var gjørd, og at talan helst var um eitt mál millum Almannamálaráðið og Klaksvíkar kommunu.

***Tað er ikki nøktandi, at eingin avtala er gjørd, siga Løgtings-grannskoðararnir.***

Í uppskoti til samtyktar um góðkenning av landsroknskapinum 2016 hildu løgtings-grannskoðararnir, at tað var ikki nøktandi, at eingin avtala var gjørd. Tað var enn eitt dømi um, at bygnaðarbroytingar verða gjørdar, uttan at neyvari reglur fylgja við.

Í august 2018 helt landsstýrismaðurin, at tað var ikki nøktandi, at eingin avtala var komin í lag. Landsverk hevði tí tikið málið upp við Heilsu- og innlendismálaráðið, sum varðar av ognunum, men eingin loysn var funnin enn.

***Enn er eingin loysn funnin.***

Í juni 2019 hevur Samferðslumálaráðið kunnað um, at einki er hent í málinum, og at Landsverk fer at taka málið upp av nýggjum við Heilsu- og innlendismálaráðið fyri at fáa eina avtalu í lag.

## 9.2 Strandfaraskip landsins (LG 2017/217-0382)

***Sambært Samferðslu-málaráðnum eru skrivligar manna-gongdir gjørdar fyri roknskapargóð-kenningar.***

Í ársfrágreiðingini 2015 vísti Landsgrannskoðanin á, at eftirlitsumhvørvið hjá stovninum var ov veikt, og at tað m.a. vantaðu skrivligar mannagongdir og skjalfestingar av teimum eftirlitum, ið leiðslan framdi t.d. í sambandi við góðkenningina av tíðarskeiðs-roknskapum.

Í juni 2019 hevur Samferðslumálaráðið greitt frá, at kekklistaskipan er fingin til vega og er sett í verk, og at eftirlitsmál eru greinaði og sett í kekklistaskipanina. Sambært ráðnum eru mannagongdir fyri roknskapargóðkenningar lýstar skrivliga.

***Størsti váðin í rokn-skaparviðurskiftunum hjá Strandferðsluni lá í avgreiðslu av lønum.***

**Lønarumsiting**

Landsgrannskoðanin hevur í seinastu ársfrágreiðingunum víst á, at ein tann størsti váðin í roknskaparviðurskiftunum hjá Strandferðsluni lá í avgreiðslu av lønum. Orsøkin var, at lønarumsitarin var einsamallur á økinum, og at lønirnar vórðu avgreiddar í rokniørkum.

Stovnurin hevur síðani verið í einari tilgond at seta í verk VaktPlan sum amboð at skráseta arbeiðstíð hjá sjófólkunum.

Í mars 2018 byrjaðu Sam, Sildberin og Ritan at brúka VaktPlan; harvið vórðu lønirnar avgreiddar við tveimum skipanum. Ætlanin var, at øll skipini skuldu brúka VaktPlan við ársenda 2018.

*Øll skipini brúka nú VaktPlan.*

Í juni 2019 hevur Samferðslumálaráðið greitt frá, at øll skipini brúka VaktPlan í dag, men ikki 100% enn. Ráðið væntar, at alt virksemið verður við í VaktPlan í summar. Samferðslumálaráðið hevur kunnað um, at Strandferðslan hevur styrkt lønarumsitingina.

### Skipan av KT trygd

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin skipan av KT trygd hjá Strandferðsluni.

KT trygdarpolitikkurin ásetir, at KT ábyrgdarbýtið hjá stovninum skal vera greitt skipað; m.a. skal verða staðfest:

- hvør hevur ábyrgdina av SLA,
- hvør hevur ábyrgdina av KT trygdini,
- hvør eigur ymisku KT skipanirnar,
- hvør er dátueigari,
- hvør skal syrgja fyri, at øll á stovninum kenna krøvini, sum verða sett brúkarunum, og
- hvør hevur heimild at taka avgerðir mótvegis Gjaldstovuni.

KT leiðarin hevði ábyrgd av rakstraravtalum við veitararnar og av KT trygdini.

Í juni 2019 hevur Samferðslumálaráðið greitt frá, at starvs- og ábyrgdarlýsingar eru skrivaðar fyri starvsfólkini á KT deildini.

Strandferðslan er við í trygdarpakkanum hjá Gjaldstovuni og hevði, saman við Gjaldstovuni, gjørt dátuflokking og váðameting av sínum skipanum. Harumframt vóru ábyrgdarpersónar skilmarkaðir fyri hvørja skipan. Vit samanbóru flokkingarskjalið við skjalið við ábyrgdarum. Samsvar var ikki ímillum skjølini.

*Strandferðslan hevur gjørt nýggja dátuflokking fyri 2018.*

Í juni 2019 hevur Samferðslumálaráðið kunnað um, at nýggj dátuflokking er gjørd fyri 2018, og yvirlit við dátu- og skipanareigarum er dagført, so tey samsvara.

Sambært Strandferðsluni vóru servarar og verja av teimum sett upp eftir dátuflokkingini. Landsgrannskoðanin mælti til, at Strandferðslan tryggjaði, at servarar og skipanir, ið ikki lógu hjá Landsneti, vórðu sett upp samsvarandi dátuflokkingini.

Í juni 2019 hevur Samferðslumálaráðið kunnað um, at stovnurin í fyrsta umfari hevur valt heimasíðuna og bíleggingarskipanina út, og biðið veitaran um trygdarváttan fyri, hvat er sett í verk fyri at minimera váðarnar. Tað er gjørt í samráði við KT Landsins.

Sambært Samferðslumálaráðnum hevur Strandferðslan havt eitt átak, har flest øll starvsfólkini á stovninum hava fingið kunning/undirvísing í KT leiðreglunum og undirskrivað brúkaraváttan, og at tað er skrásett í HR skipanini.

#### *KT tilbúgving*

Strandferðslan hevði ikki nakra tilbúgvingarætlan fyri KT trygdarhendingar. Sambært Strandferðsluni mátti metast um, í hvønn mun tað var neyðugt fyri stovnin m.a. við støði í váðametingini. Landsgrannskoðanin mælti til at taka støðu til, hvat trygdarhendingar eru, hvussu tær skulu handfarast og fráboðast fyri allar skipanir og dátur hjá Strandferðsluni. Somuleiðis mæltu vit stovninum til at taka støðu til, um tilbúgving er neyðug fyri trygdarhendingarnar. Strandferðslan tók undir við tilmælunum.

Í juni 2019 hevur Samferðslumálaráðið kunnað um, at Strandferðslan hevur dátuflokkað skipanirnar í 2018, og at ætlanin er at taka støðu til KT tilbúgving við støði í dátuflokkingini í 2019, t.e., hvussu stovnurin handfer álvarsligar hendingar viðvíkjandi kritiskum skipanum.

*Sáttmáli um rakstur av KT kervi við SLA*
Strandferðslan hevði rakstraravtalu við Landsnet og FAK-SLA sáttmálar fyri tær fakskipanir, har raksturin var útveittur til Landsnet. Stovnurin hevði ikki rakstraravtalur við allar veitararnar av skipanunum, ið lógu uttan fyri Landsnet. Skoðanin hjá Gjaldstovuni hevði tilmæli um at fáa viðurskiftini í rættlag. Strandferðslan hevði eitt punkt í prosjektyvirlitinum "Avtalur við veitarar", sum stovnurin væntaði varð avgreitt í 2019.

Í juni 2019 hevur Samferðslumálaráðið greitt frá, at Strandferðslan hevur samskift við KT Landsins um at gera eina nýggja avtaluskabilón til stovnar at taka støði í, tá ið avtalur skulu gerast við veitarar, fyri at tryggja, at øll týdningarmikil viðurskifti koma við í avtaluna, at lætta um hjá pørtunum, og at fáa ein standard, sum veitarar og stovnar kenna aftur.

*Tilmæli frá 2016*
Landsgrannskoðanin hevur fleiri ferðir síðani 2016 mælt til, at Strandferðslan gjørdi Change Management mannagongdir.

Í juni 2019 hevur Samferðslumálaráðið greitt frá, at Strandferðslan hevur sett í verk prosjektporteføljustýring, har allar broytingarverkætlanir eru skrásettar og verða fylgdar á felags fundum mánaðarliga. Tað ger stýringina neyvari, og at fólk kunnu fylgja við.

## 9.3 Stuðul til útoyggjar (LG 2018/217-0382)

Útjavningarstuðul til útjaðaraøki kann gjaldast sambært Ll. nr. 86/1998. Heimilað er at javna ein part av meirkostnaðinum av at flyta olju og annan farm til fastbúgvandi í útjaðaraøkjunum, t.e. í Fugloy, Svínoy, Kalsoy, Mykines, Nólsoy, Hestur, Koltur, Skúvoy og Stóra Dímun.

Samferðslumálaráðið hevur í 2006 gjørt reglugerð um útgjald av stuðli, sum er broytt í mai 2016.

Ráðið hevur í 2011 gjørt innanhýsis vegleiðing um, at flutningur av olju til ikki fastbúgvandi er partur av stuðlinum, um upphæddin ikki fer upp um 20 t.kr. Landsgrannskoðanin undrast á ta tulkingina.

Strandfaraskip landsins, Posta og Atlantsflog umsita skipanina, og Samferðslumálaráðið skal, eftir lokið fíggjarár, hava útgreinaðan roknskap við grannskoðaraváttan.

Samferðslumálaráðið hevur goldið peningin út, eftir at hava fingið váttan frá P/f Januar um upphæddina til Atlantsflog og frá Landsgrannskoðanini um upphæddina til Strandferðsluna. 435 t.kr. eru goldnar til Atlantsflog og 702 t.kr. til Strandferðsluna, 1,1 mió.kr. tilsamans. 20 t.kr. eru goldnar fyri olju, ið er latin til útoyggj, og har móttakarar ikki eru fastbúgvandi á útoyggj.

## 9.4 Akstovan (LG 2017/217-0384)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av KT viðurskiftum hjá Akstovuni.

***Akstovan hevur klassifiserað nakrar av sínum KT skipanum.***

Í oktober 2018 hevur Akstovan klassifiserað Akfarsskipan, Koyrikortskipan, Sýnsskipan og Navnaskránna eftir trúnaði, atgeingi og rættleika.

Í juni 2019 hevur Samferðslumálaráðið greitt frá, at Akstovan gjørdi avtalu við KT veitara á vári 2018 um at flyta ambætaraútbúnaðin í trygg ambætarahøli, og at útgerðin

varð flutt í mars 2018. Akstovan hevur í desember 2018 undirskrivað avtalu við veitaran um rakstur, viðlíkahald og trygd av útgerðini.

Sambært Samferðslumálaráðnum ætlar Akstovan at endurskoða váðametingina og KT trygdarpolitikkin í 4. ársfjórðingi á hvørjum ári, fyrstu ferð í september 2019.

## 9.5 Arbeiðs- og brunaeftirlitið (LG 2017/217-0391)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Arbeiðs- og brunaeftirlitinum.

### Roknskaparviðurskifti

Landsgrannskoðanin hevði nøkur tilmæli viðvíkjandi roknskapinum, og vísti á fleiri manglar viðvíkjandi ferðauppgerðum.

Umsitingin av tíðarskrásetingum hevði ikki verið nøktandi, men stovnurin hevði gjørt ein leist at tryggja, at starvsfólk halda seg innan fyri reglurnar um +100/-40 tímar.

Í juni 2019 hevur Samferðslumálaráðið greitt frá, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur gjørt greiðar mannagongdir fyri bóking og uppgerð av arbeiðsferðum og skjalfest tær í starvsfólkahandbókini. Eisini hevur stovnurin gjørt greiða mannagongd fyri umsiting og eftirlit við tíðarskrásetingum.

### KT viðurskifti

Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevði ikki gjørt váðameting. Sum partur av trygdarpakkanum hjá KT Landsins nýtti stovnurin váðametingina frá tí pakkanum.

Dátuábyrgdari skal sambært kunngerð gera váðameting í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum fyri at fáa greiðu á sannlíkindum fyri brotum á trygdarreglurnar og avleiðingarnar av tí. Landsgrannskoðanin mælti til at gera váðametingina.

Í juni 2019 hevur Samferðslumálaráðið kunnað um, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur vent sær til deildina fyri KT trygd á Gjaldstovuni fyri at fáa eina meting av, hvørt váðametingin í trygdarpakkanum er nøktandi fyri stovnin, ella um ein meira ítøkilig skal gerast. Stovnurin bíðar eftir metingini. Skoðan var gjørd av KT trygdini á stovninum í 2018 við útgangsstøði í trygdarpakkanum. Niðurstøðan var, at trygdarstøðið í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum var á einum nøktandi støði.

***Skoðan av KT trygdini er gjørd í 2018.***

## 9.6 Fasti Gerðarrættur (LG 2018/217-0391)

Játtanin er ein stuðulsjáttan, og hevur seinastu árini verið 700 t.kr. um árið.

Landskassin ber útreiðslurnar, ið gjøldini til Gerðarrættin ikki røkka til. Samferðslumálaráðið metir um fíggjarætlanina hjá Gerðarrættinum, áðrenn stuðulin verður goldin, serliga út frá roknskapartølunum fyri trý tey seinastu árini.

Í 2018 vóru samlaðu inntøkurnar 795 t.kr. og ársúrslitið var 67 t.kr. Í 2017 og 2016 vóru úrslitini ávikavist -4 t.kr. og -47 t.kr. Størsti parturin av útreiðslunum seinastu 3 árini vóru lønir. Eginognin við árslok 2018 var 215 t.kr.

Samferðslumálaráðið hevur greitt frá, at eginognin kann fatast sum, at landið hevur goldið ov nógv í stuðli, men ráðið heldur, at talan er um lítla upphædd. Raksturin skal fíggjast, so at útreiðslur og inntøkur javnviga á leið yvir nøkur ár. Hevur Gerðarrætturin støðugt hall, hevur landskassin skyldu at fíggja hallið.

## 9.7 Semingsmannaskipanin (LG 2018/217-0391)

Landskassin ber útreiðslurnar av Semingsstovninum; partarnir bera sjálvir egnar útreiðslur samsvarandi starvsskipan.

Semingsfólk fáa 4 t.kr. um mánaðin og varasemingsfólk 3 t.kr. um mánaðin í føstum samsýningum eftir galdandi siðvenju. Tá ið seming er, rindar stovnurin 500 kr. um tíman til hvørt semingsfólkið, umframt at hann rindar fyri fundarhøli, gisting, skeið o.a. hjá semingsfólkunum.

Roknskapar- og játtanartøl seinastu árini:

*t.kr.*

| Heiti | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 342 | 177 | 421 | 688 | 814 |
| Keyp av vørum og tænastum | 35 | 18 | 82 | 59 | 109 |
| **Tilsamans** | **378** | **194** | **503** | **747** | **923** |
| *Játtan* | *300* | *500* | *500* | *500* | *800* |

Útreiðslurnar til lønir eru munandi hægri í 2017 og 2018, enn árini frammanundan.

***Landsgrannskoðanin mælti til hóskandi tíðarskráseting.***

Spurt, hvussu Samferðslumálaráðið tryggjar sær, at tímarnir, goldið verður fyri, eru rættir, hevur ráðið svarað, at tað er ein spurningur um álit, har roknað verður við, at tímauppgerðir Semingsstovnsins eru rættar. Landsgrannskoðanin mælti til at áseta mannagongd um hóskandi skráseting av tímum, herundir dag og klokkutíð.

Í juni 2019 hevur landsstýrismaðurin í samferðslumálum kunnað um, at Samferðslumálaráðið fer nú at heita á semingsmenninar at viðmerkja í tímauppgerðum, hvørja seming talan er um, dagar og klokkutíð.

## 9.8 Vanlukkutryggingarráðið (LG 2018/217-0391)

Í Vanlukkutryggingarráðnum[30] eru fimm nevndarlimir. Landsstýrismaðurin velur 4 limir fyri eitt fýra ára skeið. Sorinskrivarin er formaður.

***Tryggingarfeløgini, landið og Vinnusjúkugrunnurin rinda kostnaðin av ráðnum.***

Gjald fyri avgreiðslu av vanlukkutryggingarmálum[31] svarar á leið til útreiðslurnar av at umsita málsøkið. Tryggingarfeløgini, landið og Vinnusjúkugrunnurin rinda kostnaðin av ráðnum.

### Samsýningar

Lønardeildin tók í november 2012 undir við umsókn frá Vinnumálaráðnum um at rinda 13 t.kr. um mánaðin til formannin og til læknan, og 10 t.kr. til skrivaran. Í 2017 og 2018 rindaði Samferðslumálaráðið 700 t.kr. um árið í lønarendurgjaldi fyri skrivstovufólk hjá Sorinskrivaranum.

Spurt, hví Vanlukkutryggingarráðið rindar løn til tveir skrivarar, hevur Samferðslumálaráðið svarað, at Sorinskrivarin í 2015 heitti á Vinnumálaráðið um at fáa økt løgfrøðiligu hjálpina til tað dupulta av tí, hon tá var, m.a. tí at uppgávurnar vóru blivnar munandi meira krevjandi.

***Vanlukkutryggingarráðið verður eftir ætlan tikið av.***

Sambært Samferðslumálaráðnum verður Vanlukkutryggingarráðið eftir ætlan tikið av í 2019, og uppgávur, starvsfólk og játtan flutt til Arbeiðs- og brunaeftirlitið.

[30] Reglur um Vanlukkutryggingarráðið eru í Ll. nr. 67/2009 “um trygging móti avleiðingum av arbeiðsskaða”.
[31] Sí K. nr. 80/2010 “um gjald fyri raksturin av Vanlukkutryggingarráðnum”.

Útreiðslur til vegleiðandi úttalilsi frá Arbejdsskadestyrelsen o.t. verða rindaðar so hvørt av viðkomandi tryggingarfelagi í sambandi við einstøku málsviðgerðina og eftir áheitan frá Vanlukkutryggingarráðnum.

### Inntøkur

Ómaksgjald[32] fyri vegleiðandi ummæli er 2 t.kr. Inntøkurnar seinastu 5 árini:

*t.kr.*

| Heiti | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Søla, leiga og langtíðarleigu, privat | -48 | -66 | -26 | -10 | -13 |

Sambært Samferðslumálaráðnum er orsøkin, til at inntøkurnar eru lækkaðar seinastu tvey árini helst, at fá mál vórðu viðgjørd.

Gjøld frá Vinnusjúkugrunninum og ALS, og gjøld frá almennum stovnum, ið eru "sjálvstryggjandi", hava seinastu 5 árini verið:

*t.kr.*

| Heiti | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Innanh. flyt. millum alm.stovn. - innt. | -159 | -143 | -269 | -57 | -182 |
| Innanh. flyt. millum alm.grunn. - innt. | 0 | 0 | 0 | -90 | 0 |
| **Tilsamans** | **-159** | **-143** | **-269** | **-147** | **-182** |

Tryggingarfeløgini hava seinastu 5 árini rindað:

*t.kr.*

| Heiti | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Aðrar flytingarinntøkur | -937 | -1.191 | -1.351 | -1.156 | -1.326 |

### Viðkvæmar persónsupplýsingar

Landsgrannskoðanin vísti á, at ímillum bókhaldskjølini eru skjøl við upplýsingum, ið eru at meta sum viðkvæmar persónsupplýsingar, sum koma undir reglurnar í § 2, stk. 1, pkt. 9, í persónsupplýsingarlógini, t.e. upplýsingar um heilsustøðu hjá persónum. Samferðslumálaráðið er samt við Landsgrannskoðanina, og hevur heitt á Vanlukkutryggingarráðið um at tryggja, at persónsupplýsingar framyvir verða handfarnar sambært galdandi reglum.

## 9.9 Barsilsskipanin (LG 2017/217-0394)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Barsilsskipanini.

Árliga gjaldið fyri persónliga teknaða trygging var 500 kr. Í 2013 vísti Landsgrannskoðanin á, at í mun til tað, A-skattgjaldarar rinda, var tann upphæddin í lægra lagi. Í august 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Samferðslumálaráðið arbeiddi við málinum um at hækka sjálvbodna tryggingargjaldið.

Í uppskoti til samtyktar mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum í samferðslumálum til at dagføra gjaldið.

***Løgtingsgrannskoðararnir mæltu til at dagføra sjálvbodna gjaldið.***

TAKS hevur umsitið reglurnar um persónliga teknaða trygging, sum at tryggingarnar galda fyri eitt kalendaraár. Landsgrannskoðanin vísti á, at sambært lógini er gjaldið fyri eitt ár. Í apríl 2017 boðaði TAKS frá, at stovnurin hevði sent áheitan til Samferðslumálaráðið um at broyta ásetingina soleiðis, at kunngerðin samsvaraði við praksis.

Í august 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at lógarbroytingin eisini skuldi fata um, at tryggingargjaldið skuldi galda fyri eitt kalendaraár.

[32] Sí K. nr. 87/2011 "um gjald sum Vanlukkutryggingarráðið kann taka fyri vegleiðandi ummæli".

Í september 2018 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Samferðslumálaráðið hevði ikki hækkað sjálvbodna tryggingargjaldið ella ásett, at tryggingargjaldið skal galda fyri eitt kalendaraár (sum var praksis). Tryggingargjaldið er ásett í § 1 í K. nr. 59/2002 "um gjald til sjálvbodnu barsilspeningatryggingina". § 2 ásetir, nær tryggingargjaldið skal vera galdandi. Sostatt var tað bert neyðugt at broyta kunngerðina sjálva, og fór tað at verða gjørt í næstum.

***Kunngerðin er send til hoyringar.***

Í juni 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at kunngerðin er gjørd og send til hoyringar. Eftir ætlan verður hon lýst í næstum.

### Áogn hjá Barsilsskipanini

Í 2010 hækkaði áognin hjá Barsilsskipanini frá 1,3 mió.kr. til 5,1 mió.kr. Áognin var støðugt hækkað síðani, við undantaki av 2014. Sambært TAKS var orsøkin til hækkingina, at tá ið peningastovnarnir fluttu frá Elektron til SDC í 2010, misti TAKS møguleikan at krevja inn barsilsgjald samstundis, sum lønir vórðu fluttar. Tá var ikki longur tekniskt møguligt at fáa gjaldið inn sjálvvirkandi.

Í september 2018 boðaði landsstýrismaðurin frá, at TAKS hevði upplýst, at arbeitt varð við at fáa gomlu skipanina at virka aftur. Komið var fram til, at tænastan ikki hvarv, tá ið peningastovnarnir fluttu frá Elektron til SDC í 2010. TAKS arbeiddi saman við øðrum grunnum við at fáa gomlu gjaldsavtaluna at koma í gildi aftur.

Seinastu 5 árini hevur áognin hjá Barsilsgrunninum verið:

*t.kr.*

| StRk | Gjald til barsilsskipanina | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 0332-0800 | Barsilsgjald, arbeiðsgevarar | 5.947 | 6.240 | 7.347 | 7.580 | 7.717 |

Í juni 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at tað er staðfest, at ikki ber til at seta gomlu skipanina í verk aftur. Peningastovnarnir kunnu ikki lata triðja persón skráseta gjaldsavtalu.

### Innheinting av ov nógv goldnum barsilspeningi

TAKS kravdi ikki upphæddir inn, ið vóru undir 2.500 kr. TAKS hevði gjørt eina meting av, hvat tað kostaði at krevja inn eftirstøður, og helt, at tað loysti seg ikki at seta arbeiðsorku av til at heinta upphæddir inn, ið vóru undir 2.500 kr.

Landsgrannskoðanin helt, at ein tílík regla átti at verið heimilað í lóg, og samanbar við regluna í skattalógini um, at írestandi skattur, sum er 100 kr. ella minni, verður ikki kravdur.

Í august 2017 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Samferðslumálaráðið fór at gera eina áseting í barsilslógini um, at upphæddir undir 2.500 kr. ikki skuldu krevjast inn.

***Løgtingsgrannskoðararnir hildu, at TAKS hevði ikki heimild at lata vera við at krevja inn.***

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2016 hildu løgtingsgrannskoðararnir, at TAKS hevði ikki heimild at lata vera við at krevja inn, og mæltu til, at lógarheimild varð fingin til vega.

***TAKS hevur umsitingarliga broytt markið, nær eftirstøða verður kravd inn, til 500 kr.***

Í september 2018 kunnaði landsstýrismaðurin um, at lógin var ikki dagførd, soleiðis at heimild var fyri at áseta, at TAKS ikki kravdi upphæddir, sum vóru undir 2.500 kr. TAKS hevði í verki broytt markið til 500 kr., og tað hevði leingi verið mannagongdin. 2.500 kr. markið varð brúkt í sambandi við stóra upprudding, tá ið TAKS yvirtók Barsilsskipanina frá ALS.

Fleiri upphæddir "hingu" sum skuld í skipanini, bæði munir í sambandi við lógarbroytingina og eisini upphæddir, ið persónar høvdu rindað aftur, tí teir høvdu fingið ov nógv goldið út. TAKS kundi ikki bóka upphæddirnar burtur, tí KT skipanin var ikki gjørd til tað, og TAKS hevði ikki raðfest uppgávuna.

Landsgrannskoðanin spurdi, hví dagføringar av KT kervinum hjá Barsilsskipanini vóru partur av raðfestingini hjá TAKS, tá ið Barsilsgrunnurin rindaði fyri menningarútreiðslurnar. TAKS svaraði, at tey raðfestu uppgávurnar hjá Barsilsskipanini saman við samlaðu uppgávunum hjá TAKS.

Landsgrannskoðanin helt, at tað átti at borið til at gjørt neyðugu dagføringarnar av KT skipanunum, soleiðis at bókhaldið kundi virka eftir reglunum. Samferðslumálaráðið tók undir við Landsgrannskoðanini.

***Í 2018 hevði Elektron ikki havt orku til menningaruppgávur.***

Í september 2018 kunnaði landsstýrismaðurin um, at stórar broytingar vóru á KT økinum hjá TAKS, og upplýsti TAKS, at Elektron ikki hevði havt orku til menningaruppgávur. Seinast í árinum skuldi arbeiðið verða liðugt, og fór TAKS at raðfesta sínar menningaruppgávur, herímillum eisini bókhaldsskipanina. Sigast kundi tó ikki við vissu, nær hon varð gjørd.

***Samferðslumálaráðið veit ikki, nær uppgávan verður loyst.***

Í juni 2019 hevur Samferðslumálaráðið kunnað um, at bókingarmyndin er á uppgávulistanum hjá TAKS, og verður raðfest frammarlaga. Ráðið veit tó ikki nær uppgávan verður gjørd.

# 10. Fíggjarstøða

## 10.1 Fíggjarstøða (LG 2018/300-0000)

Fíggjarstøðan í landsroknskapinum er ein samandráttur av fíggjarstøðuni hjá øllum "vanligum" landsstovnum, sum eru við í fíggjarlógini. Harafturat eru nakrir postar, sum eru felags, t.d. størsti parturin av tøka peninginum og skuldini. Fíggingargrunnurin frá 1992 er við undir "kapitalinnskot". Partafeløg, sum landið eigur, eru tikin við undir "virðisbrøv".

Landsgrannskoðanin hevur í stóran mun bygt grannskoðanina av postum í fíggjarstøðuni 2018 á tey eftirlit og tær avstemmanir, ið Gjaldstovan støðugt fremur.

Í talvuni niðanfyri eru samandráttir úr fíggjarstøðuni við árslok 2014 til 2018.

*mió.kr.*

| | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| **OGN** | | | | | |
| Kapitalinnskot | 459 | 451 | 460 | 487 | 390 |
| Virðisbrøv | 1.480 | 1.485 | 1.521 | 1.556 | 1.591 |
| Útlán | 126 | 125 | 122 | 121 | 109 |
| Áogn o.a. | 544 | 440 | 543 | 601 | 704 |
| Tøkur peningur | 2.536 | 2.792 | 2.905 | 3.479 | 3.666 |
| **Ogn tilsamans** | **5.145** | **5.293** | **5.551** | **6.244** | **6.460** |
| **SKULD** | | | | | |
| Skuld | 5.750 | 6.120 | 6.076 | 6.155 | 5.668 |
| Útjavningarkonta | -605 | -827 | -525 | 89 | 792 |
| **Skuld tilsamans** | **5.145** | **5.293** | **5.551** | **6.244** | **6.460** |

### 10.1.1 Kapitalinnskot (LG 2018/300-0102)

Við árslok 2018 fevnir kapitalinnskotið um Fíggingargrunnin frá 1992, sum eigur 33,4% av P/f BankNordik.

*t.kr.*

| Kapitalogn í landsfyritøkum | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Kapitalogn við ársbyrjan | 451.312 | 460.425 | 487.311 |
| Javning, kapitalognin samsvarar við eginognina í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum | 78.613 | 26.886 | -97.400 |
| Uppskriving av partapeninginum í Lív | -69.500 | 0 | 0 |
| **Kapitalogn við ársenda** | **460.425** | **487.311** | **389.911** |

Í 2017 hækkaði kapitalognin í Fíggingargrunninum 26,9 mió.kr., frá 460,4 mió.kr. til 487,3 mió.kr., og í 2018 lækkaði hon 97,4 mió.kr. til 389,9 mió.kr. Kapitalognin verður javnað hvørt ár, soleiðis at hon samsvarar við eginpeningin í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum fyri roknskaparárið frammanundan. Sostatt verður ognin í landsroknskapinum javnað eitt ár afturút.

***Kapitalinnskot fevnir um Fíggingargrunnin frá 1992.***

Av tí at roknskapurin hjá Fíggingargrunninum fyri farið roknskaparár ikki er tøkur fyrr enn eftir, at landsroknskapurin er liðugur, og fyri ikki at bóka eitt fyribils tal út frá einari

meting, hevur Gjaldstovan valt at nýta tølini úr seinast lidna roknskapinum hjá Fíggingargrunninum.

Í ársfrásøgnini hjá Fíggingargrunninum fyri 2017 var ognarparturin í P/f BankNordik bókaður til 354,3 mió.kr., sum svaraði til kursvirðið á partabrøvunum 31. desember 2017. Kursvirðið var 98,6 mió.kr. lægri enn við árslok 2016, tá ið kursvirðið var 452,9 mió.kr. Í ársfrágreiðingini greiðir leiðslan frá, at kursurin á partabrøvunum hjá P/f BankNordik lækkaði úr 135,5 við árslok 2016 í 106 við árslok 2017.

Við árslok 2018 var eginpeningurin í Fíggingargrunninum 399,1 mió.kr., ella 9,2 mió.kr. hægri enn við árslok 2017. Sambært ársfrásøgnini 2018 er høvuðsorsøkin til hækkingina, at virðið á partabrøvunum í P/f BankNordik er hækkað. Kursurin við árslok 2018 var 108,5.

Fíggingargrunnurin hevur fingið 13,4 mió.kr. í vinningsbýti frá P/f BankNordik fyri fíggjarárið 2017, sum vórðu lutaðar víðari til landskassan í 2018.

Landsgrannskoðanin hevur samanborið tølini í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum frá 1992 við tølini í landsroknskapinum árini 2017 og 2018, umframt at vit hava eftirroknað ognarpartin í P/f BankNordik. Landsgrannskoðanin hevur einki at finnast at.

***Løgtingið hevur mælt til at fáa greiðu á roknskaparpostinum og at fáa skrásett grunnar o.l.***

Í nógv ár hevur Løgtingið mælt til at fáa greiðu á hesum roknskaparposti, soleiðis at ikki bert Fíggingargrunnurin, men eisini aðrir grunnar o.l., sum landið eigur, verða skrásettir í landsroknskapinum, t.d. sum “Kapitalogn í landsfyritøkum”.

Í oktober 2013 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hesir grunnar verða ikki tiknir við í landsroknskapin, men verða partur av samlaða almenna roknskapinum.

Í 2014, 2015 og aftur í august 2016 greiddi landsstýrismaðurin frá, at arbeitt varð framvegis við spurninginum, hvussu samlaði almenni roknskapurin skuldi gerast upp. Ætlanin var, at Frítíðargrunnurin, eins og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, skuldi bóka beinleiðis í Búskaparskipan landsins.

Grunnarnir eru tiknir við sum notur til landsroknskapin undir partinum “Eksternir grunnar”. Frameftir er ætlanin, at eginpeningurin í Húsalánsgrunninum, Búnaðargrunninum, Granskingargrunninum, Mentanargrunninum og Vinnuframagrunninum verður tikin við í landsroknskapin undir “Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t.”

Eftir er at fáa greiðu á, hvussu Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Framtaksgrunnurin og Realurin kunnu takast við í landsroknskapin.

Í august 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at tað varð áhaldandi arbeitt fram ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Húsalánsgrunnurin og Búnaðargrunnurin vóru aftur tiknir við í landsroknskapin fyri 2016. Arbeitt varð við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin, har støða eisini skuldi takast til tilknýti til landsroknskapin.

Í 2018 og aftur í 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at tað verður framhaldandi arbeitt fram ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Arbeiðið fer fram í stigum. Í 2018 varð miðað ímóti, at í landsroknskapinum fyri 2018 skuldi eginpeningurin í eksternu grunnunum takast við undir “Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t.” Sambært landsstýrismanninum verður tað ikki gjørt kortini.

***Arbeitt verður við nýggjum lógaruppskoti um Realin.***

Arbeitt verður framvegis við nýggjum lógaruppskoti um Realin. Í 2019 hevur landstýrismaðurin kunnað um, at lógaruppskotið varð sent til hoyringar í apríl 2019. Í uppskotinum er ásett, at Realurin verður skrásettur í landsroknskapinum, men verður ikki tikin við í fíggjarlógini. Tað eydnaðist ikki at fáa uppskotið fyri Løgtingið, áðrenn tingið fór heim í mai.

### 10.1.2 Virðisbrøv

*t.kr.*

| | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 1.520.988 | 1.555.788 | 1.590.788 |

Frá 2016 til 2017 eru virðisbrøvini hækkað 34,8 mió.kr., og frá 2017 til 2018 eru tey hækkað 35 mió.kr. Orsøkin til hækkingina frá 2017 til 2018 er, at landið sambært Ll. nr. 30/2014 hevur sett 35 mió.kr. í partapeningi í P/f Eystur- og Sandoyartunlar.

Yvirlit yvir partabrøv, sum eru skrásett í landsroknskapinum:

*t.kr.*

| Skrásett í landsroknskapinum | 2016 | 2017 | 2018 | Til skjals |
|---|---|---|---|---|
| P/f Vágatunnilin | 160.300 | 160.300 | 160.300 | Ja |
| P/f Norðoyatunnilin | 235.000 | 235.000 | 235.000 | Ja |
| P/f Føroya Tele | 77.948 | 77.948 | 77.948 | Ja |
| P/f Postverk Føroya | 43.000 | 43.000 | 43.000 | Ja |
| P/f Fiskaaling | 17.375 | 17.375 | 17.375 | Ja |
| P/f Føroya Lívstrygging | 11.667 | 11.667 | 11.667 | Ja |
| P/f Vága Floghavn | 807.818 | 807.818 | 807.818 | Ja |
| P/f Atlantic Airways | 86.912 | 86.912 | 86.912 | Ja *) |
| P/f Elektron | 2.347 | 2.347 | 2.347 | Ja |
| P/f Føroya Dátusavn | 200 | 0 | 0 | Ja |
| Sp/f Ítróttavedding | 20 | 20 | 20 | Nei |
| P/f Smyril Line | 32.760 | 32.760 | 32.760 | Ja |
| P/f Tjaldur | 140 | 140 | 140 | Nei |
| P/f Føroya Banki | 1 | 1 | 1 | Ja *) |
| P/f Visit Faroe Islands | 500 | 500 | 500 | Nei **) |
| P/f Eystur- og Sandoyartunlar | 45.000 | 80.000 | 115.000 | Nei **) |
| **Partabrøv tilsamans** | **1.520.988** | **1.555.788** | **1.590.788** | |

*) Partabrøvini eru skrásett elektroniskt og tí pappírsleys. Útskrift er fingin til vega frá Værdipapircentralen.
**) Partabrøv verða ikki útskrivað longur.

Í 9 feløgum eigur landið allan partapeningin:

*t.kr.*

***Roknskapartøl fyri feløg, sum landið eigur einsamalt.***

| Roknskapartøl 2018 | Brutto-vinningur | Ársúrslit | Samlað ogn | Egin-peningur |
|---|---|---|---|---|
| P/f Vágatunnilin | 12.189 | 4.119 | 200.716 | 187.910 |
| P/f Norðoyatunnilin | 13.949 | 3.425 | 270.837 | 260.911 |
| P/f Føroya Tele (samtak) | 208.117 | 48.384 | 725.634 | 537.695 |
| P/f Postverk Føroya (samtak) | 65.536 | 2.724 | 124.086 | 38.071 |
| P/f Fiskaaling | 18.618 | 2.047 | 17.419 | -2.323 |
| P/f Vága Floghavn (samtak) | 60.293 | 12.635 | 915.471 | 828.186 |
| P/f Atlantic Airways | 197.572 | 16.201 | 793.201 | 242.047 |
| P/f Visit Faroe Islands | 5.273 | 11 | 4.353 | 524 |
| P/f Eystur- og Sandoyartunlar | -1.019 | -2.970 | 3.045.654 | 103.186 |
| **Tilsamans** | **580.528** | **86.576** | **6.097.371** | **2.196.207** |

Samlaða úrslitið hjá hesum feløgum var 86,6 mió.kr. í vinningi eftir skatt, og samlaði eginpeningurin varð 2,2 mia.kr. Í 2017 var samlaða úrslitið hjá feløgum, sum landið eigur allan partapeningin í, 86,1 mió.kr. og eginpeningurin 2,1 mia.kr.

Í 2018 áttu minnilutapartaeigararnir í dótturfelagi hjá P/f Vága Floghavn 9,8 mió.kr.

### *Samlað roknskapartøl hjá feløgunum*

Roknskapartølini 2008 til 2018, fyri feløg sum landið eigur allan partapeningin í:

*t.kr.*

| Ár | Brutto-vinningur/søla | Ársúrslit | Samlað ogn | Egin-peningur |
|---|---|---|---|---|
| 2008 | 925.524 | -42.241 | 5.005.434 | 1.300.876 |
| 2009 | 695.048 | -23.045 | 5.185.597 | 1.421.735 |
| 2010 | 714.585 | 27.672 | 5.983.268 | 1.524.940 |
| 2011 | 732.782 | -268.123 | 7.241.118 | 2.201.249 |
| 2012 | 608.022 | -513.502 | 3.730.656 | 1.631.006 |
| 2013 | 620.290 | 91.263 | 3.898.691 | 1.710.169 |
| 2014 | 660.020 | 67.148 | 4.201.625 | 1.819.871 |
| 2015 | 866.069 | 48.714 | 4.856.817 | 2.038.028 |
| 2016 | 607.125 | 71.277 | 5.835.015 | 1.990.572 |
| 2017 | 618.316 | 86.093 | 5.885.239 | 2.088.516 |
| 2018 | 580.528 | 86.576 | 6.097.371 | 2.196.207 |

### *Virðismeting*

Gjaldstovan hevur ásett reglur fyri, hvussu partabrøv eiga at verða goymd. Tá ið tey verða keypt, skulu tey verða latin Gjaldstovuni. Sama er galdandi fyri onnur virðisbrøv. Reglurnar viðgera ikki upp- og niðurskrivingar av partapeningi.

***Skrásetti parta-peningurin gevur ikki ábending um virðið á feløgunum.***

Í landsroknskapinum 2018 er partapeningurin skrásettur við keypsvirðinum. Talan er bæði um keyp til undirkurs, yvirkurs og útgávukurs. Skrásetti partapeningurin gevur sostatt onga ábending um ítøkiliga virðið á feløgunum.

Niðanfyri sæst innara virðið á 14 feløgum, samanborið við keypsvirðið sambært landsroknskapinum fyri 2018:

*t.kr.*

| | Keypsvirðið sambært landsroknskapinum | Innara virðið |
|---|---|---|
| P/f Vágatunnilin | 160.300 | 187.910 |
| P/f Norðoyatunnilin | 235.000 | 260.911 |
| P/f Vága Floghavn *) | 807.818 | 828.186 |
| P/f Føroya Tele | 77.948 | 537.695 |
| P/f Postverk Føroya | 43.000 | 38.071 |
| P/f Fiskaaling | 17.376 | -2.323 |
| P/f Føroya Lívstrygging | 11.667 | 23.428 |
| P/f Atlantic Airways | 86.912 | 242.047 |
| P/f Elektron | 2.347 | 5.259 |
| P/f Smyril Line | 32.760 | 44.125 |
| P/f Tjaldur | 140 | 11.174 |
| Sp/f Ítróttavedding | 20 | 35 |
| P/f Visit Faroe Islands | 500 | 524 |
| P/f Eystur- og Sandoyartunlar | 115.000 | 103.186 |
| **Partabrøv tilsamans** | **1.590.788** | **2.280.228** |

*) Parturin hjá minnilutapartaeigarum var 9,8 mió.kr.

Sum sæst í yvirlitinum, er keypsvirðið í nøkrum førum munandi lægri enn innara virðið.

Vinningsbýti frá partafeløgum, har landskassin er einasti partaeigari:

*t.kr.*

| | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|
| P/f Føroya Tele | 25.000 | 20.000 | 20.000 |

Í 2018 fekk landskassin harafturat 13,4 mió.kr. frá Fíggingargrunninum frá 1992 í sambandi við, at BankNordik lat vinningsbýti fyri 2017.

### 10.1.3 Útlán

*t.kr.*

| | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Útlán ársbyrjan | 330.748 | 328.747 | 302.016 |
| Tilgongd í árinum | 19.142 | 20.928 | 9.650 |
| Frágongd í árinum | -21.143 | -47.659 | -20.283 |
| **Útlán ársenda brutto** | **328.747** | **302.016** | **291.384** |
| Sett av ímóti tapi | 207.096 | 181.561 | 183.075 |
| **Sambært roknskapinum** | **121.651** | **120.455** | **108.308** |

Heitið útlán fevnir um veðhaldsútlegg, lestrarlán, ymisk vinnulán, serlán, kurslán og stuðulslán. Tilgongdin stavar í høvuðsheitum frá, at nýggj lestrarlán eru veitt. Frágongdin stavar í høvuðsheitum frá, at lestrarlán eru goldin aftur, og at eitt veðhaldslán til IRF er goldið aftur. Samanlagt eru útlánini lækkað netto 12,1 mió.kr. frá 2017 til 2018.

Sett er av ímóti tapi. Virðini á veðhaldsútleggum, serlánum, kurslánum og stuðulslánum sambært roknskapinum eru sett til 0 kr. Avsetingin svarar í høvuðsheitum til útlán til privata vinnu, sum ikki frammanundan eru avskrivað ella løgd um til rentu- og avdráttarfrí útlán.

***Virðini á veðhaldsútleggum, serlánum, kurslánum og stuðulslánum er sett til 0 kr.***

#### Rentu- og avdráttarfrí útlán

*t.kr.*

| | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Rentu- og avdráttarfrí lán ársbyrjan | 278.427 | 284.677 | 284.677 |
| Tilgongd í árinum | 6.250 | 0 | 0 |
| Frágongd í árinum | 0 | 0 | -20.305 |
| **Rentu- og avdráttarfrí lán ársenda** | **284.677** | **284.677** | **264.372** |
| Sett av móti tapi | 284.677 | 284.677 | 264.372 |
| **Sambært roknskapinum** | **0** | **0** | **0** |

Talan er um lán til Framtaksgrunnin, sjálvsognarstovnar, studningslán, eldrasambýli og Postverk Føroya. Sí notu nr. 3 í landsroknskapinum.

19,9 mió.kr. eru avskrivaðar í 2018. Talan er um tvey lán til Tekniska skúla í Tórshavn og eitt til Føroya Handilsskúla. Orsøkin er, at fastognirnar hjá skúlunum eru avhendaðar frá sjálvsognarstovnunum til Føroya Landsstýri. Harumframt er eitt lán til Húsarhaldskúla Føroya í Klaksvík, 455 t.kr., innfríað.

***19,9 mió.kr. eru avskrivaðar í 2018.***

Sambært landsroknskapinum verða rentu- og avdráttarfrí lán tikin við í roknskapin við virðinum 0 kr. Orsøkin er, at talan er um treytað lán, sum bert skulu rindast aftur, um bygningar o.t., sum lán eru veitt til, verða brúkt til annað, enn upprunaliga endamálið.

### 10.1.4 Áogn o.a.

#### Skatta-, toll- o.t. skuldarar

*t.kr.*

| | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Áogn landskassans brutto | 381.846 | 469.657 | 475.870 |
| Sett av ímóti tapi | -95.114 | -86.466 | -7.810 |
| **Sambært roknskapinum** | **286.732** | **383.191** | **468.060** |

Frá 2017 til 2018 eru skuldararnir hækkaðir 84,9 mió.kr. netto. Sambært landsroknskapinum eru størstu broytingarnar:

*t.kr.*

| **Broytingar 2017 til 2018** | |
|---|---|
| Vanligur landsskattur v.m. | 73.236 |
| Meirvirðisgjald | 24.966 |
| Tollavgjøld | 23.235 |
| Kapitalvinningsskattur | 9.106 |
| Felagsskattur | -7.895 |
| Tøkugjald á alivinnu | -10.957 |
| FAS endurgjald | -27.446 |

***Avsetingarnar móti tapi av skatta-, toll- o.t. skuldarum eru skeivar í landsroknskapinum.***

Landsgrannskoðanin er komin eftir, at avsetingarnar móti tapi av skatta-, toll- o.t. skuldarum eru skeivar í landsroknskapinum. Sambært landsroknskapinum eru avsetingarnar 7,8 mió.kr.; rætta talið er 116,8 mió.kr. Sostatt skuldu skatta-, toll- o.t. skuldararnir verið 359 mió.kr. netto, og ikki 468 mió.kr., sum roknskapurin vísir. Sambært Gjaldstovuni er orsøkin til at avsetingarnar eru skeivar, at tølini, sum Gjaldstovan fekk boð frá TAKS um at bóka sum avsetingar, vóru ikki røtt.

Um avsetingarnar vóru rætt bókaðar, høvdu størstu broytingarnar 2017 til 2018 verið:

*t.kr.*

| **Broytingar 2017 til 2018, tillagað** | |
|---|---|
| Tollavgjøld | 23.235 |
| Kapitalvinningsskattur | 9.106 |
| Felagsskattur | -7.895 |
| Tøkugjald á alivinnu | -10.957 |
| Meirvirðisgjald | -12.893 |
| FAS endurgjald | -27.446 |

## Tænastu-, vøru- og aðrir skuldarar

Talan er um tænastu- og vøruskuldarar hjá Apoteksverkinum, Landsverki, Kringvarpinum, Rúsdrekkasølu landsins og øðrum stovnum. Aðrir skuldarar eru m.a. inntøkur og endurgjøld, sum vanliga verða tíðaravmarkað. Eisini eru tað millumrokningar við landsstovnar, lønarútgjaldsskipanir, skipanir hjá TAKS, kommunum o.a.

Niðanfyri eru upphæddirnar útgreinaðar:

*t.kr.*

| | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|
| Tøkugjald á alivinnu | 32.887 | 9.145 | 30.338 |
| Apoteksverkið | 29.921 | 35.687 | 21.475 |
| Inntøkufíggjað virksemi, Landsverk | 20.993 | 15.116 | 16.249 |
| Avgjald á fiskatilfeingi | 7.039 | 7.342 | 13.316 |
| Ríkisstuðul, endurgjøld | 6.333 | 6.385 | 9.274 |
| Rúsdrekkasøla landsins | 1.789 | 2.299 | 7.577 |
| Uppboðssøla av fiskatilfeingi | - | 11.176 | 7.122 |
| Fróðskaparsetur Føroya, stuðulsf. virksemi | 6.477 | 5.670 | 6.895 |
| Heilsufrøðiliga starvsstovan | 5.648 | 4.592 | 6.080 |
| Gjald til Heilsutrygd | 5.643 | 5.662 | 6.028 |
| Kringvarp Føroya | 6.794 | 6.219 | 5.457 |
| Klaksvíkar sjúkrahús | 841 | 1.970 | 5.277 |
| Serviðgerð uttanlands | 1.500 | 2.801 | 5.048 |
| Landssjúkrahúsið | 6.661 | 8.028 | 4.674 |
| Ymiskir skuldarar | 55.950 | 31.188 | 35.214 |
| **Tilsamans sambært roknskapinum** | **188.476** | **153.280** | **180.024** |

***Tænastu-, vøru- og aðrir skuldarar eru hækkaðir 26,7 mió.kr. í 2018.***

Fleiri hækkingar og lækkingar eru, sum netto geva eina hækking 26,7 mió.kr. frá 2017 til 2018.

### Goymslur

*t.kr.*

| | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 67.308 | 64.509 | 56.170 |

Í tølunum eru vørugoymslurnar hjá Rúsdrekkasølu landsins, Apoteksverkinum, Strandfaraskipum landsins, Námi (útgávuvirksemi), Glasi, Miðnámi á Kambsdali, Landsverki, KT Landsins og Tekniska skúla í Klaksvík.

Netto er virðið á goymslunum lækkað 8,3 mió.kr. frá 2017 til 2018. M.a. er goymslan hjá Apoteksverkinum lækkað 4,5 mió.kr., hjá Rúsdrekkasølu landsins 3,6 mió.kr. og goymslan hjá Námi er lækkað 2,4 mió.kr. Hinvegin er goymslan hjá Landsverki hækkað 1,4 mió.kr., og goymslan hjá Strandferðsluni er hækkað 0,9 mió.kr.

### Ognir og útbúnaður (LG 2016/300-0101)

***Roknskaparkunngerðin broytt í 2017.***

Í 2017 varð roknskaparkunngerðin broytt við K. nr. 110/2017. Sambært § 20 í kunngerðini skulu stovnar gera yvirlit yvir ognir, so sum verkløg, bygningar, maskinur, før, innbúgv og annan virðismiklan útbúnað. Yvirlitini skulu fevna um ognir og útbúnað, hvørs keypsvirði er oman fyri 50 t.kr. Ognirnar og útbúnaðurin skulu skrásetast í Búskaparskipan landsins, um ikki stovnurin hevur fingið loyvi til at nýta egna búskaparskipan.

***Reglurnar um at skráseta ognir og útbúnað verða ikki hildnar.***

Landsgrannskoðanin kann enn eina ferð staðfesta, at reglurnar um at skráseta ognir og útbúnað, verða ikki hildnar.

Í august 2017 vísti landsstýrismaðurin á, at broyting í roknskaparkunngerðini um ognaryvirlit var komin í gildi, men enn vantaði tøknilig menning av ognaryvirlitum í Búskaparskipan landsins til tess at fáa skrásett ognir við virði yvir 50 t.kr.

Í september 2018 greiddi landsstýrismaðurin frá, at ognarmodulið í Búskaparskipan landsins varð broytt, soleiðis at størri stovnar við fakligum førleika fáa atgongd til at skráseta til- og frágongd av ognum. Smærri stovnar skulu framvegis venda sær til Gjaldstovuna fyri at fáa ognirnar skrásettar.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeiðið við játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarviðurskiftum verður uppraðfest, við m.a. at fáa aðalráð og stovnar at dagføra ognaryvirlitini.

## 10.1.5 Tøkur peningur

Tøkur peningur fatar um gjaldføri landsins. Sambært § 10, stk. 1, í Ll. nr. 116/2016 “um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð” umsitur Landsbanki Føroya gjaldføri landsins eftir ásetingum frá landsbankanevndini. Sambært stk. 2 er endamálið við umsitingini, at:

- landið altíð hevur neyðugt gjaldføri tøkt, soleiðis at tað kann halda sínar skyldur,
- landsins gjaldføri verður fyrisitið væl við atliti at tryggleika, herundir at samváðin millum landsins gjaldføri og føroyska búskapin verður sum minst, og at
- landsins gjaldføri verður rentað til marknaðarkor.

Sambært § 10, stk. 3 og 4, fevnir gjaldføri landsins um alt gjaldførið hjá allari landsumsitingini, øllum landsstovnum o.ø. Gjaldførið verður roknað sum landsins kassapeningur, innistandandi í peningastovnum, ótrektir kredittir í peningastovnum og óveðsettar virðisbrævaognir.

Í fíggjarstøðuni er tøkur peningur býttur í tveir bólkar:

1. Virðisbrøv o.t., og
2. Bankakontur, girokontur og kassapeningur.

### Virðisbrøv o.t.

Landsbanki Føroya hevur sett part av tøka peninginum í stuttfreistað virðisbrøv. Posturin nevnist "Virðisbrøv o.t." og eru virðisbrøvini tikin við til marknaðarvirðið.

*mió.kr.*

| | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 2.339 | 2.932 | 3.278 |

***Landsbankin hevur dagligu umsitingina av plaseringini av gjaldførinum hjá landinum.***

Landsbanki Føroya hevur dagligu umsitingina av plaseringini av gjaldførinum hjá landinum. Plaseringin byggir á íløguinstruks frá landsbankanevndini, har ásetingar eru um m.a., hvussu nógv kann plaserast í ávís sløg av virðisbrøvum.

Landsgrannskoðanin hevur kannað, um plaseringarnar av gjaldførinum eru sambært íløgureglunum í Ll. nr. 116/2016, og eisini um tær eru sambært íløguinstruksinum frá landsbankanevndini. Landsgrannskoðanin hevði einki at finnast at.

### Bankakontur og kassapeningur

*t.kr.*

| | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 566.036 | 547.568 | 388.575 |

*Banka- og girokontur*

Roknskaparposturin vísir ikki, hvussu nógv landskassin tilsamans hevur standandi á banka- og girokontum. Fleiri landsstovnar og -grunnar við leysum tilknýti til fíggjarlóg ella landsroknskap hava nógvan pening standandi í virðisbrøvum og á peningastovnskontum, sum ikki eru við í landsroknskapinum.

Í 2018 kann upphæddin greinast sundur í tær kontur, sum Landsbankin og Gjaldstovan umsita, og tær, sum aðrir stovnar í landsroknskapinum umsita.

Landsgrannskoðanin hevur kannað:

1. um kontuavrit fra peningastovnum stemma við Búskaparskipan landsins,
2. um peningur í fremmandum gjaldoyra er tikin við í roknskapin við røttum virði,
3. um saldur av plaseringum hjá Landsbankanum eru rætt skrásettar í landsroknskapinum og Búskaparskipan landsins,
4. um Landsbankin liggur inni við ov nógvum gjaldføri, og
5. um reglurnar um minstagjaldføri eru hildnar.

Ad. 4) Landsbankin hevur gjørt innanhýsis reglugerð um, hvussu nógvur tøkur peningur kann standa í føroyskum peningastovnum, í hvørjum peningastovni sær og samanlagt. Við árslok 2018 var innistandandi í peningastovnunum í tráð við reglugerðina.

Ad. 5) Sambært § 11 í Ll. nr. 116/2016 skal landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fyriskipa, at landsins gjaldføri, sambært § 10, stk. 3 og 4, í minsta lagi samsvarar við 15% av bruttotjóðarúrtøkuni í undanfarna ári. Landsbankanevndin skal í august mánað áseta minstagjaldførið. Landsbankin hevur upplýst, at av tí at bruttotjóðarúrtøkan fyri undanfarna ár ikki altíð er gjørd upp, tá ið landsbankanevndin skal áseta minstagjaldførið, verður seinasta uppgjørda talið brúkt, eisini um talan er um fyribilstal. Minstagjaldførið fyri 2018 tekur útgangsstøði í framrokningini av bruttotjóðarúrtøkuni fyri 2016.

Talvan niðanfyri vísir gongdina í tøka peninginum 2016 til 2018:

*mió.kr.*

| | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 2.905 | 3.479 | 3.666 |
| Harav minstagjaldføri | 2.290 | 2.475 | 2.670 |
| **Munur millum gjaldføri og minstagjaldføri** | **615** | **1.004** | **996** |

§ 11 ásetir, at gjaldførið fevnir um alt gjaldførið hjá allari landsumsitingini, øllum landsstovnum v.m., og sum er trygt og lætt tøkt. Gjaldførið fevnir eisini um óveðsett virðisbrøv. Sambært Landsbankanum kemur allur tøki peningurin í fíggjarstøðuni undir hesar treytir, og verður tí roknaður sum gjaldføri hjá landskassanum.

Tøki peningurin hjá landskassanum er hækkaður 187 mió.kr. frá 2017 til 2018, meðan kravið til minstagjaldførið er hækkað 195 mió.kr., t.v.s. at munurin millum tøka peningin (gjaldførið) og minstagjaldførið er minkaður við 8 mió.kr. frá 2017 til 2018.

***Tøki peningurin hækkaður 187 mió.kr.; kravið til minstagjaldførið er hækkað 195 mió.kr.***

Landsgrannskoðanin hevði ikki aðrar viðmerkingar til gjøgnumgongdina enn tær, sum eru til pkt. 4 og 5.

*Kassapeningur*

Landsgrannskoðanin hevur framt nøkur kassaeftirlit í 2018, har vit hava stemmað kassapening av við kassauppgerðir, Búskaparskipan landsins v.m. Hava stovnarnir peningastovnskontur, verða tær stemmaðar av við kontuavrit frá peningastovnum og Búskaparskipan landsins. Eisini hava vit kannað konturnar fyri óvanligar bókingar í ávís tíðarskeið. Kassaeftirlitini eru umrødd undir hvørjum stovni sær.

### 10.1.6 Skuld

Innanlandsskuld, langfreistað

*mió.kr.*

| | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 4.634 | 4.644 | 4.608 |

Við árslok 2018 var talan um 5 lánsbrævarøðir:

- FO-LB 190620, áljóðandi 1.100 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 20. juni 2019.
- FO-LB 200611, áljóðandi 1.045 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 11. juni 2020.
- FO-LB 210622, áljóðandi 1.350 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 22. juni 2021.
- FO-LB 230627, áljóðandi 550 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 27. juni 2023.
- FO-LB 320503, áljóðandi NOK 550 mió.kr. (svarandi til 411,8 mió.kr. við árslok 2018), sum fellur til gjaldingar 3. mai 2032.

Við árslok 2018 var samlaða áljóðandi skuldin 4.456,8 mió.kr.

Í 2018 og til juni 2019 eru 1,1 mia.kr. goldnar aftur, og 300 mió.kr. tiknar í nýggjum láni.

Frá fíggjarárinum 2016 eru lánini gjørd upp eftir marknaðarvirði.

***Lánini verða gjørd upp til marknaðarvirði.***

Landsbankin selur meginpartin av brævalánunum uttanlands, og óvist er, hvørjir keypararnir eru. Heitið á roknskaparpostinum, “Innanlandsskuld, langfreistað”, er tí helst ikki so beinrakið.

#### Uttanlandsskuld, langfreistað

*mió.kr.*

| | 2015 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 500 | 500 | 0 |

Lánið, 500 mió.kr., stavaði frá avtaluni 10. juni 1998 ímillum donsku stjórnina og Landsstýrið. Sambært avtaluni var lánið rentu- og avdráttarfrítt við teimum treytum, sum standa í lánsavtaluni: *“Afviklingen af lånet aftales i takt med eventuelle indtægter fra fremtidig råstofudvinding. Dog afskrives gælden efter 20 år, såfremt der ikke på det tidspunkt er startet udvinding af råstoffer.”* 10. juni 2018 datt lánið burtur sambært avtaluni.

***500 mió.kr. í láni, sambært avtalu við donsku stjórnina, er dottið burtur í 2018.***

*Partur av langfreistaðu skuldini, ið fellur til gjaldingar í komandi ári*

*t.kr.*

| | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 1.010.000 | 10.579 | 0 |

Sambært Landsbankanum vóru veruligu afturgjøldini:

- Í juni 2017 fullu eftir skránni 1.000 mió.kr. av FO-LB 170627 og 10,2 mió.kr. av FO-LB 180610. Tilsamans vórðu 1.010,2 mió.kr. goldnar í 2017.
- Í juni 2018 fall eftir skránni seinasti avdráttur av FO-LB 180610, 10,6 mió.kr.

Sambært Landsbankanum er lánið, FO-LB 190620, goldið aftur 20. juni 2019. Í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum stendur upphæddin til at vera 0 kr.

### Stuttfreistað skuld (onnur skuld)

*t.kr.*

| | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 941.431 | 1.010.733 | 1.060.060 |

Talan er í høvuðsheitum um vanligar kreditorar, millumrokningar við kommunur, tíðaravmarkingar og skuld, sum er greidd til útgjaldingar frá ymiskum skipanum. Skrásettu upphæddirnar í landsroknskapinum samsvara við sundurgreiningar, sum liggja aftanfyri.

## 10.1.7 Útjavningarkonta (LG 2017/300-0203)

*t.kr.*

| | 2017 | 2018 |
|---|---|---|
| Salda 1. januar | -524.705 | 89.404 |
| RLÚ-úrslit | 224.008 | 573.008 |
| Búskapargrunnur Føroya | 313.419 | 116.730 |
| Ymiskar broytingar | 76.682 | 12.517 |
| **Salda 31. desember** | **89.404** | **791.659** |

“Ymiskar broytingar” eru broytingar í fíggjarstøðuni, sum ikki verða førdar yvir raksturin. Talan er m.a. um tøkniligar munir, sum standast av broytingum í roknskaparmeginreglum, rættingum av skeivum bókingum, sum viðvíkja undanfarnum árum, avtøkum av grunnum, úrslitum hjá internum grunnum, broytingum í avsetingum, mótbókingum til útlánsroknskap og mótbókingum til kapitalinnskot.

Útjavningarkontan líkist ikki “kontu fyri eginpening” í einum privatum virki. Ognirnar í landsroknskapinum verða virðismettar øðrvísi, og materiell støðisogn, t.d. bygningar, skip og vegir, verða ikki virðisásett í roknskapinum. Útjavningarkontan hevur tí so at siga bert eitt tøkniligt endamál.

Landsgrannskoðanin hevur kannað rørslurnar á útjavningarkontuni fyri árini 2014 til 2018.

Rakstrar- og íløguúrslitið samsvarar við RLÚ II í landsroknskapinum.

Landsgrannskoðanin hevur hugt eftir, hvørjar posteringar eru skrásettar undir “Ymsar broytingar”. Vit hava kannað nakrar upphæddir, um tær eru rættar. Sum nevnt undir brotinum um skatta-, toll- o.t. skuldarar, eru avsetingarnar av teimum skeivar við 109,1 mió.kr. Tað ber í sær, at “Ymiskar broytingar” undir útjavningarkontuni átti at verið 109,1 mió.kr. lægri.

Vit hava ikki aðrar viðmerkingar til gjøgnumgongdina av útjavningarkontuni.

## 10.2 Fyrisiting av gjaldføri og skuld (LG 2018/300-0104 og 0202)

Landsbanki Føroya fyrisitur gjaldføris- og skuldarviðurskifti landsins. Ll. nr. 116/2016 “um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð” kom í gildi 1. januar 2017 og setti úr gildi Ll. nr. 140/2012 “um landsins gjaldføris- og skuldarfyrisiting”.

***Landsbankin fyrisitur gjaldføris- og skuldarviðurskifti landsins.***

Í broti 3.7 undir fíggjarmálum er greitt frá Landsbankanum og grannskoðan okkara av stovnsrakstrinum. Í brotunum 10.1.5 og 10.1.6 undir fíggjarstøðuni er stutt greitt frá um tøkan pening og skuld landsins.

### 10.2.1 Porteføljuskipanin

Til at fyrisita gjaldføris- og skuldaraviðurskifti nýtir Landsbankin eina skipan, nevnd PandaConnect, som er ein donsk skipan. Landsbankin hevur bert rætt til at spyrja í PandaConnect.

Bókingarnar fara ikki sjálvvirkandi yvir í Búskaparskipan landsins. Tá ið PandaConnect hevur endað mánaðarliga bókhaldið, verður ein fíla send Landsbankanum við broytingum frá síðsta mánað. Fílan verður bókað umvegis kontubrúgv í Búskaparskipan landsins. PandaConnect og Búskaparskipanin verða stemmaðar av. Landsbankin hevur ikki formligt loyvi til PandaConnect skipanina, men hevur heitt á Gjaldstovuna um at fáa loyvi.

***Bókingar fara ikki sjálvvirkandi í Búskaparskipan landsins.***

Landsbankin fær grannskoðanarváttan um skipanina hvørt ár. Landsgrannskoðanin hevur mett um grannskoðanarváttanina, og hevur kannað:

- um øll trygdartiltøk verða hildin (innritan, funktiónsskilnaður, trygdaravrit o.s.fr.), og
- um samsvar er millum porteføljuskipanina og Búskaparskipan landsins.

Einki var at finnast at.

### 10.2.2 Gjaldførið hjá landinum

Í landsroknskapinum vóru við árslok 2018 skrásettar 3.666 mió.kr. í tøkum peningi; harav 3.278 mió.kr. í virðisbrøvum o.t. Við árslok 2017 var tøki peningurin 3.479 mió.kr.; 2.932 mió.kr. vóru í virðisbrøvum o.t.

Í talvuni er tøki peningurin sambært Búskaparskipan landsins sundurgreinaður.

*t.kr.*

| Tøkur peningur | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv | 1.834.109 | 2.959.285 | 2.855.638 |
| Lánsbrøv, rentuáogn | 7.906 | 8.274 | 8.071 |
| Partabrøv | 408.789 | 442.986 | 543.231 |
| Onnur virðisbrøv | 88.409 | 94.948 | 105.173 |
| Repohandlar[33] | 0 | -149.996 | 0 |
| Ogn hjá øðrum | 0 | -423.727 | -234.421 |
| ***Virðisbrøv tilsamans*** | ***2.339.213*** | ***2.931.770*** | ***3.277.692*** |
| Bankakontur, landskassin | 142.653 | 162.748 | 231.786 |
| Útlendskar bankakontur | 458.944 | 335.143 | 82.686 |
| Ogn hjá øðrum | -104.724 | 0 | 371 |
| Aðrar bankakontur og kassar | 69.164 | 49.677 | 73.731 |
| **Tilsamans** | **2.905.250** | **3.479.338** | **3.666.266** |

Virðisbrøvini eru skrásett í landsroknskapinum til marknaðarvirði. Landsbankin hevur greitt frá, at øll virðisbrøvini eru skrásett í PandaConnect skipanini. Somuleiðis eru útlendskar peningastovnskontur, sum hava við virðisbrøv at gera, skrásettar í PandaConnect, og svara tær til næstan allan peningin á útlendsku kontunum.

[33] Repohandlar: Endurkeypsavtalur, t.e. avtalur, sum fevna um sølu og at keypa lánsbræv aftur til ásetta tíð.

Aðrar útlendskar og føroyskar peningastovnskontur eru ikki skrásettar í PandaConnect skipanini. Talan er um kontur, sum Gjaldstovan og aðrir almennir stovnar umsita.

### Plasering av gjaldførinum

Landsbankin hevur ymiskar reglur um, hvussu gjaldførið hjá landinum skal handfarast. Reglurnar standa í m.a. lógini um Landsbankan og ásetingum frá nevndini fyri bankan.

Landsgrannskoðanin hevur kannað:

- um Landsbankin hevur nøktandi og dagførdar skrivligar mannagongdir um, hvar hann plaserar gjaldførið,
- um plaseringarnar av gjaldførinum eru sambært Ll. nr. 116/2016,
- um plaseringarnar av gjaldførinum eru í tráð við instruksin frá landsbanka-nevndini, og
- um Landsbankin heldur seg til roknskaparinstruksin frá landsbankanevndini viðvíkjandi plaseringum av gjaldføri.

Einki var at finnast at.

***Transaktiónsslóðin er ikki optimal.***

Landsgrannskoðanin skal tó vísa á, at transaktiónsslóðin millum porteføljuskipanina og Búskaparskipan landsins er ikki optimal, tá ið tað ikki ber til at finna allar skrá-setingar av einari bóking í Búskaparskipan landsins, men neyðugt er at fara víðari til porteføljuskipanina, um skrásetingar av einari transaktión skulu finnast fram.

### Úrslitið av plasering av gjaldførinum

Sambært landsroknskapinum vóru rentur av innistandandi 45,2 mió.kr. í halli í 2018. Fluttar eru 4,6 mió.kr. og 72,5 mió.kr. til ávikavist Búskapargrunnin (§ 89 og internur grunnur) og "Frávik fyri rentuinntøkur" á § 80 undir RLÚ II, soleiðis at roknskapurin fyri 20.50.2.01.01 "Rentur av innistandandi" samsvarar við játtanina uppá 31,9 mió.kr. í inntøkum. Í talvuni eru rentuinntøkur o.a. sundurgreinaðar.

*t.kr.*

| **Heiti** | **2017** | | **2018** | |
|---|---|---|---|---|
| | *Játtan* | *Roknskapur* | *Játtan* | *Roknskapur* |
| Rentur og ógreinað | | -11.485 | | -20.344 |
| Vinningsbýti | | -25.083 | | -9.140 |
| Staðfestur kurs-/gjaldoyramunur | | -14.811 | | 27.922 |
| Ikki staðfestir kurs-/gjaldoyramunir | | -28.541 | | 46.060 |
| Rentur, bankar | | 183 | | 220 |
| Kostnaðir | | 13 | | 475 |
| Innanh. flyt. millum alm. grunnar | | 0 | | -4.580 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovnar | | 53.924 | | -72.513 |
| **Tilsamans** | **-25.800** | **-25.800** | **-31.900** | **-31.900** |

***Munandi broytingar eru í kursmunum.***

Sum sæst, er talan um munandi broytingar í kursmunum, serliga teimum ikki staðfestu.

Sambært ársfrágreiðingini frá Landsbankanum var avkastið av íløgurøktini 2,81% í 2017 og -1,35% í 2018. Landsbankin hevur kunnað um, at avkastið í miðal hevur verið 2% árini 2014 til 2018.

Landsbankin hevur eftirlitsfund hvønn mánað, og ger eina frágreiðing, sum byggir á fundin og tað, sum er gjørt at fylgja upp uppá fundin.

Í frágreiðingini frá 25. januar 2019 fyri desember 2018 er greitt frá, at avkastið av virðisbrøvum í desember var -1,39%. Avkastið fyri síðstu 12 mánaðirnar var -1,41%, tó -1,36%, um rakstrarkapitalurin í Føroyum varð taldur við. Benchmark fyri tíðarskeiðið var -0,88%. Avkastið av plaseringunum hjá Landsbankanum liggur tí nakað undir benchmark. Samsvarandi tølini fyri 2017 vóru 2,85% fyri alt árið; benchmark fyri árið var 1,66%.

Sambært Landsbankanum er benchmark ásett fyri hvønn aktivklassa sær, og er ásett eftir miðalvektunum á teimum ymisku aktivklassunum. Benchmark eru ikki fyri alternativar íløgur og kontur. At Landsbankin hevur lægri avkast enn benchmark í 2018, er tí at avkastið av partabrøvum er vánaligt, og at íløgurøðin hevur eina lægri vekt av partabrøvum enn benchmark. Sama ger seg galdandi fyri kredittlánsbrøv og emerging markets lánsbrøv. Negativt avkast var eisini av peningastovnskontum, har einki benchmark er.

***Lægri avkast enn benchmark.***

Á heimasíðuni hevur Landsbankin greinað avkastið í 2018 í aktivklassar.

*t.kr.*

| Aktivklassi | Miðal íløga v/innláni | Avkast DKK | Avkast % | Vekt % |
|---|---|---|---|---|
| Lánsbrøv | 2.759.467 | -13.189 | -0,48 | 77,03 |
| Partabrøv | 473.716 | -35.152 | -7,32 | 13,22 |
| Alternativar íløgur | 97.852 | 452 | 0,46 | 2,73 |
| Innistandandi | 251.518 | -813 | -0,32 | 7,02 |
| **Tilsamans** | **3.582.553** | **-48.702** | **-1,36** | **100,00** |

Sum sæst, standa partabrøvini fyri 13% av samlaðu upphæddini, men úrslitið av partabrøvunum er 72% av samlaða hallinum. Landsbankin umsitur íløgurøktina fyri landskassan og nakrar almennar grunnar undir einum. Parturin hjá grunnunum av samlaða avkastinum uppá 48,7 mió.kr. var 3,5 mió.kr.; hallið hjá landinum var 45,2 mió.kr.

### 10.2.3 Landskassaskuld - brævalán

#### Heimild at læna

Sambært § 42 í Ll. nr. 103/1994 “um stýrisskipan Føroya” kunnu lán ella borgan, ið skuldbinda løgting, landsstýri ella stovnar undir landinum, ikki verða tikin ella veitt uttan við heimild í lóg. Sambært § 1 í Ll. nr. 116/1991 “um lántøku til landskassan og umlegging av landskassalánum” verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna at taka lán til at rinda avdráttir av lánum, til afturrindan av lánum og til framskundaða afturrindan av lánum í Føroyum og uttan fyri Føroyar.

Landsgrannskoðanin hevur kannað lániheimildirnar fyri árini 2011 til 2018. Einki var at finnast at.

***Lániheimildirnar eru í lagi.***

#### Lánini í tráð við prospektini

Í sambandi við lántøku ger Landsbankin kunningartilfar til íleggjarar og onnur, nevnt prospekt. Í prospektinum er m.a. kunning um búskaparviðurskifti, upplýsingar um útgevaran av lánsbrøvunum og upplýsingar um lánsbrøvini, so sum samlaða upphædd, rentu, kurs, leypitíð og fondskotu.

Landsgrannskoðanin hevur kannað, um lánini, sum vóru virkin við árslok 2018, eru í tráð við prospektini. Einki nýtt brævalán er stovnað í 2018.

***Lánini eru í tráð við prospektini.***

#### Skráseting av brævalánum

Brævalánini síggjast í landsroknskapinum sum langfreistað innanlandsskuld í fíggjarstøðuni. Í notu 8 eru sundurgreiningar, sum vísa marknaðarvirði og viðhangandi rentu. Notan vísir eisini samanhangin millum navnvirði og marknaðarvirði, eitt yvirlit yvir einstøku brævalánsrøðirnar, umframt hvussu stórur partur av skuldini fellur til gjaldingar í komandi ári, og hvussu stór restskuldin er um 5 ár.

Bókaða virðið á brævalánunum við árslok 2018 er 4.608 mió.kr. í mun til 4.644 mió.kr. við ársbyrjan. Lánsupphæddirnar eru sambært roknskaparmeginreglunum í landsroknskapinum grundaðar á marknaðarvirðið umframt tíðargreinaðar rentur.

*t.kr.*

| Brævalán | 2017 | | | 2018 | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | *Lán* | *Lánsbýti* | *Tils.* | *Lán* | *Lánsbýti* | *Tils.* |
| Marknaðarvirði | 4.568.386 | 48.783 | 4.617.169 | 4.519.475 | 61.873 | 4.581.348 |
| Viðhang. renta | 28.974 | -2.408 | 26.566 | 28.675 | -2.213 | 26.462 |
| **Tilsamans** | **4.597.360** | **46.375** | **4.643.735** | **4.548.150** | **59.660** | **4.607.810** |

*Lánsbýti*: Sonevndur swap, sum t.d. kann fevna um lán, rentu og gjaldoyra.
*Viðhangandi renta*: Tíðargreinað renta viðvíkjandi roknskaparárinum, goldin eftir roknskaparlok.

Brævalánini hava síðani 2016 verið virðisásett til marknaðarvirði. Áður vórðu lánini bókað til kursvirðið útgávudagin; kursmunurin varð avskrivaður liniert yvir lánstíðina.

Broytta virðisásetingarmeginreglan hevði í 2016 við sær, at bókaðu upphæddirnar við ársbyrjan 2016 vórðu 104 mió.kr. hægri enn tær við árslok 2015. Samsvarandi upphædd er mótbókað á útjavningarkontuna í landsroknskapinum. Upphæddin á útjavningarkontuni verður tann sama, so leingi meginreglan ikki verður broytt. Kursbroytingar eftir tað verða rakstrarførdar hvørt ár.

*t.kr.*

| FO-LB | Restskuld við byrjan 2018 | Virði við byrjan 2018 | Munur | Restskuld við árslok 2018 | Virði við árslok 2018 | Munur | Broytt markn. virði |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 180610 | 10.578 | 10.578 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 190620 | 1.100.000 | 1.135.640 | 35.640 | 1.100.000 | 1.112.793 | 12.793 | -22.847 |
| 200611 | 1.045.000 | 1.078.963 | 33.963 | 1.045.000 | 1.066.109 | 21.109 | -12.854 |
| 210622 | 1.350.000 | 1.372.950 | 22.950 | 1.350.000 | 1.371.060 | 21.060 | -1.890 |
| 320503 | 447.883 | 447.883 | 0 | 447.883 | 447.883 | 0 | 0 |
| 320503 - gjaldoyra | | -31.753 | -31.753 | | -36.098 | -36.098 | -4.345 |
| 320503 - lánsbýti | | 48.783 | 48.783 | | 61.873 | 61.873 | 13.090 |
| 230627 | 550.000 | 554.125 | 4.125 | 550.000 | 557.728 | 7.728 | 3.603 |
| **Tils.** | **4.503.461** | **4.617.169** | **113.708** | **4.492.883** | **4.581.348** | **88.465** | **-25.243** |

*FO-LB 320503*: Lánið er í norskum krónum, men er býtt um við (swappað til) danskar krónur. Gjaldoyramunurin og virðið á lánsbýtinum eru víst fyri seg.

***Flestu kursir eru lækkaðir. Virðið á lánsbýtinum er hækkað.***

Í talvuni hava vit greinað restskuldina á brævalánunum, sum vóru virkin ávikavist við árslok 2017 og við árslok 2018. Sum sæst, er samlaði kursmunurin við árslok 2018 lækkaður í mun til við ársbyrjan. Broytingin verður tikin við í raksturin undir høvuðskontu 20.50.1.01 “Rentur at gjalda” sum ikki staðfestur kursmunur.

*t.kr.*

| FO-LB | Restskuld við árslok 2018 | Kursur smbr. roknskapi | Kursur smbr. VP[34] | Virði smbr. roknskapi | Virði smbr. VP | Munur í virði |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 190620 | 1.100.000 | 101,1630 | 102,4000 | 1.112.793 | 1.126.400 | -13.607 |
| 200611 | 1.045.000 | 102,0200 | 102,1000 | 1.066.109 | 1.066.945 | -836 |
| 210622 | 1.350.000 | 101,5600 | 101,3750 | 1.371.060 | 1.368.562 | 2.498 |
| 320503 | 411.785 | 100,0000 | 100,0000 | 411.785 | 411.785 | 0 |
| 320503 - lánsbýti | | | | 61.873 | 61.874 | -1 |
| 230627 | 550.000 | 101,4050 | 101,2750 | 557.728 | 557.013 | 715 |
| **Tils.** | **4.456.785** | | | **4.581.348** | **4.592.579** | **-11.231** |

*FO-LB 320503*: Lánið í norskum krónum er til kursvirðið í donskum krónum við árslok 2018.

Í talvuni síggjast brævalánsrøðir og lánsbýti við árslok 2018. Sambært roknskaparmeginreglunum verða árligu broytingarnar í keypsskála skrásetta kursvirðinum tiknar við í roknskapin. Vit hava samanborið lánini og kursin, sum er brúktur í landsroknskapinum, við upplýsingar sambært skjølum frá VP Securities A/S fyri at vissa okkum um upphæddirnar, sum eru í umferð, og at brúkti kursurin samsvarar við marknaðarkursin við árslok. Virðið á lánsbýtinum er borið saman við “market value report” frá Nordea. Munur er í nøkrum av brævalánsrøðunum í mun til kursin hjá VP við árslok 2018.

***Munur á nøkrum kursum.***

[34] VP Securities A/S: Felag, sum tekur sær av skráseting og handli av børsskrásettum virðisbrøvum

*Kursirnir hjá Nordea "rættari" enn teir, VP brúkar.*

Sambært Landsbankanum er Nordea "marketmaker" á landskassans lánsbrøvum, t.v.s. at tey regluliga áseta kursir á lánsbrøvum til tann besta kursin, tey kunnu koma fram til. VP er eitt skrásetingarstað. Landskassans lánsbrøv verða sjáldan keypt og seld, og tí er trupult at áseta heilt rætta kursin. Landsbankin metir, at kursurin sum Nordea brúkar er "rættari", enn tann VP brúkar.

*t.kr.*

| FO-LB | Restskuld við árslok 2018 | Tíðargr. renta | Rentudagur | Dagar | Roknað renta í % | Ásett renta í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 190620 | 1.100.000 | 10.231 | 20-06-2018 | 194 | 1,7500 | 1,7500 |
| 200611 | 1.045.000 | 5.812 | 11-06-2018 | 203 | 1,0000 | 1,0000 |
| 210622 | 1.350.000 | 3.551 | 22-06-2018 | 192 | 0,5000 | 0,5000 |
| 320503 | 411.785 | 7.320 | 03-05-2018 | 237 | 2,7000 | 2,7000 |
| 230627 | 550.000 | 1.761 | 27-06-2018 | 187 | 0,6250 | 0,6250 |
| | ***4.456.785*** | ***28.675*** | | | | |
| 320503 - lánsbýti | -411.785 | -7.550 | 03-05-2018 | 237 | -2,7851 | -2,7000 |
| 320503 - lánsbýti | 447.883 | 5.337 | 03-05-2018 | 237 | 1,8100 | 1,8100 |
| **Tilsamans** | **4.492.883** | **26.462** | | | | |

*Rentudagar*: Í FO-LB 320503 verða nýttir 30/360 dagar í mánaðinum/árinum; í øðrum lánum eitt vanligt ár.
*FO-LB 320503*: Lánið í norskum krónum er til kursvirðið í donskum krónum við árslok 2018; lánið er býtt um við danskar krónur.

Í talvuni hava vit eftirroknað tíðargreinaðu rentuna av hvørjum láni sær í mun til restskuldina við árslok 2018. Norska lánið hevur eina rentu á 2,7%, men varð býtt um til danskar krónur við 1,81% rentu. Rentumunurin verður góðskrivaður landinum.

Sum sæst í talvuni, er tíðargreinaða rentan av láninum í norskum krónum 7.320 t.kr., men samsvarandi rentan í sambandi við lánsbýtið, sum er bókað landinum til góðar, er 7.550 t.kr. Munurin er 230 t.kr.

Sambært Landsbankanum er talan um ein feil. Kursurin, sum er brúktur til lánsbýtið er kursurin, sum var galdandi, tá ið renturnar vóru goldnar í mai 2018, og ikki við árslok. PandaConnect rættar feilin, til at galda frameftir. Feilurin í roknskapinum 2018 rættar seg aftur í mai 2019, tá ið rentur aftur skulu gjaldast.

### Upplýsingar um brævalánini í landsroknskapinum

Í fíggjarstøðuni og í notu 8 til landsroknskapin er parturin av brævalánunum, sum fellur til gjaldingar árið eftir roknskaparárið, ikki upplýstur, sum tað annars er gjørt undanfarin ár. Sambært Landsbankanum fullu 10 mió.kr. til gjaldingar í 2018. Upphæddin, sum fellur til gjaldingar í 2019, er 1,1 mia.kr.

### Skráseting av rentuútreiðslum o.ø.

*Rentuútreiðslur o.a. vóru 23,7 mió.kr.; 5,7 mió.kr. vórðu fluttar á § 80 undir RLÚ II.*

Sambært landsroknskapinum vóru rentur av skuld 23,7 mió.kr. í 2018. Fluttar eru 5,7 mió.kr. til "Frávik fyri rentuútreiðslur" á § 80 undir RLÚ II, soleiðis at roknskapurin fyri 20.50.1.01 "Rentur at gjalda" samsvarar við játtanina uppá 18 mió.kr. Í talvuni eru rentuútreiðslur o.a. sundurgreinaðar.

*t.kr.*

| Heiti | 2017 | | 2018 | |
|---|---|---|---|---|
| | *Játtan* | *Roknskapur* | *Játtan* | *Roknskapur* |
| Goldnar rentur | | 54.729 | | 48.624 |
| Broytt tíðaravmarkað renta o.a. | | -398 | | 2.122 |
| ***Rentur tilsamans*** | | ***54.331*** | | ***50.746*** |
| Staðfestir kursmunir | | -9.299 | | -233 |
| Ikki staðfestir kursmunir | | 30.378 | | -27.469 |
| ***Kursmunir tilsamans*** | | ***21.079*** | | ***-27.702*** |
| Ómaksgjøld o.a. | | 3.280 | | 0 |
| Aðrar rentuútreiðslur | | 834 | | 649 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovnar | | -59.524 | | -5.693 |
| **Tilsamans** | **20.000** | **20.000** | **18.000** | **18.000** |

*Goldnar rentur*: Í Búskaparskipan landsins eru renturnar ikki greinaðar í goldnar og tíðargreinaðar rentur – upphæddirnar eru roknaðar sambært yvirlitum úr Pandaskipanini.

Sambært yvirlitinum vóru nettoútreiðslurnar av rentum og kursmunum av brævalánunum, 75.410 t.kr. í 2017 og 23.044 t.kr. í 2018.

Í talvuni niðanfyri eru goldnar rentur og tíðargreinaðar rentur í 2018 býttar á brævalánini. Vit hava roknað, hvat samlaða rentuupphæddin fyri hvørt lánið er í mun til eina miðalsaldu á láninum í árinum. Roknaða rentan er samanborin við ásettu rentuna á hvørjum láni.

*t.kr.*

| FO-LB | Miðalsalda í 2018 | Goldin renta | Broytt tíðargr. renta | Renta tilsamans | Roknað renta í % | Ásett renta í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 180610 | 5.289 | 397 | -222 | 175 | 3,7500 | 3,7500 |
| 190620 | 1.100.000 | 19.250 | 0 | 19.250 | 1,7500 | 1,7500 |
| 200611 | 1.045.000 | 10.450 | 0 | 10.450 | 1,0000 | 1,0000 |
| 210622 | 1.350.000 | 6.750 | 0 | 6.750 | 0,5000 | 0,5000 |
| 320503 | 413.958 | 11.468 | -77 | 11.391 | 2,7664 | 2,7000 |
| 230627 | 550.000 | 3.438 | 0 | 3.438 | 0,6250 | 0,6250 |
| ***Tilsamans*** | ***4.464.247*** | ***51.753*** | ***-299*** | ***51.454*** | | |
| Lánsbýti | -413.958 | -11.236 | 195 | -11.041 | -2,6812 | -2,7000 |
| Lánsbýti | 447.883 | 8.107 | 0 | 8.107 | 1,8100 | 1,8100 |
| **Tilsamans** | **4.498.172** | **48.624** | **-104** | **48.520** | | |

Sambært landsroknskapinum vóru rentuútreiðslurnar 50.746 t.kr. Munurin er ein hægri útreiðsla í landsroknskapinum uppá 2.226 t.kr., samanborið við útrokningina í talvuni. Hinvegin var ikki staðfesti kursvinningurin í landsroknskapinum 27.469 t.kr. Tað er ein hægri inntøka í landsroknskapinum uppá 2.226 t.kr., samanborið við útrokningina í talvuni á síðu 146, har munurin á marknaðarvirðinum á brævalánunum við árslok í mun til við ársbyrjan er eftirroknaður. Samlaði munurin er tí eingin. Sambært Pandaskipanini er talan um ikki staðfestan gjaldoyravinning.

***Munur, tí feilur var í PandaConnect skipanini.***

Landsbankin hevur greitt frá, at talan er um ein feil, sum PandaConnect rættar til at galda frameftir. Feilurin í roknskapinum 2018 rættar seg aftur í 2019.

***Renturnar eru nú lægri.***

Renturnar av brævalánunum vóru 50.746 t.kr. í 2018. Í 2016 og 2017 vóru tær ávikavist 75.791 t.kr. og 54.331 t.kr. Høvuðsorsøkin til lækkingina er, at brævalánið FO-LB 160622 uppá 1.350 mió.kr. við 3,75% í rentu varð afturgoldið í juni 2016. Brævalánið FO-LB 170627 uppá 1 mió.kr. við 1,75% í rentu varð afturgoldið í juni 2017. Síðsti avdrátturin av brævaláninum FO-LB 180610 við 3,75% í rentu er goldin í 2018.

## Útreiðslur í árinum av rentu, kursi og lánsbýti

Í talvuni niðanfyri hava vit samanhildið brævalánini við samlaðu rakstrarbroytingarnar, sum lánini hava við sær í árinum.

*t.kr.*

| FO-LB | Restskuld við árslok 2018 | Renta smbr. roknskapi | Kursbroyt. o.a. smbr. roknskapi | Rakstrar-broytingar tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| 180610 | 0 | 175 | 0 | 175 |
| 190620 | 1.100.000 | 19.250 | -22.847 | -3.597 |
| 200611 | 1.045.000 | 10.450 | -12.854 | -2.404 |
| 210622 | 1.350.000 | 6.750 | -1.890 | 4.860 |
| 320503 | 447.883 | 10.683 | 6.286 | 16.969 |
| 230627 | 550.000 | 3.438 | 3.603 | 7.041 |
| **Tilsamans** | **4.492.883** | **50.746** | **-27.702** | **23.044** |

*Roknað broyting í %*: Broytingin er roknað sum samlað rakstrarbroyting í mun til miðal av restskuldini við ársbyrjan og við árslok.

Í kursbroytingum o.ø. er ikki kursmunur í sambandi við útgávu. Útgávukursmunir verða staðfestir, tá ið lánini verða innfríað. Lán nr. FO-LB 180610 er innfríað í árinum. Kursmunir á øðrum lánum eru ikki staðfestir. Sum sæst, svaraðu útreiðslurnar til 3,3% av láni nr. FO-LB 180610 og 3,8% av láni nr. FO-LB 320503.

### Aðrar rentuútreiðslur

*Aðrar rentuútreiðslur vóru 649 t.kr. í 2018.*

Aðrar útreiðslur enn rentur og kursmunir av brævalánunum eru 649 t.kr. Talan er um gjald fyri skráseting, eftirlit o.a. Í 2018 eru eingi nýggj brævalán stovnað, og tí eru heldur eingi ómaksgjøld í tí sambandi. Nakrar útreiðslur eru av føroyskum peninga-stovnskontum hjá Landsbankanum og Gjaldstovuni. Landsgrannskoðanin hevur áður mælt til at áseta, hvørjar útreiðslur kunnu takast við í játtanina.

Útreiðslurnar av sjálvari porteføljuskipanini verða rindaðar av játtanini til Landsbankan. Útreiðslur í sambandi við plasering av gjaldføri, t.d. kurtaga, fara av høvuðskontu 20.50.2.01 “Rentuinntøkur av innistandandi”.

*Landsbankin bjóðaði út íløgurøktina síðsta heyst og hevur nú 5 íløgurøktarar.*

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Landsbankin bjóðaði íløgurøktina út síðsta heyst. Frá 1. januar 2019 hevur landskassin 5 íløgurøktarar, sum eru Nordea, SEB, Handelsbanken, Nykredit og Sydbank. Ætlanin var eisini at bjóða út høvuðsbankasambandið, men tað er fyribils útsett. Landsbankin metti ikki, at tað var skynsamt at bjóða út íløgurøktina og høvuðsbankasambandið í senn, men eisini hvítvaskgølan hjá Danske Bank gjørdi sítt til, at tann avgerðin varð tikin.

### Játtanir undir § 20 til rentur av brævalánum og plaseringum

*Skuld og gjaldføri landsins verða virðisásett til marknaðarvirði.*

Landsgrannskoðanin hevur í undanfarnum ársfrágreiðingum umrøtt virðisásetingar-meginreglurnar av skuld, sum Landsbankin fyrisitur. Í 2016 vórðu tær broyttar, soleiðis at brævalánini verða tikin við í roknskapin til marknaðarvirði. Fígging landsins mælti til broytingina í 2015, soleiðis at somu meginreglur vóru galdandi fyri fíggjarliga ogn og skuld. Fígging landsins vísti á, at onnur lond hava tjóðbanka, sum hevur reservarnar hjá landinum um hendi, og tá síggjast rentur o.a. ikki beinleiðis í landsroknskapinum.

Landsgrannskoðanin hevur vístá, at brúktu roknskaparmeginreglurnar eiga at vera tær, sum á bestan hátt endurspegla tær avgerðir, sum verða tiknar í fíggjarárinum. Eitt høvuðsendamál við fíggjarlógini og landsroknskapinum er at halda saman tað, sum er brúkt ella rátt yvir, í mun til tað, sum er samtykt. Tann mest rættvísandi myndin av landsroknskapinum er tí tær upphæddir, sum samsvara við tær avgerðir, sum ein landsstýrismaður ella stovnsleiðsla tekur.

*Verða lán ætlandi ikki innfríað fyri tíð, hava kursbroytingar ikki útreiðslur ella inntøkur við sær yvir lánstíðina.*

Er endamálið við at taka lán einans at fíggja almennan rakstur, og lánini ætlandi ikki verða innfríað fyri tíð, hava kursbroytingar á hvørjum ári ikki útreiðslur ella inntøkur við sær yvir samlaðu lánstíðina. Tað er rentan, sum hevur útreiðslur við sær á hvørjum ári, og sum endurspeglar veruligu avgerðirnar. Árligu kursbroytingarnar geva tí ikki betri upplýsingar – sum við plaseringunum –, men kunnu heldur hinvegin órógva veruligu myndina av útreiðslunum av skuldini.

Í talvuni síggjast játtan og roknskapur fyri ávikavist rentur av skuld og rentur av innistandandi síðani 2016; tølini fyri 2019 eru fram til og við juli.

*t.kr.*

| | 2016 | 2017 | 2018 | 2019[35] |
|---|---|---|---|---|
| **Rentur av skuld** | | | | |
| Játtan | 54.000 | 20.000 | 18.000 | 43.500 |
| *Roknskapur* | | | | |
| Rentur | 75.791 | 54.331 | 50.746 | *27.364* |
| Kursbroytingar | -16.608 | 21.079 | -27.702 | *41.100* |
| Ómaksgjøld o.a. | 3.825 | 4.114 | 649 | *1.598* |
| Javning | -9.008 | -59.524 | -5.693 | *-26.562* |
| **Rentur av innistandandi** | | | | |
| Játtan | -26.700 | -25.800 | -31.900 | -40.700 |
| *Roknskapur* | | | | |
| Samlaður vinningur | -86.734 | -79.724 | 45.193 | *-164.256* |
| Javning | 60.034 | 53.924 | -77.093 | *123.556* |

[35] Til og við juli 2019.

Í ársfrágreiðingini fyri 2017 vísti Landsgrannskoðanin á, at útreiðslurnar av rentum, kursbroytingum o.ø. í 2017 vóru 80 mió.kr. Játtanin var 20 mió.kr. Sjálv rentan var 54 mió.kr. Landsgrannskoðanin ivaðist tí í, um broyttu roknskaparmeginreglurnar høvdu við sær, at bókaðu útreiðslurnar á bestan hátt endurspeglaðu tær avgerðir og tiltøk, sum vóru framd innan játtanarøkið.

Í 2018 er játtanin 18 mió.kr. til rentur av skuld. Í talvuni sæst, at rentuútreiðslurnar eru 51 mió.kr., men kursbroytingarnar eru 28 mió.kr. í inntøku.

***Játtanin til rentu-útreiðslur í 2019 svarar til miðalrentu-stigið av skuldini.***

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at í fíggjarlógini 2019 er játtanin til rentuútreiðslur á § 20 Inntøkur ásett sum effektiva rentan við upptøku av lánsbræva-skuldini, soleiðis at hon endurspeglar miðalrentustig í mun til støddina á skuldini.

### Javning av rentuútreiðslum og -inntøkum millum § 20 og § 80

***Frávikið í mun til játtan verður flutt til § 80 undir RLÚ II.***

Í undanfarnum ársfrágreiðingum hava vit eisini umrøtt broytingarnar í upplýsingunum av rentum o.ø. Viðgerðin av rentuinntøkum og -útreiðslum, kursbroytingum o.ø. er nú soleiðis, at inntøkurnar og útreiðslurnar gjøgnum árið verða tiknar við undir § 20, sum er partur av RLÚ I, men við árslok verða tær javnaðar soleiðis, at frávikið í mun til játtan verður flutt til § 80 Rentur, sum er partur av RLÚ II.

Landsgrannskoðanin helt tað vera ivasamt, um tað var rætt at javna ella flyta millum høvuðskontur, soleiðis at nýtslan samsvarar við játtanina.

Í fíggjarlógini 2018 undir høvuðskontu 20.50.1.01 “Rentur at gjalda” er greitt frá, at fyri rentuútreiðslurnar verður effektiva rentan brúkt. Metingin av rentuútreiðslunum er grundarlag undir bæði játtan og roknskapi, og frávik í mun til játtan verða skrásett sum óvanligar útreiðslur og inntøkur.

***Frá 2019 brúkar Landsbankin effektivu rentuna á lánunum við upptøku.***

Landsbankin hevur greitt frá, at frá 2015 hevur Landsbankin mett um rentu-útreiðslurnar við at brúka effektivu rentuna á lánsbrævarøðunum, tá metingin var gjørd. Tað er viðkomandi, um broytingar verða gjørdar í lántøkuni í úrtíð. Men av tí at ætlanin ikki er at rinda lánini aftur fyri tíð, brúkar Landsbankin frá 2019 effektivu rentuna á lánunum, við upptøku. Tað eigur frameftir at endurspegla ein rættari rentukostnað í fíggjarlógini.

Landsgrannskoðanin hevur áður vísst á, at eingin § 80 og tíansheldur nøkur játtan var í fíggjarlógini. Til renturnar undir § 20 var heldur eingin átekning um at flyta millum høvuðskontur í tráð við § 13 í lógini um játtanarskipan landsins.

Í juli 2019 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at í fíggjarlógini 2019 eru játtanir til rentupostarnar á § 80 “Rentur”, umframt at heimild er fingin við átekningum til at gera innanhýsis flyting millum rentupostarnar á § 20 Inntøkur og § 80 Rentur.

Í landsroknskapinum 2018 eru rentuútreiðslurnar undir § 20 javnaðar við 5,7 mió.kr., og rentuinntøkurnar við 77,1 mió.kr. Í 2017 samsvara upphæddirnar við frávikini fyri rentuútreiðslur og -inntøkur undir § 80. Í 2018 er munur í javningini av rentuinntøkunum uppá 4,6 mió.kr., sum sambært Búskaparskipan landsins er nettopartur hjá Búskapar-grunninum av samlaðu íløgurøktini.

***Frá 2018 er rentu-avkast hjá Búskapar-grunninum broytt til at vera flyting millum almennar kassar.***

Sambært Landsbankanum hevur Gjaldstovan vísst á, at í 2017 var rentuavkastið hjá Búskapargrunninum flokkað sum standardkonta 67 “Rentuinntøkur og vinningsbýti”, uttan at nakað realbúskaparligt var aftan fyri bókingina. Í 2018 er tað broytt til at vera ein flyting millum almennar kassar.

# 11. Lønir, goldnar um Felags lønarskipanina

## 11.1 Grannskoðan av lønum 2018 (LG 2018/511-0001)

*Løn er størsta útreiðslan hjá landinum.*

Lønarútreiðslan, sum í fíggjarlógini 2018 er játtað við 2,5 mia.kr., er størsta rakstrarútreiðslan hjá landskassanum. Landsgrannskoðanin hevur gjørt eina serliga tvørgangandi lønargrannskoðan, sum hevur fevnt um lønir, sum í 2018 eru goldnar um Felags lønarskipanina hjá Gjaldstovuni. Flestu lønirnar hjá tí almenna verða goldnar um ta skipanina.

Yvirskipaða endamálið við grannskoðanini var at kanna, um roknskapurin er rættur, og um tær avgerðir, sum roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði. Í sambandi við grannskoðanina hava vit eisini kannað, um roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar, herímillum mett um innaneftirlitið.

## 11.2 Niðurstøða

Landsgrannskoðanin hevur ikki orsøk til at halda, at týðandi feilir eru í teimum lønum, sum eru goldnar út um Felags lønarskipanina í 2018.

Samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin, at:

- innaneftirlitið uttanum Felags lønarskipanina er gott,
- roknskapurin 2018 er rættur og álítandi viðvíkjandi lønarútreiðslum, sum fara um Felags lønarskipanina, og
- lógir og reglur verða hildnar, tá ið lønir verða goldnar um Felags lønarskipanina.

Niðurstøðan byggir tó á ta treyt, at stovnarnir, sum lata upplýsingar til lønarskipanina, hava skipað egið eftirlit, áðrenn upplýsingar verða latnar Felags lønarskipanini.

*Har tíðarskráseting ikki er nøktandi, kunnu vit ikki sanna, at lønir eru rættar.*

Landsgrannskoðanin kann ikki sanna, at lønarútreiðslurnar hjá teimum stovnum, sum ikki hava nøktandi tíðarskráseting, eru rættar.[36]

*Lønir verða eisini goldnar sum keyp av tænastum.*

Landsgrannskoðanin kann ikki vátta, at allar lønir eru goldnar sum lønir. Vit eru komin fram á, at nakrar upphæddir eru goldnar út sum “keyp av tænastuveitingum”, ið vit halda áttu, ella eins væl kundu, verðið goldnar sum løn. Landsgrannskoðanin fer at venda aftur til tann trupulleikan í einari seinni grannskoðan.

[36] Sambært § 5, stk. 4, í kunngerð um roknskaparverk landsins, skal stovnsleiðarin skipa fyri, at hóskandi skráseting av arbeiðstíð, fráveru, frítíð o.t. er á stovninum, so lønarútgjaldingarnar eru rættar.

## 11.3 Bygnaður

### 11.3.1 Fíggjarmálaráðið hevur yvirskipaða ábyrgd og eftirlit

Sambært § 14 í fráboðanini um málsøkjabýtið umsitur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum m.a. lønar- og setanarviðurskifti.

Í § 18, stk. 2, nr. 4, er ásett, at landsstýrismaðurin hevur heimild at geva tænastuboð um, hvussu størv skulu lýsast leys, mannagongdir við setan av størvum, um góðkenning av lønarflokkingum, um farloyvi, um starvsfólkapolitikk, um fráfaringaraldur og um viðurskifti í sambandi við uppsagnir.

### 11.3.2 Gjaldstovan hevur dagligu fyrisitingina

Gjaldstovan, sum er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, er skipað við fýra høvuðsdeildum: Talgildu Føroyar, Løn og bókhald landsins, Búskaparskipan landsins og KT landsins. Gjaldstovan er ikki skipað við lóg, men partar av virkseminum eru ásettir við lóg. Gongdin seinastu árini hevur verið, at tvørgangandi tænastur mótvegis landsstovnum og kommunum verða savnaðar hjá Gjaldstovuni.

Í K. nr. 22/2007 hevur landsstýrismaðurin ásett týdningarmestu viðurskiftini í sambandi við roknskaparverk landsins. Gjaldstovan førir roknskap yvir játtanirnar í fíggjarlógini, og yvir ogn og skuld landskassans. Gjaldstovan stendur somuleiðis fyri inn- og útgjaldingum landskassans, og rindar meginpartin av almennu lønunum. Gjaldstovan brúkar eina lønarskipan, nevnd Felags lønarskipanin, til at umsita lønirnar.

Lønarumsitingin fevnir m.a. um, at Gjaldstovan:

- leggur inn lønarsáttmálar og grunddátur,
- ger eftirreguleringar sambært sáttmálum,
- heldur skil á frítíðarløn og -ískoyti,
- tryggjar, at samskiftið við roknskaparskipanina og aðrar skipanir er rætt,
- stemmar av við innanhýsis skipanir,
- stemmar av við uttanhýsis skipanir, so sum skattaskipanina, AMEG, ALS og barsilsskipanina,
- letur upplýsingar til tryggingarfeløg í sambandi við frammanundanskatting av pensjónum,
- sendir út lønarseðlar, og
- heldur markamót við aðrar loysnir viðlíka, t.d. Vaktætlan og Skúlaforskipan.

Gjaldstovan rindar almennu lønirnar um skattaskipanina, avroknar barsilsgjald o.o. gjøld, og rindar partin hjá starvsfólkunum til eftirlønarskipanir og til fakfeløg.

#### Felags lønarskipanin

Endamálið við Felags lønarskipanini er at savna umsitingina av øllum almennum lønum og tænastumannapensjónum í eina skipan.

Gjaldstovan tekur sær av miðsavnaðu uppgávunum, sum hava við lønarútgjaldingarnar at gera. Harumframt umsitur Gjaldstovan skipanirnar Vaktætlan og Skúlaforskipan.

Í Felags lønarskipanini eru grundskráir, og hvør løntakari er skrásettur við p-tali, navni, bústaði, kontunummari, lønaraldri og øðrum upplýsingum, ið eru viðkomandi fyri starvið. Partar av upplýsingunum fær Felags lønarskipanin úr Landsfólkayvirlitinum.

Gjaldstovan umsitur grundskráirnar til lønarútrokningar, so sum at:

- stovna lønmóttakarar í Felags lønarskipanini,
- broyta grundskráir,
- lesa inn lønarsáttmálar,
- senda lønarseðlar til Mínboks,
- halda viðlíka kreditorar (t.d. pensjónsfeløg, fakfeløg o.a.),
- menna og halda viðlíka Felags lønarskipanina, og
- skráseta tænastumannapensjónir og avgreiða spurningar í tí sambandi.

Niðanfyri er mynd av dátuflutninginum til og frá Felags lønarskipanini.




Stovnar kunnu gera formliga avtalu við Gjaldstovuna um at vera sjálvstøðug lønarskrivstova, sum hevur somu uppgávur sum Gjaldstovan, burtursæð frá at skráseta lønartalvur, lønarsløg e.a. Í dag eru tríggjar sjálvstøðugar lønarskrivstovur: Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar sjúkrahús og Suðuroyar sjúkrahús.

Sambært Gjaldstovuni verða alt fleiri uppgávur lagdar til Web-løn, og gongdin er, at tað verða færri lønarskrivstovur.

### Web-løn

Web-løn er samantvinnaður partur av Felags lønarskipanini, og verður brúkt til at avgreiða leysar lønir. Brúkarin hevur atgongd til skipanina umvegis alnetið. Stovnarnir hava bert atgongd til at gjalda løn til starvsfólk, sum frammanundan eru skrásett í Felags lønarskipanini. Skipanin við Web-løn er við til at einshátta avgreiðsluna av lønum.

Skipanin við Web-løn ber eisini í sær, at fleiri stovnar, sum Gjaldstovan rindar lønir fyri, sjálvir kunnu tøppa inn einfaldar skrásetingar, t.d. tímalønir, fundarpengar og koyri-pengar.

Í hesari skipan verður skilt ímillum skrásetara og leysgevara. Tá ið stovnurin hevur leysgivið sínar skrásetingar, sæst tað aftur í einari journal í Felags lønarskipanini, og Gjaldstovan koyrir síðani tað, sum er skrásett.

### Forskipanir

Nakrir stovnar brúka forskipanir til Felags lønarskipanina. Í forskipanunum verða vaktarætlanir gjørdar, og tímar skrásettir. Dømi um forskipanir, sum lata upplýsingar til Lønarskipanina, eru Skúlaforskipanin og Vaktætlan.

Skúlaforskipanin er skipan at umsita lønar- og setanarviðurskifti hjá fólkaskúla-lærarum. Hon er samskiftisamboð millum skúla, Mentamálaráðið og lønarumsitingina á Gjaldstovuni. Skipanin verður m.a. brúkt til at:

- boða frá um setan,
- umsita virksemis- og heildarætlanir í skúlunum og í Mentamálaráðnum,
- flyta upplýsingar um vikartímar, fráverur, setanir o.a. beinleiðis frá skúlum til Mentamálaráðið, og
- fylgja upp ætlanum og nýtslu, bæði í skúlum og í Mentamálaráðnum.

Vaktætlan er skipan, sum er ment til at leggja vaktarætlanir fyri starvsfólk, sum arbeiða í skiftandi vaktum. Talan kann vera um vaktir, sum geva viðbøtur fyri ólagaligar arbeiðstíðir og hava serligar ásetingar fyri avspáking. Vaktætlan samskiftir ikki beinleiðis við Felags lønarskipanina, men ger eina fílu fyri hvørja lønarkoyring, sum Gjaldstovan lesur inn í Lønarskipanina. Í løtuni brúka Trivnaðartænastur undir Almannaverkinum og sjúkrahúsini Vaktætlan. Strandfaraskip landsins er eisini ávegis at brúka Vaktætlan.

Totalview er skipan, sum er ment til at skráseta, nær starvsfólk koma og fara, eru inni ella úti, o.s.fr.

Um upplýsingar skulu flytast úr Totalview í Felags lønarskipanina, má ein fíla gerast og lesast inn, á sama hátt sum við Vaktætlan.

Stovnar, sum nýta Totalview, hava vanliga ikki skiftandi vaktir ella ymiskar lønarsatsir. Týdningarmikið er tó at hava greiðu á arbeiðstímum og feriusaldu, ikki minst nú krav er um at tíðaravmarka tímasaldur í roknskapinum. Skal t.d. serstaka frívikan rindast út, er týdningarmikið at halda skil á feriu hjá starvsfólkum.

### Aðrar skipanir til tíðarskrásetingar

Aðrar skipanir eru til tíðarskráseting, men liggja ikki í umhvørvinum hjá Gjaldstovuni og Gjaldstovan hevur tí ikki skipanirnar um hendi. Gjaldstovan bókar og rindar út lønir eftir boðum frá stovnsleiðarum, antin tað er gjøgnum Felags lønarskipanina ella Web-løn. Málið er tó, at hava so fáar manuellar tøppingar sum gjørligt fyri at minka um vandan fyri mistøkum ella sviki.

## 11.4 KT trygd og grunddátur

Endamálið við hesum partinum av grannskoðanini er at svara spurninginum, um nøktandi KT trygd er skipað av Felags lønarskipanini, og um innaneftirlit er sett í verk fyri umsiting, víðlíkahaldi og broytingum av grunddátum.

### 11.4.1 KT trygd

Felags lønarskipanin er sett í rakstur í umhvørvinum hjá Elektron, og er undir trygdar-tiltøkunum hjá teimum, eftir krøvum frá Gjaldstovuni. Samstarvið millum Gjaldstovuna og Elektron er skipað við rakstraravtalu – SLA.[37]

[37] SLA: Service level agreement (tænastusáttmáli)

Ein ISAE 3402 váttan er um almennu KT eftirlitsskipanirnar hjá Elektron, sum sostatt eisini fevnir um Felags lønarskipanina. Váttanin er fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2018 og er gjørd av grannskoðanarfyritøkuni SPEKT. Niðurstøðan er:

a) *"at lýsingin av almennu KT eftirlitsskipanunum, ið viðvíkja skipanar-, dátu- og rakstrartrygdini hjá Gjaldstovuni, soleiðis sum tær vóru tilevnaðar og settar í verk í tíðarskeiðnum frá 1. januar til 31. desember 2018, í øllum týðandi lutum er rættvísandi,*
b) *at eftirlitsskipanirnar, sum eru knýttar til tey eftirlitsmál, ið eru tilskilað í lýsingini, í øllum týðandi lutum vóru tilevnaðar á hóskandi hátt í øllum tíðarskeiðnum frá 1. januar til 31. desember, og*
c) *at nároyndu eftirlitsskipanirnar, sum vóru tær eftirlitsskipanir, ið vóru neyðugar, til tess at geva høga trygd fyri, at eftirlitsmálini í lýsingini í øllum týðandi lutum vóru rokkin, hava virkað munadygt í øllum tíðarskeiðnum frá 1. januar til 31. desember 2018*.

*Umframt tað omanfyri nevnda skulu vit vátta, at almennu KT eftirlitsskipanirnar, ið viðvíkja skipanar-, dátu- og rakstrartrygdini hjá Gjaldstovuni, eftir okkara fatan eru trygdargóðar og hava virkað á trygdargóðan hátt í tíðarskeiðnum frá 1. januar til 31. desember 2018."*

SPEKT hevur eisini gjørt eina 3402 váttan um almennu KT eftirlitsskipanirnar hjá Gjaldstovuni í veitingini av Búskaparskipan landsins fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2018. Niðurstøðan í tí váttanini er einsljóðandi a) – c) í váttanini um almennu eftirlitsskipanirnar hjá Elektron. Sambært Gjaldstovuni fatar henda váttanin eisini um Felags lønarskipanina.

Umframt ISAE 3402 váttanina hevur SPEKT fyri árið 2017 gjørt eina frágreiðing um kervisgrannskoðanina, sum hevur til endamáls at tryggja, at grundleggjandi og týðandi viðurskifti viðvíkjandi almennum KT eftirliti eru í samsvari við trygdarásetingarnar hjá Gjaldstovuni, umframt at meta um, hvørt nøktandi trygdar- og eftirlitsstig eru sett í verk.

Niðurstøðan í frágreiðingini er, at:
*"Sum heild er niðurstøða okkara, at trygdar- og eftirlitsstigið, ið er sett í verk innan almennu KT eftirlitsskipanirnar hjá Gjaldstovuni við atliti til BSL-veitingina, við undantaki av viðmerktu veikleikum, er nøktandi."*

Við ISAE 3402 váttanini um almennu KT eftirlitsskipanirnar á Elektron, um almennu KT eftirlitsskipanirnar hjá Gjaldstovuni og frágreiðingini um kervisgrannskoðanina á Gjaldstovuni heldur Landsgrannskoðanin, at KT trygdin fyri Felags lønarskipanina er undir nøktandi eftirliti.

Gjaldstovan hevur greitt frá, at váðameting av skipanunum á Gjaldstovuni verður gjørd í minsta lagi árliga, umframt at váðameting verður gjørd, tá ið broytingar henda í umhvørvinum, t.d. tá ið skipanir verða latnar upp (eksponeraðar) móti internetinum.

Trygdarfólkið hjá Gjaldstovuni ger váðametingina og uppskot til KT trygdarpolitikkin, sum stjórin skal góðkenna. Starvsfólkini, sum sita í trygdarráðnum hjá Gjaldstovuni, ganga váðamyndina hjá Gjaldstovuni ígjøgnum. Sjónarmiðini hjá trygdarráðnum verða tikin við, og mett verður um, hvussu váðamyndin sær út. Íblástur at síggja váðarnar fær trygdarfólkið m.a. úr ársfrágreiðingini hjá ISF[38], frá samstarvi við Center for Cybersikkerhed, frá fakfólki og frá ymiskum fora.

Fastur mánaðarligur fundur er millum Gjaldstovuna og Elektron; tann eini fundurin er ársfundur. Gjaldstovan stýrir veitaratrygdini við SLA avtaluni.

[38] ISF: Information Security Forum.

Samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin, at KT trygdin er nøktandi skipað og at innaneftirlitið, sum er sett í verk fyri umsiting, viðlíkahald og broyting av grunddátum, er nøktandi.

### 11.4.2 Grunddátur

Í Felags lønarskipanini liggja grunddátur. Grunddátur, sum t.d. navn, bústaður, kontunummar og lønartalvur, verða brúktar til hvørja lønarkoyring, men verða vanliga ikki broyttar fyri hvørja koyring. Tá ið grunddátur verða broyttar, krevst tí, at eftirlit er við broytingini, soleiðis at útgoldna lønin fer á rætta kontu, men eisini at lønartalva og lønarslag er rætt.

Niðanfyri er ein mynd av brúkarabólkunum í Felags lønarskipanini. Ovast er Leiðslukunning, Lønardátuvøruhús og Lønarportalur. Brúkarar av hesum skipanum kunnu ikki stovna, broyta ella strika lønarupplýsingar, men hava bert lesiatgongd.

Úti á stovnum landsins avgreiða starvsfólk hjá stovnunum leysar lønir og EK-10 ordrar. Ábyrgdin, at tryggja at lønirnar eru stovnaðar rætt, og at lønarkoyringarnar eru rættar, liggur hjá stovnunum.

***50 brúkarar kunnu stovna og koyra lønir.***

Sjey lønarskrivstovur, ið hava umleið 50 brúkarar, kunnu stovna og koyra lønir. Lønarskrivstovurnar eru Gjaldstovan, trý sjúkrahús og tríggjar kommunur. Eisini her liggur ábyrgdin at tryggja, at lønirnar eru rættar, hjá tí stovni, sum hevur lønarskrivstovuna.

***ISAE 3402 váttan og kervisgrannskoðan fevna um administratorar.***

Tey, sum kunnu gera størstan skaða og møguliga oyðileggja Felags lønarskipanina, eru systemadministratorar og dátubasuadministratorar hjá veitaranum, tí tey kunnu gera broytingar og fjala sporini eftir seg. Í øðrum lagi eru tað tey, sum kunnu broyta lønartalvur, lønarsløg og kreditorar. Tey eru niðast og næstniðast í Felags lønarskipanarbólkunum. ISAE 3402 váttanin og kervisgrannskoðanin á Gjaldstovuni fevna um niðastu bólkarnar í mynduni. Talan er um 7 brúkarar tilsamans.



Teir brúkarar, sum hava víðastu atgongdir og størstar heimildir til at gera broytingar, eru fevndir av ISAE 3402 váttanini og kervisgrannskoðanini av Gjaldstovuni, og grannskoðarin hevur ikki givið fyrivarni. Landsgrannskoðanin heldur tí samanumtikið, at váðin, fyri at týðandi feilir kunnu koma fyri, tá ið broytingar verða gjørdar í grunddátum, er lítil.

## 11.5 Stakroyndir

### 11.5.1 Lógir, vegleiðingar, sáttmálar o.a.

Nógvar ymiskar reglur eru fyri lønarøkið, t.d. um starvsmenn, tænastumenn, frítíðarløn, sosial gjøld og setanarviðurskifti.

Umframt lógir, kunngerðir, rundskriv o.a., ið viðvíkja lønum, eru nógvir sáttmálar, sum Fíggjarmálaráðið hevur við ymisk fakfeløg, ið umboða starvsfólk í almennu fyrisitingini.

Lønardeildin hjá Fíggjarmálaráðnum hevur gjørt vegleiðingar um:

- Flokkingar og umflokkingar,
- løn undir sjúku,
- serstøku frívikuna,
- barsil, og
- arbeiðssteðg o.a.

Eisini eru rundskriv um nevndarsamsýningar, endurgjald fyri koyring o.s.fr.

Í 2017 sendi Fíggjarmálaráðið út rundskriv um at tíðaravmarka lønir í landsroknskapinum. Sambært rundskrivinum skulu tímasaldur tíðaravmarkast, tá ið starvsfólk eigur fleiri enn 40 tímar ella skyldar fleiri enn 30 tímar. Lønir, sum standast av vaktum og ikki avgreiddum sáttmálabroytingum, skulu sum meginregla verða tíðaravmarkaðar. Tað sama er galdandi fyri uppsagnarløn, tá ið starvsfólk verður fríttstillað í uppsagnartíðini.

Setanarpolitikkur er partur av almenna starvsfólkapolitikkinum, og er galdandi fyri allar stovnar o.t. hjá landinum. Endamálið við setanarpolitikkinum er at tryggja, at stovnar seta umsøkjara, sum úr einum heildarsjónarmiði er best egnaður til starvið. Setanarpolitikkurin skal eisini tryggja, at umsøkjarar, sum ikki fáa starv, kunnu vera vísir í, at avgerðin er farin fram á rættan og rættvísan hátt.

Í § 5, stk. 4, í roknskaparkunngerðini er ásett, at stovnsleiðarin skal skipa fyri, at hóskandi skráseting av arbeiðstíð, fráveru, frítíð o.t. er á stovninum, so lønarútgjaldingarnar eru rættar.

### 11.5.2 Lønir, goldnar um Felags lønarskipanina

Landsgrannskoðanin hevur kannað umsitingina av lønum við tilvildarliga valdum stakroyndum á fleiri enn 100 stovnsnumrum. Fyri hvørt stovnsnummar kannaðu vit eina løn, ið var goldin út í november 2018. Í høvuðsheitum valdu vit nýggjari setanir.

Upplýsingar viðvíkjandi setan av starvsfólki verða goymdar á einstøku stovnunum. Landsgrannskoðanin vitjaði tí stovnarnar fyri at kanna, um upplýsingar, sum skulu vera í starvsfólkamálum, eru í málunum, og um mannagongdirnar í sambandi við starvssetan verða fylgdar.

Endamálið við hesum partinum av grannskoðanini var at kanna, um reglurnar í almenna setanarpolitikkinum verða fylgdar, og um útgoldnu lønirnar samsvara við grundarlagið. Landsgrannskoðanin kannaði, um lýsingar, umsóknir um starv, prógv og

tilhoyrandi skjøl, undirskrivað setanarskriv, og lønargjaldsumbønir vóru í lønarmálunum. Harafturat spurdu vit, um stovnurin hevði hóskandi tíðarskráseting, og hvussu arbeiðstíðirnar vóru.

Sambært almenna setanarpolitikkinum skulu øll størv lýsast leys. Í 16 stakroyndum var eingin lýsing eftir starvsfólki. Í nøkrum av málunum sæst, at innkomnu umsóknirnar vísa til lýsingar, meðan í øðrum málum er ikki lýst eftir starvsfólki. Dømi eru um, at lærlingur, hjálparfólk, barsilsavloysarar og onnur tíðaravmarkað størv eru sett, hóast størvini ikki hava verið lýst leys.

Umsókn, prógv ella onnur skjøl um starvsleið, umframt setanarskriv og lønargjaldsumbønir vóru í flest øllum starvsfólkamálum.

Flestu stovnar høvdu okkurt slag av tíðarskráseting, har starvsfólk skráseta, nær tey koma og fara, frítíð o.a. Tað verður stórtsæð ikki skrásett, hvat arbeiðstíðin verður nýtt til.

Nógvir stovnar brúka skipanina Vaktætlan, t.d. serstovnaøkið og sjúkrahúsini, har arbeiðið er skipað í vaktum.

***Arbeiðstíð, brúkt til umsiting, verður ikki skrásett.***

Skúlar hava tímatalvur, sum vísa undirvísingartíðina. Á skúlum, ið hava ársnorm, verður ætlan løgd fyri eitt undirvísingarár í senn. Arbeiðstíð, ið verður brúkt til m.a. umsiting verður stórt sæð ikki skjalfest, tó at talan kann vera um nógvar tímar í einum ári.

***Ein stakroynd fyri hvørt stovnsnummar.***

Av teimum 108 stakroyndunum vit valdu, brúktu 9 starvsfólk Vaktætlan, og høvdu fastar arbeiðstíðir. 41 starvsfólk brúktu skema, ársverk ella aðrar vaktarætlanir, harav høvdu 21 starvsfólk fasta arbeiðstíð. 40 brúktu tíðarskrásetingarskipanina Totalview og høvdu flextíð, og 9 brúktu aðrar skipanir ella rokniørk at halda skil á arbeiðstíðini, herundir flexsaldu, feriu, sjúku v.m. 9 starvsfólk brúktu ikki tíðarskráseting.

Við støði í lønarútgjaldingunum fyri november 2018 kannaðu vit, um lønirnar vóru rættar, við at samanhalda setanarskriv, prógv, tíðarskráseting o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Í høvuðsheitum høvdu vit ikki týðandi viðmerkingar. Tó vóru einstøk lønarmál, sum vit eftirsíðan hava samskift við stovnarnar um, har lønin ikki var røtt.

***Stórar tímasaldur.***

Í tveimum førum skyldaðu starvsfólk ávikavist 172 og 284 tímar. Tá ið avtalaða tíðin ikki var arbeidd, kunnu vit ikki sanna, at lønin var røtt, hóast sáttmálagoldna lønin var røtt sambært setanarskrivinum. Í øðrum føri átti eitt starvsfólk 234 tímar tilgóðar.

Út frá stakroyndum, er tað okkara fatan, at týðandi feilir eru ikki í lønunum, ið eru goldnar út um Felags lønarskipanina.

Neyðugu skjølini vóru tøk í starvsfólkamálunum, tó at onkur undantøk vóru.

Yvirhøvur verður bert skrásett, nær starvsfólk koma og fara, frítíð, sjúka o.l. Bara í einstøkum førum bar til at síggja, hvat arbeiðstíðin var nýtt til.

### 11.5.3 Lønir, bókaðar sum keyp av tænastuveitingum

Landsgrannskoðanin hevur kannað, um lønir eru goldnar sum keyp av tænastuveitingum. Vit hava gjøgnumgingið ein part av bókingunum á StRk 1479 “Keyp av tænastuveitingum annars”. Talan er um samsýningar bæði til fólk, ið búgva í Føroyum og til fólk, sum búgva uttanlands.

***Løn goldin út sum keyp av tænastum.***

Kanningin vísti, at upphæddir eru goldnar út sum keyp av tænastum, sum Landsgrannskoðanin heldur áttu, ella eins væl kundu verið goldnar út sum løn. Til dømis samsýningar fyri undirvísing, prógvdøming, ferðaleiðaratænastur, tónleikaframførslur, samsýningar til vertir og upptøkufólk í kringvarpssendingum v.m. Í einum føri hevur

stovnur goldið tveimum listafólkum kontant, bert við váttan fyri móttøku á innanhýsis skjali.

Fleiri móttakarar av samsýningum hava upplýst p-talið til arbeiðsgevaran. Tað kann tí tykjast, sum móttakarin væntar sær samsýningina sum A-inntøku.

***Mannagongdirnar eru ymiskar.***

Ymiskt er eisini, hvussu meirvirðisgjaldið verður viðgjørt á rokningunum. Summar tænastur eru við MVG og aðrar ikki, sjálvt um talan er um sama slag av tænastum.

Ímillum tænastukeypini eru eisini samsýningar til nevndarlimir, undirvísarar o.o., ið búgva uttanlands.

Landsgrannskoðanin hevur ikki kannað, um móttakararnir av samsýningunum koma undir skattskyldu til Føroyar sambært skattalógini ella tvískattaavtalum.

***Átaluvert, at almennir stovnar rinda lønir uttan um Felags lønarskipanina.***

Landsgrannskoðanin heldur tað vera átaluvert, at almennir stovnar rinda lønir og samsýningar út sum keyp av tænastum, og ikki sum løn um Felags lønarskipanina.

Í sambandi við samsýningarnar til fólk búsitandi uttanlands mæla vit til, at stovnarnir seta seg í samband við TAKS fyri at tryggja, at allar lønir og samsýningar, ið skulu skattast í Føroyum, verða skattaðar her.

# 12. Norðurlendskar parallelgrannskoðanir

## 12.1 Grannskoðan av norðurlendskum hægri lærustovnum (LG 2017/409-0008)

*Endamálið var at kanna úrtøkuna í mun til tilfeingið.*

Landsgrannskoðanin hevur verið við í einari grannskoðan av hægri lærustovnum saman við hinum norðurlendsku ríkisgrannskoðanunum. Endamálið var at kanna úrtøkuna hjá lærustovnunum í mun til tilfeingið.

Svenska ríkisgrannskoðanin hevur staðið fyri kanningini og hevur almannakunngjørt eina frágreiðing fyrr í ár[39]. Almennu grannskoðanirnar í hinum Norðurlondunum hava havt ábyrgd av at savna og góðskutryggja egnar upplýsingar til kanningina.

Niðanfyri hava vit tikið saman um kanningina. Vit hava eisini viðmerkingar um, hvussu upplýsingar, sum hava týdning fyri útbúgvingarskipanina, verða handfarnar í Føroyum.

### Um kanningina

Tað er ikki vanligt, at vit gera størri kanningar av, hvussu effektivur ein stovnur er. Tað kann vera ein avbjóðing at áseta, hvat effektivitetur inniber fyri einstaka stovnin. Hinvegin ber til at samanbera stovnar, t.e. lutfalsligur effektivitetur, men ikki so sjáldan er bert ein stovnur av slagnum í landinum, og tí er einki at samanbera við.

Tað ber tó til at seta sær mál og t.d. gera hóskandi mátingar, sum kunnu samanberast yvir ár. Ein annar møguleiki er at samanbera við líknandi stovnar í grannalondunum. Mátingar og samanberingar um effektivitet o.t. krevja umhugsni, og at tilfeingi verður sett av til tað.

*Munardyggar kanningar av effektiviteti krevja vitan, innanvirkis roknskapir og skrásetingar.*

Sambært § 7 í játtanarskipanini skulu neyðug búskaparlig atlit takast, tá ið veitt játtan verður nýtt. Effektivitetur er partur av hesum hugtaki. Í § 7 í roknskaparkunngerðini eru ásetingar um innanvirkis roknskap, sum skal geva grundarlag fyri at lýsa kostnaðin av virkseminum, og hvørji viðurskifti eru avgerandi fyri, hvussu tilfeingið verður nýtt. Skal ein stovnur stýrast munadygt krevst vitan, og harvið skrásetingar av, hvussu tilfeingið verður brúkt, og hvat kemur burturúr.

*Ætlanin við kanning-ini er at samanbera lærustovnar yvir landamørk.*

Landsgrannskoðanin samstarvar við norðurlendsku ríkisgrannskoðanirnar og hevur høvi at taka lut í felags grannskoðanum. Í 2017 tók svenska ríkisgrannskoðanin stig til at gera eina felags grannskoðan av hægri lærustovnum í Norðurlondum, soleiðis at tað bar til at samanbera lærustovnarnar yvir landamørk. Landsgrannskoðanin hevur verið partur av grannskoðanini og hevur saman við Fróðskaparsetrinum savnað og góðskutryggjað upplýsingar, sum eru nýttar í grannskoðanini.

### *Orsøkin til kanningina*

Svenska ríkisgrannskoðanin hevur áður gjørt líknandi kanning av 30 hægri lærustovnum í Svøríki fyri árini 2004 til 2008. Kanningin vísti, at umleið helvtin av

[39] https://www.riksrevisionen.se/rapporter/granskningsrapporter/2019/resurseffektivitet-och-produktivitet-vid-sveriges-larosaten-i-nordisk-jamforelse.html

lærustovnunum høvdu møguleika at effektivisera tilfeingisnýtsluna. Í miðal kundu lærustovnarnir bøta um effektivitetin við 7%.

Í 2017 høvdu hægru lærustovnarnir í Svøríki 71 mia.SEK í inntøkum. Av teimum stavaðu 56 mia.SEK frá statinum. Í hinum Norðurlondunum er eisini munandi tilfeingi markað til útbúgving og gransking, upp ímóti 2% av bruttotjóðarúrtøkuni.

Undir 7.23.6 "Hægri útbúgvingar og gransking" í fíggjarlógini eru rakstrarjáttanir til Fróðskaparsetrið og maritimar skúlar. Í landsroknskapinum 2018 vóru nettoútreiðslurnar ávikavist 99,8 mió.kr. og 27,1 mió.kr., tilsamans 126,9 mió.kr. Bruttoútreiðslurnar vóru 153,6 mió.kr. Í mun til føroysku bruttotjóðarúrtøkuna er talan um minni enn 1%.

Hægri lærustovnar eru partur av einum alsamt meira globaliseraðum og kappingarkendum heimi. Tað er tí bæði áhugavert og týðandi at samanbera lærustovnarnar yvir landamørk. Kanningin er avmarkað til norðurlendskar lærustovnar, tí tær skipanirnar minna um hvørja aðra, men eisini er atkoman til hagtøl lættari.

### *Kanningarháttur*

Endamálið við grannskoðanini var at kanna tilfeingiseffektivitetin og produktivitetin hjá hægru lærustovnunum, og um onkur lærustovnur hevði møguleika at betra um støðuna. Svenska ríkisgrannskoðanin setti sær fyri at svara hesum spurningunum:

***3 spurningar vórðu settir.***

1. Er tilfeingisnýtslan effektiv samanborið við norðurlendskar lærustovnar?
2. Hvør kann orsøkin vera til effektivitetsmunirnar millum lærustovnarnar?
3. Er produktiviteturin hjá lærustovnunum øktur yvir tíð?

Við einari sokallaðari Data Envelopment Analysis (DEA) verða nøkur mátitøl roknað fyri effektivitetin av tilfeingisnýtsluni. Mátitølini siga nakað um støðuna hjá tí einstaka lærustovninum fyri eitt ávíst tíðarskeið, samanborið við aðrar líknandi hægri lærustovnar, t.v.s. lutfalslig tøl.

Ein lærustovnur kann sigast at vera effektivur, um eingin annar samanberiligur lærustovnur megnar at fáa meira burturúr tøka tilfeinginum. Mátitalið gevur sostatt eitt boð uppá, um rúmd er fyri at betra um avrikini hjá tí einstaka lærustovninum, sæð út frá tí, sum aðrir stovnar hava avrikað í verki. Mátitalið sigur tó einki um, hvat einstaki lærustovnurin, teoretiskt sæð, eigur at fáa burturúr tøka tilfeinginum.

Tá ið avrikini hjá einum lærustovni broytast yvir nøkur ár, broytist produktiviteturin. Tað kunnu vera ymisk viðurskifti, sum gera tað. T.d. kann bera til at undirvísa fleiri við sama starvsfólkatali, ella at talan er um tøkniligar broytingar, sum hava við sær færri starvsfólk. Í hesari kanningini er hædd tikin fyri øllum tilfeingi og avrikum í einum mátitali. Tað er gjørt við einum sokallaðum Malmquist produktivitetsvísitali.

Við í kanningini er ein rað av upplýsingum um lærustovnarnar, t.d. starvsfólk, lesandi, Ph.d. lesandi og hølispláss fyri hvønn næming. Sum avrik eru upplýsingar um lokin ECTS stig hjá næmingum, Ph.d. prógv, nógv endurgivnar greinar og annað.

Leggjast kann afturat, at svenska ríkisgrannskoðanin í sambandi við kanningina eisini hevur kannað gjøgnumrákið av næmingum á tveimum útbúgvingum á svensku lærustovnunum. Endamálið var at síggja dømi um, hvat hægru lærustovnarnir gjørdu fyri at fáa næmingarnar betur gjøgnum útbúgvingarnar. Tað kann geva eina betri fatan av møguligum orsøkum til effektivitetsmunirnar á hægru lærustovnunum.

Hinar norðurlendsku ríkisgrannskoðanirnar hava ikki gjørt nakra kanning av gjøgnumrákinum.

*Upplýsingar*

Kanningin fevnir um 68 av umleið 160 hægri lærustovnum í Norðurlondum; í Føroyum um Fróðskaparsetrið. Savnaða tilfarið um stovnarnar er fyri árini 2011 til 2016.

***Kanningin fevnir um 68 hægri lærustovnar. Ein í Føroyum.***

Til kanningina varð brúkt eitt rokniark, har lærustovnarnir skuldu útvega upplýsingar um alt frá slagi av stovni, eigaraviðurskifti o.t. og til ymisk tøl um starvsfólk, næmingar, hølisviðurskifti o.s.fr.

Upplýsingarnar skuldu greinast eftir bólkum av útbúgvingum. Tað varð gjørt sambært fyrimynd í handbók hjá European Tertiary Education Register (ETER), her endurgivið á enskum:

| Code | Name | Subfields |
|---|---|---|
| 00 | General programmes and qualifications | 001 Basic programmes and qualifications<br>002 Literacy and numeracy<br>003 Personal skills |
| 01 | Education | 011 Education |
| 02 | Humanities and Arts | 021 Arts<br>022 Humanities<br>023 Languages |
| 03 | Social sciences | 031 Social and behavioral science<br>032 Journalism and information |
| 04 | Business and law | 041 Business and administration<br>042 Law |
| 05 | Natural Science, mathematics and statistics | 051 Biological and related sciences<br>052 Environment<br>053 Physical sciences<br>054 Mathematics and statistics |
| 06 | Information and communication technologies | 061 Information & Communication Technologies |
| 07 | Engineering, manufacturing and construction | 071 Engineering and engineering trades<br>072 Manufacturing and processing<br>073 Architecture and construction |
| 08 | Agriculture, forestry, fisheries and veterinary | 081 Agriculture<br>082 Forestry<br>083 Fisheries<br>084 Veterinary |
| 09 | Health and welfare | 091 Health<br>092 Welfare |
| 10 | Services | 101 Personal services<br>102 Safety services<br>103 Security services<br>104 Transport services |

Ymiskt er, hvat útbúgvingar kosta. Tí er neyðugt at geva teimum ymiska vekt fyri at kunna fáa samanberilig effektivitetstøl í oman fyri nevndu útrokningum. Í útrokningunum eru útbúgvingarnar vektaðar sambært svensku kostnaðunum av útbúgvingunum.

Tøl fyri starvsfólk, loknar lærugreinar o.a. eru gjørd upp í ársverkum. Undirvísingarárið er brúkt sum grundarlag; tó er starvsfólkatalið í lønarskipanini gjørt upp eftir kalendaraárinum. Broytist starvsfólkahópurin, tá ið undirvísingarárið byrjar, kann ein minni munur vera av tí. Ein avbjóðing var somuleiðis, at talið á nýinnskrivaðum lesandi kann broytast fyrstu tíðina. Talið av øllum lesandi 30. september er brúkt fyri hvørt árið. Sum skilst, kemur tó fyri, at lesandi eru innskrivað fram til royndirnar við árslok.

Ymiskar aðrar avbjóðingar hava verið, eitt nú bólkingar av starvsfólki, t.d. í akademisk starvsfólk og ikki akademisk starvsfólk, hvat er útveitt av tænastum, hølisviðurskifti o.s.fr. Sum heild kann sigast, at flestu upplýsingarnar hava verið væl viðgjørdar og

umrøddar fyri at tryggja, at tær eru so rættar sum gjørligt, og kunnu samanberast millum lærustovnar og ímillum lond.

### Úrslitini av kanningini

Kanningin hevði til endamáls at rokna tøl fyri hvønn lærustovn, soleiðis at til bar at samanbera lærustovnarnar undir líknandi umstøðum. Við DEA háttinum ber til at finna teir ymisku lærustovnarnar, sum standa seg best á sínum øki. Lærustovnar, sum í einum ári ikki megnaðu at hava somu lutfalsligu avrik, eru ikki effektivir tað árið, og hava tí møguleika at betra um avrikini.

Í talvuni niðanfyri síggjast úrslitini fyri hvørt landið. Prosentini vísa, hvussu nógv ber til at betra um avrikini, tá ið hugt verður frameftir.

| Land | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | Øll ár |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Svøríki | 4,5% | 5,7% | 7,4% | 12,2% | 7,7% | 6,2% | 7,3% |
| Danmark | 5,3% | 7,8% | 9,1% | 10,6% | 3,8% | 2,0% | 6,4% |
| Noreg | 4,9% | 7,7% | 11,4% | 14,4% | 11,5% | 11,6% | 10,2% |
| Finnland | 19,1% | 20,3% | 19,7% | 22,6% | 17,2% | 6,8% | 17,6% |
| Ísland | - | - | - | - | - | - | - |
| Føroyar | - | - | - | - | 0,0% | 0,0% | 0,0% |
| **Miðal** | **7,8%** | **9,5%** | **11,2%** | **14,8%** | **10,0%** | **7,1%** | **10,1%** |
| Effektivir lærustovnar | 33 | 27 | 21 | 17 | 23 | 30 | |
| Lærustovnar (uttan ekstrem) | 62 | 61 | 62 | 62 | 62 | 61 | |

Í kanningini eru gjørdar ymiskar avmarkingar, t.d. eru bert lærustovnar, sum granska, við í kanningini. Tað hevur ikki verið møguligt at kanna góðskuna av avrikunum hjá hvørjum lærustovni. Tó kann talið av nógv endurgivnum greinum hjá einum lærustovni endurspegla eina ávísa góðsku í mun til ein lærustovn, hvørs greinar ikki verða endurgivnar nógv.

Sum sæst, eru eingi tøl fyri Ísland frá 2011 til 2016 og somuleiðis fyri Føroyar árini 2011 til 2014. Tølini, sum verða roknað sambært DEA háttinum, eru viðkvom fyri feilum, sum kunnu vera í upplýsingunum. Av tí at roknaðu tølini eru lutfalslig, kunnu óvanlig tøl (ekstrem) hjá einum stovni ávirka tølini hjá fleiri øðrum stovnum.

Ymiskar orsøkir kunnu vera til munandi frávikini, t.d. at tann einstaki lærustovnurin hevur serliga góð avrik; men talan kann eisini vera um upplýsingar, ið feilir av onkrari orsøk eru í. Vit hava í mest møguligan mun tryggjað okkum, at tølini hjá lærustovnunum eru røtt. Tað ber tó ikki til heilt at tryggja seg móti feilum í hagtølum. Fyri at úrslitið av kanningini ikki skal verða ávirkað av heilt óvanligum tølum hjá onkrum stovni, eru slík heilt óvanlig tøl ikki tikin við í samlaðu myndina fyri tað árið.

***Avrikini hjá Fróðskaparsetrinum líka góð sum hjá hinum.***

Samanumtikið vísa útrokningarnar í kanningini, at um Fróðskaparsetrið verður sammett við lærustovnar, ið Setrið kann metast saman við, eru avrikini hjá Setrinum líka góð, sum hjá teimum frægu í Norðurlondum. Á síðu 34 í svensku frágreiðingini er ein mynd, sum vísir effektivitetin hjá ymisku lærustovnunum í 2016.

Sum nevnt, setti svenska ríkisgrannskoðanin sær eisini fyri at kanna, hvør orsøkin kundi vera til ymisk effektivitetstøl hjá svenskum lærustovnum, eitt nú nýbyrjað lesandi, fjarlesandi, stakgreinalesandi, broytingar í starvsfólkahópi, serkunnleiki á lærustovnunum, uttanhýsis fígging o.a.

***Tað er serliga títtleikin av starvsfólkaskiftum, sum ávirkar effektivitetstølini.***

At síggja til, var tað bara títtleikin av, hvussu nógv starvsfólk skiftu starv, sum hevði beinleiðis samband við effektivitetstølini, soleiðis at skilja, at um starvsfólk tíðum skiftu starv, hevði lærustovnurin verri avrik. Ein eldri kanning í Svøríki vísti eisini samband ímillum talið av fjarlesandi og avrikini, men so var ikki í hesari kanningini.

Svenska ríkisgrannskoðanin mælti til, at lærustovnar, sum sambært kanningini høvdu møguleika at betra avrikini munandi, áttu at greina viðurskifti, sum hava týdning fyri

effektivitetin og produktivitetin og at sett hóskandi tiltøk í verk. Eisini mælti ríkisgrannskoðanin til, at lærustovnarnir skipaðu fyri regluligari uppfylging av gjøgnumrákinum av lesandi og av teimum tiltøkum, sum fóru at verða sett í verk.

**Skipan av upplýsingum í útbúgvingarskipanini**

Landsgrannskoðanin hevur saman við Fróðskaparsetrinum savnað og viðgjørt upplýsingarnar, sum eru nýttar í kanningini.

Tað er ymiskt, hvussu upplýsingarnar verða handfarnar og goymdar. Nakrar upplýsingar eru tøkar í lønarskipan, aðrar í egnum skipanum hjá Fróðskaparsetrinum. Uppaftur aðrar upplýsingar eru savnaðar til endamálið.

*Upplýsingar eiga at verða savnaðar og goymdar á hóskandi hátt.*

Landsgrannskoðanin heldur, at tær upplýsingar, sum hava týdning fyri útbúgvingarskipanina, eiga at verða savnaðar og goymdar á hóskandi hátt. Upplýsingarnar eiga at vera lætt atkomuligar og eiga at kunna greinast til ymiskan tørv, t.d. tá ið ætlanir skulu leggjast, til at stýra við, og ikki minst tá ið samanberast skal við aðrar lærustovnar.

Landsgrannskoðanin mælir til, at Mentamálaráðið og Fróðskaparsetrið greina, hvørjar upplýsingar eru viðkomandi, og hvussu tær skulu handfarast í einari hóskandi skipan.

## 12.2 Grannskoðan av talgilding í Norðurlondum
(LG 2018/409-0007)

Landsgrannskoðanin hevur síðani juni 2016 tikið lut í einari grannskoðan av talgilding, saman við ríkisgrannskoðanunum í Svøríki, Noregi, Finnlandi og Íslandi. Ætlanin er at samanbera úrslitini frá londunum, og harvið finna felags avbjóðingar og møguliga felags tilmæli. Landsgrannskoðanin hevur luttikið á jøvnum føti við hinar norðurlendsku grannskoðanirnar og hevur grannskoðað eftir somu spurningum. Svenska ríkisgrannskoðanin hevur leitt grannskoðanina.

Grannskoðanin hevur fevnt um eina undankanning og eina høvuðskanning fyri hvørt landi og síðani eina felags grannskoðanarfrágreiðing.

Niðanfyri er greitt frá grannskoðanini og úrslitunum. Væntandi verður felagsfrágreiðingin liðug og givin út í november í ár.

### 12.2.1 Grundarlag undir grannskoðanini

*Endamálið er at kanna, hvussu verandi mannagongdir verða stuðlaðar talgilt.*

Í altjóða høpi verður hugt eftir, hvussu borgarar á einfaldasta hátt kunnu avgreiða ørindi síni og fáa til vega neyðugar upplýsingar gjøgnum talgildar rásir. Ógreitt er, í hvønn mun tað almenna sum aktørur brúkar talgildar mannagongdir, ella hvussu munadyggar tær eru. Endamálið við grannskoðanini er at kanna, hvussu munadyggar verandi mannagongdir eru, og í hvønn mun tær verða stuðlaðar talgilt.

Málið við at talgilda er at effektivisera málsgongdir, t.v.s. at fáa lægri kostnað og økt framleidni.

*Fyrimunirnir við talgilding koma ikki altíð til gagns.*

Tað kann vera trupult at integrera ymiskar KT skipanir til at lata upplýsingar ímillum stovnar, og í summum førum eru partar av málsgongdunum ikki talgildar til fulnar. Fyri myndugleikan merkir tað, at fyrimunirnir við talgilding ikki koma til gagns. Hesi viðurskifti gera, at talgildi stuðulin til málsgongdir ikki altíð er so munadyggur, sum hann kundi verið.

Norðurlond eru millum tey fremstu í fleiri altjóða kanningum um talgilding av tí almenna[40]. Londini hava samstundis somu avbjóðingar við sínum talgildingum av almennum tænastum, tí at talgildingin ofta hevur verið stuttskygd, smábýtt og miðfirrað. Harafturat hevur tað verið torført hjá myndugleikunum at byggja upp førleikar og varðveita teir, bæði hjá teimum, sum brúka skipanirnar, og hjá teimum, sum fyrisita tekniskar loysnir. Heldur ikki hevur eydnast at seta í verk grundleggjandi KT- og upplýsingartrygd.

Lívshendingar[41], har fleiri myndugleikar eru uppií, fáa oftari vánalig skoðsmál samanborið við lívshendingar, har fáir ella einstakir myndugleikar veita tænastur. Hesi viðurskifti síggjast aftur í eGovernment Benchmark Report frágreiðingini.

Perspektivið við hesari grannskoðanini lættir eisini um samanberingina ímillum luttakandi londini, tí greiningin verður ikki ávirkað nevnivert av, at fyrisitingarnar í einstøku londunum eru ymiskar. Í eGovernment Benchmark Report samanber ES javnan øll ES-londini út frá sjey lívshendingum.

***Lívshendingar.***

Hugtakið lívshendingar verður brúkt til at lýsa, hvussu ein borgari á einum ávísum staði í lívinum møtir tí almenna ígjøgnum stovnar og málsgongdir. Perspektivið í lívshendingum setir borgaran í miðdepilin, heldur enn myndugleikan.

***Parallelgrannskoðan.***

At gjøgnumføra grannskoðanina sum eina norðurlendska parallel grannskoðan, kann geva luttakarunum eitt íkast við at samanbera norðurlendsku framferðarhættirnar og at greina, hvørjar avbjóðingarnar eru við talgildingartilgongdini. Ætlanin er, at samanberingin kann føra til tilmæli, sum londini einsæris koma við, men eisini felags tilmæli fyri luttakandi londini.

***Veruligt dømi verður kannað.***

Fyri at greina hvussu talgildu mannagongdirnar eru, og hvørjar avbjóðingar eru við talgildingartilgongdini, hava ríkisgrannskoðanirnar gjørt av at brúka eitt veruligt dømi, sum øll londini hava, og sum rakar fleiri almennar myndugleikar. Dømið, sum varð valt, var at fylgja einum umsøkjara (borgara ella virki), sum stovnar eitt partafelag, ið skal reka matstovuvinnu.

***Hvørjum myndugleikum møtir umsøkjarin á vegnum.***

Grannskoðanin skal nágreina, hvørjum myndugleikum og arbeiðsgongdum umsøkjari møtir á leiðini. Eisini skal grannskoðanin lýsa arbeiðsgongdirnar, við denti løgdum á arbeiðsgongdirnar hjá myndugleikum og samskifti millum myndugleikar. Ætlanin er at bera saman greiningina av avbjóðingum og “best practice” millum luttakandi londini.

### 12.2.2 Yvirskipað um talgilding av samfelagnum

Tann talgilding, sum fer fram í dag, verður av summum samanborin við eina ídnaðarkollvelting. Brúkið av KT, interneti og sosialum miðlum økist nógv, og harvið eisini væntanirnar hjá borgarum til talgildar tænastur, eisini frá tí almenna.

Sum er, strekkja talgildar tænastur til borgaran seg frá talgildum lønarseðlum til “mínar síður”, har borgarar og vinnur kunnu avgreiða síni ørindi talgilt. Menningin av talgildu tænastunum krevur tó eisini, at tað almenna brúkar munadyggar talgildar prosessir, bæði innanhýsis og millum stovnar, fyri at síggja til, at borgarin fær tær talgildu tænastur, hann ynskir.

[40] Evropiska kommisjónin, 2016. eGovernment Benchmark 2016. A turning point for eGovernment development in Europe.

[41] Vinnulívsrakstur (regular business operations), flyta bústað (moving), eiga og koyra bil (owning and driving a car), byrja eitt privat rættarmál (starting a small claims procedure), missa og finna arbeiði (losing and finding a job), byrja virksemi (starting up a business and early trading operations), hægri lestur (studying).

### 12.2.3 Grannskoðanarspurningar

Spurningarnir, sum grannskoðanin skuldi svara, vóru hesir:

*3 spurningar vórðu settir.*

- Gevur talgilda mannagongdin at stovna fyritøku, størri virði fyri íverksetaran?
- Eru innanhýsis mannagongdirnar fyri at stovna fyritøku talgilt, effektivar hjá myndugleikunum?
- Samarbeiða myndugleikarnir munadygt, fyri at varðveita og menna talgildingina í sambandi við at stovna fyritøku?

Grannskoðanin er ein lýsing av støðuni, sum hon var fram til 2018. Tað, sum er hent eftir 2018, er ikki tikið við, tó hava vit tosað við stovnarnar og tillagað okkara niðurstøðu og tilmælir eftir støðuni, sum hon var í juli 2019.

Niðanfyri er greitt stutt frá úrslitinum higartil av føroyska partinum av grannskoðanini.

### 12.2.4 Grannskoðan

*6 ymiskir myndugleikar at venda sær til.*

Umsøkjarar, sum søkja um matstovu- og skeinkiloyvi í Føroyum, skulu venda sær til seks ymiskar lands- og kommunustovnar.

#### Skráseting av felag

*Skráseting Føroya.*

Tá ið eitt kapitalfelag verður stovnað, skal tað skrásetast hjá Skráseting Føroya. Har verður felagið skrásett sum sjálvstøðugur løgfrøðiligur persónur, ið er tað formliga hylkið, virksemið kemur at liggja í.

Fyri at skráseta eitt felag skal umsøkjari útfylla oyðublað. Oyðublaðið liggur á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya, har eisini vegleiðingarskriv og annað tilfar er tøkt. Oyðublaðið kann sendast myndugleikanum sum teldubræv, vanligt bræv ella verða borið. Skráseting Føroya tøppar upplýsingarnar inn í dátugrunnin hjá stovninum og leggur onnur skjøl í journal.

#### Lønir og MVG

*TAKS.*

Fyri at kunna flyta lønir og avrokna MVG, skal felagið skrásetast í Vinnuskránni og MVG-skránni. Oyðubløð til tær skrásetingarnar eru á heimasíðuni hjá TAKS, og har eru eisini upplýsingar um skráseting av kapitalfeløgum, umframt vegleiðingar um at stovna felag og um MVG. Oyðubløðini eru PDF-skjøl, sum umsøkjarin fyllir út og sendir TAKS við telduposti saman við øðrum neyðugum upplýsingum. Heimasíðan hjá TAKS hevur eisini eina vælútbygda leitifunktión, sum vísir leitiúrslitini í evnum til at lætta um hjá teimum sum leita. Vinnuskráin er frá 1983, men skipanin og dátugrunnurin eru flutt á nýggjan tíðarhóskandi rakstrarpall. MVG-skipanin er frá 1992.

#### Matstovu- og skeinkiloyvi

*Føroya Landfúti.*

Føroya Landfúti hevur havt samskipandi leiklutin, tá ið søkt hevur verið um matstovu- og/ella skeinkiloyvi. Fútin hevur higartil sent umsóknir og tilhoyrandi skjøl millum stovnarnar og syrgt fyri, at neyðugu skjølini verða latin Loyvisnevndini.

Tann mannagondin er broytt eftir 1. januar 2019. Loyvisnevndin er nú myndugleiki fyri bæði matstovu- og skeinkiloyvi. Føroya Landfúti hevur ikki samskipandi leiklut longur, men er framvegis hoyringspartur og ger viðmerkingar til, um nevndu loyvi skulu latast. Umsóknarbløð til matstovu- og skeinkiloyvi liggja á heimasíðuni hjá Føroya Landfúta, og har eru eisini leinki til Tórshavnar kommunu og Arbeiðs- og brunaeftirlitið, sum kunnu verða hent hjá umsøkjarum. Upplýsingarnar og skjølini, sum hoyra til málið, verða goymd í journal.

#### Løggilding av køki

*Heilsufrøðiliga Starvsstovan.*

Tey, sum lata upp matstovu, skulu hava løggilding frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni til køkin. Á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni er ein nágreinilig lýsing av mannagongdini fyri at fáa løggilding, og hvørji skjøl skulu brúkast í hesum viðfangi. Har er eisini leinki til lógargrundarlagið, sum løggildingin byggir á. Umsóknarblaðið er PDF-skjal, sum skal fyllast út og sendast við telduposti. Heilsufrøðiliga Starvsstovan

goymir innkomnu upplýsingarnar í journalskipan. Umsøkjarin fær eitt løggildingarskjal, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan sendir Føroya Landfúta avrit av. Tað er nú broytt soleiðis, at avrit verður sent til Loyvisnevndina.

### Kommunal umhvørvis- og brunagóðkenning

*Kommunur.*

Hølini, sum matstova skal húsast í, skulu eisini lúka krøv frá kommunala myndugleikanum. Skulu broytingar gerast í hølunum krevst byggiloyvi, og kommunan metir eisini um kloakkviðurskifti, herundir um feittbrunnurin er av hóskiligari stødd. Eru viðurskiftini í lagi, verður umhvørvisváttan latin umsøkjaranum.

Brunaviðurskiftini verða kannað av teknisku deildini hjá kommununi. Eru viðurskiftini í lagi, fær umsøkjarin eina brunaváttan. Umhvørvis- og brunaváttan skulu brúkast í víðari málsviðgerð. Á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu er málsgongdin til skeinkiloyvi avmyndað. Tað gevur umsøkjarum yvirlit yvir, hvørjir myndugleikar eru í málsgongdini at fáa skeinkiloyvi, umframt at leinki er til allar viðkomandi myndugleikar í málsgongdini. Tórshavnar Kommuna goymir innkomnar upplýsingar í journal.

### Skeinkiloyvi

*Loyvisnevndin*

Endaliga avgerðin um at lata skeinkiloyvi liggur hjá Loyvisnevndini. Nevndin tekur alt tilfar, t.e. váttanir, tilmæli, frámæli og viðmerkingar við í málsviðgerðina. Á heimasíðuni hjá Loyvisnevndini eru upplýsingar um sjálva Loyvisnevndina. Umsøkjari skal biðja um umsóknarblað, og lítil kunning er til tey, sum ætla sær at søkja. Loyvisnevndin brúkar journalskipan til skjølini, sum hoyra til umsóknirnar og sendir skeinkiloyvi til umsøkjaran við posti ella við telduposti.

## 12.2.5 Samanumtikið

*Upplýsandi tilfar mest á føroyskum.*

Samanumtikið er tað ymiskt, hvussu heimasíðurnar hjá avvarandi myndugleikunum fyri matstovu- og skeinkiloyvi velja at kunna møguligar umsøkjarar. Allir myndugleikarnir hava tó okkurt slag av talgildari kunning. Hvussu ómakaleyst tað kann tykjast fyri tey, sum ætla sær at søkja um skeinkiloyvi veldst tí um, hvønn myndugleika tey fyrst seta seg í samband við. Fyri tey, sum ikki skilja føroyskt, ella eru stødd uttanlands, og ikki hava aðra hjálp enn heimasíðurnar, kann tað tykjast torført. Heimasíðurnar eru ikki allar týddar til onnur mál. Har t.d. enskar síður eru, er innihaldið ikki speglað, so tað er tað sama, sum stendur á føroyskum. Einstakar heimasíður hava møguleikan at fáa innihaldið á síðuni lisið upp.

*Ikki eitt serstakt stað at venda sær.*

Tey, sum søkja um skeinkiloyvi, hava ikki eitt einstakt stað at venda sær til, men kunnu, sum tað fyrsta stigið, venda sær til hvønn av avvarandi myndugleikunum tey vilja. Tey verða síðani beind víðari til næsta myndugleikan, so hvørt tað gerst neyðugt.

## 12.2.6 Niðurstøða

Sjálvt um ein umsøkjari ikki kann lata umsókn um skeinkiloyvi inn talgilt, annað enn at skanna og senda við telduposti, er málsgongdin væl skipað, smidlig og virkar væl. Umsøkjarin verður vístur ígjøgnum skipanina, og kann samskifta um manglandi upplýsingar, til komið er á mál. Umsøkjarin hevur ikki møguleika talgilt at fylgja við, hvussu langt málið er komið, men hann kann ringja, skriva ella møta upp fyri at fáa kunning.

Sambært Loyvisnevndini hava eingir umsøkjarar tikið umsókn sína aftur í 2018.

Myndugleikin ger nógv fyri at veita umsøkjarunum góða tænastu. Tað skerst tó ikki burtur, at málsgongdin er handalig og spjadd yvir fleiri stovnar, og kann hjá summum tykjast at vera alt annað enn ein einføld uppgáva.

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at tann, sum ætlar sær at reka matstovu, hevur gagn av upplýsingunum og tilfarinum á heimasíðunum hjá stovnunum, sjálvt um talgildigin enn er heldur avmarkað.

Innanhýsis málsgongdin á stovnunum tykist vera effektiv, sæð út frá, hvussu langa tíð tað tekur at avgreiða málini. Skráseting Føroya og TAKS hava ment skipanir til teirra málsviðgerð, men skipanirnar eru avmarkaðar til at stuðla upp undir innanhýsis mannagongdirnar.

Samanumtikið eru KT skipanirnar ein tryggur stuðul undir málsviðgerðini, og raksturin og viðlíkahaldið er ein rótgrógvin rutina við royndum starvsfólki.

Grannskoðanin hevur givið Landsgrannskoðanini ta fatan, at stovnarnir sjálvir hava eina fatan av, hvørjar tænastir á teirra øki kundu verðið gjørdar talgildar. Orsakað av manglandi fíggjarorku o.ø. hevur eingin stovnur tó gjørt sær eina ætlan fyri, hvussu tey skulu talgilda sín stovn. Karmurin um fatanina av, hvat kann talgildast, liggur oftast innan fyri løgdømið hjá hvørjum stovni og snýr seg um verandi uppgávurnar. Tá ið hugsað verður um, at tað er ein heldur rár hending, at ein matstova letur upp, verður sjálvandi hugsað meira um aðrar og meiri týðandi hendingar at talgilda.

### 12.2.7 Samstarv millum almennar stovnar um at gera lættari skipanir til umsøkjarar

***Ikki kannað samstarvið millum stovnar.***

Landsgrannskoðanin viðgjørdi ikki spurningin um samstarv millum almennar stovnar, tí vit hildu, at úrslitið av grannskoðanini hevði ikki givið eina rætta mynd av støðuni. Hóast samstarvið millum almennar stovnar um at gera lættari skipanir til umsøkjarar er avmarkað, má atlit takast at, at almennu stovnarnir í løtuni bíða eftir talgildingini, sum er í gongd.

Í 2015 fór Fíggjarmálaráðið undir Talgildu Føroyar, sum varð skipað í 4 súlur: Talgildur samleiki, Heldin, Grundardátur og Tænastuportalur.

Talgildu Føroyar er eitt samstarv ímillum landsmyndugleikar, kommunur og fyritøkur, og verður umsitin av landsstýrismanninum í fíggjarmálum. Talgildu Føroyar er í fíggjarlógini, og Løgtingið hevur samtykt verklagslóg, sum er galdandi til 2023.

Heldin er sett í verk, og ætlanin er, at Talgildi samleikin og Tænastuportalurin verða sett í verk í 2019.

Við Grundardátum, Heldini og Tænastuportalinum fer tað við tíðini at bera til hjá stovnum at samla alla viðgerðina av at skráseta feløg/fyritøkur og at søkja um skeinkiloyvi til eina talgilda gerð. Í Heldini fer at bera til á trygdargóðan hátt at senda dátur ímillum stovnar. Í Grundardátum fara at vera dátur, sum frammanundan eru skrásettar um umsøkjaran. Grundreglan, um at dátur bert verða skrásettar eina ferð, fer at verða nýtt, tá ið umsøkjari søkir um skeinkiloyvi fyrstu ferð. Tórshavnar kommuna og TAKS eru longu skrásett sum tænastuveitarar, og tað er nú møguligt hjá borgarum at søkja um byggiloyvi frá Tórshavnar Kommunu talgilt.

***Summir stovnar fyrireika seg til at taka við talgildu møguleikunum.***

Summir stovnar síggja møguleikarnar í talgildingini. Loyvisnevndin, sum í løtuni hevur sera avmarkaða talgilda tænastu til umsøkjarar, er farin undir arbeiði at fáa eina talgilda skipan, soleiðis at umsøkjarar talgilt kunnu søkja um skeinkiloyvi. Ætlanin er, at umsøkjari skal nýta talgilda undirskrift, tá ið hann søkir, og at Loyvisnevndin talgilt fær váttanir, viðmerkingar, tekningar og aðrar upplýsingar frá umsøkjaranum og frá stovnunum.

Skráseting Føroya og TAKS hava gjørt eina greining av treytunum fyri eina talgilda tænastu, soleiðis at umsøkjari við einari talgildari gerð kann skráseta eitt felag/fyritøku í Vinnuskránnið og samstundis skráseta hjá TAKS.

Tað er okkara fatan, at stovnar eru byrjaðir at síggja møguleikarnar við talgildum tænastum, og hvørjar tænastur høvdu verið til fyrimuns fyri umsøkjarar, men at tað enn ikki eru ítøkiligar ætlanir.

# 13. Aðrar serfrágreiðingar

## 13.1 Lønarútgjaldingar til limir í Føroya Pedagogfelag undir verkfalli (LG 2017/405-0011)

Í sambandi við klagu um handfaringina hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum av lønarútgjaldingunum til limir í Pedagogfelagnum undir verkfalli, heitti landstýrismála-nevndin á løgtingsgrannskoðararnar um at viðgera, um nøkur útreiðsla er hildin, sum lógarheimild ikki er fyri.

Løgtingsgrannskoðararnir bóðu Landsgrannskoðanina um at gera eitt notat at lýsa málið. Í notatinum[42] er greitt frá reglum og atlitum, sum eru viðkomandi, tá ið landið skal halda útreiðslur til rakstur, og serliga tá ið arbeiðssteðgur er. Umframt vanligu ræðisreglurnar fyri einari játtan eru reglurnar um búskaparlig atlit eisini av týdningi.

Samanumtikið kann verða sagt, at landið fær heimild í rakstrarjáttanum at halda útreiðslur til at útinna virksemið hjá stovnunum. Landið skal ikki rinda fyri nakað, sum tað ikki fær, og soleiðis er eisini, tá ið arbeiðssteðgur er.

Sambært vegleiðing frá Fíggjarmálaráðnum halda setanarviðurskiftini uppat, tá ið arbeiðssteðgur er. Er rættarstøðan meinlík tí donsku, tykist meginreglan tó at vera, at setanarviðurskiftini halda fram eftir arbeiðssteðg.

Lønin hjá starvsfólkum í arbeiðssteðgi skal verða afturhildin fyri tíðina, steðgurin varir. Tey tímalønt fáa vanliga løn fyri ta tíðina, tey hava arbeitt. Hjá mánaðarløntum er tilknýtið til arbeiðsgevaran nakað øðrvísi. Tað kunnu tá vera umstøður, sum tala fyri at mótrokna seinni, serliga hvussu lønarfyrisitingin hjá landinum er skipað, og sjálvsagt hvørjar skyldur partarnir hava eftir loknan arbeiðssteðg. Mótrokningin eigur tó altíð at vera gjørd, so skjótt tað ber til.

Landsgrannskoðanin heldur, at tá ið Fíggjarmálaráðið velur at mótrokna seinni, eigur ein skjalfest meting at verða gjørd av viðurskiftum, sum hava týdning, t.d. av arbeiðsbyrðini hjá lønarfyrisitingini, hvussu langur arbeiðssteðgurin er, hvør er fevndur av arbeiðssteðginum, hvussu stórar upphæddirnar eru, er nakar tapsvandi o.s.fr.

***Ymiskt, hvussu farið er fram.***

Tað er ymiskt, hvussu Fíggjarmálaráðið hevur valt at fara fram síðstu árini. Í fleiri førum er frádráttur framdur í lønini aftaná, men ráðið kennir seg ikki bundið av nakrari siðvenju. Ráðið hevur tikið avgerð í hvørjum einstøkum føri.

Tað er ein týðandi játtanarregla at taka búskaparlig atlit. Um tað standast munandi meirútreiðslur av at rinda løn við røttum afturhaldi út til tíðina, kann tað tala fyri at mótrokna seinni.

***Grundgevingarnar eru í samsvari við játtanarreglurnar.***

Landsgrannskoðanin heldur, at grundgevingarnar hjá Fíggjarmálaráðnum fyri at gera frádrátt í lønini seinni eru í samsvari við játtanarreglurnar og tað, sum praktiskt letur

[42] https://logting.fo/files/casecommittee/373/notat%20um%20lonarutgjaldingar%20Pedagogar.pdf

seg gera. Vit hava tó ikki sæð nakra skjalfesta meting av, hvussu ráðið hevur tikið avgerðina um afturhald ella frádrátt í sambandi við arbeiðssteðgin.

## 13.2 Skúladepil við Marknagil (LG 2018/405-0012)

Í apríl 2019 lat Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um meirnýtsluna av verkætlanini at byggja skúladepil við Marknagil. Niðanfyri er ein samandráttur av kanningini. Frágreiðingin í síni heild er at finna á heimasíðuni hjá Landsgrannskoðanini, www.lg.fo.

Løgtingsgrannskoðararnir heittu á Landsgrannskoðanina um at kanna orsøkina til meirnýtsluna av byggiverkætlanini Skúladepil við Marknagil, herundir játtanar- og roknskaparviðurskifti. Kanningin skuldi eisini lýsa, hvussu undanfarnar kanningar eru viðgjørdar og tiknar til eftirtektar.

Kanningin varð gjørd á tann hátt, at Landsgrannskoðanin gekk ígjøgnum verklagslóg, fíggjarlógir við viðmerkingum, skrivligt tilfar og annað atkomuligt samskifti, sum er viðkomandi fyri fíggjarliga partin av verkætlanini, at byggja Skúladepil við Marknagil. Játtanar- og roknskapartøl eru sambært Búskaparskipan landsins og prentaðum roknskapum.

Landsgrannskoðanin hevði samrøður við Landsverk, og gekk ígjøgnum verkætlanarstýringina, fíggjarstýringina og skrásetingarmannagongdirnar.

### Samanumtikið var niðurstøðan av kanningini

*Sannlíkt, ein rullandi meirnýtsla.*

Landsverk hevði sannlíkt havt eina "rullandi" meirnýtslu í fleiri ár, uttan at tað hevur kunnað sæst í landsroknskapinum. Orsøkin til tað er, at sonevnda "Fíggjarstýringsskjalið", ið skuldi brúkast til at stýra byggingini, eisini fíggjarliga partinum, hevur ikki verið brúkt, sum tað skal, seinastu árini. Tað er ivaleyst eisini ein av orsøkunum til, at so lítið samsvar hevur verið ímillum játtan og nýtslu ein stóran part av byggitíðini.

*Fíggjarstýringsskipan ikki brúkt nøktandi.*

Kanningin hjá Landsgrannskoðanini vísir, at í sambandi við verkætlanina Skúladepil við Marknagil hevur Landsverk ikki brúkt fíggjarstýringsskipanina nøktandi, og tí hevur ikki verið gjørligt at sæð samlað yvirlit yvir, hvat var "disponerað" av játtanini. Tað bar tí heldur ikki til at fylgja við frá disponering til landsroknskap.

Landsverk hevur ikki sett í verk innaneftirlit, sum tryggjar, at upplýsingarnar í SEYF, Fíggjarstýringsskjalinum og Búskaparskipan landsins eru tær somu. Landsverk hevur ikki grundfest umsitingina av SEYF og Fíggjarstýringsskjalinum í roknskaparreglugerðini ella í øðrum innanhýsis reglum

*Krøv síggjast ikki í roknskapinum.*

Hóast Landsverk hevur eitt krav upp á 75 mió.kr. ímóti sær, og hevur sett fram mótkrav upp á 86,6 mió.kr., sæst tað hvørki í landsroknskapinum ella í Búskaparskipan landsins, og krøvini eru heldur ikki upplýst í notu til landsroknskapin.

Í sambandi við byggiverkætlanina, Skúladepilin við Marknagil, tykist tað sum leikluturin, ið løgmaður og Løgmansskrivstovan hava havt, hevur verið at víst á, hvør hevði ábyrgd av hvørjum, tá ið ivi tók seg upp millum Mentamálaráðið, Samferðslumálaráðið og Landsverk.

Uppgávan hjá Fíggjarmálaráðnum hevur í stóran mun verið at lagt uppskot til fíggjarlóg og eykajáttanarlóg fyri Løgtingið, og at tryggja, at uppskotini eru innan fyri givnar karmar.

Tó at landsstýrismaðurin í samferðslumálum í apríl 2018 hevur boðað løgmanni frá, at eftirlitsskipanin SEYF, sum varð brúkt í sambandi við byggiverkætlanirnar, ið

Landsverk umsat, hevði roynst væl, síðani hon varð tikin í nýtslu, og at hon varð brúkt til allar íløgur, sum Landsverk umsat fyri aðalráð og Løgtingið, vísir kanningin hjá Landsgrannskoðanini, at hvørki SEYF ella Fíggjarstýringsskjalið hevur verið brúkt nøktandi til Skúladepilin.

Tað átti at verið ein sjálvsagdur partur av góðkenningini av roknskaparreglugerðini og roknskaparviðurskiftum annars, at ráðið tryggjaði sær, at Landsverk hevði skrivligar mannagongdir fyri roknskaparhaldinum og fíggjarstýringini við verkætlanum, ið stovnurin umsitur fyri aðalráðini.

Tann fíggjarligi parturin av byggingini hevur verið sera nógv umtalaður, bæði í Løgtinginum og í almenna rúminum, og tí kann tað tykjast undranarvert, at Mentamálaráðið ikki skal hava sóknast eftir øðrum skjalprógvi, fyri at peningurin fór at røkka til alla byggingina, enn at spyrja eina ferð um mánaðin, um stjórin á Landsverki helt, at játtanin fór at halda.

### Viðgerð av undanfarnum kanningum

Á vári 2014 løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram uppskot til samtyktar um at leggja frágreiðing fyri Løgtingið um átøk og møgulig uppskot til lógarbroytingar, at tryggja greiða leiðslu, ábyrgd og útinnan, tá ið almennar Byggiverkætlanir verða framdar. Fíggjarnevndin mælti Løgtinginum til at samtykkja uppskotið, og var tað eisini einmælt samtykt av Løgtinginum.

Løgtingsgrannskoðararnir spurdu løgmann í september 2017, nær hann væntaði, at frágreiðing um átøk og møgulig uppskot til lógarbroytingar fóru at verða løgd fyri Tingið. Løgmaður svaraði í juni í 2018, og vísti til tað, ið landsstýrismaðurin í samferðslumálum mælti til í skrivi til løgmann 16. apríl 2018.

Í skrivinum segði landsstýrismaðurin m.a., at eftirlitsskipanin SEYF, sum varð brúkt í sambandi við byggiverkætlanirnar, ið Landsverk umsat, hevði roynst væl, síðani hon varð tikin í nýtslu, og at hon varð brúkt til allar íløgur, sum Landsverk umsat fyri aðalráð og Løgtingið.

Eftir kanningunum, ið Landsgrannskoðanin hevur gjørt, er tað ikki rætt, at SEYF hevur verið brúkt og “roynst væl” síðani 2013/2014, í øllum førum tá ið um Skúladepilin við Marknagil ræður.

# 14. Orðalisti

**AMEG** - Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin.

**Brúkararættindi** - eru rættindini hjá tí einstaka til at lesa og/ella broyta dátur í KT skipanum.

**Búskaparskipan landsins** - er felagsheiti fyri allar skipanirnar, sum Gjaldstovan umsitur.

**C.átekning** - við C.átekning kann heimild verða givin til at flyta óbrúktar løgujáttanir til seinni fíggjarár, ella til innanhýsis flytingar millum høvuðskontur sama ár.

**Change management** - Broytingarleiðsla ella stýring av broytingum fyri at tryggja, at allar broytingar verða gjørdar eftir ávísum standardum at tryggja kvalitetin á broytingunum.

**DEA** - Data Envelopment Analysis.

**Effektivitetur** - Lutfallið millum tilfeingisnýtslu og úrslitini av framleiðsluni (ella settu málunum).

**Eftirlitsumhvørvi** - leggur støði undir hugburðin, starvsfólkini hava til eftirlit og stýring, og er grundarlagið undir, hvussu væl innaneftirlitið er skipað.

**Eksternir grunnar** - eru grunnar, sum ikki eru tiknir við í fíggjarstøðu landskassans, og sum hava sjálvstøðugan roknskap.

**ESCO** - Stytting fyri **E**nergy **S**ervice **CO**mpanies og er ein samstarvsháttur millum fyritøkur og tað almenna. Hugsanin aftan fyri ESCO leistin er, at gera tiltøk sum minka orkunýtsluna í einum bygningi, og nýta sparingina til at betra um bygningar, og soleiðis minka orkunýtsluna enn meira. ESCO-leisturin var ætlaður at verða brúktur í einari royndarverkætlan um orkusparing í landsins bygningum.

**Eykajáttanarlóg** - fevnir um broytingar, sum Løgtingið ger í játtanum, eftir at fíggjarlógin er samtykt.

**FIEC** - Faroe Islands Exploration Conference, ráðstevna, sum Jarðfeingi hevur skipað fyri nakrar ferðir.

**Fígging Landsins** - fyrrverandi deild hjá Gjaldstovuni, sum umsat gjaldførið hjá landinum.

**Fíggjargrannskoðan** - er at ansa eftir, at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, sum roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði.

**Fíggjarlig grannskoðan** - er grannskoðan av, um roknskapurin er rættur.

**Fíggjarstýringsskjal** - er eitt Excel rokniark, sum Landsverk brúkar at stýra fíggjarliga partinum av verkætlanum við.

**Flexsalda** - er tal av tímum, eitt starvsfólk eigur á ella skyldar.

**Fyrisitingargrannskoðan** - er at ansa eftir, at tað er hóskandi atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um.

**Grannskoðanarlógin** - løgtingslóg nr. 25/1999 “um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

**Heildarskipanin** - í frágreiðingini meinast við nýggju Heildarskipanina hjá Almannaverkinum.

**Høvuðskonta** - játtanir verða veittar á høvuðskontum, og tað er høvuðskontan, ið er sjálv játtanin, sum Løgtingið atkvøður um.

**Innaneftirlit** - eru tiltøk, sum leiðslan setir í verk fyri at fáa nóg stóra vissu fyri, at roknskapurin er rættur og álítandi, at raksturin er effektivur, og at lógir og reglur verða hildnar.

**Innheintingarskipanin hjá TAKS (IK skipanin)** - er ein KT skipan til at krevja inn skatt og o.a., sum er fallið til gjaldingar.

**Inntøkufíggjað virksemi** - er virksemi, ið ber handilsligan dám, og kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum loyva stovnum at hava inntøkufíggjað virksemi. Nærri reglur um inntøkufíggjað virksemið eru í kap. 6 í K. nr. 84/2011 “um rakstrarjáttan”.

**ISAE 3402** - er altjóða standardur, sum verður brúktur í sambandi við grannskoðanir og váttanir, sum skulu geva høga vissu fyri tryggum eftirlitum hjá tænastuveitarum, herundir KT veitarum.

**ISO 27001** - er altjóða standardur um stýring av KT trygd.

**Íløgujáttan/løgujáttan** - er eitt játtanarslag. Løgujáttan verður nýtt í sambandi við bygging, ognan ella avhending av bygningum, løgum, skipum o.ø. og í sambandi við stór viðlíkahalds-arbeiði.

**Kervisgrannskoðan** - er grannskoðan av KT skipanum.

**Keypsportalurin** - er portalur har lýst verður alment, tá ið almennir stovnar skulu keypa vørur ella tænastur.

**Kontuskipan landsins** - er kontuplanur fyri tað almenna.

**KT Landsins** - er deild hjá Gjaldstovuni, sum hevur til uppgávu at veita almennum stovnum KT tænastur og at samskipa KT á yvirskipaðum stigi.

**Landsnet** - er tænasta, sum KT Landsins veitir. Tænasturnar fevna um hýsing og rakstur av servarum og netverkum, uppseting og atgongd til grundleggjandi forrit á brúkarateldum og KT support til brúkarar.

**Landsroknskapurin** - er samlaði ársroknskapurin hjá landinum og fevnir um allar inntøkur og útreiðslur landsins fyri farið fíggjarár og aktiv og passiv landsins. Gjaldstovan setir landsrokn-skapin upp.

**Løgfrøðiliga-kritisk grannskoðan** - er grannskoðan av, at roknskapurin er samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði.

**Markamót** - er heitið á sambindingarliði millum ymiskar skipanir.

**Parallelgrannskoðan** - er tá ið norðurlendsku ríkisgrannskoðanirnar grannskoða saman ella gera sama slag grannskoðan samstundis.

**Penetrationsroynd** - er eitt umbiðið innbrot á eina telduskipan/simulerað álop frá teldusníkum.

**Produktivitetur** - eisini nevnt framleidni, er lutfallið millum tilfeingisnýtslu og framleiðslunøgd.

**Rakstrarjáttan** - er ein játtan, sum fevnir um at seta starvsfólk og at halda útreiðslur í hesum sambandi, herímillum at keypa vørur, tænastur o.a.

**Roknskapargóðkenningarskipanin** - stytt RGS, er ein KT skipan, sum góðskutryggjar tann almenna roknskapin við góðkenningum av stovnsroknskapum.

**Roknskaparkunngerðin** - Kunngerð nr. 22/2007 “um roknskaparverk landsins”.
**Roknskaparlógin** - løgtingslóg nr. 33/1994 “um landsins almenna roknskaparhald v.m.”

**Roknskaparreglugerð** - er ein reglugerð við ábyrgdar- og heimildarreglum fyri roknskaparhaldið hjá stovnum.

**Roknskaparrundskrivið** - Roknskaparrundskriv frá Fíggjarmálaráðnum frá 2001 um vegleiðing um roknskaparreglugerðir.

**Ræðisrættur** - er at hava ræði á einari kontu ella játtan.

**ScanJour** – journal-, málsviðgerðar- og útgjaldsskipan hjá Almannaverkinum.

**Setanarpolitikkur landsins** - er partur av starvsfólkapolitikkinum hjá landinum. Setanarpolitikurin hevur til endamáls at tryggja, at stovnar seta umsøkjarar, ið, úr einum heildarsjónarmiði, eru best egnaðir til starvið, og tryggja, at umsøkjarar, sum ikki fáa starv, kunnu vera vísir í, at avgerðin er farin fram á rættan hátt.

**Serviceskipan hjá TAKS** - til at taka ímóti krøvum frá Almannaverkinum o.ø.

**SEYF** - er skipan hjá Landsverk til verkætlanarstýring. Navnið SEYF stendur fyri Støða, Eftirlit, Yvirlit og Fíggjarstýring.

**SLA** - Service Level Agreement - er heiti á einari rakstrar- og viðlíkahaldsavtalu millum partar.

**Standardkonta (St.kt.)** - Sundurgreinar inntøkurnar og útreiðslurnar í t.d. sølu, lønir, vørukeyp, tænastuveitingar o.a.

**Standardroknskaparkonta (StRk)** - Neyvari útgreining av standardkontu.

**Stovnskassi** - er ein peningakassi til smákeyp.

**Stuðulsfíggjað virksemi** - virksemi undir rakstrarjáttan, sum ikki er av handilsligum slag, og sum er fíggjað við stuðli.

**Stýrisskipanarlógin** - Ll. nr. 103/1994 “um stýrisskipan Føroya, v.s.b.”

**Støðla** - er í verandi fíggjarárið at útreiðsluføra eina útreiðslu, ið fer at verða hildin í komandi fíggjarárum/seta av til væntaðar útreiðslur.

**Totalview** - er skipan, sum fleiri almennir stovnar brúka til at skráseta tíðarnýtslu v.m.

**Transaktiónsslóð** - eisini nevnd viðskiftisslóð – er treytin um at allar skrásetingar skulu kunna finnast í roknskapinum og at tølini í roknskapinum skulu kunna loysast upp í tær skrásetingar, sum tey eru samansett av.

**Trygdarkunngerðin** - K.nr. 28/2003 “um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum”.

**Trygdarpolitikkur** - er ein yvirskipaður politikkur, ið tekur atlit at váðum, ið hótta.

**Undirkonta** - verður brúkt, tá ið neyðugt er at býta eina játtan sundur í fleiri virkisøki.

**Váðameting** - er at eyðmerkja og greina teir vandar, sum mest sannlíkt kunnu raka stovnin meint.

**VaktPlan** - er KT skipan at ráðleggja arbeiðstíð í og at avgreiða lønir við.

**Verklagslóg** - er lóg, sum eigur at verða løgd fyri Løgtingið, tá ið íløguætlan er 10 mió.kr. ella størri.

**Verkætlan** - er t.d. bygging av einum bygningi ella vegi og granskingarverkætlanir.

**Verkætlanarleiðsla** - leiðslan fyri einari verkætlan.

**Víðkað fyrisitingargrannskoðan** - er ein størri og meira víðfevnd kanning, enn vanlig fyrisitingargrannskoðan, sum løgtingsgrannskoðararnir kunnu biðja um.

**Web-løn** - er ein KT skipan til lønaravgreiðslu hjá Gjaldstovuni.